LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2005

ÁRSFRÁGREIÐING

LATIN

LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

JANUAR 2007

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
Tlf. (298) 35 51 00 ▪ Fax (298) 35 51 01 ▪ Teldupostur: gralands@post.olivant.fo
WWW.LG.FO

Innihaldsyvirlit

1 INNGANGUR 7

2 ALMENNAR VIÐMERKINGAR 9

2.1 GRUNDLEGGJANDI IVAMÁL UM FÍGGJARLÓG OG LANDSROKNSKAP 9
2.1.1 STÝRISSKIPANARLÓGIN 9
2.1.2 JÁTTANARSKIPANIN 9
2.1.3 STUDNINGSLÓGGÁVA OG STUDNINGSUMSITING 9
2.1.4 UPPSKOT TIL JÁTTANARLÓG 10
2.2 VANTANDI SAMSKIPAN 10
2.2.1 EGNAR BÚSKAPARSKIPANIR 10
2.2.2 KUNNINGARTRYGD 10
2.3 VANTANDI INNANEFTIRLIT 10
2.4 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR 11
2.5 TÍMASKRÁSETING 11
2.6 GJALDFØRISSTÝRING 11
2.7 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI HJÁ KOMMUNUNUM 11
2.8 LÓGARSMÍÐ 12
2.9 ONNUR MÁL 12
2.10 TØRVUR Á AT SAMSKIPA OG SAMSTARVA 12

3 FRÁVIK MILLUM JÁTTAN OG NÝTSLU, SAMANDRÁTTUR 13

3.1 FRÁVIK, SKATTIR OG AVGJØLD 13
3.2 ONNUR FRÁVIK, INNTØKUR 13
3.3 MEIRNÝTSLA, LÓGARBUNDNAR ÚTREIÐSLUR 13
3.4 MEIRNÝTSLA, AÐRAR ÚTREIÐSLUR 14
3.4.1 FÍGGJARMÁL 14
3.4.2 LØGMANSFYRISITINGIN 14
3.4.3 FISKIVINNA 14
3.4.4 VINNUMÁL 14
3.4.5 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 14
3.4.6 INNLENDISMÁL 15
3.4.7 ALMANNAMÁL 15
3.4.8 HEILSUMÁL 15
3.5 AÐRAR VIÐMERKINGAR 15
3.5.1 IVAMÁL UM JÁTTANARSKIPANINA 15
3.5.2 STUDNINGSLÓGGÁVA OG STUDNINGSUMSITING 15
3.5.3 UM “ÚTREIÐSLUNEUTRALITET” Á FÍGGJARLÓGINI 16
3.5.4 ÓGREIÐA UM JÁTTANIR TIL FELAGS VIÐLÍKAHALD 16
3.5.5 FYRISITINGARÚTREIÐSLUR VERÐA SPJADDAR 17
3.5.6 SERVIÐGERÐ UTTANLANDS 17

4 FÍGGJARMÁL 19

4.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI O.A. 19
4.1.1 ROKNSKAPARKUNNGERÐIN (GL 1996/1 01 0-2) 19
4.1.2 EGNAR BÚSKAPARSKIPANIR (GL 2001/1 01 0-9) 19
4.1.3 BÚSKAPARSKIPAN LANDSINS, INNANEFTIRLIT (GL 1998/2 03 1-8) 21
4.1.4 LØNARUMSITING Á GJALDSTOVUNI (GL 1998/2 03 1-10) 22
4.1.5 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR O.T. (GL 1998/2 17 1-2) 23
4.1.6 EFFEKTIVISERING AV UMSITINGINI O.A. (GL 2001/1 01 0-9) 25
4.1.7 ÁVÍSAR ÚTREIÐSLUR (GL 2005/4 00 0-7) 26
4.2 FÍGGJARSTØÐAN 2005 28
4.2.1 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 28
4.2.2 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI O.A. 29
4.2.3 HØVUÐSTØL 30
4.2.4 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (GL 2005/3 01 2-6) 30
4.2.5 ÁOGN (GL 2005/3 01 3-7) 34
4.2.6 OGNARYVIRLIT (GL 2001/1 01 0-9) 35
4.2.7 TØKUR PENINGUR (GL 2005/3 01 4-4) 35
4.2.8 SKULD (GL 2005/3 02 2-3) 38
4.3 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM O.A. 39
4.3.1 UMSITING AV SKATTI, INNANEFTIRLIT (GL 2000/2 04 2-2 OG 1999/2 04 3-3) 39
4.3.2 UMSITING AV MVG, INNANEFTIRLIT (GL 2006/2 04 5-11) 40
4.3.3 MVG-EFTIRSTØÐUR (GL 1998/2 04 5-5) 43
4.3.4 INNFLUTNINGSGJØLD O.T., EFTIRLITSVIRKSEMI (GL 2001/2 04 5-7) 46
4.3.5 BRENNIOLJUGJALD (GL 2002/2 04 5-8) 47
4.3.6 FRAMLEIÐSLUAVGJALD (GL 1999/2 04 6-6) 48
4.3.7 FERÐAAVGJALD (GL 2002/2 04 6-8) 48
4.3.8 VEGSKATTUR (GL 2004/2 04 6-9) 49
4.3.9 KASSAEFTIRLIT (GL 2005/2 04 0-13) 49
4.3.10 TRYGDARGRUNNURIN (GL 1998/2 09 1-2) 50
4.3.11 STUÐUL TIL FERÐAÚTREIÐSLUR OG TIL DUPULT HÚSARHALD (GL 2004/2 07 9-1) 51
4.3.12 STUÐUL TIL RENTUÚTREIÐSLUR AV LÁNUM (GL 1997/2 03 9-5) 51
4.3.13 FAS AFTURBERING (GL 2005/2 15 3-6) 54
4.4 FULLTÍÐARSTØRV HJÁ LANDINUM 1997-2004 (GL 2005/1 02 0-4) 55
4.4.1 ROKNAÐUR VØKSTUR Í FULLTÍÐARSTØRVUM 1997-2004 55
4.4.2 SAMANBERINGAR VIÐ LØNARHAGTØL FRÁ HAGSTOVUNI 58
4.4.3 NIÐURSTØÐA 59

5 LØGMANSFYRISITINGIN 61

5.1 SAMSKIFTISÚTREIÐSLUR HJÁ LANDSSTÝRINUM (GL 1998/2 02 9-5) 61

6 FISKIVINNA 65

6.1 FISKIRANNSÓKNARSTOVAN (GL 2004/2 14 3-9) 65
6.2 LØNJAVNINGARSTOVAN (GL 2003/2 14 4-7) 66
6.3 STUÐUL TIL GRANSKING, MENNING OG ROYNDIR (GL 2003/2 14 4-8) 68

7 VINNUMÁL 69

7.1 KUNNINGARTRYGD, SØGULIG GONGD (GL 2001/1 02 0-2) 69
7.1.1 SAMSKIFTI VIÐ LØGMANN Í 2001 UM KT-TRYGD 69
7.1.2 KT-FORUM ENDURSTOVNAÐ Í 2002 69
7.1.3 UPPSKOT TIL REGLUR UM KT-TRYGD TIL HOYRINGAR Í 2003 69
7.1.4 VIÐMERKINGAR FRÁ STOVNUM O.Ø. TIL UPPSKOT TIL REGLUR UM KT-TRYGD 70
7.1.5 TILMÆLI FRÁ KT-FORUM Í DESEMBER 2003 70
7.1.6 RUNDSKRIV UM KT-TRYGD 1. FEBRUAR 2005 70
7.2 KUNNINGARTRYGD, STØÐAN Í DAG (GL 2001/1 02 0-2) 71
7.2.1 SPURNASKRIV TIL LANDSSTÝRISMENNINAR 71
7.2.2 SVAR FRÁ LANDSSTÝRISMONNUM 71
7.2.3 VIÐMERKINGAR FRÁ LANDSGRANNSKOÐANINI TIL SPURNAKANNINGINA 74
7.2.4 EFTIRLITSVIRKSEMIÐ HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM 74
7.3 KUNNINGARTRYGD, HVÍ STOVNAR IKKI LÚKA KRØVINI (GL 2001/1 02 0-2) 75
7.3.1 TÝÐANDI TILMÆLI FRÁ KT-FORUM VERÐA IKKI FYLGD 75
7.3.2 VANTANDI EFTIRLIT FRÁ LANDSSTÝRISMONNUM/AÐALRÁÐUM 78
7.3.3 ALMENNUR KT-POLITIKKUR IKKI ORÐAÐUR 78
7.3.4 ALMENNI BYGNAÐURIN 79
7.4 FERÐARÁÐ FØROYA (GL 2004/2 15 2-2) 79
7.5 ENDURGJALDSGRUNNUR ALIVINNUNNAR (GL 1998/2 15 3-2) 80
7.6 P/F FISKAALING OG HAVBÚNAÐARROYNDIR (GL 2002/2 15 3-4) 81
7.7 ENDURGJALD TIL SKIPASMÍÐ (GL 2004/2 15 3-5) 82
7.8 LANDSVERK (GL 2002/2 16 1-2) 82
7.9 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (GL 2000/2 03 9-9) 84

8 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 87

8.1 FÓLKASKÚLIN (GL 1996/2 10 2-1) 87
8.2 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (GL 2001/2 10 9-5) 87
8.3 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (GL 2001/2 10 9-7) 87
8.4 BÓKAMIÐSØLAN (GL 2000/2 10 6-5) 88
8.5 YRKISSKÚLAR (GL 2000/2 10 3-4) 90
8.6 SAMSKIPAN AV VIRKSEMINUM HJÁ SJÓMANSSKÚLUNUM (GL 2000/2 10 4-5) 90
8.7 UNDIRVÍSINGARSKYLDA HJÁ SKÚLASTJÓRUM (GL 2000/2 10 4-5) 90
8.8 FØROYA LÆRARASKÚLI (GL 2004/2 10 4-12) 90
8.9 ÚTBÚGVINGARSTUÐUL OG LÁN (GL 2006/2 10 9-10) 91
8.10 STUÐUL TIL MENTAN OG ÍTRÓTT (GL 2000/2 11 9-1) 93
8.11 LISTASAVN FØROYA (GL 2002/2 11 2-8) 94
8.12 KIRKJUGRUNNURIN (GL 2000/2 11 6-3) 94

9 INNLENDISMÁL 97

9.1 ÍTRÓTTAVEDDING (GL 2001/2 02 1-3) 97
9.2 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN (GL 2001/2 02 1-3) 98
9.3 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI HJÁ KOMMUNUNUM (GL 2002/2 02 3-1) 98

10 ALMANNA- OG HEILSUMÁL 101

10.1 KT-VIÐURSKIFTI Á ALMANNASTOVUNI (GL 2004/2 07 1-5) 101
10.2 KT-TRYGD INNAN HEIMARØKT OG SERFORSORG (GL 2004/2 07 4-16) 107
10.3 KT-TRYGD INNAN ALMANNA- OG HEILSUØKIÐ 108
10.4 ALMANNASTOVAN (GL 2004/2 07 1-5) 109
10.5 ALMANNAPENSJÓNIR (GL 2004/2 07 2-8) 109
10.6 PERSÓNLIG VIÐBÓT TIL PENSJÓNISTAR (GL 2004/2 07 2-8) 111
10.7 ANSINGARSAMSÝNING (GL 2002/2 07 3-7) 112
10.8 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (GL 2000/2 07 2-5) 112
10.9 FORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2006/2 07 3-11) 112
10.10 STUÐUL TIL HEILIVÁG (GL 2003/2 07 3-11) 116
10.11 GJALD FYRI HEIMAHJÁLP Í SAMBANDI VIÐ UMLÆTTING (GL 2004/2 07 4-14) 117
10.12 ALMANNAPENSJÓN Á STOVNUM (GL 2004/2 07 4-14) 117
10.13 HEIMARØKTIN (GL 2004/2 07 4-15) 118
10.14 SERFORSORGIN (GL 2004/2 07 4-16) 119
10.15 FØROYINGAR Á STOVNI Í DANMARK O.A. (GL 2004/2 07 4-16) 121
10.16 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (GL 2004/2 07 4-17) 122
10.17 STUÐUL TIL HJÁLPARTÓL (GL 2004/2 07 4-17) 123
10.18 STUDNINGUR TIL ALV (GL 1998/2 07 5-1) 124
10.19 SJÚKRAKASSAR (GL 2001/2 08 3-1) 125
10.20 YMISKAR HEILSUSKIPANIR (GL 2005/2 08 3-3) 126
10.21 FYRIBYRGINGARRÁÐIÐ (GL 2005/2 08 3-3) 127
10.22 VANTANDI DAGFØRING AV LÓGGÁVU OG KUNNGERÐUM (GL 2003/2 07 1-4) 127

11 FYLGISKJØL TIL FRÁGREIÐING UM FULLTÍÐARSTØRV 1997–2004 133

1 Inngangur

16. oktober 2006 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum eina frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína, í sambandi við at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2005 fyri Løgtingið til samtyktar.

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,

at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,

at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,

at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um,

at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Fyri hvørt málsøki er í frágreiðingini tikið samanum úrslitið av grannskoðanini av stovnum og skipanum. Frágreiðingin er løgd fyri avvarðandi landsstýrismann, og vit hava tikið við møguligar viðmerkingar og fráboðanir um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til.

Í frágreiðingini er eisini víst á, í hvønn mun viðurskifti eru komin í rættlag, ið vórðu umrødd í seinastu ársfrágreiðing, ið varð latin løgtingsgrannskoðarunum 20. februar 2006.

Argir, 12. januar 2007

Leivur Harryson

2 Almennar viðmerkingar

Landsgrannskoðanin vísir í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar javnan á mál, ið vit halda eiga at verða loyst.

Í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at samtykkja landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir, og harvið Løgtingið, í nógvum førum átalað, at mál ikki verða loyst, og hava heitt á løgmann og avvarðandi landsstýrismenn um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Fyri 2 árum síðani valdu løgtingsgrannskoðararnir nøkur av hesum málum burturúr, og umrøddu tey fremst í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2003 (Lm. nr. 45-6/2004). Talan er í fleiri førum um mál, har neyðugt er at samskipa og samstarva millum fleiri aðalráð fyri at finna eina loysn.

Niðanfyri hava vit í stuttum greitt gjøllari frá um gongdina í teimum og øðrum meira yvirskipaðum málum, ið ikki eru loyst.

2.1 Grundleggjandi ivamál um fíggjarlóg og landsroknskap

2.1.1 Stýrisskipanarlógin

Í áravís hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir gjørt vart við, at teir ivaðust í, um tað var rætt, at virksemið hjá fleiri stovnum/grunnum varð hildið uttanfyri fíggjarlógina og landsroknskapin. Løgmaður lat landsstýrismanninum í fíggjarmálum málið upp í hendi. Í einum áliti frá Fíggjarmálaráðnum í november 2001 er niðurstøðan m.a., at tað er í stríð við stýrisskipanarlógina, at:

- nakrir stovnar/grunnar ikki verða tiknir við á fíggjarlógina,
- nakrir stovnar/grunnar ikki verða tiknir við í landsroknskapin,
- roknskapirnir hjá fleiri stovnum/grunnum ikki verða lagdir fyri Løgtingið,
- ikki allir skattir/gjøld verða kravd inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini,
- ikki allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini.

Síðani er greiða fingin á viðurskiftunum hjá nógvum stovnum/grunnum, men komið er ikki á mál.

2.1.2 Játtanarskipanin

Eitt annað mál, ið er umrøtt í áravís, er sokallaða “játtanarskipanin”, ið ásetir meginreglur um játtanirnar á fíggjarlógini. Verandi játtanarskipan, ið upprunaliga stavar frá 1997, var ein fyribilsloysn, og ivamál hava verið um fleiri grundleggjandi hugtøk. Fíggjarmálaráðið arbeiddi í nøkur ár við at gera eina meira fullfíggjaða “budgetleiðbeining”, men hetta arbeiðið varð ikki fullført.

2.1.3 Studningslóggáva og studningsumsiting

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava í áravís víst á tørvin at bøta um studningslóggávuna og studningsumsitingina, fyri at endamál og treytir o.a. verða greiðari. Hetta fyri at tingmenn o.o. vita, hvat peningurin verður játtaður til, og fyri at sleppast kann undan dupultarbeiði. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu Løgmansskrivstovuni til at átaka sær ein virknan og samskipandi leiklut.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 hava vit á s. 27-29 greitt gjøllari frá hesum máli.

2.1.4 Uppskot til játtanarlóg

Í februar 2005 royndu limirnir í Fíggjarnevndini at taka um endan við at heita á Formansskap Løgtingsins um at seta ein arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg. Lógin skuldi loysa umrøddu ivamál viðvíkjandi stýrisskipanarlógini, játtanarskipanini og bøta um studningsumsitingina.

Tingið tók undir við hesari áheitan, og í februar 2006 handaði arbeiðsbólkurin Formansskapinum sítt álit, saman við einum uppskoti til játtanarlóg. Formansskapurin legði uppskotið fyri Tingið í mars 2006. Uppskotið varð beint í eina serliga § 25-nevnd. Uppskotið kom ikki úr aftur nevndini, áðrenn Tingið fór heim, og er tí fallið burtur.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 hava vit á s. 13–17 greitt gjøllari frá hesum máli, og vit hava mælt løgtingsformanninum til at reisa málið av nýggjum skjótast til ber.

2.2 Vantandi samskipan

Løgtingsgrannskoðararnir hildu, at á fleiri økjum er ikki hóskandi atborið fíggjarliga:

2.2.1 Egnar búskaparskipanir

Løgtingsgrannskoðararnir vístu á, at nógvir stovnar/grunnar nýta nógvar og ymiskar KT-skipanir at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, debitorar o.a. Peningur og starvsfólkaorka verða ikki nýtt á skynsaman hátt.

Vísandi til s. 19-23 í frágreiðingini eru hesir trupulleikar ikki loystir. Vit hava fleiri stórar skipanir til ov fáar dátur, og vandi er fyri, at roknskaparhaldið syndrast, um reglurnar í roknskaparkunngerðini um eina felags búskaparskipan ikki verða tiknar í álvara. Í frágreiðingini ávarar Landsgrannskoðanin enn einaferð ímóti at spjaða roknskaparhaldið, tí tað bindir óneyðuga arbeiðsorku á stovnum og aðalráðum.

2.2.2 Kunningartrygd

Í sambandi við, at allir landsstovnar sambært rundskrivi frá Vinnumálaráðnum skuldu lúka altjóða KT-trygdarkrøv (ISO 17799) í seinasta lagi 1. februar 2006, ávaraðu løgtingsgrannskoðararnir um, at skuldi hvør stovnur í sínum lagi lúka øll trygdarkrøvini, var vandi fyri, at kunningartøkni gjørdist eitt haft um beinið á landsumsitingini. Løgtingsgrannskoðararnir vildu tí enn eina ferð gera vart við, at tað var bráðneyðugt at miðsavna og samskipa eina loysn á trupulleikunum.

Vísandi til umrøðuna av kunningartrygd á s. 69-79 lúka flestu stovnar ikki ásettu trygdarkrøvini, hvørki í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum ella í lógini og kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

2.3 Vantandi innaneftirlit

Løgtingsgrannskoðararnir vístu á, at fleiri týðandi búskaparskipanir eru ikki nóg tryggar, og at stórur tørvur er á at bøta um innaneftirlitið og KT-trygdina, t.d. á Almannastovuni og á Toll- og Skattstovu Føroya.

Vísandi til s. 101-109 heldur Landsgrannskoðanin, at KT-trygdin á Almannastovuni er ikki nøktandi, og at langt er eftir á mál. Sama er galdandi fyri almanna- og heilsuøkið sum heild.

Vísandi til s. 26-41 er eingin bati, tá ræður um innaneftirlitið á Toll- og Skattstovu Føroya. Toll- og Skattaráðið og Stýrið hava ikki sett tey mál, tað verið seg stevnumið ella árligar virkisætlanir, sum lógin um toll- og skattafyrisiting ásetir. Roknskaparreglugerðin, við tilvísingum og leiðbeiningum, er á fleiri økjum ógreið og er ikki dagførd. Ásetingar um eftirlitsvirksemi verða í nógvum førum ikki fylgdar, og skrásetingar av eftirlitsvirksemi eru ikki neyvar og sambærligar. Saknur er á yvirskipaðum ætlanum um ráðlegging og skráseting, og tørvur er á at endurskoða og bøta um roknskaparreglugerðina og innaneftirlitið sum heild.

Landsstýrismaðurin hevur m.a. vístá, at í sambandi við bygnaðarbroytingar á Toll- og Skattstovu Føroya verður styrkt um innaneftirlitið. Hinvegin hevur stovnurin vístá, at bygnaðarbroytingarnar hava verið ein høvuðsorsøk til trupulleikarnar.

2.4 Tænastumannaeftirlønir

Løgtingsgrannskoðararnir vístu á, at umsitingin av tænastumannaeftirlønum er ikki nøktandi. Talan er um vantandi roknskaparreglugerð/innaneftirlit, vantandi skráseting av eftirlønarrætti hjá tí einstaka, ymiskar bókingarhættir, vantandi uppgerð av samlaðu eftirlønarskylduni, árliga eftirlønarskyldan sæst ikki í landsroknskapinum, og bygnaðurin er óhóskandi.

Vísandi til s. 23-25 eru nøkur tiltøk sett í verk, men langt er eftir á mál. Arbeiðið at samskipa umsitingina av tænastumannaeftirlønum hevur gingið striltið. Í desember 2006 samdust avvarðandi aðalstjórar um eitt tilmæli til Landsstýrið um at fara fram eftir ávísum leisti, har m.a. arbeiðsbólkar verða settir at nærlýsa og útgreina økið.

2.5 Tímaskráseting

Løn er vanliga nógv tann størsta útreiðslan hjá einum stovni. Løgtingsgrannskoðararnir gjørdu vart við, at nógvir landsstovnar hava ikki eina hóskandi tíðarskráseting, har eisini sæst, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Fíggjarmálaráðið hevur ongantíð álagt stovnum at skráseta t.d. framleiðslu og tíðarnýtslu í innanvirkis roknskapum samsvarandi § 7 í roknskaparkunngerðini, sum hevur verið í gildi síðani 1. januar 1997. Vísandi til s. 19 hevur Fíggjarmálaráðið í fleiri ár arbeitt við at dagføra roknskaparkunngerðina, og ætlar í hesum sambandi at áseta gjøllari reglur um “mál- og avriksstýring”. Arbeiðið er ikki liðugt.

2.6 Gjaldførisstýring

Løgtingsgrannskoðararnir mintu á, at teir fleiri ferðir hava mælt til at bøta um gjaldførisstýringina og fáa greiði á hugtøkunum “landskassin” og “landsstovnar”, bæði í lógini “um Landsbankan” og í lógini “um landskassans innlán og lán í Landsbankanum”.

Vísandi til s. 35-37 er lóggávan ikki broytt.

2.7 Roknskaparviðurskifti hjá kommununum

Nú fleiri uppgávur verða fluttar til kommunurnar, hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tað var umráðandi at tryggja, at roknskapar- og KT-viðurskiftini koma í eina tryggari legu.

Vísandi til s. 98-100 er málið ikki loyst.

2.8 Lógarsmíð

Aðalráð og stovnar hava ofta ilt við at manna størv við fólki, sum hava neyðugan førleika og royndir innan lógarsmíð. Vánaligt lógarsmíð hevur m.a. fört til, at ov nógv orka verður "spilt burtur" til kæruviðgerðir. Á s. 127-131 hava vit umrøtt vantandi dagføring av lóggávu og kunngerðum á almannaøkinum, men hetta er ein trupulleiki á flestu málsøkjum, og tykist støðan ikki at batna. Landsgrannskoðanin heldur, at lógargrundarlagið er eitt tað størsta vandamálið í umsitingini.

Løgtingsgrannskoðararnir hava víst á, at tað hevur stóran týdning, at lógararbeiðið verður væl skipað. Teir hava eisini mælt til, at tað tilfar, sum verður lagt fyri Tingið, verður málsliga betur greitt úr hondum.

2.9 Onnur mál

Í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini og í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum sæst, at seinastu mongu árini eru nógv mál í áravís umrødd, uttan at nakað ítøkiligt hendir. T.d. hava avvarðandi landsstýrismenn í fleiri málum javnan boðað frá, at "arbeitt verður við málinum, ein arbeiðsbólkur er ella verður settur, málið verður loyst um stutta tíð, til várs, til heystar, eftir ársskiftið, í hesi tingsetu, í komandi tingsetu" o.s.fr. Í øðrum førum boða avvarðandi landsstýrismenn frá, at vegna vantandi starvsfólkaorku ella vegna aðrar átrokandi uppgávur er málið ikki loyst.

Landsgrannskoðanin heldur gongdina í málinum um "ávísar útreiðslur" á s. 26-28 vera eitt dømi um, at rúm tíð ofta gongur, áðrenn reglur verða ásettar ella endurskoðaðar.

2.10 Tørvur á at samskipa og samstarva

Endamálið við grannskoðanini er m.a. at ansa eftir, at eftirlitsskipanir eru tryggar, at peningurin verður brúktur samsvarandi galdandi játtanum, lógum og fyriskipanum, og at umsitingin er sparin og virkin. Í síðsta enda átti tað at fört til, at umsitingin verður bíligari og betri. Landsgrannskoðanin heldur, at nógvu óloystu málini benda á, at so er ikki á fleiri økjum.

Seinnu árini eru nógvar broytingar farnar fram, uttan at undirliggjandi bygnaðurin í landsumsitingini er broyttur stórvegis. Krøvini til umsitingina eru herd á fleiri økjum, t.d. roknskaparreglur, KT-trygdarreglur, fyrisitingarlóg o.a., samstundis sum kollveltandi broytingar eru hendar innan tøkni og samskiftismøguleikar.

KT-trygd tekur nógv pláss í hesari frágreiðing, sjá m.a. s. 69-79. Ein orsøk er herdu krøvini. Ein onnur er, at skulu vit gagnnýta kunningartøknina fult út, er neyðugt, at grundstøðið er trygt. Sum víst á, er langt eftir á mál, tá ræður um kunningartrygd.

Broytingar innan kunningartøkni skapa stórar møguleikar fyri digitalisering og rationalisering. Vísandi til s. 25-26 um "effektivisering av umsitingini o.a." hevur Fíggjarmálaráðið at kalla til fánýtis tikið stig til at samskipa ítøkilig uppskot á hesum øki. Landsstýrismaðurin vísir á fleiri fyritreytir, ið skulu til, fyri at tílíkar broytingar skulu hepnast, m.a. politiska semju um broytingar og undirtøka í umsitingini.

Landsgrannskoðanin heldur, at trupulleikarnir at bøta um kunningartrygdina og at gagnnýta kunningartøknina eru tvey av fleiri dømum um, hvussu torført tað ofta er at loysa mál, har neyðugt er at samskipa og samstarva millum fleiri aðalráð. Landsgrannskoðanin vil mæla Landsstýrinum til at taka hetta álvarsmál til viðgerðar.

3 Frávik millum játtan og nýtslu, samandráttur

Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum eina frágreiðing um meirnýtslu og minninýtslu sambært landsroknskapinum 2005. Frágreiðingin er dagfest 16. oktober 2006. Viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismonnum/aðalráðum um frávikini millum játtan og nýtslu eru tiknar við í frágreiðingina. Harumframt hevur Landsgrannskoðanin umrøtt onnur viðurskifti, ið viðvíkja grannskoðanini av landsroknskapinum.

Á fundi 25. oktober 2006 samtyktu løgtingsgrannskoðararnir at lata Løgtinginum frágreiðingina, hóast samlaða ársfrágreiðingin um grannskoðan av landsroknskapinum ikki var liðug. Hetta fyri at løgtingsgrannskoðararnir og Løgtingið í størri mun kundu nýta frágreiðingina í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina.

Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin tikið samanum nakað av tí, ið stendur í frágreiðingini 16. oktober 2006.

3.1 Frávik, skattir og avgjøld

Samanumtikið hava metingarnar hildið væl, og samlaðu inntøkurnar 2.936 mió.kr. vóru um 95 mió.kr. hægri, enn mett var á fíggjarlógini (s. 11). Inntøkurnar av skrásetingargjøldum vóru um 36,5 mió.kr. hægri enn mett.

Á onkrum økjum kom tó nakað væl minni inn (mió.kr.):

	Meting	Roknskapur
Kapitalvinningsskattur	45	30
Punktgjøld	190	153

3.2 Onnur frávik, inntøkur

Nøkur stór frávik stava frá, at bygningar o.a., sum ætlanin var at selja í 2005, ikki vórðu seldir:

- Posthúsbygningurin á Argjum: 36 mió.kr.
- Íbúðabygningar á Landssjúkrahúsinum: 30 mió.kr.
- Søla av partabrøvum: 3 mió.kr.

Ætlanin at selja posthúsbygningin er slept. Stovnar undir Innlendismálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum skulu húsast í bygninginum (s. 37-38).

Ætlanin er framvegis at selja íbúðabygningarnar á Landssjúkrahúsinum, og væntaða inntøkan er sett á fíggjarlógina 2006 (s. 71).

Ætlanin at selja partabrøv í samtakinum Skipafelagnum Føroyar fyri 3 mió.kr. varð slept, tí einki nøktandi boð kom í 2005 (s. 37). Hesi eru síðani seld í 2006.

3.3 Meirnýtsla, lógarbundnar útreiðslur

Tá ið talan er um lógarbundnar útreiðslur, er meirnýtslan um einar 16 mió.kr. Meginparturin undir almannamálum (s. 59). Í flestu førum er talan um lutfalsliga smá frávik.

Í 2005 er ofta komið fyri, at Fíggjarnevndin hevur mælt frá at veita eykajáttan, tá talan er um lógarbundnar útreiðslur (s. 23). Fíggjarnevndin hevur vístá, at talan er um vanligar framrokningar, ið ikki er rætt at játta, men sum mega verða staðfestar í roknskapinum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum er samdur við sjónarmiðnum hjá Fíggjarnevndini og vísir eisini á, at umbønir um eykajáttan, har peningurin í veruleikanum longu er brúktur, og har landsstýrismaðurin ikki uttan drál er komin við umbøn til eykajáttan, eru í ósam-

svari við játtanarreglurnar. Tílíkar umbønir um eykajáttan skulu ikki verða lagdar fyri Løgtingið, men vera meirútreiðslurnar at staðfesta í landsroknskapinum.

3.4 Meirnýtsla, aðrar útreiðslur

Samanumtikið er talan um fáar játtanir, har útreiðslurnar eru størri enn játtanin, og avvarðandi landsstýrismenn hava greitt frá, hví so er.

3.4.1 Fíggjarmál

Størsta meirnýtslan (s. 9-10) stavar frá, at rentuútreiðslurnar 138 mió.kr. vórðu um 6 mió.kr. hægri, enn mett var.

Landsgrannskoðanin hevur reist spurningin, um tað er rætt, at broytingin í kursvirðinum á brævalánum pr. statusdagin verður bókað sum kursmunur saman við rentuútreiðslunum. Hesin kursmunur er hvørki vinningur ella tap, uttan so at brævalán verða afturkeypt í úrtíð. Er tað ikki ætlanin, kann verða sagt, at talan er um "óneyðugar" bókingar av kursmunum, ið grugga tíðaravmarkanina av rentuútreiðslum millum árini. Landsstýrismaðurin vísir á, at galdandi roknskaparregla, ið hevur verið nýtt í mong ár, gevur eina rættvísandi mynd av rakstri og fíggjarstøðu við ársenda.

Av øðrum frávikum kann verða nevnt, at rentuinntøkurnar vóru um 12 mió.kr. lægri enn játtanin á fíggjarlógini, sum var 41,7 mió.kr. Spurdur, hví inntøkurnar vórðu heilar 12 mió.kr. lægri, enn mett varð í november 2005, hevur landsstýrismaðurin vístá (s. 10), at játtanin gjørdist nakað samantvinnað og torskild, tí ætlanin var at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman. Stovnarnir vórðu ikki lagdir saman, og tí varð roynt at skilja hesar upphæddir út aftur í sambandi við eykajáttanina. Eisini hevur landsstýrismaðurin vístá, at metingin hjá Landsbankanum um kursjavning gjørdist øðrvísi, enn roknað var við.

3.4.2 Løgmansfyrisitingin

At kalla eingin meirnýtsla (s. 25).

3.4.3 Fiskivinna

Samlaða meirnýtslan er um 1,1 mió.kr., talan er um 4 játtanir (s. 31).

3.4.4 Vinnumál

Samlaða meirnýtslan er um 2 mió.kr., talan er um 5 játtanir (s. 37).

3.4.5 Útbúgving og gransking

Samlaða meirnýtslan er um 5 mió.kr., talan er um 10 játtanir (s. 45).

Størsta meirnýtslan er á játtanini til Kringvarp Føroya, um 2 mió.kr., sum sambært landsstýrismanninum stavar frá serligu útreiðslunum til at leggja stovnarnar saman (s. 50). Í frágreiðingini verður eisini vístá, at Gjaldstovan í áravís hevur sett spurningin, um tað er rætt, at landsstovnar/-fyritøkur, sum m.a. Útvarp Føroya, hava nógvan pening standandi í peningastovnum og ikki í Landsbankanum. Landsstýrismaðurin fer at taka spurningin upp.

Meirnýtslan á játtanini "felags viðlíkahald" er um 0,4 mió.kr. Sambært landsroknskapinum eru 453 t.kr. nýttar til trygdarskipan á Listasavninum. Í frágreiðingini verður vístá (s. 46), at fakturadagarnir á rokningunum kundu bent á, at søkt er um eykajáttan, eftir at trygdarskipanin er bíløgd, og at útreiðslurnar at bøta um trygdina á Listasavninum eru

bókaðar á høvuðskontu 7.11.1.14. “Viðlíkahald”, hóast Fíggjarnevndin ikki helt tað vera rætt at játta pening av hesari kontu til endamálið. Sambært landsstýrismanninum helt Byggiumsiting Landsins, at pláss kom at verða á viðlíkahaldsjáttanini at rinda útgerðina fyri og góðkendi tí, at útgerðin varð keypt.

3.4.6 Innlendismál

Samlaða meirnýtslan er um 17 mió.kr., talan er um 3 játtanir (s. 57).

Størsta meirnýtslan er á játtanini til Strandfaraskip landsins, um 15 mió.kr. Meirnýtslan svarar til mettu inntøkurnar av at einskilja farmaleiðir. Einskiljingin fór fram í 2006.

Meirnýtslan á játtanini til Innlendismálaráðið er um 2 mió.kr. Meirnýtslan svarar til mettu nettoinntøkurnar av at yvirtaka Tinglýsingarstovuna í 2005. Yvirtøkan varð framd í 2006.

3.4.7 Almannamál

Samlaða meirnýtslan er um 13,5 mió.kr., talan er um 8 játtanir (s. 59). Talan er at kalla bara um lógarbundnar útreiðslur.

3.4.8 Heilsumál

Talan er um 8 játtanir. Samlaða meirnýtslan er um 4,5 mió.kr., (s. 69), harav 2,3 mió.kr. eru farnar til raksturin av sjúkrahúsunum.

3.5 Aðrar viðmerkingar

3.5.1 Ivamál um játtanarskipanina

Ivamál um játtanarskipanina eru umrødd javnan seinastu 15 árini. Í frágreiðingini (s. 13-17) verður m.a. víst á, at ábøtur eru framdar, men at framvegis er ivasamt:

- um allar inntøkur landsins eru við í landsroknskapinum,
- um allar ognir og øll skuld er við í landsroknskapinum,
- um allir skattir/gjøld verða kravd inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini,
- um allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini,
- hvussu landsins gjaldføri skal verða gjørt upp og umsitið.

Eftir uppskoti frá Fíggjarnevndini setti løgtingsformaðurin í mars 2005 eina serfrøðinganevnd at fyrireika uppskot til lóg, ið kann loysa hesar og aðrar trupulleikar við verandi játtanarskipan. Eftir tilmæli frá serfrøðinganevndini legði løgtingsformaðurin í mars 2006 fram uppskot til løgtingslóg “um landsins játtanarskipan” (Lm. nr. 81/2005).

Lógaruppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn Tingið fór heim í mai 2006, og fall tí burtur. Landsgrannskoðanin heldur tað vera umráðandi, at málið ikki verður slept, og mælir løgtingsformanninum til at reisa málið av nýggjum skjótast til ber.

3.5.2 Studningslóggáva og studningsumsiting

Landsgrannskoðanin hevur í áravís víst á tørvin á at bøta um studningsgrundarlag/-lóggávu og studningsumsiting, so at endamál og treytir o.a. verða greiðari, og fyri at sleppa undan dupultarbeiði.

Nógvar studningsjáttanir verða bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Stovnar og feløg kunnu fáa studning til somu endamál frá fleiri studningsjáttanum,

og í ávísan mun er talan um fleirfaldaða málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Umsitingin av studningi er fløkt, óskipað og merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð og útgjalding. Viðvíkjandi studningsskipanum, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, er tað góður lóggávusiður at áseta neyvari reglur í serstakari lóg.

Hesir trupulleikar eru á flestu málsøkjum. Í frágreiðing okkara í oktober 2006 (s. 26-29) varð sum dømi víst á, at eisini lógargrundarlagið undir játtanini til menningarhjálp er ófullfíggjað.

Løgtingsgrannskoðararnir hava áður mælt til, at Løgmansskrivstovan átók sær ein virknan og samskipandi leiklut at bøta um verandi studningslóggávu.

Løgmaður hevur í september 2006 boðað frá, at hann harmast um, at hóskandi reglur ikki eru ásettar. Ætlanin við uppskotinum frá løgtingsformanninum til løgtingslóg "um landsins játtanarskipan" var eisini at útvega heimild til at áseta neyvari reglur "til tess at tryggja skynsama stuðulsumsiting." Lógaruppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn Tingið fór heim í mai 2006, og fall burtur. Løgmaður vísir á, at hetta mál nú liggur í Løgtinginum, og tað má ganga sína gongd, áðrenn onnur stig verða tikin av Landsstýrinum.

3.5.3 Um "útreiðsluneutralitet" á fíggjarlógini

Á s. 23-24 verður víst á, at seinastu árini er ofta komið fyri, at meira ella minni ítøkiligar løgujáttanir verða settar á fíggjarlógina, og tað tykist, sum at fleiri av hesum játtanum síðani verða nýttar til at tryggja "útreiðsluneutralitet", soleiðis at løgujáttanir verða lækkaðar á eykajáttanarlógum fyri at nýta peningin til rakstrarútreiðslur.

Í álitinum til uppskotið til eykajáttanarlóg november 2002 førdi minnilutin í Fíggjarnevndini fram, *"at eykajáttanarlógin við meirinntøkum minnir mest um tað, sum á fremmandum máli verður kallað "kreativ" bókføring. Meirinntøkur og ikki nýttar játtanir í einum fíggjarári koma í landskassaroknskapin og telja sostatt við í endaliga úrslitinum fyri viðkomandi fíggjarár. Tí hava vit ásetingina í stýrisskipanarlógini um, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið áðrenn 30. juni árið eftir."*

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tekur undir við fleiri sjónarmiðum, ið verða førd fram ímóti útreiðsluneutraliteti, herímillum at meirinntøkur av inntøkujáttanum og minniútreiðslur av rakstrarjáttanum í prinsippinum ikki skulu verða tikin við fyri at pynta eina eykajáttan.

Tó heldur landsstýrismaðurin tað vera rætt at hava útreiðsluneutralitet í teimum førum, tá ið talan er um veruligar umraðfestingar í rakstrinum, og tá talan er um umraðfestingar av løgum innan løgukarmin. Her verður útreiðsluneutraliteturin nýttur sum stýringaramboð til at kunna Løgtingið um umraðfestingarætlanir Landsstýrisins. Í nøkrum førum hevur verið loyvt at taka við bæði meir- og minniútreiðslur av lógarbundnum játtanum, mest fyri at tryggja eina ávísa javnvág. Arbeitt hevur verið við at stramma upp reglurnar fyri, hvat kann verða tikið við sum útreiðsluneutralar eykajáttanir, men landsstýrismaðurin ásannar, at ábøtur framvegis kunnu verða gjørdar á økinum.

3.5.4 Ógreiða um játtanir til felags viðlíkahald

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingini umrøtt, at á flestu málsøkjum eru játtanir, sum eru markaðar til felags viðlíkahald. Víst verður á, at hesar játtanir í ávísan mun verða brúktar til at keypa vørur, tænastur og útbúnað, ið vanliga ikki er at rokna sum viðlíkahald, ella tilfar í sambandi við viðlíkahald. Skipanin, at hava eina felags játtan á einum málsøki

til viðlíkahald, byrjaði sum ein kreppuloysn við uppskotinum til fíggjarlógina 1994. Minkandi játtanir høvdu tá fört til, at viðlíkahald av bygningum ofta varð spart burtur, og fleiri bygningar vóru í ringum standi.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum heldur, at tørvur framvegis er á tílíkum felags játtanum. Landsstýrismaðurin er samdur í, at tað er ov tilvildarligt og ógreitt, hvat verður bókað sum felags viðlíkahald. Fleiri av dømunum um viðlíkahaldsútreiðslur, sum nevnd eru í frágreiðingini, eru at rokna sum vanlig keyp av útbúnaði ella afturvendandi keyp av tænastum, ið av røttum skuldu verið skrásett undir vanligum rakstri. Tað kundi talað fyri, at tørvur er á einari reglugerð, sum útgreinar, hvat kann verða skrásett sum viðlíkahald. Sambært landsstýrismanninum er tað ein uppgáva hjá Fíggjarmálaráðnum, men hann heldur tað vera týdningarmikið, at Byggiumsiting Landsins tekur lut í hesum arbeiði.

3.5.5 Fyrisitingarútreiðslur verða spjaddar

Landsgrannskoðanin hevur millum ár og dag gjørt fleiri stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur hjá einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin umsitur. Í frágreiðingini (s. 21-23) vísir Landsgrannskoðanin á nøkur dømi, og setir m.a. spurningin, um játtanin til sjálvt Mentamálaráðið í veruleikanum átti at verið einar 4-5 mió.kr. hægri.

Landsgrannskoðanin heldur ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan, tá ein stovnur ella aðalráð pilkar út nakrar av sínum útreiðslum og spjaðir tær meira ella minni tilvildarliga út á aðrar játtanir, ið stovnurin/aðalráðið hevur ræði á. Henda mannagongd kann eisini vera við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.

Eisini Gjaldstovan heldur seg síggja oftari, at stovnar, sum umsita stórar játtanir, leggja fyrisitingarútreiðslur undir hesar játtanir. Úrslitið er, at fyrisitingarútreiðslurnar ikki geva røttu myndina av, hvat fyrisitingin veruliga kostar, og søguligar samanberingar, sum er tað týdningarmesta politiska stýringaramboðið, verða eisini órógvaðar.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum heldur eisini, at fyrisitingarútreiðslur í mest møguligan mun eiga at verða savnaðar undir aðalráðunum. Fíggjarmálaráðið mælir til, at umrøddu høvuðskontur og aðrar verða gjøgnumgingnar fyri at fáa staðfest, í hvønn mun fyrisitingarútreiðslur eru á hesum játtanum, og um hesar útreiðslur eiga at verða fluttar til avvarðandi aðalráð.

3.5.6 Serviðgerð uttanlands

Í frágreiðingini (s. 72-75) ávarar Landsgrannskoðanin ímóti, at játtanin til “Serviðgerð uttanlands” kann enda sum ein fløkja ímillum serviðgerðir uttanlands og serviðgerðir, ið eru framdar innanlands, fyri at minka um útreiðslurnar til serviðgerðir, ið “annars vildu verið framdar uttanlands”. Ein orsøk til, at játtanin kann enda sum ein fløkja, er, at til ber at siga, at ein stórur partur av øllum serviðgerðum, sum fara fram á sjúkrahúsunum í Føroyum, “annars vildu verið framdar uttanlands”. Landsgrannskoðanin mælir til, at játtanin verður endurskoðað saman við Fíggjarmálaráðnum.

4 Fíggjarmál

4.1 Roknskaparviðurskifti o.a.

4.1.1 Roknskaparkunngerðin (GL 1996/1 01 0-2)

Vit hava áður í frágreiðingum mælt Fíggjarmálaráðnum til at endurskoða roknskaparkunngerðina. Í 2003 høvdu vit aftur eitt ávíst samskifti við Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovuna um spurningin.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan hildu eisini tørv vera á at dagføra roknskaparkunngerðina og rundskrivið. Fíggjarmálaráðið ásannaði, at tað ongantíð hevði álagt stovnum at skráseta t.d. framleiðslu og tíðarnýtslu í innanvirkis roknskapum, samsvarandi § 7 í kunngerðini. Fíggjarmálaráðið arbeiðir við at dagføra roknskaparkunngerðina og ætlar, at skrásetingar av hesum slagi skulu verða raðfestar høgt í rationaliseringunum í almennu umsitingini komandi árini.

Seinnu árini hava Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan arbeitt við at dagføra roknskaparkunngerðina, og í november 2006 sendi Fíggjarmálaráðið aðalráðunum eitt uppskot til viðmerkingar. Sambært hesum uppskoti er ætlanin at taka við gjøllari reglur um "mál- og avriksstýring."

4.1.2 Egnar búskaparskipanir (GL 2001/1 01 0-9)

Sambært § 4, stk. 3, í roknskaparkunngerðini hava allir stovnar skyldu at nýta Búskaparskipan Landsins. Sambært § 4, stk. 4, skal Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan gera eina ætlan fyri, hvussu teir stovnar verða tiknir við, sum liggja uttan fyri Búskaparskipan Landsins tann dagin, kunngerðin kom í gildi (1. januar 1997).

Sambært § 4, stk. 5, kann Fíggjarmálaráðið eftir umsókn loyva stovnum við serligum tørvi at nýta sína egnu búskaparskipan heilt ella lutvíst. Loyvið er tó treytað av, at *"skipanin lýkur tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri Búskaparskipan Landsins"*, og at ein skrivlig rakstraravtala verður gjørd millum Føroya Gjaldstovu og viðkomandi stovn, sum neyvari útgreinar treytirnar fyri dátusamskifti o.ø.

Vit hava áður vísst á, at hesar reglur als ikki verða hildnar, hóast talan er um stórar og umfatandi skipanir. Vantandi samskipan og stýring hevur helst fört til ov nógvar "egnar búskaparskipanir", m.a. tí at stovnar ofta halda seg hava ein heilt serligan tørv. Fleiri broytingar og tillagingar eru gjørdar í KT-skipanunum, uttan at Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan framman undan hevur fingið nakað at vita.

Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir vísst á:

> *"at nógvir landsstovnar/-grunnar nýta nógvar og ymiskar KT-skipanir at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, debitorar o.a., og tá ræður um KT-trygd, er verandi KT-bygnaður eitt tað størsta vandamálið.*
>
> *Peningur og starvsfólkaorka verða tí ikki nýtt á skynsaman hátt, og Búskaparskipan Landsins verður ikki gagnnýtt í tann mun, ætlanin var. Fíggjarmálaráðið hevur tikið fleiri stig til at bøta um støðuna. Løgtingsgrannskoðararnir vilja enn eina ferð mæla til at gera eina ítøkiliga langtíðarætlan fyri, hvussu roknskaparviðurskiftini, út frá einum heildarsjónarmiði, kunnu um- og samskipast, soleiðis at umsitingin verður bíligari og betri."*

Landsstýrismaðurin heldur tað hevði verið skilagott, í einari skynsamari langtíðarráðlegging, at lagt niður fleiri av smærru búskaparskipanunum, og í staðin nýtt Búskaparskipan Landsins í størri mun. Fíggjarmálaráðið hevur reist spurningin mótvegis hinum aðalráðunum.

Í juni 2006 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin, hvat síðani var hent í málinum, og hvørjar ætlanir hann hevði. Landsstýrismaðurin vísti til eina frágreiðing frá Gjaldstovuni. Gjaldstovan heldur ikki nakað munagott vera hent. Tríggir smærri stovnar afturat brúka Búskaparskipan Landsins, og nakrir hava tikið felags lønarskipanina í nýtslu; men samstundis hevur Almanna- og Heilsumálaráðið góðkent, at tveir smærri stovnar, sum eru tiknir við sum rakstrarjáttan, nýta egnar búskaparskipanir, uttan at Gjaldstovan formliga er kunnað um tað. Gjaldstovan heldur, at landsfyritøkur, sum eru vinnuligar fyritøkur við t.d. vørusølu, goymslu, innkeypi og kassaterminalum, kunnu hava egnar búskaparskipanir.

Gjaldstovan vísir á, at Almannastovan er í holt við at gera kravfestingar til eina størri loysn, sum m.a. snýr seg um at fáa viðurskiftini við Búskaparskipan Landsins formliga í rættlag. Tað fer at taka nøkur ár, og er sjálvandi treytað av, at peningur verður játtaður til endamálið.

Samanumtikið heldur Gjaldstovan seg ikki kunna gera annað enn at hyggja at, hvussu leikur fer. Sambært Gjaldstovuni eru tað fyrst og fremst aðalráðini, sum hava ábyrgdina av, at viðurskiftini formliga eru røtt, og nú 10 ár eru liðin, síðani krøvini um skipað viðurskifti á roknskaparøkinum vórðu sett, er torført framhaldandi at hava undanførslur.

Landsverk

Í september 2006 var fundur millum Fíggjarmálaráðið, Vinnumálaráðið, Gjaldstovuna og Landsverk, í sambandi við at Landsverk hevur tikið í nýtslu og tillagar "egna" Navision búskaparskipan uttan at biðja Fíggjarmálaráðið um formligt loyvi sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini.

Vinnumálaráðið hevur í desember 2006 boðað frá, at arbeitt verður við at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

Vinnuskúlar

15. apríl 2003 fingu vinnuskúlarnir - t.e. Tekniski skúli í Tórshavn og Føroya Handilsskúli - fráboðan frá Mentamálaráðnum um, at Fíggjarmálaráðið hevði gjørt av, at vinnuskúlarnir skuldu nýta Búskaparskipan Landsins. Síðani tá hava vinnuskúlarnir samskift við Gjaldstovuna um, hvussu teir verða tiknir við í Búskaparskipan Landsins.

Landsgrannskoðanin hevur biðið Mentamálaráðið greiða frá, hví hetta mál ikki er loyst enn, og hvørjar ætlanir eru um at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

Mentamálaráðið hevur í oktober 2006 gjørt skúlarnar varugar við, at tað er Fíggjarmálaráðið, ið hevur avgerðarrætt í hesum máli, og at teir skulu fylgja boðunum frá Gjaldstovuni.

Felags búskaparskipan ella egnar búskaparskipanir

Gjaldstovan heldur tað vera ein trupulleika, at vit í Føroyum hava fleiri stórar KT-skipanir, herímillum eisini Búskaparskipan Landsins, men til ov fáar dátur. Sambært Gjaldstovuni tykist Landsverk vera á veg út úr Búskaparskipan Landsins, og fara t.d. sjúkrahúsini eisini, so er "legitimiteturin" hjá Búskaparskipan Landsins burtur.

Gjaldstovan vísir á, at verða reglurnar í roknskaparkunngerðini um eina felags búskaparskipan ikki tiknar í álvara, er vandi fyri, at stovnar hvør í sínum lagi venda sær til KT-fyritøkur at finna egnar loysnir, sum ikki sampakka við Búskaparskipan Landsins. Tað kann tí enda við, at tað almenna stendur við nógvum, ósamanhangandi loysnum, og so er tað "óveruligt" at tryggja dátugrundarlagið. Vandi er soleiðis fyri, at almenna roknskaparhaldið endar aftur í teirri støðu, tað var í, áðrenn Búskaparskipan Landsins varð sett í

verk, t.v.s. at landsins myndugleikar hava ov vánaligt dátugrundarlag at stýra almenna búskapinum við.

Gjøgnumskygni og góðska í roknskaparhaldinum

Gjaldstovan hevur víst á, at árligi landsroknskapurin er ein gluggi inn í landsins almenna roknskaparhald, og at Búskaparskipan Landsins er ein partur av hesum glugga. Gluggin, Búskaparskipan Landsins, minkar tó, tí fleiri stovnar o.o. liggja uttan fyri Búskaparskipan Landsins, og nakrir stovnar royna at sleppa burtur úr Búskaparskipan Landsins.

Parturin, sum liggur í Búskaparskipan Landsins, er tryggjaður við tryggum mannagongdum (manuellar, KT-skipanarligar o.a.) og verður støðugt betur skipaður og meira gjøgnumskygdur (niður á skjalastøði). Tað er møguliga orsøkin til, at fleiri stovnar halda tað vera ein fyrimun at liggja uttanfyri. So sleppa teir undan, at onnur fáa innlit í teirra virksemi niður á skjalastøði.

Stovnar o.o., sum eru við á fíggjarlógini sum rakstrarjáttan, og sum ikki bóka beinleiðis í Búskaparskipan Landsins, senda inn samlibókingar á standardroknskaparstøði. Sambært Gjaldstovuni er tilfarið, sum hesir stovnar senda inn, viðhvørt av slíkari góðsku, at Gjaldstovan kann ikki svara fyri rættleikanum.

4.1.3 Búskaparskipan Landsins, innaneftirlit (GL 1998/2 03 1-8)

Gjøgnumgongd okkara í 2006 av innaneftirlitinum, í sambandi við skráseting og útgjalding av útreiðslum í Búskaparskipan Landsins, stuðlar samanumtikið undir fatan okkara av, at innaneftirlitið á Gjaldstovuni er miðvíst og væl skipað, og at leiðslan og starvsfólkini raðfesta arbeiðið høgt.

Í 2005 varð verkgongdarskipanin tikin í nýtslu. Verkgongdarskipanin er ein partur av kreditoraskipanini í Búskaparskipan Landsins. Kreditorfakturar verða ljóslisnir inn í verkgongdarskipanina, og so fer skjalið í elektroniskari "verkgongd" til teirra, sum skulu góðkenna keypið, og teirra, sum skulu kontera og leysgeva útgjaldingina av kreditorfakturanum.

Vit halda, at verkgongdarskipanin, við funktiónsskilnaði og atknýttum innaneftirliti, er sera væl gjøgnumhugsað út frá einum eftirlitssjónarmiði. Vit hava mælt til einstakar ábøtur.

Vandin fyri, at feilútgjaldingar verða framdar av misgáum, ella tí svikað verður, tykist lítil.

Kontering og avstemman av kreditorum

Vit vilja tó vísa á, at tað eru fleiri stovnar og aðalráð, sum ikki stemma kreditorarnar av, og at stovnar og aðalráð hava torført við at kontera útreiðslur rætt, helst tí at roknskaparfatanin eftir øllum at døma vantar, og kanska eisini tí at konteringarleiðbeiningin ikki er løtt atkomulig. Gjaldstovan hevur í desember 2006 víst á, at konteringarleiðbeiningin er teldutøk á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni. Fyrimunurin við hesari loysnini er, at til ber at bora seg niður í kontuskipanina og at leita upp á orð.

Vit hava víst á, at tað kundi verið vert at umhugsa at miðsavna neyðuga arbeiðsorku og roknskaparvitan á Gjaldstovuni, sum so konteraði øll skjølini í verkgongdarskipanini niður á standardroknskapar- og útgreiningarstøði, áðrenn tey verða send stovninum at góðkenna og leysgeva til útgjaldingar, og at stovnar o.o. bara kontera "internu segmentini". Gjaldstovan hevur í desember 2006 víst á, at tað er bert møguligt, um Gjaldstovan fær neyðuga orku at loysa uppgávuna.

Miðfirring av roknskaparhaldinum

So við og við eru fleiri stovnar og aðalráð farin at nýta verkgongdarskipanina. Eisini stovnar og aðalráð, sum fyrr vórðu hildin at hava ov fáar skrásetingar og hendingar til, at tey kundu skráseta sjálvi.

Í dag hava vit hundraðtals bókhaldarar, leysgevarar og "ljóslesarar", og tey hava øll varafólk. Tá ið aðrar KT-loysnir, sum eitt nú Web-løn (sokallaðar leysar lønir verða skrásettar á stovnum og aðalráðum, heldur enn á lønarstovuni á Gjaldstovuni), verða settar í verk, verða tey enn fleiri í tali.

Verandi miðfirringarstrategi kann føra til, at fleiri stovnar og aðalráð ikki megna uppgávuna, og at vit fáa fleiri privatar "mini-Gjaldstovur". Tað reisir fleiri spurningar um, hvør ið hevur ábyrgdina av, um roknskapurin er rættur. Vit kunnu nevna sum dømi, at fyri summarfrítíðina 2006 fór roknskaparfólkið á Mentamálaráðnum í annað starv, og Mentamálaráðið valdi at leggja skrásetingaruppgávuna o.a. út til privata bókhaldsstovu.

Landsgrannskoðanin ivast í, hvussu skilagóð miðfirringin (desentraliseringin) av skráseting og leysgeving í partsskipanum av Búskaparskipan Landsins er. Vit hava áður ávarað ímóti, at nógvu og smáu stovnarnir mega nýta óneyðuga nógva arbeiðsorku at loysa lutfalsliga sera smáar umsitingaruppgávur, uttan at roknskaparhaldið verður bíligari og/ella betri.

4.1.4 Lønarumsiting á Gjaldstovuni (GL 1998/2 03 1-10)

Lønarstovan á Gjaldstovuni umsitur og rindar út lønir hjá nógvum landsstovnum. Í sambandi við lønargrannskoðan úti á stovnunum hava vit eisini kannað, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking, stigum o.ø. í lønarskipanini á Gjaldstovuni. Hesar stakroyndir benda á, at lønarsatsir, útrokningar o.a. í lønarskipanini eru rættar.

Um at góðkenna lønargrundarkort

Eina ferð um árið sendir lønarstovan á Gjaldstovuni øllum stovnsleiðarum lønargrundarkortini hjá starvsfólkunum at góðkenna. Stovnsleiðarin skal kanna, um samsvar er millum formligu setanarviðurskiftini og tær í lønarskipanini skrásettu upplýsingar, herímillum starvsbólk, lønartalvu, aldursviðbót og lønarbrøk.

Í apríl 2005 sendi Gjaldstovan aftur út nýggj lønargrundarkort til stovnarnar at góðkenna. 17 lønargrundarkort komu aftur við viðmerkingum, broytingum og feilum.

Í 2006 hevur Gjaldstovan valt at bíða við at senda lønargrundarkort út, m.a. tí at í oktober 2005 gingu flestu sáttmálar út, og umleið helmingurin av feløgunum hava ikki enn fingið nýggjan sáttmála.

Lønarútreiðslur stemmaðar av við Toll- og Skattstovu Føroya

Mannagongdin hevur verið, at Lønarstovan stemmar lønarútgjaldingarnar av við yvirlit frá Toll- og Skattstovu Føroya, tá ið Gjaldstovan eina ferð um árið rindar Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Trygdargrunninum kravdu gjøldini. Í oktober 2006 hevur Gjaldstovan kunnað um, at lønarútgjaldingarnar 2005 eru stemmaðar av millum felags lønarskipanina og Toll- og Skattstovu Føroya.

Gjaldstovan hevur í desember 2006 greitt frá, at Toll- og Skattstovan í 2006 hevur broytt sína mannagongd soleiðis, at rokningin frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum nú verður send Gjaldstovuni, so hvørt lønarútgjaldingarnar fara fram, og tí stemmar Gjaldstovan av so hvørt.

Broytta mannagongdin hjá Toll- og Skattstovuni merkir m.a., at stovnarnir í 2006 hava fingið rokningina fyri gjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin fyri bæði 2005 og 2006. Gjaldstovan hevur tí brúkt heimildina í § 14 í roknskaparkunngerðini at broyta skrásetingarmeginreglu, soleiðis at gjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin fyri 2005 er tikið við sum primopostur til fíggjarstøðuna fyri 2006. Tilsamans er talan um 10,5 mió.kr.

Nýggj lønarskipan

Í juni 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein felags lønarskipan fór at verða tikin í nýtslu um ársskiftið 2001/2002, og á vári 2004 skuldu allar almennar lønir, og aðrar gjaldingar, ið verða handfarnar sum lønir, uttan undantak fara um hesa skipan. Í ávísum førum kundu egnar forskipanir verða nýttar, t.d. í sambandi við útbúgvingarstuðul o.l. Gjaldstovan skuldi ikki skráseta lønir; tað skuldu aðalráðini/stovnarnir gera.

Henda tíðarætlan hjá landsstýrismanninum helt ikki. Í 2005 vórðu lønirnar hjá fólkaskúlalærarum lagdar um til felags lønarskipanina. Gjaldstovan vísti tá á, at lønarøkið er eitt stórt økið við nógvari servitan. Skuldi nakað munagott verða gjørt, fyri at fáa allar almennar lønir avgreiddar einsháttað í somu skipan, var neyðugt at fremja ávísar bygnaðarbroytingar og at savna fólk við serkunnleika á lønarøkinum í eina eind.

Í oktober 2006 hevur Gjaldstovan kunnað um, at tað gongur seint at fáa nýggju lønarskipanina innførda. Eftir ætlan verða sjúkrahúsini tikin við í næstum. Nær hinir stovnarnir verða tiknir við, kann Gjaldstovan ikki siga nakað um nú. Tað er m.a. treytað av, um Landsstýrið kann semjast um at savna vitan á økjunum í eina felags lønarfyrisiting.

4.1.5 Tænastumannaeftirlønir o.t. (GL 1998/2 17 1-2)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2005 vísti Landsgrannskoðanin á, at umsitingin av tænastumannaeftirlønum er ikki nøktandi.

Niðanfyri hava vit gjørt ein samandrátt av frágreiðingini, og vit kunna um, í hvønn mun landsstýrismaðurin hevur bøtt um viðurskiftini.

Vantandi útrokning/meting av samlaðu eftirlønarskylduni

Í 2005 vóru útreiðslurnar til tænastumannaeftirlønir o.t. um 50 mió.kr. netto, sum er einar 29 mió.kr. meira enn í 1997. Sambært landsroknskapinum eru tænastumannalønir o.t. í sama tíðarskeiði vaksnar úr um 194 mió.kr. í 257 mió.kr.

Einki samlað yvirlit finst yvir, hvussu nógvir tænastumenn o.a. hava vunnið sær eftirlønarrætt, hvussu nógvir teirra framvegis eru í tænastumannastarvi, eru farnir í annað starv, ella hvussu nógvir fáa eftirløn. Vit royndu at leita fram upplýsingar og gjørdu eitt ávegis yvirlit í mars 2005, sum skal vera tikið við fyrivarni:

- Tænastumenn í starvi: 658
- Tænastumenn, farnir í annað starv: 212
- Tænastumenn o.a., ið fáa eftirløn: 344

Samanlagt er talan um umleið 1200 tænastumannamál. Harafturat koma løgtings- og landsstýrismenn, ið eisini fáa eftirløn sum tænastumenn. Vit vístu á fleiri vandamál m.a.:

at samlaðu eftirlønarskyldurnar hjá landinum eru ikki tiknar við í landsroknskapinum,

at eftirlønaraldur o.a. hjá tænastumonnum er ikki skrásett á ein skipaðan hátt,

at fullfíggjað yvirlit er ikki yvir allar tænastumenn, ið eru ella hava verið í starvi,

at vissa er ikki fyri, at øll, ið hava eftirlønarrættindi, fáa eftirløn, herímillum hjúnafelagar og børn o.s.fr., og vandi er fyri at fleiri av órøttum verða gloymd burtur,

at ymiskt er, hvar á fíggjarlógini eftirlønarútreiðslur verða játtaðar,

at landið ikki hevur nóg gott yvirlit yvir verandi og komandi eftirlønarskyldur og eftirlønarútreiðslur,

at ongar metingar finnast av vøkstrinum í landsins útreiðslum til tænastumannaeftirlønir komandi 5, 10 ella 20 árini,

at metingar av samlaðu, kapitaliseraðu eftirlønarskylduni eru ikki gjørdar.

Vit mæltu til at bøta um hesi viðurskifti.

Felags tilmæli frá umsitingini í mars 2004

Starvsfólkini, ið dagliga umsita eftirlønir, savnaðust í mars 2004 at umrøða trupulleikarnar. Á fundinum vóru tey samd um, at umsitingin á eftirlønarøkinum hjá tænastumonnum var illa greinað, fyrisitingarliga ógreið, skipað skráseting av eftirlønarrætti manglaði, og vandi var fyri, at fólk høvdu eftirlønarrættindi, sum hvørki tey sjálvi ella myndugleikar vistu av.

Eitt brot í fundarfrágreiðingini er orðað soleiðis: *"Verður einki gjørt, kann enda púra galið. Eitt er, at myndugleikin ikki veit, hvørjar skyldurnar eru. Annað er, at vandi er fyri, at fólk detta burtur ímillum. Tey hava kanska rætt til eftirløn, men rættindini eru vunnin fyri so langari tíð síðani, at tey hava gloymt tað. Talan kann eisini vera um hjúnafelagaeftirløn hjá hjúnafelaga, sum ikki veit seg hava rættindini. Mælt verður til at fáa skil á økinum, áðrenn tað verður kravboð frá umboðsmanninum."*

Sambært fundarfrágreiðingini er eftirlønarøkið ógvuliga viðbrekið, tí tað er so bundið at vitanini hjá einstøkum fólkum. Í notatinum verður mælt til, at støða verður tikin til:

- at eftirlønarrættur hjá tænastumonnum skal verða skrásettur,
- hvør skal umsita økið at skráseta tænastumannaeftirlønarrætt,
- at upplýsingarnar verða skrásettar miðsavnað,
- at dátugrunnur verður gjørdur.

Tilmælið varð stílað leiðaranum á Lønardeildini, sum síðani hevur kunnað aðalstjóran og landsstýrismannin og givið teimum avrit av tilmælinum.

Tiltøk, ið Fíggjarmálaráðið hevur sett í verk at samskipa umsitingina

Í oktober 2005 greiddi Fíggjarmálaráðið frá, at Landsstýrið hevði gjørt av, at umsitingin av lønum og tænastumannaeftirlønum hjá landinum skuldi verða samskipað. Ætlanin var, at eini 15 fólk vórðu savnað í eina fyrisitingarliga eind. Sambært Fíggjarmálaráðnum var neyðugt, at arbeiðið varð skipað við einum verkætlanarleiðara. Ein felags lønarfyrisiting skuldi verða komin uppá pláss í seinasta lagi á heysti 2007.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið at savna uppgávur og starvsfólk verður gjørt í samráði við tey aðalráð, sum frammanundan eisini umsita tænastumannaeftirlønir. Úrslitið er bundið at, hvussu tað arbeiðið gongur. Landsstýrismaðurin ger vart við, at *"Servitan um tænastumenn og tænastumannaeftirlønir er savnað hjá nøkrum fáum fólkum. Kritisku trupulleikarnir verða ikki loystir við at seta "nýggj" fólk at loysa teir. Fortreytin fyri, at uppgávan verður loyst nøktandi, er, at tey, sum hava savnað sær vitanina, verða sett at greiða trupulleikarnar í felag."*

Landsgrannskoðanini kunnugt, gekk arbeiðið striltið, og í desember 2006 bóðu vit Fíggjarmálaráðið kunna okkum um samskiftið, ið hevur verið við aðalráðini um hetta mál. Vit spurdu eisini, um tíðarætlanin, at savna 15 fólk í eina fyrisitingarliga eind í seinasta

lagi á heysti 2007, fer at halda. Fíggjarmálaráðið hevur svarað, at í desember 2006 varð semja gjørd millum aðalstjórarnar í Fíggjarmálaráðnum, Mentamálaráðnum og Almanna- og Heilsumálaráðnum um at mæla Landsstýrinum til at fara fram eftir hesum leisti:

1. Nærlýsa og útgreinað økið. Seta arbeiðsbólk við limi úr hvørjum aðalráði. Fyri aðalráðini, sum hava tyngstu uppgávuna í dag, t.e. Fíggjarmálaráðið, Mentamálaráðið og Almanna- og Heilsumálaráðið, verða smærri arbeiðsbólkar settir, sum nærlýsa serliga egið øki.
2. Tilfeingis- og vitanaruppgerð verður gjørd, har m.a. verður lýst, hvørjar uppgávur og hvør servitan skal verða savnað, hvussu nógv starvsfólk, tilfeingi og pening aðalráðini lata til felags lønar- og starvsfólkafyrisitingina. Er trupult at fáa fólk við røttu vitanini, og tey eru í aðalráðunum, men hava aðrar uppgávur, eigur at verða roynt at finna eina loysn, soleiðis at hesi starvsfólkini, í sátt og semju, kunnu verða flutt í felags lønar- og starvsfólkafyrisitingina. Restar peningur í, verður hann fingin til vega í komandi løgtingsfíggjarlógum (nýggjur, raðfestur peningur).
3. Avgerð um og íverksetan "av loysn" í seinasta lagi 1. apríl 2007.

Onnur tiltøk, ið eru sett í verk

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at síðani 1. apríl 2006 hevur verið talt upp, hvussu nógv tænastumenn vinna sær í eftirlønaraldri. Talan er um tænastumenn, sum eru í starvi, og sum eru løntir gjøgnum felags lønarskipanina.

Mentamálaráðið hevur gjørt upp, hvussu nógv tænastumannasettir lærarar í fólkaskúlanum hava vunnið sær í eftirlønaraldri, frá tí teir vórðu settir í starv og til 1. apríl 2006.

Fíggjarmálaráðið er eisini farið undir at telja eftirlønaraldur hjá tænastumonnum, sum verða løntir um felags lønarskipanina. Fyri tænastumenn undir Almanna- og Heilsumálaráðnum er ætlanin, at eftirlønaraldurin verður gjørdur upp so hvørt, sum teir verða fluttir yvir í felags lønarskipanina.

Telduforrit er bílagt, soleiðis at tað skal bera til at síggja, hvussu nógv hvør tænastumaður hevur vunnið sær í eftirløn. Næsta stigið verður at finna eftirlønaraldurin hjá teimum, sum hava rætt til útsetta eftirløn, men ilt er at siga, hvussu nógva orku og tíð tað fer at krevja, áðrenn komið er á mál.

4.1.6 Effektivisering av umsitingini o.a. (GL 2001/1 01 0-9)

Vit hava áður mælt til at kanna, um tað ikki hevði loyst seg at savna stovnar, grunnar og fyrisitingar í størri eindir í nútímans umsitingarbygningum, møguliga saman við kommunalum fyrisitingum, fyri at effektivisera umsitingaruppgávurnar og frígeva starvsfólkaorku til tær grundleggjandi uppgávurnar.

Í uppskoti til samtyktar í februar 2003 frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin 2001 (Lm. nr. 71-6/2002) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at kanna hesi viðurskifti nærri.

Í januar 2004 boðaði Fíggjarmálaráðið m.a. frá, at fyrimunirnir eru so eyðsýndir, at ikki skuldi verið neyðugt við nakrari kanning fyri at fáa tað staðfest.

Í november 2004 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at í sambandi við arbeiðið við løgtingsfíggjarlógini 2005 hevði Fíggjarmálaráðið biðið aðalráðini koma við ítøkiligum uppskotum, til tess at fremja sparingar, t.d. strukturbroytingar, talgildis- ella onnur tiltøk. Fíggjarmálaráðið ásannaði, at striltið hevði gingist at fáa nøkur ítøkilig uppskot.

Landsstýrismaðurin var ikki í iva um, at tað var skilagott av savna stovnar og fyrisitingar í størri eindir, bæði hvat viðvíkti KT-skipanum og bygnaði. Fyri at tílíkar broytingar skulu hepnast, krevjast fleiri fyritreytir:

- peningur skal verða settur av til umleggingina (tað verður dýrari, áðrenn tað verður bíligari),
- játtan skal flytast frá fleiri umsitingareindum til ta umsitingareindina, ið skal loysa uppgávuna í framtíðini,
- politisk semja skal fáast um broytingarnar,
- broytingarnar skulu hava undirtøku í umsitingini.

Í desember 2005 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at hann á sínum øki arbeiddi við tveimum stórum rationaliseringsætlanum. Onnur var ein grundleggjandi umskipan av toll- og skattaumsitingini, og hin var ein grundleggjandi umskipan av virkseminum hjá Hagstovuni, Landsbankanum og Búskaparráðnum. Eisini skuldi í 2006 verða farið undir at savna lønarútgjaldingar o.a. í ein lønardepil. Sambært landsstýrismanninum miðaðu hesar verkætlanir ímóti at savna eins uppgávur saman, bygnaðarliga og "fysiskt", og harvið skapa eina bæði effektivari og betri umsiting.

Landsstýrismaðurin ásannaði, at tað var sera tungt at fremja rationaliseringar í almennu umsitingini. Serliga høvdu nógvar forðingar verið í arbeiðinum at umskipa virksemið hjá Hagstovuni, Landsbankanum og Búskaparráðnum. Fíggjarmálaráðið var liðugt at evna til lógaruppskot at fremja nevndu umskipan, men uppskotini eru ikki løgd fyri Løgtingið.

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Fíggjarmálaráðið hevur at kalla til fánýtis tikið stig til at samskipa ítøkilig uppskot á hesum øki. Landsstýrismaðurin vísir á fleiri fyritreytir, ið skulu til, fyri at tílíkar broytingar skulu hepnast, m.a. politisk semja um broytingar og undirtøka í umsitingini. Landsgrannskoðanin heldur, at her er enn eitt dømi um, hvussu torført tað er at loysa mál, har tað er neyðugt at samskipa og samstarva millum fleiri aðalráð. Landsgrannskoðanin vil mæla Landsstýrinum til at taka hesar spurningar til viðgerðar.

4.1.7 Ávísar útreiðslur (GL 2005/4 00 0-7)

Á s. 115 – 156 í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 greiddi Landsgrannskoðanin frá, at løgtingsgrannskoðararnir høvdu heitt á Landsgrannskoðanina um at kanna, hvørjar reglur vóru galdandi, og hvussu mannagongdir og siðvenjur vóru, tá ið ráddi um:

1. ferðing uttanlands og dagpening fyri tænastuferðir,
2. fartelefon og aðrar samskiftisútreiðslur,
3. umboðan, starvsfólkaútreiðslur o.t.,
4. bilar.

Í hesum sambandi sendi Landsgrannskoðanin í november 2005 spurnabløð til allar stovnsleiðarar, sum eru skrásettir í Búskaparskipan Landsins, og spurnakanningin fevndi tí um at kalla allar landsstovnar. Við spurnablaðnum fylgdi eitt fylgiskjal við brotum úr galdandi reglum. Allir stovnsleiðarar svaraðu spurnabløðunum.

Landsgrannskoðanin sendi eisini spurnabløðini til stovnar, sum eru uttan fyri landsroknskapin. Allir svaraðu, uttan Arbeiðsloysisskipanin og Føroya Realkreditstovnur, sum

vístu á, at teir ikki vóru landsstovnar. Samanlagt svaraðu 92 stovnsleiðarar spurnabløðunum.

Landsgrannskoðanin hevði eisini við stakroyndum kannað, hvussu aðalráðini umsótu hesi somu øki.

Niðanfyri hava vit tikið saman um úrslitið av frágreiðingini.

Ferðing uttanlands

Í einum gomlum rundskrivi frá 1973 er álagt øllum *"sum fara uttanlandsferð fyri almenna rokning at vissa sær flogferðaseðil (við rabatti) frá Landsskrivstovuni í góðari tíð."* Ferðaseðlar verða í nógvum førum keyptir uttan avsláttur, og verða ikki bílagdir í góðari tíð.

Sambært rundskrivi í 2002 frá Fíggjarmálaráðnum er álagt øllum stovnum at tryggja, at bonusstig og annar avsláttur, sum stavar frá tænastuferðum, kemur stovninum til góðar. Bert 8 stovnsleiðarar siga seg halda rundskrivið. Einki aðalráð heldur rundskrivið, heldur ikki Fíggjarmálaráðið sjálvt.

Fartelefon- og aðrar samskiftisútreiðslur

Flestu stovnsleiðarar og øll aðalráð hava latið starvsfólki fartelefon ókeypis at nýta sum arbeiðsamboð, og verður fartelefonin vanliga tikin við heim til hús. Flestu stovnar hava onga skipaða mannagongd, sum tryggjar, at starvsfólk endurrinda møguliga privata nýtslu. Sambært frágreiðingini hava "bert" 4 stovnsleiðarar boðað Toll- og Skattstovuni frá um fartelefonir, sum skattliga eru at rokna sum fríir ágóðar.

Umboðan, starvsfólkaútreiðslur o.t.

Ongar reglur finnast fyri umboðan. Sjáldan er nóg væl greitt frá, hví útreiðslan er hildin, og ymiskt er, hvussu umboðanarútreiðslur verða konteraðar.

Sambært nøkrum gomlum ásetingum frá Landsstýrinum skulu starvsfólk sjálvi rinda fyri jólaborðhald og starvsfólkaútferðir. Í dag rinda aðalráð og nógvir stovnar jólaborðhaldið, og nakrir lata eisini jólagávur. Flestu aðalráð og nakrir stovnar rinda starvsfólkaútferðir, og starvsfólkini fáa frí við løn útferðardagin. Tá ið ræður um aðrar starvsfólka- ella trivnaðarútreiðslur, er sera ymiskt, hvat aðalráð og stovnar rinda fyri.

Bilar

Sambært spurnakanningini verður eingin í landsumsitingini skattaður av fríum ágóða av at nýta stovnsbil privat.

Um tørvin at áseta reglur

Í 1997 mæltu vit fyrstu ferð til at gjøgnumganga øll rundskriv, ið landsstýrið hevði sent út, við tí fyri eyga at gera eitt meira fullfíggjað yvirlit yvir, hvørji rundskriv eru í gildi, og hvørji eru farin úr gildi. Vit handaðu landsstýrinum eitt ringbind við øllum rundskrivunum.

Í frágreiðingini vístu vit á nøkur av hesum gomlu rundskrivum um m.a. gávur, jólaborðhald og útferðir. Nakrir stovnsleiðarar halda seg til hesar "strongu" reglur, og halda tað nærum vera "ómoralskt", at landsins peningur fer til slíkt. Aðrir stovnsleiðarar halda tílíkar útreiðslur vera sjálvsagdar og hartil gagnligar fyri trivnaðin á stovninum.

Í november 2005 mæltu vit Løgmansskrivstovuni til at áseta dagførdar reglur á hesum øki.

Í januar 2006 vísti Løgmansskrivstovan á, at Løgmansskrivstovan ikki longur fyrisitur málsøkið starvsfólkapolitikk. Málið var flutt til landsstýrismannin í fíggjarmálum í 2003.

Løgmansskrivstovan boðaði frá, at hon var samd við Landsgrannskoðanini um, at rættast hevði verið at fingið dagførdar reglur, og fór tí at heita á Fíggjarmálaráðið um at skipa so fyri, at tað verður gjørt.

Øll hini aðalráðini tóku undir við áheitanini á Fíggjarmálaráðið at evna til felags dagførdar reglur og at rudda upp í rundskrivunum.

Samskifti við landsstýrismannin

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tørvur var á at áseta gjøllari reglur. Fleiri rundskriv eru gomul og ótíðarhóskandi, og helst ókend av mongum. Hóast onnur rundskriv eru nýggjari, verða tey heldur ikki altíð fylgd. Samanborið við onnur øki, er ikki talan um tær stóru útreiðslurnar, men talan er um útreiðslur, sum liggja á markinum til privatútreiðslur ella fríar ágóðar. Tí er umráðandi fyri stovnsleiðarar og starvsfólk o.o., at greiðar reglur verða ásettar, so allir partar vita, hvat er rætt, og hvat er skeivt. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at áseta gjøllari reglur.

Í juni 2006 spurdu Landsgrannskoðanin landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Landsstýrismaðurin svaraði tá, at Fíggjarmálaráðið ætlaði at taka hesar spurningar upp við hini aðalráðini til heystar.

Í desember 2006 spurdu vit aftur landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Tá svaraði Fíggjarmálaráðið, at aðalráðini á heysti 2006 hava viðgjørt spurningin, men arbeiðið er ikki liðugt enn. Aðalráðini hava avtalað, at Fíggjarmálaráðið og Løgmansskrivstovan eftir ársskiftið 2006/2007 fara undir at orða nýggjar reglur fyri framman fyri nevndu útreiðslusløg.

Sum nevnt, mæltu vit fyrstu ferð í 1997 til at gjøgnumganga og endurskoða rundskrivini, ið Landsstýrið hevði sent út. Vónandi verður arbeiðið gjørt liðugt í hesum umfari, so eingin ivi er um, hvørjar reglur eru galdandi.

4.2 Fíggjarstøðan 2005

4.2.1 Góðkenningarmannagongdir

Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini er álagt stovnsleiðarum mánaðarliga at góðkenna játtanarroknskapin mótvegis aðalráðunum. Á serligum góðkenningarskjali skal stovnsleiðarin sambært pkt. 2.1 í roknskaparrundskrivinum m.a. vátta:

> *"at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, herímillum at allar peningastovnskontur, sum stovnurin hevur ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum; at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp; at samsvar er millum búskaparskipanir landsins og egnar búskaparskipanir, at alt er stemmað av, sum ásett í roknskaparreglugerðini, og at ásettu mannagongdirnar í roknskaparreglugerðini eru hildnar. Harafturat skal verða kannað, at allar áognir, frammanundan goldnar og skyldugar upphæddir, veittar trygdir o.a. eru skrásettar í roknskapinum, so hann gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ogn og skuld við fíggjarárslok. Í átekningini skal verða kunnað um møgulig viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Tá ið játtanarroknskapurin fyri síðsta roknskaparliga ískoytisskeiðið (ársroknskapurin) er góðkendur, skal Gjaldstovan hava avrit av góðkenningarskrivinum."*

Greinaroknskapurin

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok á serligum góðkenningarskjali at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálaráðnum.

Greinaroknskapurin er ein samandráttur av játtanar/mánaðarroknskapunum undir einari grein. Aðalstjórarnir skulu vegna landsstýrismannin vátta, at játtanarroknskapirnir, ið liggja undir greinaroknskapinum, allir eru góðkendir av stovnsleiðarum sambært galdandi reglum.

Á góðkenningarskjalinum skulu aðalstjórarnir kunna Fíggjarmálaráðið um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningarskjølum og møguligum fylgiskjølum. Henda skipan er eisini við til at tryggja, at gjørt verður vart við møguligar feilir og munir, og at teir verða rættaðir so hvørt.

Í 2006 hava flestu aðalráðini hildið reglurnar, men einki aðalráð heldur tíðarfreistina. Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í desember 2006, hava Mentamálaráðið og Fiskimálaráðið ikki sent Fíggjarmálaráðnum góðkendan greinaroknskap í 2006.

Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapurin, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað. Eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, skal vera kunnað um tey á góðkenningarskjalinum.

Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningaroyðubløðum og møguligum fylgiskjølum og skrásetir tey, so hvørt stovnarnir hava sent oyðubløðini inn. Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni eru umleið 520 stovnsnummur í landsroknskapinum 2005.

Freistin at senda inn góðkenningarskjalið fyri 2005 var 20. mars 2006. 27. apríl 2006 sendi Gjaldstovan áminningarskriv til stovnsleiðararnar á umleið 400 stovnsnumrum, og 6. juni 2006 varð 2. áminning send til stovnsleiðararnar á 150 stovnsnumrum. Góðkenningarskjøl fyri umleið 60 stovnsnummur eru ikki send inn. Fiskimálaráðið varðar av teimum umleið 30.

Á umleið 50 góðkenningarskjølum eru viðmerkingar. Í onkrum føri er talan um tíðaravmarkanarfeilir, tí Gjaldstovan og stovnar við egnari búskaparskipan nýta ymiskan uppgerðarhátt. Í flestu førum er talan um smávegis rættingar, vantandi skrásetingar og um meira- og ella minninýtslu.

4.2.2 Avstemman av fíggjarstøðuni o.a.

Í sambandi við gjøgnumgongd í landsroknskapinum 2005 av roknskaparpostum í fíggjarstøðuni hava vit í stóran mun bygt á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

4.2.3 Høvuðstøl

Í talvuni niðanfyri er ein samandráttur av fíggjarstøðuni við árslok 2003-2005.

mió.kr.

	2005	2004	2003
Aktiv			
Kapitalinnskot	1.575	1.576	1.531
Virðisbrøv	466	424	381
Útlán	370	339	352
Áogn o.a.	423	460	380
Tøkur peningur	1.697	1.903	2.260
Aktiv, tilsamans	**4.531**	**4.702**	**4.904**
Passiv			
Skuld	4.198	4.256	4.383
Útjavningarkonta	333	446	521
Passiv, tilsamans	**4.531**	**4.702**	**4.904**

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við á fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

4.2.4 Fíggjarligur útbúnaður (GL 2005/3 01 2-6)

Kapitalogn í landsfyritøkum

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	1.574.913	1.575.935	1.530.999

Í 2005 fevnir roknskaparposturin bert um Fíggingargrunnin frá 1992. Kapitalognin svarar til "eginognina" hjá hesum grunni. Sambært endaliga roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri 2004 er eginognin um 1 mió.kr. lægri, enn roknað varð við í landsroknskapinum 2004. Broytingin er bókað í 2005. Roknskaparliga úrslitið hjá Fíggingargrunninum fyri 2005 er ikki bókað í landsroknskapinum.

Eingin allýsing finst av hugtakinum "landsfyritøka", og at júst hesin grunnur er eftir í roknskaparpostinum, er helst ein søgulig tilvild. Í nógv ár hevur Løgtingið í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, t.d. Føroya Realkreditstovnur, Húsaláns-, Bjálvingarstuðulsláns-, Íbúða- og Búnaðargrunnurin o.a. verða skrásettir í landsroknskapinum sum t.d. "Kapitalogn í landsfyritøkum o.l."

Fíggjarmálaráðið kunnaði í oktober 2005 um, at ætlanin var at taka málið upp, og miðað varð ímóti at taka allar grunnar o.l. við sum ogn í landsroknskapinum 2005. Grunnar o.l. eru ikki tiknir við sum ogn í landsroknskapinum 2005.

Virðisbrøv

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	466.096	423.890	380.443

Í 2005 hækkaði Landsstýrið partapeningin í P/f Postverki Føroya, P/f Vágatunlinum og P/f Norðoyatunlinum við ávikavist 21,5 mió.kr., 20 mió.kr. og 32,5 mió.kr. Partapeningurin í P/f Flogsamband 1,5 mió.kr. er ikki til longur.

Í 2005 fór P/f Flogsamband í solventa likvidatión, og í desember 2005 varð landskassans partur, umleið 4 mió.kr., rindaður á peningastovnskontu hjá Gjaldstovuni. Partapeningurin í P/f Tvøroyrar Flakavirki 820 t.kr. varð niðurskrivaður til 0, tí partafelagið er tikið av og strikað í partafelagsskrásetingini

Keypsskála skrásettu virðisbrøvini hjá Postverki Føroya eru ikki longur skrásett í landsroknskapinum, tí Postverkið er lagt um til partafelag frá 1. januar 2005.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum

t.kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2005 Upphædd	2004 Upphædd	2003 Upphædd	Til skjals á Gjald stov.	Ikki til skjals
P/f Atlantic Airways	75.000	75.000	75.000	x	
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	x	
P/f Flogsamband	-	1.521	1.521	x	
P/f Fiskaaling	4.635	4.635	2.635	x	
P/f Føroya Banki	1	1	1	x	
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200	x	
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	500	x	
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	x	
Nordatlantisk Turistselskab	66	66	-	x	
P/f Norðoyatunnilin	95.000	62.500	62.500	x	
P/f Postverk Føroya	43.000	21.500	-	x	
P/f Skipafelagið Føroyar	70	70	70	x	
L/f Skopunar Útróðrarfelag	50	50	50		x
P/f Smyril Line	2.760	2.760	2.760	x	
P/f Tvøroyrar Flakavirki	-	820	820	x	
P/f Vágatunnilin	160.300	140.300	120.300	x	
Sp/f Vedding	20	20	20		x
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	4.200	4.200	x	
Partabrøv tilsamans	**466.096**	**394.437**	**350.871**		
Keypsskála skrásett virðisbrøv, Postverk Føroya	-	29.453	29.572		
Virðisbrøv tilsamans	**466.096**	**423.890**	**380.443**		

Landið eigur allan partapeningin í 7 feløgum: P/f Atlantic Airways, P/f Fiskaaling, P/f Føroya Lívstrygging, P/f Føroya Tele, P/f Norðoyatunlinum, P/f Postverki Føroya og P/f Vágatunlinum.

Ultimo 2005 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 50 t.kr. í lutabrøvum í L/f Skopunar Útróðrarfelag. Fiskimálaráðið kunnaði í september 2003 um, at peningurin upprunaliga varð settur í felagið í 1968, og at felagið varð umskipað/endurreist í 1993, eftir at virksemið í felagnum var steðgað upp. Vit hava áður mælt Fiskimálaráðnum til at fáa greiði á, um innskotið frá 1968 er mist.

Í november 2005 boðaði Vinnumálaráðið almenninginum frá, at Føroya Banki, vegna Vinnumálaráðið, skuldi selja partabrøvini, sum landskassin eigur í Sp/f Ognarfelagnum 1980 (fyrr Skipafelagið Føroyar), og í P/f Tjaldur. Minstiprísurin, sum Vinnumálaráðið vildi hava fyri partabrøvini, var innara virðið. Navnaupphæddin á partabrøvum landskassans í Sp/f Ognarfelagnum 1980 var 70.000 kr. og innara virðið 3,1 mió.kr. Navnaupphæddin á partabrøvum landskassans í P/f Tjaldur er 140.000 kr. og innara virðið 3,1 mió.kr.

Í apríl 2006 flutti Føroya Banki landskassanum góðar 3 mió.kr. fyri søluna av partabrøvunum í Sp/f Ognarfelagnum 1980.

Partabrøvini í P/f Tjaldur eru ikki seld enn, og tey eru ikki skrásett í landsroknskapinum 2005. Gjaldstovan hevur í januar 2007 boðað frá, at partabrøvini í P/f Tjaldur verða í tikin við í landsroknskapinum 2006.

Virðismeting

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey eru keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera tó ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum 2005 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum.

Til samanberingar er innara virðið sambært ársroknskapinum hjá 10 av feløgunum í yvirlitinum tilsamans um 857 mió.kr., sí yvirlitið niðanfyri:

t.kr.

2005	**Keypsvirðið**	**Innara virðið**
P/f Atlantic Airways	75.000	136.880
P/f Fiskaaling	4.635	5.191
P/f Føroya Dátusavn	200	221
P/f Føroya Lívstrygging	500	86.608
P/f Føroya Tele	77.948	331.446
Nordatlantisk Turistselskab	66	-225
P/f Norðoyatunnilin	95.000	88.888
P/f Postverk Føroya	43.000	47.279
P/f Smyril Line	2.760	3.456
P/f Vágatunnilin	160.300	157.451
Partabrøv, tilsamans	**389.259**	**857.195**

Sum víst á í yvirlitinum frammanfyri, er keypsvirðið í nógvum førum munandi lægri enn innara virðið. Í sambandi við ætlaðu einskiljingarnar av almennum fyritøkum hava vit

mælt til at endurskoða verandi roknskaparreglur, og at umhugsa at fara yvir til at nýta innara virðið. Í oktober 2005 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at ætlanin er at nýta innara virðið í landsroknskapinum 2005. Innara virðið er ikki nýtt í landsroknskapinum 2005.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari

mió.kr.

	2006	2005	2004	2003	2002
Føroya Tele	30,0	8,0	11,0	3,0	3,0
Atlantic Airways	10,0	2,0	1,0	0	0
Tilsamans	40,0	10,0	12,0	3,0	3,0

P/f Atlantic Airways hevur í ársroknskapinum 2005 sett 10 mió.kr. av til vinningsbýti. 29. desember 2006 rindaði P/f Atlantic Airways vinningsbýtið á peningastovnskontu hjá landskassanum.

Kapitalvinningsskattur er ikki goldin av vinningsbýti, sum er goldið landinum síðani 2002. Lógin um kapitalvinningsskatt, sum varð sett í gildi í november 2001, er galdandi fyri vinningsbýti útlutað eftir 16. november 2001. Vit hava mælt Fíggjarmálaráðnum til at kanna, um henda mannagongd er røtt.

Rentu- og avdráttarfrí lán

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	208.062	187.059	189.703

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, til sjálvsognarstovnar og studningslán sambært Ll. nr. 34/1993, Ll. nr. 48/1964, Ll. nr. 42/1976 og Ll. nr. 26/1997.

Hækkingin frá 2004 til 2005 stavar frá einum láni í sambandi við umlegging av Postverki Føroya til partafelag, rentu- og avdráttarfríum láni umleið 29 mió.kr. til P/f Postverk Føroya. Harafturat er talan um vanligar niðurskrivingar og um endaliga niðurskriving av láni til Høgafoss í sambandi við tvingsilssølu í desember 2005.

Útlán

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Áogn landskassans	399.921	400.598	418.571
Sett av	-238.218	-249.001	-256.023
Sambært roknskapinum	161.703	151.597	162.548

Talan er um veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán, umframt likviditetslán, sum verða umsitin av Realkreditstovninum. Harafturat er talan um eitt lán til P/f Postverk Føroya, 21,5 mió.kr., í sambandi við umleggingina av Postverki Føroya til partafelag.

Sett er av ímóti tapi. Virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum er sett til kr. 0. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Lækkingin frá 2004 til 2005 stavar í høvuðsheitum frá broytingum í gjaldførislánum, afturgjald av lánum til heilsumál, afturgjald av láni til Húsalánsgrunnin, afturgjald av veðhaldsútláni til IRF og afturgjald av stuðulslánum til lesandi.

4.2.5 Áogn (GL 2005/3 01 3-7)

Goymslur

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	38.281	36.104	27.296

Talan er um vørugoymsluna hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum Landsins og Skúlabókagrunninum (Útgávuvirksemi).

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Áogn landskassans	326.543	357.819	300.356
Sett av	-136.685	-123.748	-126.149
Sambært roknskapinum	189.858	234.071	174.206

Broytingin frá 2004 til 2005 stavar serliga frá lægri áogn av innflutningsavgjøldum (tollavgjøld) við 27,1 mió.kr. og av kapitalvinningsskatti við 12,1 mió.kr., og hægri áogn av felagsskatti við 14 mió.kr.

Avsetingarnar eru hækkaðar við 13 mió.kr. netto, og tær stava frá landsskatti og meirvirðisgjaldi.

Tíðaravmarkan

Í fleiri ár hevur Gjaldstovan víst á trupulleikan, at skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki kunnu handfara tíðaravmarkanir. Trupult er at fáa ein rættan landsroknskap, tá ið inntøkurnar verða tiknar við í landsroknskapin alt eftir, hvussu “a jour” Toll- og Skattstovan er við bókingum.

Sambært Toll- og Skattstovuni eru ongar ætlanir um tøkniligar broytingar av bókhaldsskipanini, men dentur verður lagdur á at vera “a jour” við árslok.

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	195.013	201.346	178.668

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Landsverkfrøðinginum, Strandferðsluni, sjúkrahúsunum og øðrum stovnum. “Aðrir skuldarar” er m.a. renta av inniogn í Landsbankanum, ikki avroknað yvirskot (føroyski parturin) frá danska Tjóðbankanum, endalig uppgerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur ella endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað, fyri at geva eina rætta mynd. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá Toll- og Skattstovu Føroya, kommunur o.a.

Broytingin frá 2004 til 2005 stavar í høvuðsheitum frá, at tænastu-, vøruskuldarar o.t. eru hækkaðir við um 35,5 mió.kr., at skuld hjá stovnum og myndugleikum er lækkað við

um 10,3 mió.kr., og at onnur áogn er lækkað við um 26 mió.kr. Harafturat eru samanberingartølini fyri 2004 lækkað við um 12,5 mió.kr. í sambandi við, at Postverk Føroya er lagt um til partafelag.

4.2.6 Ognaryvirlit (GL 2001/1 01 0-9)

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovnunum vera eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 um roknskaparreglugerðir er ásett, at ognaryvirlit skulu verða gjørd fyri innbúgv, maskinur, bøkur og annan virðismiklan útbúnað við støði í roknskaparskjølum, og skulu tey m.a. fevna um slag, útveganarvirði, livitíð, og hvar ognin er. Vit hava fleiri ferðir víst á, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Í sambandi við vitjanir á stovnum í 2005 hava vit aftur staðfest, at fleiri stovnar ikki enn hava eitt dagført yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Í desember 2002 sendi Fíggjarmálaráðið skriv til allar stovnsleiðarar um at skráseta størri almennar ognir. Í skrivinum stóð, at sjøtul nú fór at verða settur á verkætlanina at fáa skrásett ognirnar hjá landinum og at taka upplýsingarnar við í landsroknskapin.

Í februar 2004 kunnaði Gjaldstovan um, at verkætlanin var seinkað umleið eitt ár, men at KT-skipanin, sum er partur av Búskaparskipanum Landsins, er liðug. Ætlanin var at byrja at skráseta í mars 2004 og at taka upplýsingar úr ognaryvirlitinum við í landsroknskapin 2004. Henda ætlan helt ikki, men í november 2004 vórðu allir almennir stovnar bidnir um at senda Gjaldstovuni upplýsingar um støðisogn, t.v.s. bygningar, størri KT-útbúnað, innbúgv og aðrar størri ognir.

Í januar 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum fór at heita á starvsfelagar sínar um at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Arbeiðið hevur tó gingið striltið, og í tíðindaskrivi í desember 2006 minnir Gjaldstovan á, at talan er um eitt álvarsmál og vísir á, at hóast 10 ár eru liðin, síðani krøvini komu um at skráseta almennar ognir, er ivasamt, hvussu fullfíggjaðar hesar skrásetingar eru.

4.2.7 Tøkur peningur (GL 2005/3 01 4-4)

Inniogn í Landsbankanum

t.kr.

Ár	**2005**	**2004**	**2003**
Sambært roknskapinum	1.293.051	1.474.447	1.820.143
Herav minstainnlán	1.500.000	1.485.000	1.515.000
Munur	-206.949	-10.553	305.143

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 6 í Ll. nr. 57/1978 “um Landsbanka Føroya” er Landsbankin bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu eisini nýta bankan sum bankasamband. Sambært § 2 í Ll. nr. 31/1995 “um landskassans innlán og lán í Landsbankanum” skulu innlánini í Landsbankanum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan.

Sambært yvirlitinum frammanfyri hevur inniognin hjá landskassanum seinastu 2 árini verið niðan fyri roknaða minstainnlánið. Vit hava eisini gjørt vart við, at fleiri landsstovnar og -grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum. Vit hava fleiri ferðir áður vístá, at hugtøkini “landskassin” og “landsstovnar” ikki eru nóg greitt lýst, hvørki í lógunum ella í viðmerkingunum.

Stýring av landsins gjaldføri

Í einum uppriti í mars 2004 hevur Gjaldstovan m.a. vísst á, at hóast tað er ásett í § 15 í roknskaparkunngerðini, at allar útgjaldingar skulu fara ígjøgnum Búskaparskipan Landsins, fara um 3 mia.kr., út við helvtin av øllum útreiðslum o.ø., sum eru heimilaðar á fíggjarlógini, uttanum Búskaparskipan Landsins. Sambært skrivi í mars 2005 heldur Landsbankin, at neyðugt er at støða verður tikin til málið, og at neyðugt er at fáa gjørt greiðar lógar- og umsitingarkarmar á hesum øki.

Gjaldstovan vísti eisini á, at tað er ógreitt, hvat eigur at standa í Landsbankanum, og tí er eisini ógreitt, hvussu nógv Landsstýrið kann brúka av almennum gjaldføri, uttan at fara út á lánimarknaðin ella at broyta lógina. Í uppritinum vísti Gjaldstovan á, hvussu bøtt kann verða um stýringina av landsins gjaldføri, og hon mælti m.a. til:

at seta tiltøk í verk, so at stovnar ikki sjálvir liggja við gjaldføri, men flyta tað í Landsbankan, sum so kann hava gjaldførið standandi í peningastovnunum, verður tað neyðugt,

at staðfesta eitt greiðari ábyrgdar- og myndugleikabýti millum landsstovnar, Gjaldstovuna og Landsbankan,

at seta í verk eina virknari, nútímans gjaldførisstýring, sum hevði fört til hægri rentuinntøkur,

at útgjaldsskipanin hjá Gjaldstovuni verður ein miðdepil í almennu gjaldførisstýringini, so sum ætlanin var upprunaliga.

Í skrivi í mars 2005 vísti Landsbankin á, at um tilmælini hjá Gjaldstovuni verða fylgd, fáa Gjaldstovan og Landsbankin ein virknari og greiðari leiklut í stýringini av almenna gjaldførinum. Í juni 2006 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Gjaldstovan hevur avtalað “lines” við peningastovnarnar, soleiðis at tað skapar fyritreytir fyri einari meira liðiligari stýring av gjaldførinum, sum Gjaldstovan umsitur. Hesir stuttu kredittir merkja, at tøka gjaldførið er skorið munandi, tí nú er ikki neyðugt at hava ein “gjaldførisbuffara”.

Broyting av lóggávu

Í fleiri uppskotum til samtyktar seinastu árini um at góðkenna landsroknskapirnar hava løgtingsgrannskoðararnir vísst á, at útrokningin av bruttotjóðarúrtøkuni byggir á eitt leyst grundarlag, og at hugtøkini “landskassin” og “landsstovnar” í lógini “um Landsbankan” og í lógini “um landskassans innlán og lán í Landsbankanum” eru ógreið. Løgtingsgrannskoðararnir hava mælt landsstýrismanninum til at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

Í januar og september 2002 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at hugtøkini “landskassin” og “landsstovnar” fóru at verða lýst neyvari í uppskoti til broyting í lóg “um Landsbankan”, sum fór at verða lagt fyri Løgtingið á heysti 2002.

Í februar 2003 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at arbeitt varð við at seta ein óheftan arbeiðsbólk at endurskoða alla lóggávuna viðvíkjandi Landsbankanum og at koma við tilmæli um framtíðar bygnað. Landsgrannskoðanini kunnugt varð eingin arbeiðsbólkur settur.

Í november 2004 greiddi landsstýrismaðurin frá, at trupult hevði verið at fingið semju um, hvønn status Landsbanki Føroya skuldi hava. Trupulleikin er ein partur av ósemjuni um, hvat tilknýti grunnar og landsstovnar skulu hava til landsroknskapin og løgtingsfíggjarlógina. Landsstýrismaðurin vísti á, at júst støðan hjá Landsbankanum verður nýtt

sum grundgeving fyri, hví grunnar og landsstovnar ikki skulu verða tiknir við í landsroknskapin og á løgtingsfíggjarlógina.

Í november 2004 vísti landsstýrismaðurin á, at hann hevði gjørt av at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman í ein stovn, og at stovnurin skal vera á løgtingsfíggjarlógini. Ætlanin er at taka av lógirnar "um Landsbanka Føroya" og "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum". Nýggj lóg skal verða gjørd, har reglur fyri umsiting av gjaldføri verða ásettar.

Í september 2005 sendi landsstýrismaðurin til ummælis út eitt uppskot til nýggja løgtingslóg um Landsbanka Føroya. Uppskotini eru ikki løgd fyri Løgtingið.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at lógaruppskotini eru ikki løgd fyri Løgtingið enn, men landsstýrismaðurin arbeiðir framvegis við at útvega sær politiska undirtøku.

Banka-, giro- og kassapeningur

t.kr.

Ár	**2005**	**2004**	**2003**
Sambært roknskapinum	404.379	431.010	439.937

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv "landið" tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar, við leysum/ivasomum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Sambært landsroknskapinum 2005 er "banka-, giro- og kassapeningur" 404 mió.kr. í 2005. Gjaldstovan umsitur um 168 mió.kr. ella 42% av hesi upphædd.

Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hevur Gjaldstovan í áravís vístá, at landsstovnar og -fyritøkur (t.d. Útvarp Føroya, Apoteksverkið, Húsalánsgrunnurin, Trygdargrunnurin og Rúsdrekkasøla Landsins) hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Gjaldstovan hevur sett spurningin, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum.

Sambært skrivi í mars 2005 heldur Landsbankin tað vera óheppið, at landsins peningur ikki verður umsitin á ein meira skipaðan hátt. Landsbankin setir spurningin, um tað átti at verið ásett í lóg, at umsitingin av almennum peningi verður røkt á besta hátt, t.d. við einum samstarvi og ábyrgdarbýti millum Gjaldstovuna og Landsbankan, har útgjaldsskipanin hjá Gjaldstovuni er miðdepilin í almennu gjaldførisstýringini, og fíggjarumsitingin í Landsbankanum umsitur uppsparda peningin, eins og Landsbankin umsitur gjaldføri landskassans. Ístaðin fyri at hópurin av almennum krónum standa spjaddar á ymiskum bankakontum til sera lága rentu, kundi peningurin verið settur í virðisbrøv e.a. til eina munandi betri rentu.

Harafturat vísir Landsbankin á, at fastar og nøktandi mannagongdir eru, tá Gjaldstovan flytir gjaldføri millum Landsbankan og "privata bankakervið", og tá ið Toll- og Skattstovan flytur pening inn á kontu í Landsbankanum, men at mannagongdirnar eru ikki nøktandi, tá ið aðrir stovnar flyta pening úr Landsbankanum.

4.2.8 Skuld (GL 2005/3 02 2-3)

Innanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	3.124.790	1.538.224	1.609.162

Í 2004 var talan um 4 brævalán ("2003-06" 375 mió.kr., "2003-08" 375 mió.kr., "2004-05" 350 mió.kr. og "2004-08" 400 mió.kr.), tilsamans navnvirði 1.500 mió.kr.

Í 2005 er talan um 7 brævalánsrøðir áljóðandi 3.074 mió.kr. Brævalánini fella til gjaldingar við 800 mió.kr. í 2006, 974 mió.kr. í 2008, 550 mió.kr. í 2010 og 750 mió.kr. í 2018.

Brævalánini verða seld uttanlands, og tað er óvist, hvør "keyparin" er. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

Uttanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	500.000	2.118.400	2.197.045

Við árslok 2005 er bert talan um 1 lán, sum stavar frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Lánið er 500 mió.kr., og sambært avtaluni er lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: *"Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer."*

Hitt lánið, sum eisini stavaði frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið, var upprunaliga 4.024 mió.kr. Í 2003 umfíggjaði Landsstýrið part av láninum við at skriva út 1,2 mia.kr. í lánsbrøvum og við 0,5 mia.kr. av gjaldføri landskassans í Landsbankanum. Í 2005 varð lánið goldið út, við at Landsstýrið skrivaði út fleiri brævalán.

Lánini samsvara við lánsavtalur og onnur uttanhýsis skjøl.

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar innanfyri komandi árið

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	800.000	430.345	925.519

Talan er um brævalánið "2003-06" 375 mió.kr. og brævalánið "2005-06" 425 mió.kr.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Sambært roknskapinum	573.657	599.175	576.959

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkanir og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Útjavningarkonta

t.kr.

Ár	2005	2004	2003
Salda 1. januar	527.186	520.102	499.313
RLÚ-úrslit	-210.567	-155.656	22.493
Ymiskar broytingar	16.289	78.246	-1.028
Salda 31. desember	**332.909**	**446.692**	**520.778**

Saldan á útjavningarkontuni primo 2005 stemmar ikki við salduna ultimo 2004. Í høvuðsheitum er orsøkin, at eginognin hjá Postverki Føroya 72,2 mió.kr. varð bókað burtur, tá ið Postverk Føroya varð lagt um til partafelag.

"Ymiskar broytingar" fevna um broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskapar-meginreglum, rættingar av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøka av grunnum, úrslit hjá internum grunnum, broytingar í avsetingum, mótbókingar til útlánsroknskap og mótbókingar til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki "Kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Aktivini í landsroknskapinum verða virðismett øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip, vegir o.t., eru ikki virðismett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

4.3 Umsiting av skatti, avgjøldum o.a.

4.3.1 Umsiting av skatti, innaneftirlit (GL 2000/2 04 2-2 og 1999/2 04 3-3)

Innaneftirlit

Í frágreiðing okkara í mars 2005 varð m.a víst á, at í fleiri førum er roknskaparreglugerðin ógreið, tá tað snýr seg um eftirlitsvirksemi viðvíkjandi umsiting av skatti. Fleiri reglur og mannagongdir, ið víst verður til, eru "ein leivd frá farnari tíð". Tað er helst tí, at rokn-skaparreglugerðin við tilvísingum verður lítið brúkt av starvsfólkunum.

Har eftirlitsvirksemi er ásett í roknskaparreglugerðini, verða eftirlit í nógvum førum ikki framd sum ásett. Á fleiri umsitingarøkjum er einki eftirlitsvirksemi ásett í roknskapar-reglugerðini e.t., men hóast tað hava vit sæð, at onnur skilagóð eftirlit fara fram. Flestu eftirlit verða tó ikki skjalprógvað.

Nógvar grundir kunnu verða til, at innaneftirlitið ikki virkar nóg væl, t.d. at:

- eftirlitsmál eru ikki ásett,
- eingin váðameting er gjørd,
- eftirlitsmálini eru ikki hóskandi ella nóg væl greinað,
- starvsfólk eru ikki nóg væl kunnað um, hvat tey skulu gera,
- starvsfólk eru ikki nóg væl kunnað um, hvussu arbeiðið skal verða skjalprógvað,
- eru feilir, vita starvsfólk ikki, hvørjum tey skulu boða frá,
- leiðslan raðfestir ikki innaneftirlitið nóg høgt.

Í oktober 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at frá 1. ársfjórðingi 2007 verða starvsfólk á Toll- og Skattstovu Føroya sett at bøta um innaneftirlitið.

Álíkning og mál

Í frágreiðingini vístu vit eisini á leiklutin hjá landsstýrismanninum, Toll- og Skattaráðnum og Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya, tá ræður um álíkning og mál. Vit vístu á, at ein treyt fyri, at innaneftirlitið kann virka, er at leiðslan hevur sett sær mál.

Í Ll. nr. 169/1997 "um Toll- og skattafyrisiting" eru ásetingar um yvirskipaðu leiðsluna av Toll- og Skattstovu Føroya. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett reglur fyri virkseminum hjá Toll- og Skattaráðnum. Toll- og Skattaráðið hevur ikki ásett stevnumið, sum Toll- og Skattstovan skal arbeiða eftir, og Stýrið hevur ikki gjørt árligar virkisætlanir.

Í januar 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði ikki ásett neyvari reglur fyri virkseminum hjá Toll- og Skattaráðnum, og at hann, sum liður í bygnaðarbroytingunum á Toll- og Skattstovu Føroya, umhugsaði at taka av Toll- og Skattaráðið.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at landsstýrismaðurin hevur sett í verk mál- og avriksstýring fyri Toll- og Skattstovu Føroya, sum saman við Fíggjarmálaráðnum setir yvirskipað mál fyri, hvørji mál og úrslit skulu verða rokkin komandi fíggjarár.

Landsstýrismaðurin vísir á, at mál- og avrikssáttmálin tó ikki broytir ábyrgdina hjá landsstýrismanninum og fyriskipanareglurnar, sum eru fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Sum framhald av mál- og avrikssáttmálanum er ætlanin, at Stýrið ger virkisætlanir fyri ymisku arbeiðsøkini á økisskrivstovunum. Hetta arbeiðið verður soleiðis skipað, at atlit verður tikið til tær bygnaðarbroytingar, ið longu eru framdar.

4.3.2 Umsiting av mvg, innaneftirlit (GL 2006/2 04 5-11)

Í samráð við stjóran á Toll- og Skattstovu Føroya hava vit, saman við umboðum fyri Stýrið, vitjað økini fyri at fáa staðfest, um eftirlitsvirksemið fer fram, sum ásett, og hvussu tað verður skjalprógvað. Í einum uppriti hava vit gjøllari greitt Toll- og Skattstovu Føroya frá úrslitinum av arbeiði okkara.

Landsstýrismaðurin

Í Ll. nr. 169/1997 um toll- og skattafyrisiting, § 19, stk. 6, er ásett, at landsstýrismaðurin í skattamálum kann gera reglur fyri virkið hjá Toll- og Skattaráði Føroya. Ongar reglur eru ásettar. Sum áður nevnt, umhugsar landsstýrismaðurin at taka av Toll- og Skattaráðið.

Í september 2006 kunnaði stjórin á Toll- og Skattstovu Føroya um, at støða er ikki tikin til, hvat skal verða av Toll- og Skattaráðnum, og at Stýrið í dag virkar sum sekretariat fyri ráðið.

Toll- og Skattaráð Føroya

Toll- og Skattaráð Føroya skal fastleggja tey stevnumið, sum Toll- og Skattstova Føroya skal arbeiða eftir á toll-, avgjalds- og skattaøkinum (§ 19, stk. 1). Í september 2006 hevur stjórin kunnað um, at Toll- og Skattaráðið hevur ikki fastlagt nøkur stevnumið, sum Toll- og Skattstovan skal arbeiða eftir.

Toll- og Skattaráð Føroya skal, saman við Stýrinum, hava eftirlit við skattaálíkningini og toll- og avgjaldsfyrisitingini og ansa eftir, at álíkningin og fyrisitingin á øllum økisskrivstovum fer fram á rættan og samlíkan hátt og í samsvari við reglurnar í galdandi lóggávu (§ 20, stk. 1, 1. pkt.). Í september 2006 hevur stjórin kunnað um, at Toll- og Skattaráðið ikki hevur nakran leiklut í sambandi við eftirlitið við skattaálíkningini og toll- og avgjaldsfyrisitingini.

Toll- og Skattaráð Føroya skal góðkenna tær vegleiðingar, sum Stýrið skal geva økisskrivstovunum viðvíkjandi skattaálíkningini og toll- og avgjaldsfyrisitingini (§ 2, stk. 3) og

kann, eftir tilmæli frá Stýrinum, geva vegleiðingar skattaálíkningini og toll- og avgjaldsfyrisitingini viðvíkjandi (§ 20, stk. 1, 2. pkt.). Í september 2006 hevur stjórin kunnað um, at Toll- og Skattaráðið hevur ein góðkennandi leiklut, tá ið vegleiðingar verða settar í gildi.

Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið

Á hvørjum ári skal Stýrið gera eina virkisætlan fyri alt landið, sum økisskrivstovurnar hava skyldu at fylgja, og Stýrið hevur eftirlit við, at ætlanin verður fylgd (§ 2, stk. 1). Í september 2006 hevur stjórin kunnað um, at Stýrið hevur ikki gjørt nakrar virkisætlanir.

Stýrið skal eisini ansa eftir, at skattaálíkningin og toll- og avgjaldsfyrisitingin fer fram á rættan og samlíkan hátt um alt landið (§ 1). Í desember 2006 hevur stjórin boðað frá, at av bygnaðarbroytingum og starvsfólkamangli hevur einki tílíkt eftirlit verið seinastu árini.

Stýrið hevur skyldu til, tá ið tað heldur tað vera neyðugt, at kanna rættleikan í teimum avgerðum, sum økisskrivstovan hevur tikið (§ 3, stk. 1). Sambært stjóranum eru ongar kanningar gjørdar, men hann vísir á, at í ivamálum ráðførir økisskrivstovan seg altíð við eftirlitsdeildina og lógardeildina í Stýrinum.

Í starvsfólkahandbókini kapittul 2.1.2 er ásett, at fyrst í juni og fyrst í desember mánaði ger Stýrið eina "konfidensiella" ætlan fyri, hvat serligur dentur eigur at verða lagdur á komandi hálvár í sambandi við punkteftirlit. Í september 2006 hevur stjórin kunnað um, at Stýrið ikki hevur gjørt nakrar "konfidensiellar" ætlanir.

Økisstjórin

Eftirlitspolitikkurin ásetir m.a., at eftirlitið skal, saman við økisstjóranum, leggja eina eftirlitsætlan fyri ein ársfjórðing ella hálvt ár í senn. Avtala verður gjørd millum økisstjóran og eftirlitið um, hvørji eftirlit skulu verða framd, og hvat dentur skal verða lagdur á í hvørjum einstøkum føri, t.d. at kanna virkir har sannlíkt er, at stórir feilir kunnu koma fyri, stórar negativar mvg-útgjaldingar o.a. Vit bóðu um avrit av eftirlitsætlanum, sum eftirlitið hevur lagt saman við økisstjórunum í 2005 og 2006. Á fundum í september og oktober 2006 kunnaðu allir økisstjórarnir um, at fáar tílíkar eftirlitsætlanir verða lagdar.

Í starvsfólkahandbókini kapittul 2.1.2 er eisini ásett:

- at fyrst í januar á hvørjum ári ger hvør økisstjóri ein lista yvir tær revisiónir, ið økið ætlar at gera komandi ár,
- at fyrsta í hvørjum mánaði ger økisstjórin ein lista yvir tey punkteftirlit, ið økið ætlar at gera komandi mánaðin,
- at ein føst vitjanarætlan kann verða løgd til samskipað eftirlit, men kemur eftirlitið fram á viðurskifti, sum tað heldur gevur grund til "størri eftirlit", skal økisstjórin hava boð um tað.

Samanumtikið er niðurstøðan, at í flestu førum eru ongar ætlanir at vísa á.

Eftirlit í sambandi við bóking av mvg-uppgerðum

Sambært roknskaparreglugerðini verða allar mvg-uppgerðir talmerktar og bókaðar, og síðani lagdar til mvg-eftirlitið til "nærri kanningar". Eingin leiðbeining finst um tílíkar "nærri kanningar", og talan er sostatt um royndir og lokalkunnleika hjá fólkunum í mvg-eftirlitinum.

Skráseting í hagtalsskipanini

Ein hagtalsskipan verður brúkt m.a. til at skráseta tímanýtslu, skattabroytingar og mvg-broytingar. Á fundum í september og oktober 2006 kunnaðu allir økisstjórarnir um, at allar broytingar verða neyvt skrásettar í einari hagtalsskipan. Kotur verða skrásettar fyri, hví broytingar verða gjørdar. Skrásetingarnar í hagtalsskipanini geva tó onga ábending um, hvussu nógv eftirlit eru gjørd. "Eftirlit" sambært hagtalsskipanini er eitt breitt hugtak, sum fevnir um allar broytingar, sum Toll- og Skattstovan ger, bæði í sambandi við líkning og at skattgjaldari biður um eina broyting o.a. Eisini kunnaðu økisstjórarnir um, at økini ikki nýta skrásettu upplýsingarnar, og økini hava varhugan av, at Stýrið heldur ikki nýtir upplýsingarnar í hagtalsskipanini.

Skráseting í Vinnuskránni av eftirlitsvitjanum

Sambært einari leiðbeining til hagtalsskipanina skulu eftirlitsvitjanir verða skrásettar í Vinnuskránni. Fyri at kanna, hvat liggur aftan fyri skrásetingarnar av mvg-eftirlitsvitjanum og samskipaðum eftirlitum í Vinnuskránni í 2005 og 2006, hava vit tilvildarliga valt út nakrar eftirlitsvitjanir og kannað, hvussu tær eru skjalfestar í saksmappunum hjá virkjunum. Vit hava eisini spurt økisstjórarnar um grundarlagið fyri skrásetingunum.

Eftirlit í sambandi við negativar mvg-uppgerðir

Økini raðfesta høgt at kanna mvg-uppgerðir, sum eru negativar, tí íløgur verða gjørdar. Ofta er tað so, at ein íløga hjá einum lítlum virki hevur við sær, at mvg-uppgerðin í einum ársfjórðingi verður negativ. Toll- og Skattstovan brúkar tí nógva orku at kanna íløgur hjá smáum virkjum. Hjá størri virkjum, har ein einstøk íløga ikki hevur somu ávirkan á mvg-uppgerðina, t.v.s. at avgjaldstilsvarið samanlagt er positivt, hóast íløguna, verður nærum eingin orka brúkt til at kanna hesar fyritøkur.

Kanningarnar verða ikki gjørdar sum eftirlit úti hjá virkjunum, sum orðið eftirlitsvitjan kundi bent á, men talan er fyri tað mesta um brævaskifti. Økini skráseta á ymiskan hátt, t.d. eru eingi tílík eftirlit skrásett í einum øki, hóast íløgu-mvg sambært økisstjóranum eisini er kannað har.

Eftirlitsvitjan "samskipað eftirlit"

Sambært roknskaparreglugerðini er tað økisstjórin, ið metir um, hvørt neyðugt er við serligum eftirliti, ella um samskipað eftirlit av tolli, mvg og skatti skal verða fyrireikað.

Í einum øki vóru óvanliga nógv samskipað eftirlit skrásett, men ein kanning vísti, at talan var um vanligar uppgávur í sambandi við líkning og serligar kanningar av rakstrar-roknskapi. Við stakroyndum valdu vit út og gjøgnumgingu eisini "samskipað eftirlit" í øðrum økjum. Talan var í flestu førum um gjøgnumgongd av innkallaðum roknskapartilfari frá smáum virkjum. Við støði í kanningum okkara og samrøðum við økisstjórarnar kann samanumtikið verða sagt, at einki veruligt samskipað eftirlit er farið fram árini 2005 og 2006.

Onnur mvg-eftirlit

Stakroyndirnar vísa, at ymiskt er, hvat økini skráseta sum mvg-serkanning o.a. Hvørt øki sær hevur sínar egnu skrásetingarmannagongdir, sum ikki kunnu samanberast við hini økini.

4.3.3 Mvg-eftirstøður (GL 1998/2 04 5-5)

Løgtingsgrannskoðararnir hava biðið Landsgrannskoðanina um at lýsa vøksturin í mvg-eftirstøðunum og kanna, um nóg mikið verður gjørt fyri at fáa tær goldnar.

Mvg-inntøkur og eftirstøður 1993 – 2005

Niðanfyri er sett upp ein talva, sum vísir gongdina sambært landsroknskapinum í mvg-inntøkum og eftirstøðum tíðarskeiðið 1993 til 2005.

mió.kr.

	2005	2004	2003	2002	2001	2000	1999	1998	1997	1996	1995	1994	1993
Mvg á innflutningi	951	948	973	969	986	883	711	636	577	520	431	408	344
Mvg-uppgerðir	618	635	664	650	543	453	414	361	336	344	307	305	269
Mvg-inntøkur (brutto)	1.569	1.583	1.637	1.619	1.529	1.336	1.125	997	913	864	738	713	613
Negativt mvg o.a.	-475	-529	-576	-621	-626	-482	-372	-302	-279	-265	-210	-205	-160
Mvg-inntøkur (netto)	1.094	1.054	1.061	998	903	854	753	695	634	599	528	508	453
Mvg-eftirstøður	62	62	60	48	45	44	46	43	48	58	52	34	29
Avsetingar	-33	-29	-36	-23	-20	-22	-21	-28	-30	-32	-32	-21	
Eftirstøður eftir avsetingar	29	33	24	25	25	22	25	15	18	26	20	13	

Mvg-inntøkur

Talvan vísir, at mvg-inntøkurnar hava verið støðugt vaksandi síðani 1993. Mvg-inntøkurnar av innflutningi eru nógv tann størsti parturin av mvg-inntøkunum. Inntøkurnar av mvg-uppgerðum eru inntøkur, sum virkir, sum liður í dagliga rakstrinum, avrokna til landskassan. Samlaðu mvg-inntøkurnar (brutto) eru vaksnar úr 613 mió.kr. í 1993 í 1.569 mió.kr. í 2005.

Ein stórur partur av mvg-inntøkunum verður goldin út aftur sum negativt mvg, og t.d. í 2005 eru hesar útgjaldingar umleið 475 mió.kr., í 2001 626 mió.kr. og í 1993 160 mió.kr.

Mvg-inntøkurnar (netto) í tíðarskeiðinum 1993–2005 eru vaksnar úr 453 mió.kr í 1.094 mió.kr.

Mvg-eftirstøður/tap

Av talvuni sæst, at við árslok 2005 vóru samlaðu mvg-eftirstøðurnar í landsroknskapinum 62 mió.kr., og avsetingar móti tapi vóru 33 mió.kr.

Mvg-eftirstøðurnar, eftir at avsetingar eru drignar frá, vóru 29 mió.kr. við árslok 2005. Í tíðarskeiðinum 1994-2005 er henda upphædd vaksin úr 13 mió.kr. í 29 mió.kr.

Sambært Toll- og Skattstovuni eru staðfestu tapini av mvg-eftirstøðunum í tíðarskeiðinum 1996–2006 (higartil) umleið 31 mió.kr.

Gjøgnumgongd av einstøkum málum

Vit hava valt út og kannað 15 innheintingarmál í Miðøkinum, sum hevur nógv tey flestu innheintingarmálini. Hesi 15 málini umboða 11 mió.kr., svarandi til 18% av samlaðu mvg-eftirstøðuni, sum var 62 mió.kr. við árslok 2005. Avsetingarnar í hesum málunum vóru 7 mió.kr., svarandi til 22% av samlaðu avsetingunum, sum vóru 33 mió.kr. við árslok 2005.

Vit hava kannað, nær eftirstøðurnar byrjaðu, hvussu gongdin hevur verið, og í hvønn mun heimildirnar í mvg-lógini eru brúktar at forða fyri, at eftirstøðurnar vaksa.

Nógvar av eftirstøðunum eru íkomnar stutt eftir, at mvg-skipanin varð sett í gildi 1. januar 1993. Sum árini hava gingið, eru eftirstøðurnar vaksnar, ofta tí at Toll- og Skattstovan hevur ásett eina metta fyribilsinntøku, og so eru rentutilskrivingar komnar afturat. Í flestu málum er fleiri ferðir pantað úrslitaleyst.

Umframt tey 15 málini, vit hava gjøgnumgingið, eru fleiri onnur líknandi gomul innheintingarmál, har eftirstøðurnar eisini vaksa, uttan at nakað veruligt virksemi er.

Fyribilsásetingar

Fyri at lætta um arbeiðsgongdina fór Toll- og Skattstovan 1. oktober 1998 undir at fyribilsáseta sjálvvirkandi. Síðani tá eru nógvar fyribilsásetingar gjørdar uttan eina veruliga málsviðgerð. Í gjøgnumgongdini av málunum eru dømi um virki, sum er fyribilsásett í nærum 9 ár.

Úrslitið er, at fyribilsásetingarnar í nógvum førum sjálvvirkandi vaksa "órealistiskt" um eftirstøðurnar, sum síðani verða fluttar til innheintingina at krevja inn. Toll- og Skattstovan hevur ongar skrivligar mannagongdir um fyribilsásetingar, sum kundu forða fyri hesi gongd.

Samskiparin av innheintingini er av teirri áskoðan, at Toll- og Skattstovan eigur at taka stig til at forða fyri, at mvg-uppgerðir hjá sama virki verða sjálvvirkandi fyribilsásettar fleiri ferðir.

Vantandi heimildir

Fleiri heimildir, sum vórðu settar í mvg-lógina í 1995 (§ 23a), eru ikki brúktar. Hesar heimildir vóru ætlaðar sum amboð hjá Toll- og Skattstovu Føroya at steðga vøkstri í eftirstøðunum, við eitt nú at stytta avrokningartíðarskeiðið og at krevja trygd.

Leiðarin á Eftirlits- og Innheintingardeildini í Miðøkinum hevur greitt frá, at fleiri grundir eru til, at heimildirnar ikki verða brúktar í tann mun, ætlanin var. Umframt vantandi starvsfólkaorku á Eftirlits- og Innheintingardeildini, verður víst á, at KT-skipanirnar eru ikki nøktandi, vantandi skipað skráseting av ávísum upplýsingum, ov nógv manuelt arbeiði, vantandi skrivligar mannagongdir o.a. Hildið verður eisini, at tørvur er á at endurskoða og samskipa lógarásetingarnar í § 23a. Niðanfyri verður greitt gjøllari frá um umrøddu lógarbroytingar í 1995 og um tey sjónarmið, sum Toll- og Skattstova Føroya hevur fört fram.

Um broytingina av mvg-lógini í 1995

Við Ll. nr. 108/1995 vórðu broytingar framdar í mvg-lógini (Lm. 174/1994). Í viðmerkingunum til lógaruppskotið varð m.a. víst á, at mvg-eftirstøðurnar við árslok 1994 vóru 34 mió.kr., av hesum vóru møgulig tap um 21 mió.kr. Endamálið við lógarbroytingini var at effektivisera innkrevjingina av eftirstøðum við at stytta avrokningartíðarskeiðið og at fáa til vega heimild at krevja trygd og at nokta skráseting. Hetta fyri at minka um møguleikan fyri eftirstøðum og tapi av meirvirðisgjaldi. Í viðmerkingunum stendur m.a., at:

> *"Sum støðan er í dag, hava virkir, ið gjalda meirvirðisgjald til ásettu tíð, trupult við at kappast við tey virkir, ið ikki gjalda meirvirðisgjald, sum lógin ásetir. Hetta hevur við sær, at meirvirðisgjaldskipanin, sum eigur at vera neutral, í veruleikanum ávirkar kappingarførið millum virkini. Sum sæst á omanfyrinevndu upphæddum yvir eftirstøður og tap av meirvirðisgjaldi, er hetta ein stórur trupulleiki, sum bert kann bøtast uppá við lógarbroyting.*

Eftir uppskotinum fær tað avleiðingar eftir einum stiga, ið hevur trý stig, um skyldan at krevja meirvirðisgjald upp fyri landskassan verður misnýtt."

Fyrsta stig: Stytta freistina at avrokna meirvirðisgjald.

Annað stig: Áleggja virkjum at seta trygd, um tey framvegis ikki avrokna rættstundis.

Triðja stig: Nokta at skráseta nýggj virkir, um tey ikki seta eina ávísa trygd. Brot kann revsast við bót, hefti og fongsli upp til 2 ár, um virkið fer undir virksemi, hóast tað er noktað.

At enda í viðmerkingunum varð vístá, at umsitingarnar hjá Toll- og Skattstovuni og Føroya Gjaldstovu høvdu tørv á at fáa ymiskar KT-skipanir o.a. upp á pláss, áðrenn lógin kom í gildi.

Almennar viðmerkingar frá Toll- og Skattstovu Føroya

Sum vístá, hevur Toll- og Skattstova Føroya bert í lítlan mun brúkt lógarheimildirnar. Vit hava havt samskifti við leiðaran á Eftirlits- og Innheintingardeildini í Miðøkinum um henda spurning. Hann hevur greitt soleiðis frá:

"Tað finnast enn ongar serstakar edv skipanir, ið kunnu stuðla fyrisitingini í umsiting av § 23a í meirvirðisgjaldslógini. Tøkniligar fortreytir fyri at seta í verk og eisini at taka av tær skipanir, ið § 23a leggur upp til at útinna í verki, hava hvørki verið ella eru til staðar hjá umsitingini. Ei heldur er vitan t.d. um "tap, virki, stjórar/stjórn, nevndarlimir/nevnd" tøkniliga atkomulig hjá umsitingini. Øll tilgongd til upplýsingar, sum skulu leggjast til grund fyri skjóta og trygga málsviðgerð, krevja enn í dag eina beinleiðis manuella og samskipandi arbeiðsorku frá byrjan til enda.

Skrivligar mannagongdir hava ikki verið og eru ikki gjørdar í sambandi við umsiting av § 23a í meirvirðisgjaldslógini.

Tað framgekk ikki, hvussu torfør og krevjandi ein tílík skipan var at byggja, reka og viðlíkahalda, líka frá tøkniligari loysn til fullfíggjaða umsiting av slíkari skipan, her íroknað málsviðgerð, avgerðir, kærumál, rættarmál og eisini møguligar sakir um endurgjald.

Ei heldur framgekk, hvussu uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum umsitingina skuldi verða. Hvat skuldi Toll- og Skattstovan gera við atliti til § 23a? Føroya Gjaldstova innheintaði frammanundan alla skuld og gjørdi allar gjaldsavtalur, bæði við einstaklingar og vinnuvirkir.

Viðmerkingar frá Toll- og Skattstovu Føroya til einstøku ásetingarnar

Niðanfyri hava vit endurgivið viðmerkingarnar frá Toll- og Skattstovu Føroya til lógarásetingarnar.

Fyrsta stig: Stytta freistina at avrokna meirvirðisgjald (§ 23a, stk. 1 og 4).

"Um vanliga innheintingin ikki gevur úrslit, verður mett sera ivingarsamt, um tað gevur annað ítøkiligt úrslit enn elektroniskt parkeraðar trupulleikar at stytta avgjaldstíðarskeiðið eftir § 23a. Við øðrum orðum verður mett, at eitt slíkt úrslit ikki sørt kann minna um støðuna við automatiskum metingum fyri mvg."

Annað stig: Áleggja virkjum at seta trygd, um tey framvegis ikki avrokna rættstundis (§ 23a, stk. 7).

"Sum heild er úrslitið givið í ásetingini, at eitt krav um trygd eftir § 23a, stk. 7, aftur endar sum vanligt innheintingarmál...". "Tað verður mett, at tá ongar ítøkiligar avleiðingar standast av

ikki at veita kravdu trygd eftir ásetingini, kann innheintingin við minst sama virkningi royna at heinta inn skuldina, panta v.m., fyri síðani sum síðsta útkall at umbiðja konkurs yvir skuldaran."

Triðja stig: Nokta at skráseta nýggj virkir, um tey ikki seta eina ávísa trygd (§ 23a, stk. 8). Brot kann verða revsað við bót, hefti og fongsli upp til 2 ár (§ 33, stk. 3).

(Krav um trygd kann verða sett, tá ið eigari av virkinum innan fyri tey seinastu 5 árini hevur verið eigari av ella limur í nevnd ella stjórn á øðrum skrásettum virki, ið er farið konkurs ella er vorðið insolvent, har ið Toll- og Skattstovan hevði krøv, ið ikki vóru nóg væl tryggjað, ella har landskassin hevði havt 50.000 kr. ella meira í tapi av avgjaldi eftir hesari lógini.)

"Mett verður, at krav um trygd eftir § 23a, stk. 8 hevur eina ávirkan, hóast hon er rættiliga avmarkað í upphædd. Her sýnist ongin grundgeving at vera fyri, at ein trygd í sambandi við nýskráseting ikki minst skal svara til samlaðu skuldina, umframt miðal avgjaldið í einum 3 mánaða tíðarskeiði, tvs. í minsta lagi eitt krav um trygd ájavnt við ásetingina í § 23a, stk. 7."

"Tílík áseting um revsing fyri brot á lógina er ikki knýtt at § 23a, stk. 7, her er eitt nú ongin heimild til at taka av skrásetingar vegna manglandi veitan av trygd. Tíanverri er als ongin sanktiónsmøguleiki hjá myndugleikanum, tí talan er ikki um, at skyldur eftir § 23a, stk. 7, yvirhøvur kunnu misrøkjast. Tá um revsing ræður, eru heldur ongar ásetingar.

Samanumtikið fevna bæði § 23a, stk. 7 og 8, um krav um at veita trygd vegna skuld til landskassan. Ásetingarnar eru ikki líkar, tá talan eru um avleiðingar av manglandi handlingum, upphædd at veita í trygd, og tá brot á lógina kunnu staðfestast. Tær hava støði í somu skuld, sum eisini kann ávirka í eini raðfylgju. § 23a, stk. 7 og 8, bera brá av manglandi javnvág, og samanumtikið er trupult at fáa eyga á samanhangin í hesum ásetingum."

Vísandi til viðmerkingarnar frá Toll- og Skattstovu Føroya hava vit mælt leiðsluni og landsstýrismanninum til at taka viðurskiftini til viðgerðar.

4.3.4 Innflutningsgjøld o.t., eftirlitsvirksemi (GL 2001/2 04 5-7)

Í Ll. nr. 169/1997 "um Toll- og Skattafyrisiting" er m.a. ásett í § 2, at Stýrið hvørt ár skal gera eina virkisætlan fyri alt landið, sum økisskrivstovurnar hava skyldu at fylgja, og Stýrið skal hava eftirlit við, at ætlanin verður fylgd.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið varð dentur lagdur á, at Stýrið framhaldandi er ein "eftirlits- og planleggingarmyndugleiki", sum kann áleggja allari fyrisitingini arbeiðsuppgávur og hevur eftirlit við, at tær verða framdar á rættan og samlíkan hátt á økisskrivstovunum kring landið.

Viðvíkjandi eftirliti við, at innflutningsgjøld verða rætt avroknað, hevur Stýrið onkur ár sett upp og greinað ávís eftirlitsmál, t.d. um:

- Manifesteftirlit
- Vørueftirlit
- Pakkhúseftirlit

Eins og á øðrum toll- og avgjaldsøkjum hevur Stýrið ikki seinnu árini lagt árligar virkisætlanir ella sett eftirlitsmál. Pakkhúseftirlit eru tó nevnd í roknskaparreglugerðini, og tað tykist, sum at tey verða gjørd, sum ásett.

Ásetingar um eftirlitsvirksemi, t.d. í roknskaparreglugerðini, eru heldur ikki dagførdar, nú nógv virkir eru farin at tolla sjálvi um internetið (e-tolling). Toll- og Skattstovan fremur tó eftirlit úti á virkjum, sum tolla sjálvi. Vit hava kunnað okkum um hesi eftirlit í Mið-

økinum. Tey tykjast væl úr hondum greidd, men saknur er á yvirskipaðum ætlanum um ráðlegging og skráseting.

Vit hava aftur mælt Toll- og Skattstovu Føroya til at gera fleiri eftirlit við serligum teldukanningum (QMF).

Samanumtikið halda vit, at Stýrið eigur at endurskoða og dagføra eftirlitsvirksemið út frá einum heildarsjónarmiði, og við støði í einari yvirskipaðari váðagreining.

4.3.5 Brennioljugjald (GL 2002/2 04 5-8)

Lógargrundarlag o.a.

Brennioljugjaldið verður kravt inn og partvíst afturgoldið við heimild í Ll. nr. 179/1992 "um serligt avgjald á brenniolju", kunngerð nr. 23/2003 "um endurgjald av serligum oljugjaldi" og kunngerð nr. 177/1993 "um endurrindan av serligum oljugjaldi".

Eitt gjald, kr. 0,80 pr. liturin, sum verður lagt á søluna av gassolju, verður goldið landskassanum. Tó skulu skip yvir 20 GT einki avgjald rinda. Skip og bátar undir 20 GT, og virkir, sum lúka ávísar treytir, hava rætt til at fáa gjaldið endurgoldið. Einki er ásett um skip, sum eru júst 20 GT.

Kunngerðin vísir til skeiva heimild

Í K. nr. 177/1993 stendur, at hon er heimilað í § 2, stk. 3, í Ll. nr. 179/1992, men heimildin í lógini er § 2, stk. 4. Sambært Stýrinum er talan um eina prentvillu, sum verður rættað.

Ivamál um umsóknarfreist

Sambært § 2 í K. nr. 177/1993 "um endurrindan av serligum oljugjaldi" er ásett, at umsókn um endurrindan av oljugjaldi til skip og bátar undir 20 GT skal latast Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 1. november árið eftir, at roknskaparskeiðið er endað.

Økisskrivstovurnar hava í 2006 fingið at vita frá Stýrinum, at freistin, sum er ásett í kunngerðini, ikki hevur heimild í lógini, og tí skulu økini síggja burtur frá hesari freist.

Landsgrannskoðanin heldur, at Toll- og Skattstovan í staðin átti at greitt landsstýrismanninum frá hesum trupulleika, soleiðis at landsstýrismaðurin kundi tikið støðu til spurningin og møguliga broytt lógina ella kunngerðina. Í desember 2006 hevur Stýrið boðað frá, at ætlanin er at broyta lógina.

Inntøkur

Inntøkurnar (knappar 80 mió.kr. um árið) verða skrásettar í Miðøkinum. Oljufeløgini senda uppgerð inn hvønn mánað, sum vísir, hvussu nógv oljufelagið skal gjalda. Oljufeløgini rokna sjálvi oljugjaldið út og gjalda upphæddina á kontu hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Vit hava spurt, hvussu Toll- og Skattstova Føroya tryggjar sær, at upplýsingarnar frá oljulatingarfeløgunum eru rættar. Sambært Stýrinum er tað virkiseftirlitið, ið fremur hetta eftirlit. Í Miðøkinum verður greitt frá, at tey ikki hava kannað brennioljugjald í sambandi við framd virkiseftirlit á oljulatingarfeløgunum.

Oljulatingarfeløgini kunnu sigast at vera ein partur av umsitingini av lógini. Tey taka m.a. støðu til, hvørjum olja verður latið við og uttan avgjald. Vit hava áður mælt til at umhugsa eina skipan, har grannskoðarin hjá oljulatingarfeløgunum árliga váttar, at tær uppgerðir, ið latnar eru Toll- og Skattstovu Føroya viðvíkjandi oljugjaldi í farna ári, eru rættar. Grannskoðarin, ið kennir roknskaparmannagongdirnar, kann lættliga meta um, hvørt mannagongdir og bókhaldið eisini eru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av oljugjaldi. Vit hava aftur mælt til at viðgera hetta tilmælið.

Endurrindan til virkir

362 virkir eru skrásett í Vinnuskránni hjá Toll- og Skattstovu Føroya við rætti til endurgjald av oljugjaldi (um 12 mió.kr. um árið). Virkir senda økisskrivstovunum umsókn um rætt til annaðhvørt fult ella lutvíst endurgjald. Økini kanna, um virkið lýkur ásettu treytirnar í kunngerðini, og síðani verður virkið skrásett í Vinnuskránni.

Síðani skal virkið ikki søkja aftur um endurgjald, men seta upphæddina, sum tey skulu hava endurgoldið, á mvg-uppgerðirnar. Soleiðis verður oljugjaldið drigið frá hvørjari mvg-uppgerð fyri ávísa tíðarskeiðið.

Vit hava áður vístá, at umsitingin av endurrindan av brennioljugjaldi til gistingarhús tyktist vera meira avmarkandi, enn ásett er í lógini og kunngerðini. Vit fingu ongantíð nakað svar og hava tí reist málið av nýggjum.

Um samskipað eftirlit

Stýrið hevur greitt frá, at upplýsingar frá virkjunum um brennioljugjald, sum verður mótroknað í mvg-uppgerðini, umframt onnur gjøld, verða kannað í sambandi við samskipað eftirlit. Vit hava síðani staðfest, at mótrokning av brennioljugjaldi sjáldan verður kannað. Vit hava vístá, at Toll- og Skattstovan hevur tørv á at allýsa, hvat hugtakið "samskipað eftirlit" merkir, og at áseta reglur og mannagongdir fyri, hvat eitt "samskipað eftirlit" skal fevna um.

Endurrindan til bátar

Í K. nr. 177/1993 "um endurrindan av serligum oljugjaldi" er nágreinað, hvat umsitingin skal gera í sambandi við endurrindan av brennioljugjaldi til bátar (um 1 mió.kr. um árið). Í øllum økjunum verður kunngerðin fylgd, og ansað verður eftir, at báturin er mvg-skrásettur, er vinnuligur, hevur sent inn ársroknskapin fyri undanfarna ár, at umsóknirnar er rætt útfyltar o.s.fr.

4.3.6 Framleiðsluavgjald (GL 1999/2 04 6-6)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin m.a. vístá, at eftirlitið við framleiðslugjaldinum er ikki nóg væl greinað í roknskaparreglugerðini e.ø.

Í januar 2006 kunnaði stjórin á Toll- og Skattstovu Føroya um, at stovnurin arbeiðir við at samla umsitingina á einum stað, og er í ferð við at kanna framleiðslugongdina og lýsa, hvørji krøv skulu verða sett framleiðsluvirkjunum. Síðani verður arbeiðsgongdin sett í roknskaparreglugerðina.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at frá 1. januar 2007 umsitur Norðurøki framleiðslugjaldið, og í tí sambandi verða mannagongdir gjørdar.

4.3.7 Ferðaavgjald (GL 2002/2 04 6-8)

Í frágreiðingini í 2004 og í 2005 umrøddu vit, at Toll- og Skattstova Føroya hevði bøtt um flest allar veikleikar, vit høvdu gjørt vart við. Vit vístu tó á, at í roknskaparreglugerðini vóru ongar reglur viðvíkjandi ferðaavgjaldi, og vit mæltu Stýrinum til at endurskoða roknskaparreglugerðina.

Í januar 2006 kunnaði stjórin á Toll- og Skattstovuni um, at stovnurin var í ferð við skriva mannagongdir viðvíkjandi umsiting av ferðaavgjaldi og at seta tær í roknskaparreglugerðina.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeitt verður við at styrkja innaneftirlitið, sum fer til verka í 1. ársfjórðingi 2007. Reglur um eftirlit við ferðaavgjaldinum eru ein partur av uppgávunum hjá innaneftirlitinum.

4.3.8 Vegskattur (GL 2004/2 04 6-9)

Roknskaparreglugerð

Í 2004 grannskoðaðu vit umsitingina av vegskatti, og í frágreiðingini í mars 2005 til løgtingsgrannskoðararnar umrøddu vit úrslitið av grannskoðanini.

Í frágreiðingini vístu vit á, at umsitingin av vegskatti á Akstovuni tyktist virka væl, og eftirlit verða framd, sum tryggja, at rakstur og fíggjarstøða eru rætt.

Í pkt. 10 í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum eru ávís krøv til skrivligar lýsingar av egnum EDV-skipanum. Vit hildu ikki, at roknskaparreglugerðin hjá Akstovuni leyk hesi krøv og mæltu til at endurskoða roknskaparreglugerðina.

Í januar 2006 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at arbeiðið við at skjalfesta EDV-skipanirnar varð liðugt á heysti 2005, og farið verður undir at gera brúkaravegleiðingar seinni í 2006. Akstovan skuldi sum skjótast fara undir at endurskoða roknskaparreglugerðina og senda Fíggjarmálaráðnum hana at góðkenna.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið at endurskoða roknskaparreglugerðina er ikki byrjað, tí orka hevur ikki verið á Akstovuni til tess. Aðrar uppgávur eru farnar við allari tøkari orku hjá leiðandi starvsfólkunum seinasta árið. Ætlandi verður farið undir at endurskoða roknskaparreglugerðini í 2007. Fíggjarmálaráðið hevur boðað Akstovuni frá, at hetta arbeiðið eigur at verða raðfest høgt.

Vektgjald av líkvognum og prutlum

Vit hava víst á, at soleiðis sum lógin er orðað, er ivasamt, um heimild er fyri, at líkvognar og prutl ikki rinda vegskatt.

Í januar 2006 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at siðvenja ongantíð hevði verið at kravt avgjøld av líkvognum og prutlum. Einki bendi á, at nakrar ætlanir høvdu verið um, at tey skuldu gjalda vegskatt. Sama gjørdi seg galdandi við skrásetingargjaldi. Landsstýrismaðurin ætlaði tí at skjóta upp at nágreina hesi viðurskifti, næstu ferð vektgjalds- og skrásetingargjaldslógirnar skuldu broytast.

Í juni 2006 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin, hvat síðani var hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

4.3.9 Kassaeftirlit (GL 2005/2 04 0-13)

Eins og í teimum seinastu frágreiðingunum hava vit, í sambandi við kassaeftirlit á Toll- og Skattstovu Føroya í 2005, gjørt vart við ymisk viðurskifti:

- at mannagongdirnar á kassaøkinum ikki altíð samsvara við roknskaparreglugerðina.
- at ymiskt er, hvussu økini skilja og umsita reglurnar um kontantgjaldingar. Reglurnar tykjast ótíðarhóskandi.
- vit mæltu til at endurskoða verandi kvittanir og gera tær einfaldari.
- vit mæltu enn eina ferð til, at Stýrið ger sær greitt, hvørjar ásetingar skulu vera fyri kassaeftirlit, setir tær í roknskaparreglugerðina og síðani fylgir teimum.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Toll- og Skattstovu Føroya er farin undir at gera arbeiðsgongdina einfaldari. Eftir ætlan skal arbeiðið verða liðugt við árslok 2006.

4.3.10 Trygdargrunnurin (GL 1998/2 09 1-2)

Lógargrundarlagið hjá grunninum er Ll. nr. 68 frá 9. juni 1988 "um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir" v.s.b.

Við heimild í § 8 eru neyvari reglur fyri umsiting av grunninum ásettar í K. nr. 66/1991 "um Trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m."

Við heimild í § 7, stk. 1 og 2, vóru neyvari reglur ásettar í K. nr. 85/1991 "um gjald til Trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir v.m." Við K. nr. 105/2002 varð K. nr. 85/1991 sett úr gildi frá 1. januar 2003. Sostatt fara eingi inngjøld í Trygdargrunnin.

Roknskaparreglugerð

Í frágreiðingini í mars 2005 til løgtingsgrannskoðararnar søgdu vit frá, at Toll- og Skattstova Føroya arbeiddi við at tillaga roknskaparreglugerðina.

Í februar 2005 kunnaði stjórnin á Toll- og Skattstovu Føroya um, at arbeiðið við reglugerðini var um at verða liðugt.

Í desember 2005 kunnaði Toll- og Skattstovan um, at tað liggur nakað úti í framtíðini at gera og góðkenna eina endaliga roknskaparreglugerð, tí tókt starvsfólk er ikki til uppgávuna. Hóast 5 ár eru liðin, síðani stovnarnir í seinasta lagi skuldu hava eina góðkenda roknskaparreglugerð, hevur Trygdargrunnurin framvegis onga góðkenda reglugerð.

Í januar 2006 spurdu vit, nær viðurskiftini fóru at koma í rættlag.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Toll- og Skattstovu Føroyar var farin undir at endurskoða uppskotið til reglugerð.

Skráseting og eftirlit

Í desember 2005 kunnaði stjórin á Toll- og Skattstovuni um, at roknskapardeildin í Stýrinum hevur yvirskipaða umsitingareftirlitið við Trygdargrunninum. Eftirlitið hevði ligið á láni á heysti 2005, men stjórin roknaði við, at tað fór at virka fyrst í komandi ári, t.v.s. í 2006.

Vit vístu á, at ikki allar lønarútgjaldingar úr Trygdargrunninum vóru farnar um lønarskipanina á Føroya Gjaldstovu. Vit spurdu, um Toll- og Skattstovan hevði tikið stig til at skráseta útgjøldini í landsroknskapinum, sum Trygdargrunnurin hevði goldið av egnari peningastovnskontu.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at mannagongdin var broytt, og allar útgjaldingar fara um lønarskipanina á Føroya Gjaldstovu.

Endurgjaldskrøv skulu verða send Føroya Gjaldstovu at skráseta. Vit vístu á, at priviligeraðu lønarkrøvini eru ikki skrásett í landsroknskapinum.

Í januar 2006 mælti Landsgrannskoðanin landsstýrismanninum til at fáa greiði á spurninginum.

Uppsøgn av peningastovnskontum

Í skrivi 1. oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at inniognin hjá Trygdargrunninum (74,1 mió.kr. við árslok 2005) átti at standa í Landsbankanum, og at landsstýrismaðurin fór at taka spurningin upp við leiðslurnar á Toll- og Skattstovu Føroya og í Landsbankanum.

Í desember 2005 greiddi stjórin frá, at í mars 2005 vórðu konturnar sagdar upp.

Spurdur, hvat ætlanin var við hesari peningaupphædd, svaraði landsstýrismaðurin í juni 2006:

> *"Endalig avgerð er ikki tikin til henda spurning. Trygdargrunnurin er tikin inn í fíggjarlógina og tikin við í landsroknskapinum, og kundi hetta talað fyri at tikið peningin inn í landskassans vanliga gjaldføri, men ásannast má tó, at peningurin er kravdur inn við serligari løgtingslóg til serligt endamál. Inntil løgtingslógin um Trygdargrunnin møguliga verður broytt, haldi eg, at rættast er at hava nevndu upphædd setta til síðis."*

Landsgrannskoðanin hevur síðani spurt landsstýrismannin, nær støða fer at verða tikin til henda spurning.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin svarað, at ætlanin er í hesari tingsetuni at taka endaliga avgerð um at taka Trygdargrunnin av. Tað fer at hava við sær, at lógin um Trygdargrunnin verður tillagað soleiðis, at landið átekur sær skyldurnar og yvirtekur ognirnar.

4.3.11 Stuðul til ferðaútreiðslur og til dupult húsarhald (GL 2004/2 07 9-1)

Í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um grannskoðanina av stuðli til ferðaútreiðslur og til dupult húsarhald. Vit høvdu nakrar viðmerkingar og einstøk tilmæli.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at frá 1. januar 2007 verður stuðul til ferðaútreiðslur og dupult húsarhald umsitin av Suðurøki, og í tí sambandi verða mannagongdir gjørdir. Í sambandi við, at Toll- og Skattstova Føroya setir í verk elektroniska journal, verða arbeiðsgongdirnar og umsóknarblaðið gjøgnumgingin. Atlit verða í hesum sambandi tikin til at lætta um málsviðgerðina og at tryggja innaneftirlitið.

4.3.12 Stuðul til rentuútreiðslur av lánum (GL 1997/2 03 9-5)

Lógargrundarlag

Stuðul til rentuútreiðslur verður veittur við heimild í Ll. nr. 148/1996 "um stuðul til rentuútreiðslur av lánum".

Kunngerð nr. 100/1997 "um rætt til stuðul til persónar, sum ikki lúka treytirnar í rentustuðulslógini" er sett í gildi við heimild í § 1, stk. 2, og § 8, stk. 2, í Ll. nr. 148/1996. Vit hava gjørt vart við, at tann eina lógargreinin, § 1, stk. 2, sum víst verður til í kunngerðini, er strikað við Ll. nr. 24/1999 "um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum".

Stýrið hevur víst á, at nevnda kunngerð eisini er heimilað í § 8, stk. 2, í rentustuðulslógini, sum framvegis er í gildi, og at Toll- og Skattstovan í fyrisiting sínari bert nýtir tann partin av kunngerðini, ið hevur heimild í § 8, stk. 2.

Landsgrannskoðanin heldur, at kunngerðin átti at verið broytt, soleiðis at tann parturin av kunngerðini, sum ikki er galdandi longur, verður tikin burtur. Landsgrannskoðanin hevur mælt landsstýrismanninum til at viðgera henda spurning.

Avmarking av stuðulstíðarskeiði

Sambært § 2, stk. 3, pkt. 4, í K. nr. 101/93 skal í umsóknini standa, nær síðsti avdráttur av láninum verður goldin. Á umsóknarblaðnum verður ikki spurt um, nær síðsti avdrátturin verður goldin, og eingin teigur er í telduskipanini til tílíka skráseting. Sambært Stýrinum átti henda áseting at verið strikað í kunngerðini, tí eingin grund er til at nýta hesar upplýsingar.

Rentustuðul í óavmarkaða tíð

Bygt er inn í rentustuðulsskipanina, at um lánið ikki veksur, ber til at fáa stuðul í óavmarkaða tíð, t.v.s. um lántakarin rindar renturnar.

Rentustuðul uttan at gjalda rentur

Stuðulin verður steðgaður, um lánssaldan veksur, t.v.s. um lántakarin einki rindar ella rindar minni enn renturnar. Lántakarin má tí søkja av nýggjum um rentustuðul.

Um lántakarin, í samráð við peningastovnin, einki ætlar at gjalda í t.d. 5 ár, ber til at viðmerkja á umsóknini, hvussu nógv lánið væntandi kemur at vaksa vegna rentutilskrivingar. Sambært Toll- og Skattstovuni ber sostatt eisini til at fáa rentustuðul hvønn mánað í hesi 5 árini, uttan at gjalda nakað.

Avmarking í stuðulsupphæddini

Í § 3, stk. 2, í lógini er ásett, at rentustuðul í mesta lagi kann verða veittur av árligari rentu uppá kr. 60.000. Sambært stk. 3 kann Toll- og Skattstova Føroya, eftir umsókn, og tá serligar umstøður eru, játta hægri rentustuðul fyri eitt ár, tó í mesta av 120.000 kr. Umsóknin skal verða latin inn fyri 1. apríl árið eftir. Mannagongdin er, at øll, ið søkja innan 1. apríl, fáa játtað hægri rentustuðul av í mesta lagi 120.000 kr., uttan nakra veruliga málsviðgerð.

Eftir umbøn útvegaði Stýrið okkum ein lista, sum vísti, at í 2005 var talan um 241 persónar, sum ikki fingu fullan rentustuðul, tí árliga rentan var hægri enn 60.000 kr. Hesi 241 fólkini høvdu ikki søkt um at fáa hægri rentustuðul, og "mistu" tí samanlagt um 1,2 mió.kr. í rentustuðli.

Sum nevnt, fáa øll, ið søkja um tað innan 1. apríl, játtað hægri rentustuðul. Tí er tað sannlíkt, at fleiri av teimum 241 persónunum ikki vita av hesi mannagongd. Tí er tað ein spurningur, um nøkur meining er í at hava eitt rentuhámark 60.000 kr. Landsgrannskoðanin hevur mælt landsstýrismanninum til at viðgera henda spurning.

Vit hava eisini víst á, at Toll- og Skattstova Føroya eigur at vegleiða borgarar um rætt teirra at søkja um hægri rentustuðul, t.d. við at kunna um tað í játtanarskrivinum ella á umsóknarblaðnum.

Lán fyri og eftir 18. januar 1991

Lán, sum eru avtalað fyri 18. januar 1991, koma ikki undir frammanfyri nevndu avmarkingar í stuðulsupphæddini, og eru frámerkt við serligari kotu.

Á einum yvirliti sæst, at stovningardagfestingin fyri fleiri lán er eftir 18. januar 1991, og nøkur av hesum lánum hava rentuupphæddir yvir 60.000 kr. Tað kundi bent á, at um eitt lán, sum er avtalað fyri 18. januar 1991, er hækkað, er stovningardagfestingin broytt, men kotan er ikki í øllum førum broytt. Á tann hátt kann lántakari fáa óavmarkaðan stuðul av láni, ið er tikið/hækkað eftir 18. januar 1991. Sambært Toll- og Skattstovuni eiga tílík lán at verða roknað sum nýggj lán, og verður hetta rættað.

Er endamálið við stuðlinum rokkið

Við Ll. nr. 148/1996 um "stuðul til rentuútreiðslur av lánum" varð rentufrádráttarskipanin í skattinum løgd um til eina stuðulsskipan. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:

> *"at rentufrádrátturin hevur leingi verið nýttur sum ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging. Í 80´árunum vóru nógv og stór lán veitt til nógv ymisk endamál, t.d. keyp av fleiri húsum, bilum,*

summarhúsum, uttanlandsferðir og aðra privatnýtslu. Landsstýrið ynskti ikki at stuðla hesi nýtslu skattliga og legði tí uppskot fyri Tingið í 1990 um at avtaka rentufrádráttin fyri øll lán uttan sethúsalán, lestrarlán og lán til innfrían av veðhaldi."

Eftir hesum at døma er rentustuðulin til sethúsalán ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging, og vóru avmarkingarnar gjørdar, tí Landsstýrið ikki framhaldandi ynskti at stuðla privatnýtslu.

Sammett við siðvenju fyri bert fáum árum síðani, kemur í dag helst oftari fyri, at sethúsalán ikki verða goldin aftur. Talan er um lán, har 40% av rentuútreiðslunum verða latin sum rentustuðul frá landinum. Sum víst á frammanfyri ber til at fáa rentustuðul í eitt óavmarkað tíðarskeið.

Ein avleiðing av rentustuðlinum tykist sostatt vera, at fólk verða eggjað til ikki at rinda síni sethúsalán aftur, kanska heldur ikki renturnar. Eitt størri fíggjarligt rásarúm kann síðani verða brúkt til onnur endamál, m.a. privatnýtslu ella til uppsparing til eitt nú kapitalpensjón, ratupensjón ella íløgur í virðisbrøv o.t. Landsgrannskoðanin ivast í, um hetta var endamálið við at veita rentustuðul.

Seinastu mongu árini hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar m.a. víst á, at á flestu málsøkjum eru studningslóggáva og studningsumsiting ikki nøktandi. Sjáldan er endamálið nóg væl lýst, og ofta er ikki heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð, útgjald o.a. Tí er ofta torført hjá landsstýrismanninum/umsitingini at tryggja, at landsins peningur verður nýttur á ein sparnan og virknan hátt, og at úrslitini svara til endamál og fyritreytir fyri játtanini.

Landsgrannskoðanin heldur, at lógin um rentustuðul lýkur ikki krøvini til eina góða studningslóg. Endamálið við studninginum er ikki nóg greitt og nóg neyvt, og ongar ábendingar eru um, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið. Landsgrannskoðanin hevur mælt landsstýrismanninum til at viðgera henda spurning.

Innaneftirlit sambært roknskaparreglugerðini

Við stakroyndum hava vit kannað umsóknir og onnur skjalprógv fyri útgjaldingunum. Saman við umsóknum um rentustuðul til húsakeyp liggja í nógvum førum skjøl so sum skeyti, skuldarbræv, kontuavrit, býtisavtala o.t., og í øðrum førum er umsøkjarin biðin um at útvega hesar upplýsingar. Er talan um umvæling/umbygging, verður umsøkjarin í nøkrum førum biðin um at útvega skjalprógv, so sum kostnaðarætlan.

Á umsóknarblaðnum skal umsøkjarin vátta, *"at hann hevur kunnleika um, at Toll- og Skattstovan hevur heimild at kanna, um upplýsingarnar eru rættar, og í hesum sambandi verður kravt, at øll skjøl viðvíkjandi láninum skulu goymast í 5 ár."* Vit hava spurt Toll- og Skattstovuna, um hon, tá ið ein tíð er farin, hevur biðið um rokningar og onnur skjøl, ið kunnu sanna, at lánið/hækkingin av láninum er brúkt til tað, sum stendur í umsóknini ella kostnaðarætlanini, tá søkt varð um stuðulin. Sagt var frá, at tað vanliga ikki verður gjørt.

Sambært roknskaparreglugerðini skal ein umsókn, góðkend av málsviðgera, verða latin deildarleiðara/økisstjóra at góðkenna. Rætturin til rentustuðul, herímillum lánskota og konta, ið peningurin skal flytast til, skal síðani verða skrásettur í rentustuðulsskipanini av bókhaldsdeildini, sum skal vátta skrásetingina á umsóknarblaðnum. Henda áseting verður fylgd í Miðøkinum, men ikki í Norðurøki og Suðurøki. Har skráseta málsviðgerarnir sjálvir.

Sambært roknskaparreglugerðini verður hvønn mánað útskrivaður ein listi við útgoldnum rentustuðli yvir 5.000 kr., og málsviðgerin skal kanna eftir, um nakað óvanligt er á listanum. Vit hava spurt, um útgjøld lægri enn 5.000 kr. verða kannað. Øll økini siga,

at tað verða tey ikki. Í reglugerðini stendur eisini, at *"eina ferð um mánaðin verður stemmað av yvir fyri FSL. Annað eftirlit verður gjørt av Stýrinum."* Sambært Stýrinum verður mánaðarliga stemmað av, men vanliga verður einki *"annað eftirlit"* gjørt í Stýrinum.

4.3.13 FAS afturbering (GL 2005/2 15 3-6)

Lógargrundarlag

Við heimild í § 63a í skattalógini afturber Toll- og Skattstova Føroya reiðaravirkjum 28% (ásett í kunngerð nr. 6/1996) av hýrunum til manningina á skipum, ið eru skrásett í FAS (Føroya Altjóða Skipaskrá) o.l. Henda afturbering verður roknað sjálvvirkandi hvønn mánað, út frá hvussu nógva løn/hýru manningini hevur fingið ávíst um FAS V-talið hjá reiðaravirkinum.

Sambært § 63a, stk. 8, í skattalógini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur fyri afturberingina. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett neyvari reglur.

Roknskaparreglugerðin

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at áðrenn FAS-útlendingar fáa fyribils persónstal, skal økisskrivstovan hava avrit av passi, avrit av hýrusáttmála og av- og ámynstringarskjølum.

Við stakroyndum hava vit staðfest, at hesar ásetingar verða ikki fylgdar. Tó verður avrit av passi kravt frá útlendingum, sum koma frá londum uttan fyri Norðurlond. Toll- og Skattstovan ásannar, at reglurnar ikki verða fylgdar og heldur, at roknskaparreglugerðin og reglurnar um fyribils persónstøl eiga at verða broyttar/dagførdar.

Umsóknarblað um fyribils persónstal

Sambært leiðbeining á umsóknarblaðnum um fyribils persónstal til FAS-útlendingar skal umsóknin verða dagfest og undirskrivað av umsøkjaranum ella av arbeiðsgevaranum. Er skjalið undirskrivað av arbeiðsgevaranum, skal navnið skrivast við maskinu, ella skal stempul verða brúkt. Henda mannagongd verður ikki fylgd, og undirskriftirnar kunnu ofta ikki lesast.

Reglugerð frá Stýrinum

Í reglugerðini er m.a. ásett, at biðið skal verða um mynstringarlistar, tá ið skip verða skrásett við einum FAS V-tali. Eru útlendingar á mynstringarlistanum, skal avrit av passi útvegast. Hvørja ferð ein broyting fer fram í mynstringunum, skulu økini hava avrit av øllum mynstringarlistum og hýrusáttmálum, so økini kunnu kanna, at bert lønir til manningina eru farnar um V-talið.

Við stakroyndum hava vit staðfest, at reglugerðin frá Stýrinum verður ikki fylgd. Biðið verður ikki um mynstringarlistar, tá ið skip verða skrásett við einum FAS V-tali. Mynstringarlistar og hýrusáttmálar verða ikki kannaðir. Nakrir arbeiðsgevarar senda sjálvbodnir inn mynstringarskjøl, men tey verða ikki brúkt í sambandi við FAS eftirlitið.

Eftirlit við útgjaldingum

Í roknskaparreglugerðini er einki ásett um eftirlit við útgjaldingum. Stýrið bókar og rindar afturberingina til reiðaravirkini eftir listum úr skattaskipanini. Í Stýrinum eru óskrivaðar mannagongdir, sum tryggja, at bert reiðaravirkir, sum hava FAS V-tøl, fáa afturbering. Hvørki Stýrið ella økini hava eftirlit við, hvørjir persónar reiðaravirkið fær afturbering fyri. Toll- og Skattstovan hevur kunnað um, at ætlanin er at skipa eitt eftirlit, áðrenn útgjaldið fer fram, m.a. tí ætlanin er at automatisera útgjaldið - nakað líknandi sum útgjald av

negativum mvg. Ætlanin er, at útgjaldseftirlit skal fara fram á einari FAS-deild, sum helst verður ein partur av uttanlandsdeildini hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Arbeiðsgevaraeftirlit

Seinastu 5 árini hava fá eftirlit verið við afturberingum til FAS reiðaravirkir. Toll- og Skattstovan hevur vístá, at eftirlit eiga at verða skipað sum "arbeiðsgevaraeftirlit", sum er einasti háttur at kanna, um alt fer rætt fram.

Aðrar viðmerkingar

Toll- og Skattstovan hevur gjørt av ikki at senda kontuavrit og skattauppgerðir til ávísar skattgjaldarar, m.a útlendingar undir FAS-skipanini, tí flest øll brøv koma retur.

4.4 Fulltíðarstørv hjá landinum 1997-2004 (GL 2005/1 02 0-4)

Løgtingsgrannskoðararnir hava heitt á Landsgrannskoðanina um at útvega yvirlit yvir vøksturin í samlaða talinum á starvsfólkum hjá landinum árini 1997 - 2004. Ber tað ikki til, so yvirlit yvir vøksturin í lønarútreiðslunum, har fyrilit verður tikið fyri lønarvøkstri.

Í tí sambandinum hevur Landsgrannskoðanin útvegað taltilfar frá starvsfólkayvirlitum, sum standa í viðmerkingum til fíggjarlógaruppskotini, frá lønarhagtølum í landsroknskapinum og í eksternum roknskapum.

Við støði í hesum tilfari, og við ávísum tillagingum, hevur Landsgrannskoðanin roknað út vøksturin í fulltíðarstørvum hjá landinum. Harafturat hevur Landsgrannskoðanin samanborið útrokningarnar við lønarhagtøl frá Hagstovu Føroya yvir vøksturin í lønarútgjaldingum.

4.4.1 Roknaður vøkstur í fulltíðarstørvum 1997-2004

Allýsingar av hugtøkum

Starvsfólkatalið, fyri hvønn stovn sær, sæst í starvsfólkayvirlitum í viðmerkingunum til uppskot til fíggjarlóg hvørt árið.

Árini 1997-2004 vanta starvsfólkayvirlit hjá fleiri stovnum, og fleiri starvsfólkayvirlit eru eyðsæð skeiv. Landsgrannskoðanin hevur tí, við serligum útrokningum, mett um starvsfólkatalið við grundarlagi í útgoldnum lønum og í starvsfólkayvirlitum hjá teimum stovnum, sum Landsgrannskoðanin heldur geva rættastu samanhangandi upplýsingar árini 1997-2004. Útrokningarhátturin er neyvari lýstur í **fylgiskjali 1**.

Starvsfólkatalið hjá "landinum" fevnir um teir stovnar, sum í 2004 eru við á fíggjarlógini/í landsroknskapinum. Hjá teimum stovnum, sum vóru við á fíggjarlógini/í landsroknskapinum í 2004, men ikki árini frammanundan, eru roknskapartøl fingin til vega.

Lønarútreiðslur eru tær útreiðslur, sum eru bókaðar á standardkontu 11 "Lønir v.m." Í einstøkum førum eru útgjaldingar skrásettar á standardkontu 11, sum ikki er løn til starvsfólk, t.d. pensjónir, burðarfarloyvi og útreiðslur av vali. Hesar útgjaldingar eru ikki tiknar við í útrokningargrundarlagnum.

Roknað tal av fulltíðarstørvum

Í niðanfyristandandi talvu hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknaða talið av fulltíðarstørvum hjá landinum sambært okkara útrokningum. Eisini hevur Landsgrannskoðanin sett upp talið á fulltíðarstørvum hjá landinum sambært starvsfólkayvirlitum í viðmerkingum til fíggjarlógaruppskotini.

Talva 1: Fulltíðarstørv 1997-2004

Ár	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	Munur	Í %
Fulltíðarstørv, roknað	4.214	4.307	4.430	4.432	4.510	4.686	4.746	4.934	+720	17%
Fulltíðarstørv smb. fíggjarlóg	4.135	4.247	4.322	4.238	4.257	4.445	4.501	4.717	+582	14%
Munur	79	60	108	194	253	241	245	217		

Á talvu 1 sæst, at roknaði vøksturin í fulltíðarstørvum hjá landinum árini 1997-2004 hevur verið 720 fulltíðarstørv, svarandi til 17%.

Vøksturin sambært starvsfólkayvirlitunum í fíggjarlógaruppskotunum hevur verið 582, svarandi til 14%. Sum nevnt, stavar munurin frá vantandi og skeivt uppgjørdum starvsfólkayvirlitum í viðmerkingunum til fíggjarlógirnar. Hesi viðurskifti eru gjøllari umrødd í **fylgiskjali 1**.

Í talvuni niðanfyri eru tøl fyri fulltíðarstørv hjá landinum, lønarútreiðslur hjá landinum og miðallønarútreiðslur fyri hvørt fulltíðarstarv árini 1997-2004.

Talva 2: Fulltíðarstørv og lønarútreiðslur 1997-2004

Ár	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	
Fulltíðarstørv, roknað	4.214	4.307	4.430	4.432	4.510	4.686	4.746	4.934	17%
Lønarútreiðslur (mió.kr.)	1.094	1.136	1.214	1.288	1.401	1.531	1.611	1.725	58%
Miðallønarútreiðslur (1.000 kr.)	260	264	274	291	311	327	340	350	35%

Í talvu 2 hevur Landsgrannskoðanin endurtikið, at roknaði vøksturin í fulltíðarstørvum hjá landinum, er 720 fulltíðarstørv, sum er ein øking frá 4.214 í 1997 til 4.934 í 2004, svarandi til 17%.

Í sama tíðarskeiði eru lønarútreiðslurnar hjá landinum øktar 58%.

Miðallønarútreiðslurnar eru øktar úr 260 t.kr. í 1997 til 350 t.kr. í 2004, svarandi til 35%.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í starvsfólkatalinum hjá landinum gjørt upp sum fulltíðarstørv.



Fulltíðarstørv, greinað á málsøkir

Í talvuni niðanfyri er metta talið á fulltíðarstørvum hjá landinum árini 1997-2004 greinað á málsøkir. Hvussu hesi málsøki eru bólkað, er neyvari greinað í **fylgiskjali 2**.

Talva 3: Fulltíðarstørv, greinað á málsøkir (1997-2004)

Ár	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	Munur	Í%
Almannamál	803	839	820	841	853	907	968	1.069	265	33%
Fíggjarmál o.a.	190	193	189	187	190	197	199	198	8	4%
Heilsumál	983	1.000	1.041	981	978	1.024	1.015	1.065	82	8%
Løgtingsstovnar	16	16	18	21	24	25	26	28	12	72%
Mentan	134	145	151	152	148	156	166	168	34	25%
Miðfyrisiting	97	127	178	189	192	196	200	204	108	111%
Samferðsla og samskifti	627	625	618	625	630	636	594	582	-45	-7%
Útbúgving og gransking	1.134	1.129	1.176	1.192	1.237	1.253	1.287	1.320	186	16%
Vinnumál	229	234	239	243	259	291	291	300	71	31%
Tilsamans	**4.214**	**4.307**	**4.430**	**4.432**	**4.510**	**4.686**	**4.746**	**4.934**	**720**	**17%**

Á talvuni sæst, at størsti vøksturin í fulltíðarstørvum er innan:

- almannamál (265)
- útbúgving og gransking (186)
- miðfyrisiting (108)
- heilsumál (82)
- vinnumál (71)

Meginparturin av vøkstrinum innan málsøkið “almannamál” stavar frá eldrarøkt, serforsorg og stuðulsskipanum til børn og vaksin. Talan er um ein vøkstur upp á umleið:

- 84 fulltíðarstørv innan eldrarøkt,
- 80 fulltíðarstørv innan stuðulsskipanir til børn og vaksin,
- 60 fulltíðarstørv innan serforsorg.

Vøksturin innan málsøkið “útbúgving og gransking” stavar í høvuðsheitum frá fólkaskúlanum (umleið 110 fulltíðarstørv).

Størsti prosentvísi vøksturin er:

- miðfyrisiting (111%),
- løgtingsstovnar (72%),
- almannamál (33%),
- vinnumál (31%),
- mentan (25%).

Málsøkið “samferðsla og samskifti” er minkað við 45 fulltíðarstørvum, svarandi til 7%.

Fyri betri at lýsa gongdina eru í **fylgiskjali 3** myndir, ið vísa lutfalsbroytingina í starvsfólkatalinum greinað á málsøki, soleiðis sum Landsgrannskoðanin hevur valt at greina málsøkini. Harumframt eru myndir, sum vísa spjaðingina av miðallønini millum stovnar.

4.4.2 Samanberingar við lønarhagtøl frá Hagstovuni

Fyri at meta um rættleikan av lønarútreiðslunum, sum Landsgrannskoðanin hevur gjørt út frá starvsfólkayvirlitum, landsroknskapum og eksternum roknskapum, hevur Landsgrannskoðanin samanborið mettu lønarútreiðslurnar við lønarhagtøl frá Hagstovu Føroya.

Lønarútgjaldingar

Sum víst á talvu 4, eru lønarútreiðslurnar hjá “landinum” í tíðarskeiðinum 1997-2004 øktar úr 1.094 mió.kr. í 1.725 mió.kr., svarandi til 58%.

Talva 4: Lønarútreiðslur hjá “landinum” 1997–2004

mió.kr.

	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	
Lønarútreiðslur hjá landinum	1.094	1.136	1.214	1.288	1.401	1.531	1.611	1.725	58%

Í hjálagda **fylgiskjali 4** hevur Hagstovan gjørt upp og bólkað lønarútgjaldingarnar í sama tíðarskeiði. Burtur úr hesum hagtølum hevur Landsgrannskoðanin í niðanfyristandandi talvu víst gongdina í lønarútgjaldingum hjá trimum av bólkunum.

Talva 5: Lønarútgjaldingar til heimastýrisfyrisiting, landsfyritøkur og kommunur 1997-2004

mió.kr.

	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	%
Heimastýrisfyrisiting	897	940	1.003	1.065	1.153	1.251	1.318	1.413	57%
Landsfyritøkur	401	427	434	496	532	585	563	553	38%
Kommunur	225	244	271	297	337	379	414	476	111%

Verða lønarútreiðslurnar hjá landinum samanbornar við lønarútgjaldingarnar í bólkinum "heimastýrisfyrisitingin", er vøksturin at kalla tann sami, men lønarútreiðslurnar hjá "landinum" eru væl størri enn hjá "heimastýrisfyrisitingini".

Orsøkin er, at í bólkinum "landsfyritøkur" eru stovnar sum Postverkið, Apoteksverkið, Strandferðslan, Landsverk, Kringvarpið og Rúsdrekkasølan. Lønarútreiðslurnar hjá hesum stovnum vóru í 1997 og 2004 ávikavist 209 og 276 mió.kr. Verða hesar lønarútreiðslur roknaðar upp í "heimastýrisfyrisitingina", er so at siga samsvar við lønarútreiðslurnar hjá "landinum", sum vístar eru í talvu 4.

Sum "landsfyritøkur" annars roknar Hagstovan m.a. Føroyagrunnin frá 1971, P/f JFK, P/f Føroya Fiskavirking, P/f Telefonverkið, P/f Atlantic Airways, P/f Vágatunnilin og P/f Norðoyatunnilin.

Í talvu 5 hevur Landsgrannskoðanin til samanberingar tikið við lønarútgjaldingar til kommunurnar. Lønarútgjaldingar hjá kommununum tíðarskeiðið 1997-2004 eru øktar úr 225 mió.kr. í 476 mió.kr., svarandi til 111%. Hesin vøkstur er á leið dupult so stórur sum hjá "landinum".

Løntakarateljingar

Í hjálagda **fylgiskjali 5** hevur Hagstovan gjørt upp og bólkað talið á løntakarum í ymiskum vinnugreinum tíðarskeiðið 1997-2004. Í fylgiskjalinum er neyvari greitt frá um hesar løntakarateljingar, sum eru grundaðar á skráirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Hagstovan ger upp talið á løntakarum, t.v.s. talið á fólki, ið fáa løn í einum tíðarskeiði. Skilt verður ikki ímillum fulltíðar- og parttíðarstørv.

Landsgrannskoðanin hevur gjørt upp starvsfólkatalið sum fulltíðarstørv, og tí ber ikki til at samanbera við hesar løntakarateljingar í **fylgiskjali 5.**

4.4.3 Niðurstøða

Landsgrannskoðanin metir, at vøksturin í fulltíðarstørvum hjá landinum hevur verið um 720 størv árini 1997-2004, svarandi til ein vøkstur áleið 17%. Størsti vøksturin hevur verið innan málsøkini:

- Almannamál (265 fulltíðarstørv),
- Útbúgving og gransking (186 fulltíðarstørv), og
- Miðfyrisitingina (108 fulltíðarstørv).

Størsti prosentvísi vøksturin er:

- Miðfyrisitingin (111%) (úr 97 í 204),
- Løgtingsstovnar (72%) (úr 16 í 28),
- Almannamál (33%) (úr 803 í 1.069).

Miðallønarútreiðslurnar fyri hvørt fulltíðarstarv eru øktar úr 260 t.kr. í 1997 til 350 t.kr. í 2004, svarandi til 35%.

Samlaðu lønarútreiðslurnar hjá "landinum" eru í tíðarskeiðinum 1997-2004 øktar úr 1.094 mió.kr. til 1.725 mió.kr., svarandi til 58%.

Til samanberingar eru lønarútgjaldingar hjá kommununum í sama tíðarskeiði øktar úr 225 mió.kr. í 476 mió.kr., svarandi til 111%.

5 LØGMANSFYRISITINGIN

5.1 Samskiftisútreiðslur hjá landsstýrinum (GL 1998/2 02 9-5)

Í frágreiðing til løgmann í juli 2000, um grannskoðan av samsýning landsstýrismanna, vístu vit á, at sera ymiskt var, hvussu endurrindað varð fyri telefonútreiðslur hjá landsstýrismonnum. Tí reistu vit fleiri spurningar m.a. um heimildina, hvør rætta mannagongdin var, hvussu nógv skuldi verða rindað og hvussu nógv skuldi verða givið upp skattliga. Niðanfyri verður í stuttum kunnað um gongdina í málinum.

Lógargrundarlag

Sambært § 27, stk. 2, í stýrisskipanarlógini tilnevnir løgmaður landsstýrismenn, og sambært § 32, stk. 2, skulu neyvari reglur fyri setanarviðurskiftum løgmans og landsstýrismanna ásetast í løgtingslóg. Ongar ásetingar um kostnaðarendurgjald fyri samskiftisútreiðslur eru í Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." sum seinast broytt við Ll. nr. 65/2006. Seinastu nógvu árini hevur tó verið siðvenja at veita kostnaðarendurgjald, og Fíggjarnevndin góðkendi á fundi 20. mars 1981, *"at landsstýrismenn fáa fría heimatelefon, tó soleiðis at teir fyri privatar samtalur gjalda 1.000 kr. um árið"*. Okkum kunnugt varð hetta gjald ikki rindað.

Sambært § 25 í stýrisskipanarlógini verður samsýning løgtingsmanna ásett við løgtingslóg, og vanligt hevur verið, at løgtingslógirnar um samsýning landsstýrismanna og um samsýning løgtingsmanna hava verið broyttar/dagførdar um somu tíð. Lógin um samsýning landsstýrismanna varð ikki broytt, tá lógin um samsýning til løgtingsmenn seinast varð broytt/dagførd.

Sjálvt um arbeiðið hjá einum løgtingsmanni ikki kann samanberast við arbeiðið hjá einum landsstýrismanni, kann verða nevnt, at skattafrítt endurgjald fyri samskiftisútreiðslur hjá løgtingsmonnum óbeinleiðis er heimilað í § 1, stk. 4, í Ll. nr. 12/1999 "um samsýning og eftirløn løgtingsmanna". Har er ásett, at sum endurgjald fyri útreiðslur, ið standast av arbeiðinum sum løgtingsmaður, verður veitt hvørjum tingmanni eitt skattafrítt kostnaðarískoyti kr. 2.000 um mánaðin. Av viðmerkingunum til lógina gongur fram, at talan er um telefon, brúk av egnari teldu o.a.

Í mars 2001 tók løgmaður stig til at greiða heimildarspurningin um kostnaðarendurgjald fyri telefon o.a., tá ið hann legði fyri Tingið uppskot um at broyta lógina "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." Her verður skotið upp, at løgmaður og landsstýrismenn fáa skattafrítt kostnaðarendurgjald fyri samskiftisútreiðslur kr. 2.000 um mánaðin.

Broytingaruppskotið, sum annars snúði seg um at hækka eftirlønirnar, varð samtykt við gildi frá 1. januar 2002, men varð sett úr gildi aftur í desember 2002. Eftirsíðan feldi Løgtingið eitt nýtt broytingaruppskot frá løgmanni, og sostatt eru framvegis ongar ásetingar um endurgjald fyri samskiftisútreiðslur.

Skattur av fríari heimatelefon

Í skrivi til løgmann 22. januar 2003 vístu vit á, at sambært § 25, stk. 1, nr. 4, í skattalógini eru fríir ágóðar skattskyldug inntøka. Sambært § 118, stk. 1 b, í skattalógini skal upplýsingarskyldugi boða Toll- og Skattstovuni frá um møguligar skattafríar ágóðar, sum hann hevur latið. Eftir hesum at døma er tað ikki í tráð við skattalógina, at "eingin fráboðan er til Toll- og Skatt." Var løgmaður ikki samdur í hesum sjónarmiði, mæltu vit løgmanni til at avgreiða spurningin saman við Toll- og Skattstovu Føroya.

30. januar 2003 vendi løgmaður sær til Toll- og Skattstovu Føroya við spurninginum. Toll- og Skattstovan svaraði m.a., at heimatelefon hjá landsstýrismonnum er at rokna sum fríur ágóði/skattskyldug inntøka, sum landsstýrismenn hava skyldu at geva upp, og at arbeiðsgevarin hevur upplýsingarskyldu.

Grundað á svarið boðaði løgmaður 13. februar 2003 aðalráðunum og landsstýrismonnunum frá, hvørjar reglur vóru galdandi á økinum, og heitti á tey um at halda galdandi reglur. Løgmaður vísti m.a. á, at landsstýrismenn fáa fría heimatelefon, tó so, at teir gjalda 1.000 kr. um árið; at frí heimatelefon er at rokna sum skattskyldugur fríur ágóði; og at skattgjaldari og arbeiðsgevari hava skyldu at boða frá um fríar ágóðar. Løgmansskrivstovan boðaði somuleiðis Toll- og Skattstovu Føroya frá, at løgmaður hevur heimatelefon eftir ásetingunum frá Fíggjarnevnd Løgtingsins í 1981.

Í februar 2006 kunnaði løgmaður um, at hann fór at heita á aðalráðini um at boða skattamyndugleikunum frá um fríar ágóðar hjá landsstýrismonnum, við avriti til Løgmansskrivstovuna.

Um fría fartelefon

Ikki allir landsstýrismenn hava fría heimatelefon, men allir hava fría fartelefon, sum er ogn hjá aðalráðunum.

Í rundskrivi nr. 2/2001, frá Toll- og Skattstovu Føroya, “um fartelefon” er ásett, at fartelefon, sum arbeiðsgevari letur starvsfólkum sínum at nýta ókeypis, sum meginregla er at rokna sum frí telefon sambært reglunum um fríar ágóðar. Tekur løntakarin telefonina við til hús, talar alt fyri, at hon eisini verður nýtt privat. Nýtir løntakarin einans fartelefonina í.s.v. arbeiðið, ella fartelefonin er neyðug fyri at kunna útinna arbeiðið, t.d. í samband við tilkallivaktir, skal løntakarin ikki skattast av fríari telefon.

Landsstýrismannastarvið ber í sær nógv samskifti, sum í stóran mun fer fram um fartelefon, og tí er tað natúrligt, at hesar rokningar eru lutfalsliga høgar. Helst taka landsstýrismenn fartelefonina heim við til hús, tí tað er praktiskt, og verður sama fartelefon óivað í ein ávísan mun eisini brúkt privat, umframt til meira partapolitisk viðurskifti, sum ikki beinleiðis hava við landsstýrismannastarvið at gera. Hesi viðurskifti tala fyri, at fría fartelefonin, ið er latin landsstýrismonnum, er fevnd av rundskrivinum um skattafría telefon.

Í skrivi 2. desember 2005 bóðu vit um viðmerkingar frá løgmanni. Løgmaður hevur ikki svarað hesum spurningi beinleiðis.

Endurrindan fyri aðrar samskiftisútreiðslur

Landsgrannskoðanini kunnugt kemur tað eisini fyri, at landið rindar fyri aðrar samskiftisútreiðslur hjá landsstýrismonnum, eitt nú internetsamband.

Tilmæli frá nevnd

Í mai 2003 samtykti Løgtingið Ll. nr. 77/2003 “um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m.” Sambært lógini velur løgmaður eina nevnd við trimum fólkum at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna o.a. Í nevndini, ið skal verða vald fyri hvørt valskeið, skal vera ein løgfrøðingur, ein kønur í lógarmálum og ein roknskaparkønur. Nevndin skal lata løgmanni tilmæli í seinasta lagi í aðru tingsetu í hvørjum valskeiði.

Í juni 2005 fekk løgmaður frágreiðing og tilmæli frá nevndini. Nevndin mælir m.a. til at útvega lógarheimild til at veita løgmanni og landsstýrismonnum fría fartelefon, teldu og alnetssamband til arbeiðsbrúks.

Samskifti við løgmann

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, mæltu løgtingsgrannskoðararnir løgmanni til at greiða hetta mál.

Í juni 2006 spurdi Landsgrannskoðanin løgmann, hvat síðani var hent í málinum, og hvørjar ætlanir løgmaður hevði.

Í svarskrivi sínum í oktober 2006 ásannar løgmaður, at spurningurin um samskiftis-útreiðslur til løgmann og landsstýrismenn hevur verið umrøddur í langa tíð, uttan at endaligar lógarfestar reglur eru settar í gildi. Víðari sigur løgmaður:

> *"Tað skerst ikki burtur, at menningin í arbeiði løgmans og landsstýrismanna ger, at samskiftisviðurskifti teirra als ikki kunnu samanberast við støðuna, sum hon var fyri fáum árum síðani, og sum galdandi formligu og óvissu reglur hava sum fyrimynd.*
>
> *Fyrr hevur ein so dánt kunnað tosað um, at løgmaður og landsstýrismenn hava verið til arbeiðis ávísar skrivstovutíðir. Hetta er fullkomiliga broytt seinastu árini vegna menningina av samskiftistøknini, somuleiðis sum fjølmiðlar og onnur í nógv størri mun enn fyrr áseta, hvørjar tíðir av degnum løgmaður og landsstýrismenninir arbeiða. Arbeiðið hjá løgmanni og landsstýrismonnum er vorðið nærum púra óheft av staðnum, har teir eru staddir, og tíðini á degnum.*
>
> *Grundað á henda veruleika er tað eftir okkara tykki rætt at meta øll samskiftistól løgmans og landsstýrismanna sum vanlig arbeiðstól. Hvar hesi arbeiðstól eru, á skrivstovuni, uttanlands ella heima við hús, má metast at vera uttan týdning fyri privatinntøku teirra."*

Landsgrannskoðanin heldur ikki svarið hjá løgmanni vera nøktandi. Spurningarnir snúgva seg ikki um, hvørt løgmaður og landsstýrismenn hava brúk fyri samskiftistólum í sínum starvi, men um heimild at rinda/endurrinda hesar útreiðslur, og um at fylgja skattligu reglunum um fríar ágóðar.

6 Fiskivinna

6.1 Fiskirannsóknarstovan (GL 2004/2 14 3-9)

Um inntøkufíggjað virksemi

Í frágreiðingini í mars 2005 umrøddu vit grannskoðanina av roknskapinum hjá Fiskirannsóknarstovuni. Roknskapurin hjá Fiskirannsóknarstovuni er býttur sundur í 5 undirkontur, harav 2 undirkontur eru "inntøkufíggjað virksemi".

Sambært landsroknskapinum 2004 vórðu umleið 35% av samlaðu útreiðslunum hjá Fiskirannsóknarstovuni hildnar undir inntøkufíggjaðum virksemi, herímillum eru útreiðslur til verkætlanir, sum verða fíggjaðar av játtanini til "Fiskivinnuroyndir".

Í frágreiðingini vístu vit á, at vit halda tað vera tilvildin/fíggingarhátturin, ið ger av, um virksemið verður skrásett sum inntøkufíggjað. Talan er um granskingar- og menningarverkætlanir, sum stovnurin oftast sjálvur tekur stig til, í framhaldi av vanliga virkseminum.

Sum útgangsstøði er "inntøkufíggjað virksemi", sum skal verða bókað á serstaka undirkontu, ætlað til vinnuliga sølu av vørum og tænastum. Strongu játtanarreglurnar um prísáseting skulu forða fyri, at alment vinnuligt virksemi verður kappingaravlagandi.

Verkætlaninar á Fiskirannsóknarstovuni eru ikki nakað eindømi um, at verkætlanir undir "inntøkufíggjaðum virksemi" eru ikki vinnuligar. Vit hava áður víst á, at eftir okkara tykki er á øllum málsøkjum tørvur á einum greiðum skilnaði á undirkontustøði ímillum "inntøkufíggjað virksemi" og annað "studningsfíggjað virksemi", sum ikki er vinnuligt, men sum heilt ella lutvíst verður fíggjað av øðrum.

Tað gerst meira viðkomandi, nú tað verður alt meira vanligt, at privat feløg, grunnar o.o. eru við til at fíggja m.a. ymiskar granskingarverkætlanir. Í tí sambandi er avgerandi at staðfesta, at talan skal verða um granskingarvirksemi, sum stovnurin sjálvur hevur áhuga í at fremja, og at tað er stovnurin, sum hevur "ognarrættin" til úrslitini, sum kunnu verða almannakunngjørd.

Roknskaparviðurskifti

Í frágreiðingini í mars 2005 vístu vit eisini á, at samanumtikið er innaneftirlitið á Fiskirannsóknarstovuni gott, men vit mæltu tó til fleiri ábøtur, m.a. at:

5. endurskoða uppskotið til roknskaparreglugerð og at fáa reglugerðina góðkenda; hon skuldi vera góðkend fyri 31. desember 2001,
6. vegleiðingin "Arbeiðsgongd viðvíkjandi posti og journalisering á Fiskirannsóknarstovuni" verður dagførd,
7. reglur verða ásettar fyri, hvørji skjøl skulu vera í starvsfólkamálunum, og at gjøgnumganga "gomlu" starvsfólkamálini og útvega øll neyðug skjalprógv, ið kunnu sanna, at lønarútgjaldingarnar eru rættar,
8. arbeiðstíðin verður skrásett, vísandi til § 7 í roknskaparkunngerðini,
9. greitt verður frá stóru nýtsluni av fartelefonini, sum er "til at taka", m.a. vísandi til rundskriv frá Løgmansskrivstovuni nr. 1/2002, og til rundskriv frá Toll- og Skattstovu Føroya nr. 2/2001 "um fartelefonir",
10. ognaryvirlitið verður dagført, og at yvirlitið fevnir um tær upplýsingar, sum eru minstukrøv sambært roknskaparrundskrivinum,
11. ferðaforskot verða gjørd upp og avroknað sambært galdandi reglum,
12. inntøkuføring av fremmandari fígging fylgir ásetingunum í vegleiðing frá Gjaldstovuni,

13. rørslur á kassa- og peningastovnskontum verða skrásettar regluliga, og at tær verða stemmaðar av.

Í desember 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at:

ad 1) Endurskoðan av uppskotinum til roknskaparreglugerð verður liðug tíðliga í 2007.

ad 2) Dagføring av journalmannagongdini fer fram í løtuni.

ad 3) Reglur eru gjørdar fyri, hvørji skjøl skulu vera í starvsfólkamálunum, og málini verða gjøgnumgingin í løtuni.

ad 4) At miðað verður eftir, at nýggj skipan verður sett í verk, har m.a. arbeiðstíðin kann verða skrásett uppá slag av virksemi, verkætlanir o.a.

ad 5) Nýtslan av fartelefonini er minkað. Álagt er starvsfólkunum at nýta fartelefonirnar við skynsemi, tá tey eru uttanlands.

ad 6) Ognaryvirlitið er og verður dagført.

ad 7) Ferðaforskot verða gjørd upp og avroknað sambært galdandi reglum.

ad 8) Fiskirannsóknarstovan hevur ikki neyðugu umsitingarligu orkuna at fylgja ásetingunum í vegleiðingini frá Gjaldstovuni. Hvønn mánað verður mett um gongdina í hvørjari verkætlan, so fíggjarliga stýringin o.a. er nøktandi.

ad 9) Bøtt er um mannagongdir á økinum, og at meira orka er sett av at skráseta.

Roknskapargóðkenning

Í frágreiðingini í mars 2005 vístu vit m.a. á, at verkætlanarinntøkur, herímillum "fremmand fígging" og rørslur á fíggjarstøðukontum, ikki vórðu skrásettar nóg regluliga og so skjótt sum gjørligt, og at mánaðarliga avstemmanin av fíggjarstøðuni var ikki nøktandi. Flestu viðurskiftini koma í rættlag við árslok, tá ið verkætlanirnar verða gjørdar upp, og fíggjarstøðan verður dagførd.

Í desember 2006 hevur Fiskimálaráðið boðað frá, at Fiskirannsóknarstovan arbeiðir við at bøta um mannagongdir, tíðarskráseting o.a., so at t.d. verkætlanir kunnu verða skrásettar neyvari hvønn mánað.

6.2 Lønjavningarstovan (GL 2003/2 14 4-7)

Innaneftirlit

Síðani 1999 hevur Landsgrannskoðanin vístá tørvin á roknskaparreglum og innaneftirliti. Í mars 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Lønjavningarstovan, saman við fíggjardeildini í Fiskimálaráðnum, hevði lýst nakrar av mannagongdunum fyri útgjaldingum neyvari, og hevði seinasta árið, við stakroyndum, kannað útrokningarnar í sambandi við útgjøld.

Í september 2006 hevur Lønjavningarstovan boðað frá, at allar mannagongdir nú eru gjørdar. Stjórin velur stakroyndirnar út, og tær verða kannaðar av øðrum enn teimum, ið hava skrásett útgjaldingarnar.

KT-viðurskifti

Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir vístá, at trupulleikarnir í gomlu KT-skipanunum eru ikki loystir. Fiskimálaráðið er farið undir at endurnýggja partar av KT-skipanunum. Landsgrannskoðanin helt tað vera óheppið, at Fiskimálaráðið ikki hevur gjørt nakrar kravfestingar, og vit hava mælt til, at uppgávan at dagføra KT-skipanirnar hjá Lønjavningarstovuni fer fram sum liður í yvirskipaðari heildarætlan.

Í mars 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at KT-verkætlanin varð steðgað, tá ið játtanin varð skorin av fíggjarlógini í 2004.

Í januar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki var hent í málinum, men ætlanir vóru um at fáa ment nýggjar skipanir til Lønjavningarstovuna frá 2006. Talan er um stórar íløgur, sum kunnu koma at strekkja seg yvir ár.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, umrøddu løgtingsgrannskoðararnir eisini málið:

> *"EDV-verkætlanin at endurnýggja verandi skipanir steðgaði í 2004, tá játtanin varð skorin burtur. Ætlanin er at fara undir aftur arbeiðið í 2006, og sambært landsstýrismanninum er talan um stórar íløgur, sum strekkja seg yvir fleiri ár. Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at arbeiðið verður gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið, sum liður í einari yvirskipaðari heildarætlan, har eisini verandi uppgávur hjá Lønjavningarstovuni verða endurskoðaðar".*

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Fiskimálaráðið er byrjað at gera kravfestingar til KT-skipanirnar á Lønjavningarstovuni, men enn er ikki komið á mál.

Sambært landsstýrismanninum ber ikki til at greiða gjøllari frá, hvørjar ætlanirnar eru, ella hvussu stórur íløgutørvurin er. Í tráð við galdandi reglur fer Fiskimálaráðið at samstarva við Fíggjarmálaráðið um menningina av KT-skipanum, og fer at taka atlit til krøv og royndir hjá øðrum stovnum, sum hava líknandi KT-skipanir. Fiskimálaráðið hevur tó ikki ætlanir um at endurskoða verandi uppgávur hjá Lønjavningarstovuni.

Mánaðarligur minstaforvinningur

Landsgrannskoðanin hevur síðani 1999 víst á, at tørvur var á greiðari reglum, og at talan er um fleiri veikleikar við skipanini:

- Maður ikki við allar túrar: Vit hava mælt til, at neyvari reglur verða ásettar í kunngerð.
- Bert A-inntøka verður roknað sum onnur inntøka: Útróðrarmaður kann hava stórar B-inntøkur, uttan at tað minkar um minstaforvinningin.
- Inntøkutreytir: Í sambandi við grannskoðanina komu vit fram á fleiri dømi um bátar, sum ikki høvdu verið nakran túr í einum mánaði. Sostatt var manningarparturin 0 kr, men manningin fekk fullan minstaforvinning. Tað kundi lata seg gera, tí báturin teir 6 undanfarnu mánaðirnar hevði avreitt fyri so mikið, at hann leyk treytirnar í § 2, stk. 1, í lógini um minstaforvinning. Tikið varð fram sum dømi, at avreiddi einsamallur maður fyri 54 t.kr. í einum mánaði, leyk hann treytirnar fyri at fáa minstaforvinning komandi 5 mánaðirnar uttan at fara á flot. Teoretiskt nýttist honum sostatt bert at rógva út 6. hvønn mánað fyri at fáa minstaforvinning.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, mæltu løgtingsgrannskoðararnir enn eina ferð til at taka málið upp.

Í august 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fiskimálaráðið hevði framt ymiskar fyrisitingarligar batar. Arbeitt varð við at gera eitt nýtt lógaruppskot, sum tók hædd fyri flest øllum viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini. Lønjavningarstovan vísti í september 2006 á, at lógin skuldi vera so greið og greinað, at tað skuldi ikki vera neyðugt at áseta neyvari reglur í kunngerð.

3. november 2006 legði landsstýrismaðurin fram "uppskot til løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn" (Lm. nr. 33/2006). Lógaruppskotið varð samtykt 8. desember 2006 (Ll. nr. 112 frá 13. desember 2006).

6.3 Stuðul til gransking, menning og royndir (GL 2003/2 14 4-8)

Í frágreiðing okkara í mars 2004 umrøddu vit enn einaferð umsitingina av studningsjáttanunum til gransking, menning og royndir:

- Fiskivinnuroyndir
- Granskingarætlanir
- Varðveitan av fjølbroyttum fiskiflota
- Fiskivinnumenning á landi

Vit vístu m.a. á, at í fleiri førum er trupult at meta um, hvørt peningurin á studningsjáttanunum er rætt umsitin, og er nýttur til ætlaða endamálið. Í summum førum er eingin neyvari endamálsáseting, og ítøkiligar ásetingar eru ikki, sum kunnu geva eina ábending um, hvørt endamálið er rokkið.

Í oktober 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at studningurin til játtanirnar "Fiskivinnuroyndir" og "Granskingarætlanir" verður goldin út eftir føstum mannagongdum, og landsstýrismaðurin heldur, at peningurin á hesum játtanum verður rætt umsitin og nýttur til ætlaða endamálið.

Í áliti sínum til uppskotið um løgtingsfíggjarlóg 2007 hevur Fíggjarnevndin ta viðmerking til játtanina "Fiskivinnumenning á landi", at hon nú verður nýtt til nógv ymisk endamál, sum hon ikki var ætlað til upprunaliga. Nevndin heldur tí, at landsstýrismaðurin eigur at útvega sær materiella heimild, áðrenn játtanin verður nýtt.

7 Vinnumál

7.1 Kunningartrygd, søgulig gongd (GL 2001/1 02 0-2)

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum sínum seinnu árini kunnað løgtingsgrannskoðararnar um gongdina í málinum um stjórnan av kunningartrygd. Niðanfyri er ein stuttur samandráttur av søguligu gongdini seinastu 5 árini.

7.1.1 Samskifti við løgmann í 2001 um KT-trygd

Í skrivi til løgmann í august 2001 um stjórnan av kunningartrygd vísti Landsgrannskoðanin m.a. á, at arbeiðið í landsumsitingini at tryggja elektroniska partin av kunningarkervinum fer óskipað fram. Fólk sita hvør sær og stríðast við somu trupulleikum uttan at halda seg til viðurkendar standardar, og ógreitt er, hvørja ábyrgd og hvønn myndugleika KT-forum, DNL-ráðið og onnur stýri og stovnar hava, og hvørjar avleiðingarnar verða, verða boð ikki fylgd.

Løgmaður ásannaði í oktober 2001, at enn var eingin felags kunningar- ella trygdarpolitikkur ásettur og staðfesti, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevði ábyrgdina av, at tað almenna hevði ein yvirskipaðan KT-politikk, umframt ein KT-trygdarpolitikk, ið skuldi taka støði í altjóða standardum innan stjórnan av KT-trygd.

Stovnar og landsstýrismenn skulu sostatt ikki hvør í sínum lagi seta yvirskipað krøv til KT-trygd, men taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett. Løgmaður legði dent á, at hvør landsstýrismaður hevur ábyrgd av KT-trygd og –tøkni á sínum øki.

7.1.2 KT-forum endurstovnað í 2002

Á vári 2002 endurstovnaði landsstýrismaðurin í vinnumálum KT-forum við hesum arbeiðssetningi:

- at orða uppskot til ein KT-politikk, umframt ein KT-trygdarpolitikk fyri landsfyrisitingina,
- at fáa til vega eitt felags regluverk fyri KT-trygd,
- at gera tilmæli um at seta trygdarpolitikkin í verk,
- at leggja lunnar undir framhaldandi arbeiði við KT-trygd í landsfyrisitingini.

7.1.3 Uppskot til reglur um KT-trygd til hoyringar í 2003

Í august 2003 sendi KT-forum út til hoyringar hjá fleiri stovnum o.ø. “Uppskot til felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini”, umframt skjølini:

- Bólking av krøvunum í ISO 17799.
- Bólkur B1 – Frágreiðing um trygdarkrøv sambært ISO 17799.
- Bólkur B2 – Frágreiðing um trygdarkrøv sambært ISO 17799.
- Lýsing av váða á KT-økinum fyri almennar stovnar.

Í uppskotinum til felags regluverk fyri KT-trygd verður m.a. mælt til, at:

- ein felags standardur fyri KT-trygd verður settur í verk fyri KT-trygdina í landsfyrisitingini,
- arbeiðið við KT-trygd í landsfyrisitingini verður grundað á:

  - ISO 17799 standardin, og
  - BS 7799-2, sum verður brúktur sum leiðbeining at byggja upp og reka KT-trygdarkervið,
- regluverkið verður "skyldubundið", og skal galda fyri alla landsfyrisitingina,
- standardarnir verða settir í verk innan 3 ár, og at byrjað verður við pilotverkætlanum á 5 stovnum.

7.1.4 Viðmerkingar frá stovnum o.ø. til uppskot til reglur um KT-trygd

44 stovnar, fyritøkur o.o. nýttu høvið at koma við viðmerkingum til uppskotið, ið varð sent til hoyringar. Í "Niðurstøður frá hoyring um felags regluverk fyri KT-trygd" 9. desember 2003 tók KT-forum samanum viðmerkingarnar. Yvirhøvur taka stovnarnir undir við regluverkinum, og at bygt verður á altjóða standardin ISO 17799, tó eru onkrir ivasamir og mæla beinleiðis frá at seta so høg mál.

Eitt nú verður í viðmerkingunum víst á, at:

- samband má vera millum trygd og kostnað,
- veruligi tørvurin má vera avgerandi fyri, hvussu nógv orka skal verða brúkt til KT-trygd,
- uttan "fíggjarliga uppbakking" er vandi fyri, at sjónligasta avleiðingin av regluverkinum verður kritiskar skoðanarfrágreiðingar,
- fáar fyritøkur tora at siga, at tær fylgja BS 7799-2 standardinum, tí skoðaraviðmerkingarnar verða hareftir,
- talan verður um eina sera krevjandi tilgongd fyri fyrisitingina, og 3 ár er ov stutt tíð at seta regluverkið í verk,
- vandi er fyri, at váðametingin er ov tíðarkrevjandi fyri hvønn stovnin, og hinvegin er vandi fyri, at farið verður ov lætt um váðametingina.

7.1.5 Tilmæli frá KT-forum í desember 2003

Í tilmæli sínum til landsstýrismannin mælti KT-forum m.a. til:

1. Eina 5-ára freist í staðin fyri 3 ár.
2. At brúka ISO 17799 standardin, men ikki BS 7799-2.
3. Broyting av KT-bygnaðinum.
4. Samstarv um at seta í verk regluverkið.
5. "Pilotverkætlanir".
6. At stovna KT-deild.
7. At skipa fyri útbúgving/førleikamenning.

7.1.6 Rundskriv um KT-trygd 1. februar 2005

1. februar 2005 setti landsstýrismaðurin í vinnumálum í gildi rundskriv um KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin fyri 1. februar 2006 byggir á ISO 17799 standardin, at arbeiðið við KT-trygd skal verða skipað sambært BS 7799-2 standardinum, og at tær hava sett í verk teir partar av ISO 17799 trygdarstandardinum, sum stovnarnir sambært ítøkiligari váðameting skulu lúka.

Standardarnir, sum víst verður til í rundskrivinum, eru dagførdir í 2005. Landsgrannskoðanin hevur tí spurt Vinnumálaráðið, hvørjir standardar eru galdandi.

Í november 2006 hevur Vinnumálaráðið kunnað um, at KT-forum hevur viðgjørt spurningin á fundi í november 2006, og semja var um, at tann til eina og hvørja tíð galdandi ISO 17799 standardurin skal vera galdandi, og Vinnumálaráðið fer tí at broyta rundskrivið samsvarandi hesum.

Á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum liggja skjølini, sum í august 2003 vórðu send út til hoyringar. Tá ið skjølini høvdu verið til hoyringar, vórðu tey tillagað í desember 2003. Vinnumálaráðið greiddi í november 2006 frá, at tað var eitt mistak, at skjølini, sum vórðu send til hoyringar, vóru at finna á heimasíðuni. Síðani eru skjølini tikin av heimasíðuni.

7.2 Kunningartrygd, støðan í dag (GL 2001/1 02 0-2)

Í 2006 hevur Landsgrannskoðanin spurt landsstýrismenn, hvørjir landsstovnar o.l., sum teir varða av, lúka tey krøv, ið eru ásett um KT-trygd, og í hvønn mun landsstýrismenn/aðalráð hava umsjón við, at teir landsstovnar, teir varða av, lúka krøvini. Flestu stovnar lúka ikki krøvini, og landsstýrismenn/aðalráð hava so at siga ikki umsjón/eftirlit við, um stovnarnir lúka krøvini fyri KT-trygd. Niðanfyri verður kunnað gjøllari um úrslitið av kanningini.

7.2.1 Spurnaskriv til landsstýrismenninar

Sambært skrivi frá løgmanni 22. oktober 2001 skulu stovnar og landsstýrismenn taka stig til og tryggja, at KT-trygdin á teirra málsøki lýkur tey krøv, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur ásett.

Ein landsstýrismaður hevur rættarliga ábyrgd av fyrisitingini á teimum málsøkjum, sum løgd eru til hansara, og tað áliggur honum, í rímiligan mun, at føra eftirlit við og áseta reglur á sínum málsøki. Við heimild í stýrisskipanarlógini hevur løgmaður í kunngerð býtt málsøkini millum landsstýrismenninar.

Ein landsstýrismaður hevur yvirskipaða eftirlitið við stovnunum á sínum málsøki. Yvirskipað eftirlit merkir m.a., at landsstýrismaðurin/aðalráðið skal hava umsjón og eftirlit við, at stovnarnir fylgja ásettum reglum. Harafturat hevur landsstýrismaðurin heimild at geva stovnunum tænastuboð, í tann mun lóggávan ikki forðar tí.

Í skrivi 19. september 2006 bóðu vit allar landsstýrismenn um at greiða frá/skjalprógva, hvørjir stovnar, sum teir varða av:

- 1. februar 2006 luku ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd,
- ikki luku ásetingarnar 1. februar 2006, og hvussu støðan var í dag,

og hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit/umsjón við, um stovnarnir lúka ásetingarnar í rundskrivinum.

7.2.2 Svar frá landsstýrismonnum

Løgmansskrivstovan

Løgmansskrivstovan og sendistovurnar lúka ikki ásetingarnar um umsitingarliga KT-trygd. LandsNet arbeiðir við at fáa henda partin í rættlag. Væntandi verður hetta arbeiðið liðugt miðskeiðis í 2007.

Innlendismálaráðið

Bert ein stovnur undir Innlendismálaráðnum leyk 1. februar 2006 ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd, men fleiri hava sett eitt miðvíst arbeiði í gongd.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at neyðugt verður at fara meira miðvíst til verka, fyri at allir stovnarnir skulu lúka ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd.

Fíggjarmálaráðið

Sambært landsstýrismanninum í fíggjarmálum siga 4 av 7 stovnum undir Fíggjarmálaráðnum seg at lúka ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd. Hinir stovnarnir arbeiða við at fáa viðurskiftini í rættlag. Fíggjarmálaráðið kann tó ikki siga, um stovnarnir luku treytirnar 1. februar 2006.

Fíggjarmálaráðið hevur latið Landsgrannskoðanini eitt yvirlit, har stovnarnir undir Fíggjarmálaráðnum eru bólkaðir í 3 ymisk trygdarstig, vísandi til bólkingarnar, ið KT-forum gjørdi í 2003.

Sambært Fíggjarmálaráðnum hava landsstýrismaðurin og aðalstjórin regluliga fundir við stovnsleiðslurnar, har til ber at taka upp spurningin, hvørt stovnarnir fylgja ásetingunum í rundskrivinum um KT-trygd. Fíggjarmálaráðið heldur, at fyri teir stovnar, ið eru fevndir av "hægsta trygdarstigi" (Gjaldstovan og Toll- og Skattstovan) er hóskandi, at dagførd váðameting og skoðan av KT-kervinum verður framd við jøvnum millumbili.

Mentamálaráðið

Á heysti 2004 tók Mentamálaráðið stig til at gera eina váðagreining fyri stovnar og skúlar undir ráðnum. Váðagreiningin varð latin stovnsleiðarunum.

Hóast vit hava spurt tvær ferðir, sigur Mentamálaráðið seg ikki kunna svara, hvørjir stovnar lúka ásettu treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd. Mentamálaráðið fer at umhugsa at gera eina kanning.

Fiskimálaráðið

Fiskimálaráðið framdi fyrst í 2005 eina tvørgangandi verkætlan ímillum stovnar og deildir í ráðnum, har KT-trygdin varð sett í fokus. Fiskimálaráðið nýtti ein viðurkendan og góðkendan KT-grannskoðara til m.a. at gera váðametingar. Hvør deild/stovnur fekk síðani eina skrivliga váðameting, sum lýsti váðar viðvíkjandi kunningartøkni við støði í "trygdarkunngerðini". Fyri 1. september 2004 skuldu KT-kervini, sum eru fevnd av lógini "um persónsupplýsingar", lúka treytirnar í "trygdarkunngerðini".

Fiskimálaráðið og stovnar/deildir undir ráðnum lúka enn ikki tey strongu og víðtøknu krøvini í ISO 17799/BS 7799-2. Skal Fiskimálaráðið lúka krøvini, verður neyðugt við hægri játtan og fleiri starvsfólkum.

Nakrar deildir hava verið afturhaldin við at gera skrivligan KT-politikk, tí ivi er um, hvørt uppskotið um KT-politikk, sum Vinnumálaráðið skal koma við, kemur at galda fyri øll ella bara verður eitt ískoyti til verandi innanhýsis KT-politikk.

Hesin trupulleiki er ikki vorðin minni av, at KT-politikkurin hjá Vinnumálaráðnum hevur verið ávegis í fleiri ár. Sum nú er, hava deildir og stovnar undir Fiskimálaráðnum ein innanhýsis skrivligan KT-politikk.

Uppgávan hjá landsstýrismanninum at hava eftirlit við, um stovnar/deildir undir Fiskimálaráðnum fylgja ásetingunum í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum um KT-trygd, er løgd út til KT-leiðaran í ráðnum, og hann fylgir við menningini hjá stovnunum á KT-økinum.

Fiskimálaráðið vísir á, at valið, at nýta ISO 17799/BS 7799-2 sum grundarlag fyri KT-trygdini, er ein umfatandi verkætlan, sum tekur fleiri ár at seta í verk. Harumframt fevnir málið um kunning generelt og tískil eisini um fysiska handfaring av pappíri/skjølum. Tað er ein mannagongd, sum krevur, at peningur verður játtaður til endamálið, og at fleiri starvsfólk verða knýtt at, fyri at tað kann setast í verk.

Fiskimálaráðið vísir eisini á, at størsti munurin millum eina skjóta íverksetan av aðalkravinum (ISO 17799/BS 7799-2) og eitt longri skotbrá er, at almennu stovnarnir fáa álvarsamar viðmerkingar í árligu skoðarafrágreiðingunum. Tað fer í sjálvum sær ikki at hækka støðið.

Almanna- og Heilsumálaráðið

Bert tveir stovnar siga seg lúka ásetingarnar fult út ella møguliga lúka ásetingarnar. Almanna- og Heilsumálaráðið hevur enn ikki sett nakrar fyriskipanir í verk fyri at kanna, hvørt stovnarnir, sum landsstýrismaðurin varðar av, lúka ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd.

Landsstýrismaðurin heldur ikki, at tað er uppgávan hjá landsstýrismanninum/aðalráðnum at skipa fyri beinleiðis eftirliti/grannskoðan av KT-trygdini á stovnunum. Tað skal leiðslan á stovnunum sambært ISO 17799 standardinum sjálv skipa fyri.

Á einum árliga afturvendandi evnisdegi fyri allar stovnarnar, sum hann varðar av, ætlar landsstýrismaðurin bert at spyrja stovnarnar, um teir hava framt eina árliga KT-skoðan. Á henda hátt kann landsstýrismaðurin hava eftirlit við, hvussu KT-trygdarstøðan á stovnunum er. Landsstýrismaðurin ætlar annars at eggja teimum stovnum, har eingin árlig KT-skoðan er gjørd, til at fáa tað í lag.

Vinnumálaráðið

Sambært Vinnumálaráðnum eru tað onkrir stovnar, ið siga seg lúka treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd. Bert ein stovnur segði seg 1. februar 2006 lúka trygdarásetingarnar í rundskrivinum.

Teir størru stovnarnir, sum hava fingið uttanhýsis serkøna hjálp, eru væl ávegis við trygdararbeiðinum, men teir flestu hava tikið stig til at innlima seg í rakstrardepilin hjá Vinnumálaráðnum og LandsNet, og eru tí fevndir av trygdarásetingunum har. Tað umfatar bæði fysisku og logisku trygdina o.s.fr. Tó er langt á mál til at lúka øll trygdarkrøvini sambært ISO 17799 og BS 7799-2, og er talan um eina áhaldandi menning.

Rakstrardepilin hjá KT-fyrisitingini lýkur ikki krøvini í rundskrivinum um KT-trygd. KT-fyrisitingin hevur gjørt eina tíðarætlan fyri, hvussu rakstrardepilin kann lúka krøvini í ISO 17799, og sambært KT-fyrisitingini má tað arbeiðið verða raðfest høgt. Arbeiðið er býtt upp í: váðameting, orða KT-politikk, KT-trygdarstrategi, verksetan, tilbúgvingarætlan og eftirmetan. Ætlanin er at fáa uttanhýsis hjálp at gera váðagreining/meting fyri rakstrardepilin, áðrenn KT-politikkurin verður gjørdur, og at arbeiðið verður raðfest høgt.

Samanumtikið kann sigast, at teir smáu stovnarnir mangla at gera eina váðameting, trygdarpolitikk, trygdarstrategi, verksetan (m.a. skjalprógv), tilbúgvingarætlan og eina árliga skipaða skoðan.

Vinnumálaráðið arbeiðir í løtuni við at fáa eina skipaða eftirlits-/umsjónarfunktión at virka, eitt nú við regluligari vitjan á stovnunum og at hava umsjón við trygdararbeiðinum. Ein kunningartrygdarleiðari, sum áður var partur av KT-fyrisitingini, er settur til tað arbeiðið, og kunningartrygdarleiðarin er nú ein “stápsfunktión” í Vinnumálaráðnum.

Uppgávurnar hjá kunningartrygdarleiðaranum eru m.a., at:

- Hava umsjón við trygdaryvirvakingarskipanum; at gera váðametingar; at gera og dagføra KT-trygdarpolitikkin.
- At samskipa kunningartrygdararbeiðið í Vinnumálaráðnum og stovnum undir Vinnumálaráðnum, herímillum eisini á stovnum, har Vinnumálaráðið hevur tikið á seg ábyrgdina av kunningartrygdini (t.e. hjá stovnum, ið eru limaðir inn í LandsNet).
- At hava umsjón við, at KT-trygdarpolitikkur og atknýttar leiðreglur o.a. verða fylgdar.
- At veita ráðgeving í KT-trygdarspurningum.

7.2.3 Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini til spurnakanningina

Við støði í svarskrivunum frá løgmanni og landsstýrismonnunum er tað samanumtikið okkara fatan, at hvørki løgmaður ella landsstýrismenn hava eftirlit/umsjón við, um aðalráð og undirliggjandi stovnar, grunnar o.l. 1. februar 2006 luku treytirnar í rundskrivinum ”um at seta í verk KT-trygd”, og um stovnarnir eftirsíðan hava fingið viðurskiftini í rættlag.

Eftir øllum at døma er tað spurnaskrivið, sum vit í september 2006 sendu løgmanni og landsstýrismonnum, sum hevur fingið flestu aðalráð at kanna, hvørji aðalráð, undirliggjandi stovnar, grunnar o.l. lúka treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd.

Svarini hjá flestu landsstýrismonnum eru merkt av, at tað er metingin hjá undirliggjandi stovni av, hvørt stovnurin lýkur treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd, sum verður borin ”ókritiskt” víðari. Landsstýrismaðurin/aðalráðið tykist ikki, sum liður í vanliga eftirlitinum/umsjónini við stovninum, at hava tikið støðu til, hvørt stovnurin lýkur ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd.

7.2.4 Eftirlitsvirksemið hjá Dátueftirlitinum

Sambært grannskoðanarlógini skal Landsgrannskoðanin m.a. ansa eftir, at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar. Út frá spurnaskrivum til avvarðandi landsstýrismenn og út frá grannskoðanarvitjanum í 2005 og 2006 hava vit staðfest, at flestu aðalráð og landsstovnar lúka ikki KT-trygdarkrøvini, ásett í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum.

Í fleiri førum er talan um samantvinnaðar KT-skipanir og mannagongdir, sum bæði fevna um búskaparupplýsingar, persónsupplýsingar o.a. Tað er tí sannlíkt, at flestu stovnar heldur ikki lúka øll tey formligu krøvini í lógini og í kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Vit kunnu í hesum sambandi eisini vísa til nakað av tí, ið landsstýrismaðurin í innlendismálum skrivar í viðmerkingunum til játtanina til Dátueftirlitið:

- 2006: “Eftirlitið kann staðfesta, at trygdartiltøkini enn ikki eru í lagi, og at trupulleikin er stórur innan landsumsitingina. Aðalráð og almennir stovnar hava tí eisini søkt um leingjan av freistini”.
- 2007: Einki starvsfólk verið í føstum starvi síðani 1. september 2006.
- 2007: “ES hevur sett sjøtul á at kanna eftir, um Føroyar á ein nøktandi hátt viðgera persónsupplýsingar samsvarandi ES lóggávu, og setir hetta enn størri krøv til Dátueftirlitið”.

Sambært § 37 í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum skal Dátueftirlitið m.a.:

- “ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini”,

- ”gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar”.

Um skerda virksemið hjá Dátueftirlitinum kunnu vit nevna sum dømi, at Almannastovan í mars 2006 søkti Dátueftirlitið um loyvi at leingja tillagingartíðina til 31. august 2006 fyri nøkur tiltøk og útseta onnur, sum krevja stórar skipanarligar umleggingar og eru kostnaðarmikil. Í november 2006 hevði Dátaeftirlitið ikki svarað skrivinum, helst tí onki starvsfólk er at taka sær av tílíkum samskifti.

Í januar 2007 hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum greitt frá, at í samráð við Dáturáðið hevur hann arbeitt fyri og fingið nøktandi játtan til Dátueftirlitið í 2007. Nýggjur stjóri er settur frá 1. januar 2007, og søkt er eftir einum løgfrøðingi og einum skrivstovufólki.

Aðalráð og landsstovnar, ið ikki lúka KT-trygdarkrøvini, ásett í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum, lúka í flestu førum heldur ikki ásetingarnar í lóg/kunngerð um viðgerð av persónsupplýsingum. Talan er um at kalla somu formligu krøv, sum flest allir stovnar ikki lúka. Landsstýrismaðurin heldur, at hetta álvarsmál tí átti at verið loyst sum ein samskipað verkætlan, og hann ætlar at taka málið upp í Landsstýrinum.

7.3 Kunningartrygd, hví stovnar ikki lúka krøvini (GL 2001/1 02 0-2)

Niðanfyri hava vit roynt at vísa á nakrar orsøkir til, at so fáir landsstovnar í dag lúka krøvini um KT-trygd.

7.3.1 Týðandi tilmæli frá KT-forum verða ikki fylgd

Í august 2003 sendi KT-forum út til hoyringar eitt “Uppskot til felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini”. 44 stovnar, fyritøkur o.o. nýttu høvið at koma við viðmerkingum til uppskotið. Viðmerkingarnar førdu til, at KT-forum broytti tilmæli sítt á nøkrum økjum:

1. at seta eina 5-ára freist í staðin fyri 3 ár.
2. at brúka ISO 17799 standardin, men ikki BS 7799-2.
3. at broyta KT-bygnaðin.
4. at samstarva um at seta í verk regluverkið.
5. at nýta “pilotverkætlanir”.
6. at stovna KT-deild.
7. at skipa fyri útbúgving/førleikamenning.

Tilmælið varð síðani í januar 2004 handað landsstýrismanninum. 1. februar 2005 setti landsstýrismaðurin í vinnumálum í gildi rundskriv um KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin fyri 1. februar 2006 lýkur ásettu krøvini.

Sum vísst á, lúka flestu landsstovnar ikki krøvini, og ein orsøk kann vera, at fleiri týðandi tilmæli frá KT-forum í desember 2003 ikki vórðu fylgd. Niðanfyri hava vit greitt gjøllari frá hesum.

1. At seta eina 5-ára freist í staðin fyri 3 ár

Upprunaliga mælti KT-forum til eina 3-ára freist. Eftir at uppskotið hevði verið til ummælis, mælti KT-forum til at leingja freistina til 5 ár at seta í verk regluverkið, og at gera eina nágreiniliga ætlan um lutmál, sum skulu verða nádd ávegis.

Men sambært § 4 í rundskrivinum varð freistin í staðin fyri stytt til eitt ár.

Um orsøkina hevur Vinnumálaráðið í november 2006 vístá, at sambært ”trygdarkunngerðini” viðvíkjandi persónsupplýsingum skuldi KT-trygdin vera í lagi í 1. september 2004, men Dátueftirlitið kundi leingja freistina til í seinasta lagi 1. september 2006. Tí varð hildið ráðiligt at seta freistina til 1. februar 2006.

2. At brúka ISO 17799 standardin, men ikki BS 7799-2

Í januar 2004 handaði KT-forum landsstýrismanninum uppskot til “Felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini”, sum byggir á ISO 17799 standardin, m.a. tí at hann er mest brúkti standardur í heiminum, og tí at K. nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum” eisini byggir á henda standard, men farið varð burtur frá tilmælinum um at nýta BS 7799-2 sum leiðbeinandi standard fyri at byggja upp og reka KT-trygdarkervið. Hetta tilmæli varð ikki fylgt, og rundskrivið um at seta í verk KT-trygd vísir til báðar standardarnar.

3. At broyta KT-bygnaðin

Í tilmælinum í desember 2003 um at seta regluverkið í verk verður eisini víst til upprit 28. oktober 2003 frá KT-forum, “Upprit um KT-bygnaðin hjá landsfyrisitingini”, har víst verður á, at ein broyting av KT-bygnaðinum er ein fortreyt fyri at seta stovnum so umfatandi krøv til KT-trygd.

Í innganginum til uppritið stendur m.a., at *“Tá arbeiðið við KT-trygdarpolitikki byrjaði í KT-forum, var tað greitt, at KT-bygnaðurin er ein av mest avgerandi faktorunum í tí, sum hevur við KT-trygd at gera, og at ein óhóskandi KT-bygnaður kann beina fyri annars skilagóðum royndum at betra um trygdina. Hetta er ein staðfesting av, at fyrisitingarligu eindirnar eru so smáar, vitanin so spjadd og bygnaðurin so óhóskandi samanskrúvaður, at uppgávan við KT-trygd gerst óverulig, um ikki nakað munagott verður gjørt organisatoriskt.”*

KT-bygnaðurin er sum so ikki broyttur, men ein nýggj deild - KT-fyrisitingin - er sett á stovn í Vinnumálaráðnum.

4. At samstarva um at seta í verk regluverkið

Í tilmælinum í desember 2003 vísir KT-forum á, at nógvir stovnar eru so smáir, at teir hava ikki orkuna at átaka sær uppgávuna at byggja eitt KT-trygdarkervi upp frá grundini. Skulu tílíkir stovnar framvegis hava egið KT-kervi, er neyðugt at skipa so fyri, at teir onkursvegna kunnu koma lættari til málið.

KT-forum mælir til eitt víðfevnt samstarv og samskipan í landsfyrisitingini. Sum dømi um uppgávur, sum landsfyrisitingin kann gera í felag, og við tí spara arbeiðsorku, verða nevndar mannagongdir, forskriftir og vegleiðingar um at lúka einstøk krøv í standardunum; og at menna og kunna um hóskiligar arbeiðshættir, og amboð til at betra og lætta um arbeiðið hjá hvørjum stovni.

Við at loysa hesar uppgávur í felag, heldur enn hvør sær, kann verða tryggjað, at krøvini í standardunum verða tulkað eins allastaðni í landsfyrisitingini, og at hvør stovnur sær ikki hvørja ferð skal byrja frá botni. Nevnda samstarv og samskipan er ikki framt, soleiðis sum KT-forum mælti til.

5. At nýta “pilotverkætlanir”

KT-forum mælir til at seta ”pilotverkætlanir” í verk á t.d. 5 stovnum, har hesir stovnar ganga undan við arbeiðinum at byggja upp KT-trygdarkervi, og at royndirnar hjá teimum koma øðrum stovnum til gagns. Stovnarnir skulu í støddd og virkisøki vera ymiskir og hava onkrar upplýsingar, ið koma undir lógina um persónsupplýsingar, og mælt verður frá at

seta í verk pilotverkætlanir á størstu og KT-tyngstu stovnunum (t.d. á Almannastovuni, Gjaldstovuni og Toll- og Skattstovuni).

Endamálið við pilotverkætlanunum skal vera: at byggja upp KT-trygdarkervi til luttakandi stovnarnar; at landsfyrisitingin fær royndir við hóskiligum arbeiðsháttum; og at ítøkiligir myndlar o.a. tilfar spyrst burturúr, sum aðrir stovnar kunnu miða seg eftir. KT-forum mælir til, at pilotverkætlanirnar byrja skjótast til ber. Ongar pilotverkætlanir vórðu settar í verk, soleiðis sum KT-forum mælti til.

6. At stovna KT-deild

Í tilmælinum frá desember 2003 vísir KT-forum til serstakt tilmæli um at stovna KT-deild undir Vinnumálaráðnum. Deildin skal samskipa kunningartøkni í landsfyrisitingini og røkja uppgávur viðvíkjandi KT-trygd, m.a.:

- Halda regluverkið fyri KT-trygd viðlíka og útbyggja tað eftir tørvi.
- Gera uppskot til mannagongdir, forskriftir, skipanir og annað, sum skal verða gjørt fyri at lúka krøvini í trygdarstandardunum.
- Menna og kunna um hóskiligar arbeiðshættir og amboð til at betra og lætta um arbeiðið hjá stovnunum.
- Saman við skeiðsstovum at samskipa tiltøk í førleikamenning.
- Kunna seg um arbeiðið við KT-trygd í grannalondunum og kunna landsfyrisitingina.
- Samstarva við aðrar partar av samfelagnum um KT-trygd.

KT-fyrisitingin í Vinnumálaráðnum hevur ikki havt neyðuga orku til t.d. at samskipa tiltøk til førleikamenning, og tað hevur verið trupult at samstarva við aðrar partar av samfelagnum um KT-trygd.

KT-fyrisitingin tekur sær av kunningartøkniligari samskipan í landsfyrisitingini sum heild. Ætlanin er eisini at KT-fyrisitingin skal ráðgeva stovnum og ráðum um ætlanir fyri nýtslu av KT. Ráðgevingin verður rættað móti leiðslunum, soleiðis at tær verða betur førar fyri at taka støðu til, hvussu KT skal nýtast á teirra ábyrgdarøki.

Harafturat skal KT-fyrisitingin reka ein felags rakstrardepil og eitt ”net”, LandsNet. Vinnumálaráðið/KT-fyrisitingin hevur yvirtikið sonevnda “AHS-netið”, herímillum fysisku umstøðurnar, útgerð o.a. í húsunum hjá Landsapotekaranum. Í hesum hølum hevur KT-fyrisitingin bygt upp ein rakstrardepil.

Stovnarnir, ið knýta seg uppí rakstrardepilin, skriva undir avtalu, har víst verður til eitt fylgiskjal. Í avtaluni verður víst til § 8, Umsitingarøki, í fráboðan um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, kunngerð nr. 12 frá 1. apríl 2004, har ásett er, at *“Landsstýrismaðurin (í vinnumálum) útvegar undirstøðukervi, felags nýtsluskipanir og standardforrit, sum fyrisitingarligar eindir hjá landinum kunnu fáa atgongd til. Tá stovnur fær atgongd til felags undirstøðukervið o.t., tekur landsstýrismaðurin á seg ábyrgd viðvíkjandi trygd av felags skipanunum.”* Ábyrgdin av fakskipanum (t.e. búskaparskipanir og aðrar umsitingarligar skipanir) vil framvegis liggja hjá leiðsluni.

Ynskir ein stovnur ikki at verða ein partur av undirstøðukervinum, ið landsstýrismaðurin í vinnumálum útvegar, hevur leiðslan sjálv ábyrgd av KT-trygdini.

7. At skipa fyri útbúgving/førleikamenning

Í tilmælinum frá desember 2003 mælir KT-forum til, at KT-deildin undir Vinnumálaráðnum samstarvar við skeiðsstovur um at fáa til vega nøktandi skeiðstilboð og at virka fyri, at undirtøka fyri skeiðunum er í landsfyrisitingini.

Í uppískoyti til "uppskotið um regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini" er gjørdur ein listi við skeiðstilboðum, sum KT-forum heldur vera neyðug at fáa til vega. Listin er býttur upp í almenn skeið og serskeið, og um hvørt skeiðið er ásett: skeiðsevni, málbólkur, væntað longd og innihald.

KT-fyrisitingin er ikki komin til at útvega skeiðstilboð, men hon tekur undir við at fáa til vega skeiðstilboð.

7.3.2 Vantandi eftirlit frá landsstýrismonnum/aðalráðum

Í september 2006 spurdu vit eisini landsstýrismannin/aðalráðið, hvussu tey høvdu eftirlit-/umsjón við, at stovnarnir luku ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd, sum allar skuldu verða loknar 1. februar 2006.

Eftir svarunum at døma hevur onki skipað eftirlit verið við, um stovnarnir lúka krøvini. Tað tykist eisini vera sera misjavnt, hvussu landsstýrismenn fata leiklut sín á hesum øki. Ein stórur vandi liggur í, at stovnsleiðarar ofta fata spurningar um KT-trygd sum tekniskar trupulleikar, ið serfrøðingar skulu taka sær av. Ein uppaftur størri vandi liggur í, at fleiri aðalráð og landsstýrismenn tykjast hava somu fatan.

Fleiri ásetingar eru um eftirlit, sum landsstýrismenn/aðalráð skulu hava við stovnum á teirra málsøki.

Sambært stýrisskipanarlógini hava løgmaður og landsstýrismenn rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra

Sambært kunngerðini um býti av málsøkjum hevur ein landsstýrismaður yvirskipaða eftirlitið við stovnunum á sínum málsøki, og hevur heimild at geva teimum tænastuboð. Sambært løgmanni skal hvør landsstýrismaður taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar um KT-trygd, sum verða ásettir av Vinnumálaráðnum.

Sambært lógini um ábyrgd landsstýrisins kann løgmaður ella landsstýrismaður verða revsaður, skúgvar hann tilætlað ella av grovum ósketni til viks tær skyldur, sum liggja á honum. Hann kann eisini *"verða mettur at hava medvirkað til gerðina hjá einum undirmanni, tá hann, við ikki í rímiligan mun at hava fört eftirlit og ásett reglur, hevur virkað fyri, at gerðin er vorðin framd."*

Landsgrannskoðanin heldur tað vera neyðugt hjá løgmanni at leggja áherðslu á tað eftirlit, ið hvør landsstýrismaður/aðalráð eigur at hava við stovnum á sínum málsøki, herímillum um stovnarnir lúka ásetingarnar um KT-trygd, tað verið seg sambært rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum, ella sambært lógini og kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Á roknskaparliga økinum er hetta yvirskipaða eftirlitið formaliserað við, at undirliggjandi stovnar hvønn mánað mótvegis landsstýrismanninum/aðalráðnum vátta á einum serstøkum oyðiblaði (EK 76), at roknskaparligu viðurskiftini eru í lagi. Men tað eru so mong onnur øki, eitt nú KT, har yvirskipaða eftirlitið als ikki er skipað.

7.3.3 Almennur KT-politikkur ikki orðaður

Sambært skrivi løgmans frá oktober 2001 skuldi Vinnumálaráðið, við hjálp frá KT-forum, gera uppskot til almennan KT-politikk og KT-trygdarpolitikk. Í skrivi 13. august 2002 boðaði Vinnumálaráðið frá, at høvuðsdentur í fyrsta umfari varð lagdur á arbeiðið við KT-

trygdarpolitikki. Á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum hevur til fyri stuttum staðið ein skrivlig lýsing av arbeiðssetninginum hjá KT-forum. Har verður greitt frá, at *"tá verkætlanin "at fáa til vega eitt regluverk fyri KT-trygd" er liðug um stutta tíð, verður aftur arbeitt við spurninginum um yvirskipaðan KT-politikk fyri landsfyrisitingina."*

Enn er ongin KT-trygdarpolitikkur orðaður, og í november 2006 hevur KT-fyrisitingin kunnað um, at ætlanin er at taka spurningin upp í KT-forum, um tað framvegis er uppgávan hjá KT-forum at orða ein KT-politikk.

Landsgrannskoðanin heldur, at ein yvirskipaður KT-politikkur ikki kann verða gjørdur uttan samstundis at endurskoða almenna bygnaðin, við tí endamáli at effektivisera umsitingina, t.v.s. gera hana bíligari og betri.

7.3.4 Almenni bygnaðurin

Flest øll lond í Evropa hava fyri fleiri árum síðani lagt miðvísar yvirskipaðar ætlanir um at gagnnýta menningina innan KT til at effektivisera umsitingina (digitalisering). Í hesum sambandi verða allir tættir í umsitingini endurskoðaðir, eisini verandi lóggáva, uppgávubýtið millum land og kommunur, málsøki, stovnar o.a. Skulu vit luttaka fult út í hesi gongd, er tað neyðugt, at tey grundleggjandi KT-trygdarviðurskiftini eru í lagi.

Landsgrannskoðanin hevur fyri fleiri árum síðani vísst á, at almenni KT-bygnaðurin kundi verið væl betri skipaður/samskipaður, men hann er í stóran mun ein spegilsmynd av einum undirliggjandi bygnaði. Broytingar innan lógarverkið, roknskaparverkið, uppgávubýtið millum aðalráð, stovnar, millum land og kommunu, millum landsstovnar og meira ella minni almennar grunnar o.s.fr. eru oftast farnar fram uttan nakað yvirskipað endamál.

Seinnu árini eru tó ávís framstig hend. Ein felags KT-depil undir Vinnumálaráðnum loysir í dag nakrar av teimum uppgávum, ið stovnar hvør sær áður skuldu loysa. Umleið 20% av landsstovnunum eru við í hesum samstarvi.

Framvegis hevur landsumsitingin eitt ótal av KT-skipanum, og tíðum hava alt ov smáar umsitingarligar eindir ábyrgd av at keypa, broyta, halda viðlíka, menna og reka skipanir, umsita net, trygd o.s.fr. Óneyðuga nógvir stovnar mega tí hava starvsfólk, sum hava kunnleika til kunningartøkni. Nógvar leiðslur megna ikki at taka á seg ábyrgdina av KT-skipanum, og verða uppgávurnar tí ofta uttan neyðuga leiðslustýring latnar privatum veitarum uppí hendi. Helst verður neyðugt at miðsavna fleiri uppgávur fyri at bøta um trygdina.

Tá ið eindirnar eru so smáar, verða stovnarnir ofta hart raktir, tá ið starvsfólk skifta arbeiði. Tað kann hava við sær vantandi siðvenju og vantandi upplæring av nýggjum starvsfólkum, sum tí ikki verða nóg dugnalig. Men sæð út frá einum heildarsjónarmiði er tað uppaftur verri, at ein stovnur nýtir dugnalig/yvirkvalifiserað fólk at loysa smáar/óneyðugar umsitingaruppgávur. Hesi starvsfólk høvdu kunnað gjørt stóra nyttu, har veruligur tørvur er á teirra evnum og dugnaskapi.

Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til at kanna, um tað hevði loyst seg at savna stovnar/grunnar og fyrisitingar í størri eindir í nútímans umsitingarbygningum, møguliga saman við kommunalum fyrisitingum, fyri at effektivisera umsitingaruppgávurnar og loysa starvsfólkaorku til tær grundleggjandi uppgávurnar.

7.4 <u>Ferðaráð Føroya</u> (GL 2004/2 15 2-2)

Í frágreiðingini í mars 2005 greiddu vit frá grannskoðan okkara, um hvussu Ferðaráðið umsitur útgjald av studningi. Niðanfyri verður kunnað um viðmerkingar og tilmæli okkara, og um, hvussu støðan er í dag.

Studningur til økisferðavinnufeløg

Samanumtikið hildu vit, at umsitingin av studningunum var væl skipað, og at roknskapar- og eftirlitsskipanir vóru tryggar. Vit høvdu tó nakrar viðmerkingar:

1. Ongar samanskrivaðar reglur vóru fyri málsviðgerðina av studninginum, og í roknskaparreglugerðini var einki ásett um umsiting av studningi.
2. Fleiri viðurskifti, í sambandi við umsitingina av studninginum til økisferðavinnufeløg, eru ásett í "avtalu frá 1996" millum Ferðaráðið og økisferðavinnufeløgini og í óformligum fundarfrásagnum.

Vit mæltu landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða verandi lógargrundarlag.

Í juni 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at lógaruppskot verður væntandi lagt fyri Løgtingið í næstu tingsetu (2006/07). Ætlanin er at taka av lógina um Ferðaráð Føroya og lógina um Menningarstovuna. Samanlagdi stovnurin fer at virka eftir einari reglugerð fyri stovnin. Sambært landsstýrismanninum er ætlanin, at stuðulin til økisferðavinnufeløgini verður ásettur í serligari lóg. 8. desember 2006 samtykti Løgtingið at seta úr gildi umrøddu løgtingslógir.

Inntøkufíggjað virksemi (verkætlanir)

Í frágreiðingini í mars 2005 vístu vit á, at vit halda ikki, at verkætlanirnar á Ferðaráði Føroya kunnu metast sum "inntøkufíggjað virksemi", soleiðis sum tað er allýst í játtanarskipanini, m.a. tí talan er ikki um vinnuliga sølu av vørum og tænastum í kapping við onnur, og tí verkætlanirnar fíggja ikki langtíðar miðalkostnaðin. Ætlanin var at strika heitið "inntøkufíggjað virksemi" í fíggjarlógaruppskotinum 2006, men av misgáum varð tað ikki gjørt.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 eru Menningarstovan og Ferðaráð Føroya løgd saman á eina høvuðskontu, 6.37.1.03."Vinnuframastovan", sum hevur tríggjar undirkontur:

- 20. Vanligt virksemi
- 21. Marknaðarføring
- 40. Verkætlanir

Sambært viðmerkingunum er undirkonta "40. Verkætlanir" ætlað til verkætlanir, sum Vinnuframastovan fremur, men onnur rinda. Flestu verkætlanir verða fíggjaðar av Vinnuframagrunninum.

7.5 Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar (GL 1998/2 15 3-2)

Í frágreiðing frá februar 2002 umrøddu vit í stuttum Endurgjaldsgrunn alivinnunnar. Har varð m.a. kunnað um, at í sambandi við, at ILA-sjúkan í 2000 rakti eitt alibrúk, varð eitt endurgjaldskrav reist ímóti grunninum. Tað hendi, áðrenn Ll. nr. 26/1987 "um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum" varð tikin av. Í 2001 vórðu um 2,9 mió.kr. goldnar út til felagið. Kravið var munandi størri, og málið fór í rættin.

Í mars 2005 kunnaði Vinnumálaráðið um, at partarnir høvdu gjørt semju, har grunnurin rindaði sakarmálskostnaðin og 8,9 mió.kr. í endurgjaldi. Vinnumálaráðið bíðaði eftir, um enn eitt endurgjaldskrav fór at verða reist móti grunninum. Síðani skuldu lóg og grunnur verða tikin av. Við árslok 2005 er eginpeningurin hjá grunninum umleið 7,5 mió.kr.

Í november 2005 kunnaði Vinnumálaráðið um, at eitt alibrúk afturat reisti endurgjaldskrav móti grunninum. Dómur fall í Føroya Rætti í september 2005, grunnurin fekk viðhald. Alibrúkið skeyt dómin inn fyri landsrættin.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at landsrætturin hevði staðfest dómin hjá Føroya Rætti, og at nevndin fór at mæla landsstýrismanninum til at taka grunnin av. Landsstýrismaðurin fer at reisa málið um, hvat skal henda við ognum grunsins.

7.6 P/f Fiskaaling og Havbúnaðarroyndir (GL 2002/2 15 3-4)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 16. oktober 2005 umrøddu vit ávís viðurskifti viðvíkjandi P/f Fiskaaling og játtanini til Havbúnaðarroyndir.

Niðanfyri verður greitt frá, hvat síðani er hent.

P/f Fiskaaling

Við Ll. nr. 69 frá 2. mai 2003 "um at hækka partapeningin í og at veita stuðul til P/f Fiskaaling" gav Løgtingið landsstýrismanninum heimild at hækka partapeningin í felagnum 6 mió.kr. við at skjóta tvær ognir hjá landinum, sum felagið hevði nýtslurætt til, inn í felagið. Talan var um eina høll við Áir (2 mió.kr.) og lívfiskastøðina í Skopun (4 mió.kr.).

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 vístu vit á, at sambært landsroknskapunum síðani 1991 hava ognirnar, sum ætlanin er at skjóta inn í P/f Fiskaaling, kostað landskassanum umleið 49 mió.kr.

Í 2004 varð einans høllin við Áir skotin inn í felagið við 2 mió.kr. Grannskoðarafelagið Spekt váttaði, at virðið á innskotnu ognini í minsta lagi svaraði til innskotið.

Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at viðvíkjandi lívfiskastøðini í Skopun varð arbeitt við einari loysn, har kommunan ognartekur lendið, lívfiskastøðin stendur á, og leigar P/f Fiskaaling økið. Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið um lendið eftir øllum at døma er loyst.

Fíggjarliga heimildin, at skjóta ognina inn í felagið er fingin til vega við játtan á fíggjarlógini 2007. Lívfiskastøðina verður skotin inn í P/f Fiskaaling við 8,95 mió.kr., sum er ein varliga mettur søluprísur í vanligum handli.

Havbúnaðarroyndir

Sáttmálin við P/f Fiskaaling 1999-2001

Sáttmáli fyri árini 1999-2001 varð gjørdur millum Vinnumálaráðið og P/f Fiskaaling um kynbøtur, royndir við aling við nýggjum fiskasløgum o.a. Vinnumálaráðið rindaði P/f Fiskaaling 11 mió.kr. um árið. Sambært sáttmálanum skuldi P/f Fiskaaling rinda Vinnumálaráðnum aftur tann partin av studninginum, sum ikki var nýttur við sáttmálalok ultimo 2001.

Avlopið av studninginum ultimo 2001, 6.742 t.kr., varð inntøkuført í landsroknskapinum, og P/f Fiskaaling varð skuldskrivað fyri upphæddina. Sáttmálin 1999-2001 varð longdur at galda fyri 2002 eisini, og í 2003 varð staðfest, at 2.407 t.kr. av teim 6.742 t.kr. vóru brúktar til verkætlanir, sum ikki vóru lidnar ultimo 2001. Aðrar 2.460 t.kr. vórðu í 2003 lagdar um til partapening í felagnum, og P/f Fiskaaling skuldi rinda 1.875 t.kr. aftur, sum var avlopið á verkætlanum, sum vóru lidnar ultimo 2001.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at fíggjarstøðan hjá P/f Fiskaaling er hampiliga góð nú, tí vøkstur er í alivinnuni, og felagið fær meiri fyri sølu av tøkulaksi, sílayngli og laksarognum. Felagið hevur goldið landskassanum 818 t.kr. í 2006 og miðar eftir, at øll skuldin er afturgoldin í 2007.

Sáttmálin við P/f Fiskaaling 2003-2005

Nýggjur sáttmáli millum Vinnumálaráðið og P/f Fiskaaling varð gjørdur fyri árini 2003-2005.

Í 2004 vórðu játtaðar 12 mió.kr. í studningi. Í 2004 roknaði P/f Fiskaaling sær 2.634 t.kr., svarandi til 22% av studningsupphæddini, til fyrisitingargjald. Talan er um endurgjald fyri m.a. lønarútreiðslur til stjóran, bókhaldaran, maskinmeistaran, útreiðslur til grannskoðan og edv, umframt part av olju- og elnýtslu í skrivstovuhølunum. Fyrisitingargjaldið var ikki ásett í sáttmálanum fyri árini 2003-2005.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sáttmálin millum Vinnumálaráðið og felagið varð endurnýggjaður í apríl 2006, har m.a. er ásett, hvat stuðul landskassans kann verða nýttur til, herímillum til fyrisiting.

Studningur til havbúnaðarroyndir

Landið hevur árini 1999 til 2005 veitt P/f Fiskaaling umleið 71 mió.kr. í studningi til "havbúnaðarroyndir".

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at eftirmeta tað, sum komið er burturúr í sáttmálaskeiðinum, í mun til ætlaða úrslitið.

7.7 Endurgjald til skipasmíð (GL 2004/2 15 3-5)

Lógargrundarlagið fyri endurgjaldi til skipasmíð er Ll. nr. 73 frá 20. mai 1996 "um studning til skipasmiðjur" seinast broytt við Ll. nr. 49/2002. Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 61 frá 23. mai 2002 "um at umsita lóg um studning til skipasmiðjur".

Í 2004 gjøgnumgingu vit hesa stuðulsskipan, sum Vinnuframagrunnurin umsitur. Samanumtikið var umsitingin væl skipað, roknskapar- og eftirlitsskipanir vóru tryggar, og útgjaldingarnar vóru hóskandi skjalprógvaðar. Vit mæltu tó landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða verandi lógargrundarlag á ávísum økjum m.a. soleiðis, at greiðari heimildir vera í lógini at áseta treytir og reglur viðvíkjandi studninginum.

Í november 2005 og aftur í juni 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at lógargrundarlagið verður dagført í sambandi við aðrar møguligar broytingar av lógini.

7.8 Landsverk (GL 2002/2 16 1-2)

Í frágreiðingini í mars 2005 kunnaðu vit um, at vit í 2003 og 2004 høvdu kannað EDV-nýtslu, virksemi/inntøkur og innanhýsis skrásetingar hjá Landsverki. Í 2004 hevur Landsverk, m.a. við serkønari hjálp, broytt og bøtt um fleiri av teimum mannagongdum og veikleikum, ið vit hava umrøtt, og í 2005 var ætlanin at menna skipanir og mannagongdir at lúka krøvini til KT-trygd í ISO 17799. Niðanfyri hava vit tikið samanum, hvat síðani er hent í málinum.

Roknskaparreglugerðin og KT

Í frágreiðingini í mars 2005 kunnaðu vit um, at roknskaparreglugerðin leyk ikki minstukrøvini í roknskaparrundskrivinum "um egnar EDV-skipanir", at leiðslan hevði ikki skjalfest nakra váðameting í sambandi við KT-nýtsluna, og at stovnurin hevði ongan yvirskipaðan KT-politikk/trygdarpolitikk.

Í juni 2006 kunnaði Vinnumálaráðið um, at Landsverk eftir summarfrítíðina var farið undir at dagføra roknskaparreglugerðina.

Í 2005 orðaði stovnurin ein KT-trygdarpolitikk, sum varð settur í gildi í oktober 2005. Í hesum sambandi varð ein yvirskipað váðameting gjørd fyri tær týdningarmiklastu KT-skipanirnar á stovninum.

Landsverk hevur ikki sett sett øll tey tiltøk í verk, sum eru ásett í KT-trygdarpolitikkinum. Landsverk arbeiðir støðugt við at bøta um KT-trygdina, og í 2007 er ætlanin at endurskoða KT-trygdarpolitikkin og at gera eina nýggja yvirskipaða váðameting.

Egnar búskaparskipanir

Í frágreiðingini í mars 2005 kunnaðu vit m.a. um, at Landsverk hevur ”egnar EDV-skipanir”, sum verkfrøðingar á stovninum hava ment. Í roknskaparligum høpi vóru tær týdningarmiklastu skipanirnar:

- Vektarskipanin: til at skráseta uttanhýsis sølu og innanhýsis nýtslu frá skerv- og asfaltsverkunum kring landið.
- Lønarskipanin: til at skráseta viku- og mánaðarlønir, koyripengar umframt samsýningar í sambandi við tyrluavgreiðslur.
- Interna bókhaldsskipanin (INTB): til at býta nýtsluna av egnari framleiðslu (skerv, asfalt, maskintímar) út á hvørt arbeiðsplássið (vegastrekki o.a.).

Harafturat hevur stovnurin sjálvur ment eina eykaluta-goymslustýringarskipan, maskin-viðlíkahaldsskipan, prísindexskipan, journalskipan, vegdátugrunn, lendisskipan og eina skipan, har ferðsluóhapp verða skrásett. Stovnurin hevur eisini sjálvur ment eina intranet-skipan.

Íverksetan av nýggjari ”egnari búskaparskipan”

Síðani ársskiftið 2005/2006 hevur Landsverk arbeitt við at seta í verk eina Navision búskaparskipan, sum skal avloysa fleiri av teimum KT-skipanum, sum stovnurin sjálvur hevur ment, herímillum Vektarskipanina, Internu bókhaldsskipanina, eykaluta-goymslustýringarskipanina og maskin-viðlíkahaldsskipanina.

Í september 2006 var fundur millum Fíggjarmálaráðið, Vinnumálaráðið, Gjaldstovuna og Landsverk, í sambandi við at Landsverk var farið undir at taka í nýtslu egna Navision búskaparskipan uttan at biðja Fíggjarmálaráðið um formligt loyvi sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini. Landsverk hevur í oktober 2006 greitt Landsgrannskoðanini frá, at Landsverk var av teirri fatan, at Gjaldstovan kundi ikki nøkta tann tørv, stovnurin hevði á búskaparskipan, sum kundi avloysa ”egnu búskaparskipanirnar”.

Vinnumálaráðið hevur í desember 2006 boðað frá, at arbeitt verður við at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

Roknskaparreglugerðin og inntøkur

Í desember 2004 vístu vit á, at:

1. roknskaparreglugerðin leyk ikki minstukrøvini í rundskrivinum um prísáseting/príspolitikk, og at ongar formligar reglur vóru um at góðkenna prísásetan/-broytingar
2. vit ivaðust í, um reglurnar í játtanarskipanini um inntøkufíggjað virksemi og prísáseting vórðu hildnar.

Ad. 1: Í desember 2005 greiddi Vinnumálaráðið frá, at Landsverk, við serkønari hjálp, hevði arbeitt við at orða ein príspolitikk. Arbeiðið var steðgað upp, men tað skuldi verða tikið uppaftur fyrst í 2006. Ætlanin var, at arbeiðið skuldi verða liðugt í mars 2006. Landsverk hevur í desember 2006 kunnað um, at aðrar uppgávur hava verið raðfestar hægri í 2006, men farið verður undir at orða ein príspolitikk í januar 2007.

Í juni 2006 boðaði Vinnumálaráðið frá, at Landsverk eftir summarfrítíðina 2006 fór undir at dagføra roknskaparreglugerðina. Landsverk hevur í desember 2006 kunnað um, at endurskoðanin av reglugerðini er um at vera liðug. Ætlanin er, at reglugerðin verður liðugt dagførd í mars 2007.

Ad. 2: Í juni 2006 kunnaði Vinnumálaráðið um, at Landsverk nú fyri fyrstu ferð hevði ”reinar” roknskapir, tá tað um skerv- og asfaltsverkini ráddi. Í 2005 vórðu allar inntøkur og allar útreiðslur skrásettar ”reint”, tvs. at tað var farið eitt regulert keyp fram ímillum deildirnar hjá Landsverki innanhýsis. Av tí at Landsverk hevði lagt nógva orku í arbeiðið at fáa Navision búskaparskipanina setta í verk, var Landsverk ikki komið til sjálva prísásetingina av skervi og asfalti, men tað varð væntandi gjørt tíðliga á heysti 2006. Landsverk hevur í desember 2006 boðað frá, at farið verður undir arbeiðið við prísáseting í januar 2007.

7.9 Rúsdrekkasøla Landsins (GL 2000/2 03 9-9)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað ársroknskapin 2005, og vit hava verið ófráboðað á kassa- og goymslueftirliti. Vit hava gjøgnumgingið avstemmanir viðvíkjandi banka- og girokontum, kreditorum o.a.

Í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum fyri 2005 hava vit kannað, um møguligir fríir ágóðar eru goldnir út sambært galdandi reglum. Eingin viðmerking var til gjøgnumgongdina.

Harafturat hava vit eisini kannað einstakar partar av KT-trygdini hjá stovninum.

Egnar búskaparskipanir

Rúsdrekkasøla Landsins hevur egnar búskaparskipanir. Talan er um eina bókhaldsskipan við fleiri mótulum, kassaskipan, lønarskipan, heimabanka og serlig forritað excel-rokniørk til at skráseta lønartímar. Í november 2005 byrjaði Rúsdrekkasølan at nýta felags lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Síðani mars 2006 eru allar lønir farnar um felags lønarskipanina, og í november 2006 er stovnurin byrjaður at nýta Web-løn til leysar lønargjaldingar.

Hvønn mánað ger roknskaparleiðarin yvirlit yvir sumbókingarnar í bókhaldsskipanini á Rúsdrekkasøluni, sum Gjaldstovan handliga skrásetir í Búskaparskipan Landsins.

Yvirskotsgjaldføri

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár vístá, at stovnurin ofta hevur nógvan tøkan pening á vanligum peningastovnskontum, til lítla og onga rentu, og vit hava mælt til, at Rúsdrekkasølan javnan flytur yvirskotsgjaldførið á kontu hjá Gjaldstovuni.

Í november 2006 hevur stjórin á Rúsdrekkasøluni kunnað um, at stovnurin í 2006 hevur flutt Gjaldstovuni yvirskotsgjaldførið hvønn ársfjórðing.

KT-viðurskifti í roknskaparreglugerðini

Í punkt 10 í roknskaparrundskrivinum eru ávís krøv sett til skrivligar lýsingar av egnum edv-skipanum. Vit halda ikki, at roknskaparreglugerðin lýkur hesi krøv, t.d. er samskiftið

millum kassaskipanirnar og búskaparskipanina ikki lýst. Vit hava mælt til at endurskoða roknskaparreglugerðina. Stjórin kunnaði í november 2006 um, at stovnurin er í ferð við endurskoða KT-partin í roknskaparreglugerðini.

Gjøgnumgongd av KT-trygdini

Landsgrannskoðanin framdi í 2002 eina størri gjøgnumgongd av KT-trygdini á Rúsdrekkasølu Landsins. Niðurstøðan av gjøgnumgongdini var, at Rúsdrekkasøla Landsins ikki leyk fleiri av grundleggjandi krøvunum til eina trygga edv-skipan, sum eru ásett í roknskaparrundskrivinum til egnar edv-skipanir.

Vit hava síðani javnan staðfest, at lítið ítøkiligt er komið burtur úr arbeiðinum við at bøta um KT-trygdina. Síðani 2002 eru onnur krøv til KT-trygd sett í persónsupplýsingalógini, trygdarkunngerðini og í rundskrivi frá Vinnumálaráðnum um KT-trygd.

Í juni 2006 kunnaði Rúsdrekkasølan um, at tað ikki vóru gjørdar nakrar ítøkiligar broytingar í KT-trygdini á Rúsdrekkasøluni í mun til gjøgnumgongdina í 2002, og vit hava tí ikki í 2006 gjørt eina nágreiniliga kanning av KT-trygdini.

Vit hava tó hugt eftir einstøkum pørtum innan: skjalfesting av KT-skipanum o.a., ábyrgd av KT, funktiónsskilnað, umsitingina av brúkarum (herímillum atgongd hjá veitarum) og trygdaravrit.

Vit hava víst á ymiskar veikleikar í KT-trygdini, serliga við atliti at stýring av brúkararættindum til búskaparskipanina. Í sambandi við grannskoðanina hava vit staðfest vantandi funktiónsskilnað á týðandi økjum. Vit hava mælt til eina skipaða gjøgnumgongd av funktiónsskilnaðinum á stovninum, og at ásetingar verða settar í roknskaparreglugerðina. Harafturat hava vit mælt til, at KT-skipanirnar, serliga búskaparskipanin, verða settar upp í samsvari við ásetingarnar í roknskaparreglunum.

Tá havt verður í huga støddina á stovninum, og hvussu heftur stovnurin er at kunningartøkni, halda vit ikki, at KT-trygdin er nøktandi.

Í november 2006 hevur stjórin greitt frá, at bøtt er um fleiri av veikleikunum, sum vit hava víst á, og stovnurin hevur í meira enn eitt ár arbeitt skilvíst við KT-trygdini.

8 Útbúgving og gransking

8.1 Fólkaskúlin (GL 1996/2 10 2-1)

Í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar hava vit fleiri ferðir vístá, at lønarskipanin til læraraløn var gomul og ótíðarhóskandi, og vit hava mælt til at bøta um viðurskiftini. Mentamálaráðið valdi at bíða, til nýggj lønarskipan fór at verða tikin í nýtslu.

Á vári 2000 fór Mentamálaráðið undir at menna eina forskipan til nýggju felags lønarskipanina á Gjaldstovuni. Bæði arbeiðið við felags lønarskipanini og við forskipanini til læraraløn varð nógv seinkað. Forskipanin varð tikin í nýtslu í august 2005.

Í 2006 er Landsgrannskoðanin farin undir at ráðleggja grannskoðanina av læraralønum, herímillum eisini grannskoðanina av nýggju lønarforskipanini. Í hesum sambandi kunna vit okkum eisini um mannagongdir, innaneftirlit og KT-viðurskifti í sambandi við skráseting og útgjalding av lønum til lærarar.

8.2 Musikkskúlaskipanin (GL 2001/2 10 9-5)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 69/1984 "um stuðul til musikkskúlar", broytt við Ll. nr. 67/1996. Í áravís hevur Landsgrannskoðanin vístá, at ósamsvar er ímillum § 1 í lógini, har ásett er, at landskassin letur studning, og § 5, har ásett er, at landsstýrismaðurin setir lærararnar. Heldur ikki verður lógin umsitin, sum var talan um studning úr landskassanum. Landskassin rindar allar lønarútreiðslurnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum 50% av lønarútreiðslunum til lærararnar í mun til, hvussu nógvar tímar musikkskúlarnir í kommununum hava fingið tillutað.

Landsgrannskoðanin heldur, at musikkskúlaskipanin verður væl umsitin, og umsitingin verður neyvan bíligari ella betri, verður hon løgd út til kommunurnar. Tí hava vit mælt landsstýrismanninum til at broyta lógina, soleiðis at samsvar verður ímillum praksis og allar ásetingar í lógini.

Hóast meira enn 20 ár eru liðin, síðani lógin kom í gildi, er enn ikki samsvar ímillum allar ásetingar í lógini og fyrisitingarligu mannagongdirnar, og vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst.

Í juni 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *"arbeitt hevur verið við málinum í umsitingini og er málið komið so væl áleiðis, at tað kann verða lagt til politiska støðutakan í samgonguni í nærmastu framtíð."*

8.3 Frítíðarundirvísing (GL 2001/2 10 9-7)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing", sum broytt við Ll. nr. 124/2003, og K. nr. 6/1988 "um frítíðarvirksemi". Harafturat eru nógvar ásetingar gjørdar í rundskrivum.

Hóast Mentamálaráðið í oktober 2002 tók undir við, at fleiri av rundskrivunum eiga at verða gjørd til kunngerðir, er tað ikki gjørt enn.

Í frágreiðing okkara í februar 2003 vístu vit á, at hóast lógin ásetir, at landskassin veitir kommununum studning, er játtanin til frítíðarundirvísing ein rakstrarjáttan. Landskassin rindar lønirnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum fyri lønarútreiðslur til lærarar. Mannagongdin er sostatt ikki í samsvari við Ll. nr. 70/1983, har ásett er, at landskassin letur kommununum studning.

Síðani oktober 2002 hava skiftandi landsstýrismenn á hvørjum ári boðað frá, at teir hava tikið stig til, at fult samsvar fór at verða ímillum fyrisitingarligu mannagongdirnar og lógina um frítíðarundirvísing.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst. Men enn er einki broytt.

8.4 Bókamiðsølan (GL 2000/2 10 6-5)

Tilknýti til fíggjarlóg

Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti". Bókamiðsølan varð ikki umrødd í álitinum, men Fíggjarmálaráðið hevur eftirsíðan viðgjørt stovnin.

Niðurstøðan er, at Bókamiðsølan er ein landsstovnur. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógarheimild at verða veitt, soleiðis at virksemið hjá Bókamiðsøluni kann verða hildið uttan fyri fíggjarlógina. Somuleiðis eigur virksemið antin at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógarheimild at verða veitt, soleiðis at virksemið kann verða hildið atskilt frá landsroknskapinum.

Í november 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann *"hevur sett sær fyri at fáa viðurskiftini skipað á Bókamiðsøluni og arbeiðir við at fáa gjørt formligu reglurnar fyri hesum."*

Einskiljing/søla av Bókamiðsøluni

Í skrivi til Landsgrannskoðanina í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin í mentamálum boðað frá, at gjørt er av at niðurleggja Bókamiðsøluna og avhenda stovnin til eitt partafelag undir Føroya Lærarafelag, P/f Bókahøll.

Landsstýrismaðurin vísir til eitt skriv til Fíggjarmálaráðið 17. mars 2006, har Mentamálaráðið hevur greitt frá um ætlaðu søluna. Sambært skrivinum verður Bókamiðsølan tikin av, og P/f Bókahøll keypir allar ognir til bókingarvirðið og yvirtekur ognarar og skuldarar.

Víst verður á, at sambært ársroknskapinum 2005 er eginognin við árslok t.kr. 1.131, men gjørt verður vart við, at Bókamiðsølan hevur eina ikki skrásetta skuld til Bókadeild Føroya Lærarafelags t.kr. 1.627. Skuldin er íkomin, tí Bókamiðsølan av misgáum árini 1995-2004 hevur roknað sær tvær ferðir porto í sambandi við avgreiðslu av bókum hjá barnabókaklubbanum. Verður henda skuld drigin frá, er talan um eina negativa eginogn t.kr. 497. Sambært ársroknskapinum í 2005 gav Bókamiðsølan eitt hall t.kr. 543.

Spurdur, hevur landsstýrismaðurin í mentamálum í skrivi 1. desember 2006 greitt frá, at málið um at einskilja Bókamiðsøluna og avhenda ogn og skuld hjá stovninum til P/f Bókahøll ikki er lagt fyri Løgtingið til støðutakan.

Men landsstýrismaðurin vísir á, at málið er lagt fyri Fíggjarmálaráðið, Landsstýrið og Einskiljingarnevndina. Av fylgiskjølunum frá landsstýrismanninum sæst, at ætlaða sølan, uttan gjald, varð góðkend av Fíggjarmálaráðnum í apríl 2006, og í september 2006 hevur løgmansstjórin boðað frá, at Einskiljingarnevndin tekur undir við søluháttinum, sum Mentamálaráðið hevur lýst í skrivinum 17. mars 2006.

Vanliga krevur tað eina fíggjarheimild frá Løgtinginum at niðurleggja ein landsstovn og avhenda ogn og skuld, og sambært leiðreglunum um at einskilja fyritøkur landsins skal Løgtingið eisini samtykkja eitt møguligt uppskot um einskiljing.

Í januar 2007 hava vit spurt Fíggjarmálaráðið, Mentamálaráðið og Løgmansskrivstovuna, um tey eru samd við Landsgrannskoðanini í, at eitt tílíkt mál, um at niðurleggja/-

einskilja ein landsstovn og avhenda ogn og skuld, eigur at verða lagt fyri Løgtingið til støðutakan, áðrenn ein einskiljing/søla kann fara fram.

Vit hava eisini spurt, í hvønn mun leiðreglurnar "um at einskilja fyritøkur landsins" eru fylgdar í hesum máli, og vit hava m.a. víst á nøkur brot úr hesum reglum:

§ 2. Politisk samskipan

Avvarðandi landsstýrismaður hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja einskiljing av einstøku fyritøkuni samsvarandi Løgtingsins vilja.

§ 4. Arbeiðsbólkar og greiningar

Avvarðandi landsstýrismaður fær tilmæli frá viðkomandi arbeiðsbólki um søluhættir, eitt nú um søla skal fremjast við almennum partabrævaútboði á virðisbrævamarknaði, ella um tiltøk skulu setast í verk fyri at finna strategiskar- ella fíggjaríleggjarar uttan um ein virðisbrævamarknað.

Eftir at Løgtingið hevur samtykt uppskotið um einskiljing, skal arbeiðsbólkurin fáa til vega frá uttanhýsis ráðgevarum upplýsingar um marknaðarliga virðið av fyritøkuni, ið er grundað á nútíðarvirðið av framtíðar peningastreymi, fyritøkan kann skapa eigarum sínum og aðrar greiningar, ið eru neyðugar í sambandi við søluna.

§ 7. Kunngerð

Fyri at tryggja øllum pørtum javngóðan møguleika at vísa áhuga og at leggja fram boð, verður ítøkilig ætlan at selja landsfyritøku kunngjørd alment.

§ 9. Søla til strategiskar íleggjarar, fíggjaríleggjarar v.m.

Í førum, har ætlanin er at selja uttan alment partabrævaútboð, verður útbjóðingarumfar fyrireikað og framt. Endamálið við útbjóðingini er at tryggja sum mest av tilboðum frá íleggjarum við nøktandi eginleikum, ið skulu til fyri at tryggja framhald og menning av fyritøkuni, ætlanin er at einskilja. Innkomin tilboð verða mett eftir reiðupeningsvirði.

Tikið verður av keypstilboði, ið tryggjar bestu gjalding og hægsta prís í reiðupeningi, tó undantikið í førum, sum nevnd eru í § 5. Ónøktandi tilboð verða afturvíst.

§ 10. Upplýsingar

Landsstýrismaður skal, skjótast til ber, kunna almenningin um gongd og støðu í einskiljingarmálum, hann varðar av.

Roknskapargrannskoðan

Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe hevur grannskoðað roknskapin fyri 2005. Í grannskoðanarfrágreiðingini vísir grannskoðarin á, at "grannskoðanin av ársroknskapi stovnsins fyri 2005 hevur vístur, at stovnsins bókhald og innanhýsis mannagongdir ikki eru á einum nøktandi støði." Grannskoðarin vísir á fleiri ógreið viðurskifti:

- *at* kassin eigur at vera gjørdur upp regluliga,
- *at* stovnurin má fyri hvønn debitor tryggja eitt sporføri til teir einstøku kreditorarnar, fyri at verja seg móti tapi, um debitor fær fíggjarligar trupulleikar,
- *at* høvuðsbókhaldið og ognarabókhaldið samsvara ikki,
- *at* bókamiðsølan krevur bert 20% í mvg fyri sølugjald,
- *at* nevndin eigur at finna útav, hvørjar reglur skulu galda fyri trygdargrunnin hjá bókahandlunum, og gera upp, hvussu nógv hvør bókahandil eigur til góðar,
- *at* tá starvsfólk koyra fyri stovnin, skulu almennu takstirnir nýtast,
- *at* viðtøkurnar hjá stovninum eiga at verða dagførdar,

at stovninum vantar skrivligar virkisgongdir fyri øll týðandi virkisøki,

at funktiónsskilnaður eigur at vera millum atgongd til pening og atgongd til bókhald.

Grannskoðarin vísti eisini á fleiri av hesum viðurskiftum í grannskoðanarfrágreiðingini fyri 2004. Í februar 2006 lat nevndin fyri Bókamiðsøluna Mentamálaráðnum eina frágreiðing um nøkur viðurskifti, grannskoðarin ger vart við.

8.5 Yrkisskúlar (GL 2000/2 10 3-4)

Í februar 2001 vístu vit á, at hóast Ll. nr. 106/1998 "um yrkisskúlar" v.s.b. kom í gildi 1. januar 1999, hevur landsstýrismaðurin ikki ásett reglur, sum álagt honum í § 14 í lógini.

Í áravís hevur landsstýrismaðurin síðani boðað frá, at arbeitt verður við málinum.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst.

Í september 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlandi fór kunngerðin at verða lýst í 2006. Kunngerðin er ikki lýst.

8.6 Samskipan av virkseminum hjá sjómansskúlunum (GL 2000/2 10 4-5)

Í oktober 2001 spurdu vit landsstýrismannin, um hann hevði ætlanir um at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Tórshavn og í Klaksvík, vísandi til at samlaða næmingatalið var minkandi.

Skiftandi landsstýrismenn hava síðani fleiri ferðir boðað frá, at spurningurin um at samskipa fór at verða tikin upp.

Í juli 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ein arbeiðsbólkur skal lata landsstýrismanninum álit við árslok 2006.

8.7 Undirvísingarskylda hjá skúlastjórum (GL 2000/2 10 4-5)

Síðani í 2000 hava vit í frágreiðingum umrøtt, at stjórarnir á Maskinmeistaraskúlanum og Føroya Sjómansskúla ikki undirvísa skylduga tímatalið, og at setanarviðurskiftini hjá stjóranum á Maskinmeistaraskúlanum vóru ógreið og óformlig.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst.

Í august 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at spurningurin um undirvísingarskylduna hjá skúlastjórunum er loystur. Mentamálaráðið hevur endurskoðað og dagført undirvísingarskylduna hjá skúlastjóranum á Klaksvíkar Sjómansskúla, og ásett undirvísingarskyldu fyri skúlastjóran á Vinnuháskúlanum.

8.8 Føroya Læraraskúli (GL 2004/2 10 4-12)

Vantandi reglur fyri tímaútrokning og lønaráseting

Í oktober 2001 vístu vit á, at lønarumsitingin ikki í øllum førum byggir á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað, og vit mæltu til at bøta um viðurskiftini.

Niðurstøðan av grannskoðanini í 2004 var tann sama. Verður støði tikið í sáttmálanum við Magistarafelagið, og í einum skrivi frá "Undervisningsministeriet" 6. januar 1983, umframt teimum tulkingum og "óskrivaðu reglunum", sum Læraraskúlin hevur fyri

tímaútrokningum og lønarásetingum, eru útgoldnu lønirnar rættar; men sum vit hava gjørt vart við í fleiri ár, byggir lønarumsitingin ikki í øllum førum á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað. Vit heittu tí enn eina ferð á landsstýrismannin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í februar 2005 vísti landsstýrismaðurin á, at viðurskiftini viðvíkjandi tímaniðurskurði eru partur av málinum um at endurskoða arbeiðstíð, arbeiðsviðurskifti o.a. á Føroya Læraraskúla, sum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelagið 11. september 2001 gjørdu protokollat um. Í nýggjari semju millum partarnar 1. juli 2004 varð aftur víst til protokollatið frá 2001, og samstundis varð avtalað, at Fíggjarmálaráðið fór at taka stig til at fáa sáttmálaviðurskiftini í rættlag. Mentamálaráðið hevði tó einki frætt aftur í hesum máli.

Í februar 2006 heitti landsstýrismaðurin á Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um at taka alt málið upp við Magistarafelagið í sambandi við sáttmálasamráðingarnar. Lønardeildin hevur boðað Mentamálaráðnum frá, at Lønardeildin og Magistarafelagið hava havt fund, og at eitt av krøvunum frá Lønardeildini er, at ásetingarnar í sáttmálanum um Læraraskúlan skulu endurskoðast, tí nógvir trupulleikar eru og hava verið. Magistarafelagið hevur ynskt at seta ein arbeiðsbólk, sum kann endurskoða ásetingarnar sum heild.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið hevur ikki frætt aftur um málið, og at partarnir hava enn ikki gjørt nýggjan sáttmála.

Vantandi sáttmálaásetingar um lærarar, ið undirvísa pedagoglesandi

Lærarar, ið undirvísa læraralesandi, hava 19 tíma undirvísingarskyldu. Lærarar, ið undirvísa pedagoglesandi, hava sambært siðvenju 22 tíma undirvísingarskyldu.

Í januar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ósemja var um hetta mál, og at Mentamálaráðið hevði biðið Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um at taka málið upp við Magistarafelagið í komandi sáttmálasamráðingum.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hóast sáttmálaskeiðið var úti 1. oktober 2005, hava partarnir enn ikki gjørt nýggjan sáttmála.

8.9 Útbúgvingarstuðul og lán (GL 2006/2 10 9-10)

Stuðulsstovnurin umsitur studning og lán til fólk í útbúgving og krevur lánini innaftur. Lógargrundarlagið er Ll. nr. 45/1999 “um útbúgvingarstuðulsskipan” v.s.b. Við heimild í lógini eru 4 kunngerðir lýstar, sum áseta neyvari reglur á økinum. Ein nevnd arbeiðir við at endurskoða lógargrundarlagið.

Innaneftirlit

Landsgrannskoðanin hevur í 2006 grannskoðað umsitingina av útbúgvingarstuðli, og vit hava kannað mannagongdir og innaneftirlit í sambandi við útgjald av stuðli og lánum og innkrevjing av lánum.

Stuðulsstovnurin hevur 2 roknskaparreglugerðir. Eina fyri stovnsraksturin og eina fyri útgjald og umsiting av studningini og lánum. Vit hava mælt til, at roknskaparreglugerðirnar verða dagførdar.

Leiðslan hevur gjørt mannagongdirnar fyri stovnin og er ávegis at gera mannagongdir fyri útgjaldi av stuðli og lánum. Harafturat er leiðslan í ferð við at gera journalvegleiðing til journalskipanina hjá stovninum, sum varð tikin í nýtslu í juli 2003.

Vit kannaðu útgjaldskoyringina fyri mai 2006 og staðfestu, at eftirlitsvirksemið fór fram, sum ásett. Allar peningastovnskonturnar verða stemmaðar av regluliga, og samsvar var ímillum bókhaldið og kontuavrit frá peningastovnum pr. 31. mai 2006.

Landsgrannskoðanin hevur í 2006 havt samskifti við leiðsluna á Stuðulsstovninum um vandan fyri sviki ella mistøkum. Samanumtikið hevur leiðslan ikki varhugan av, at svik er komið fyri á Stuðulsstovninum. Hildið verður eisini, at innaneftirlitið byrgir upp fyri mistøkum og sviki, serliga skipanin við at tveir málsviðgerar skulu viðgera eina umsókn. Fyri at byrgja upp fyri sviki uttan fyri Stuðulsstovnin eru eisini fleiri tiltøk sett í verk.

Samanumtikið halda vit, at eftirlitsarbeiðið á Stuðulsstovninum er miðvíst og væl skipað, og at leiðslan og starvsfólk raðfesta hetta arbeiðið høgt.

Um upplýsingarskyldu, útgjaldingarhátt o.a.

Útrokningin av útbúgvingarstuðli er ikki heft at, hvat umsøkjarin ella foreldrini forvinna, og sambært § 29, litra 12, í skattalógini er útbúgvingarstuðul ikki skattskyldug inntøka.

Stuðul frá Stuðulsstovninum verður ikki longur goldin út um afturhaldsskipanina hjá Toll- og Skattstovuni. Tað merkir, at Almannastovan ikki kann leita sær upplýsingar í skattaskipanini um útgoldnan útbúgvingarstuðul, tá ið hon skal viðgera fíggjarligu viðurskiftini hjá lesandi, ið fær "annan almennan stuðul, ið er ætlaður til at gjalda livikostnað". Landsgrannskoðanin heldur, at tað hevði lætt um innaneftirlitið hjá Almannastovuni, varð útbúgvingarstuðulin goldin um afturhaldsskipanina.

Í § 15 í K. nr. 103/2000 v.s.b. eru ásetingar um upplýsingarskyldu hjá stuðulsmóttakara. Stuðulsmóttakarin skal skrivliga boða Stuðulsstovninum frá um persónlig viðurskifti, sum kunnu ávirka, um stuðulsmóttakarin framvegis kann fáa stuðul og hvussu nógv. Stuðulsmóttakarin skal m.a. boða frá, um hann fær annan almennan stuðul til livikostnað.

Lesandi, sum fáa stuðul, fáa ikki longur skrivið "roknaður útbúgvingarstuðul", har tey "beinleiðis" verða kunnað um m.a. treytirnar fyri lestrarvirkni, afturgjaldskyldu og upplýsingarskyldu mótvegis Stuðulsstovninum. Landsgrannskoðanin heldur, at tað kann gera eftirlitið veikari við, um rættur stuðul verður goldin út.

Stuðulsstovnurin vísir á, at vegleiðing við øllum neyðugum upplýsingum verður latin næmingunum á skúlunum, og at allar upplýsingar kunnu heintast á heimasíðuni hjá Stuðulsstovninum.

KT-viðurskifti

"Gamla" KT-skipanin á Stuðulsstovninum varð tikin í nýtslu í august 1993, men hon lýkur ikki øll krøv, sum verða sett til dokumentatión, brúkaravegleiðingar, brúkararættindi o.t. Váðameting er ikki gjørd, eingin neyðætlan finst, og ongar reglur eru um logg. Ábøtur á gomlu KT-skipanina verða ikki raðfestar høgt.

Á sumri 2004 varð fyrri partur (studningsparturin) av einari nýggjari KT-skipan tikin í nýtslu, og tí verður hesin parturin í gomlu KT-skipanini ikki nýttur.

Ætlanin er, at seinni partur av KT-skipanini (lánsparturin) skal verða tikin í nýtslu mánaðarskifti januar/februar 2007. Samstundis, sum KT-skipanirnar verða mentar, verður arbeitt við at skjalfesta, gera vegleiðingar o.t.

KT-skipanirnar hjá Stuðulsstovninum eru á ambætarum, ið standa í KT-rúminum hjá Mentamálaráðnum. Nýggja KT-skipanin hevur samband við útgjaldsskipanina í Búskaparskipan Landsins.

22. desember 2004 sendi Vinnumálaráðið út til aðalráðini og stovnar rundskriv um at seta í verk KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin fyri 1. februar 2006 byggir á standardarnar ISO 17799 og BS 7799-2. Sambært rundskrivinum skulu leiðslurnar gera eina ítøkiliga váðameting fyri egið ábyrgdarøki.

Stuðulsstovnurin lýkur ikki treytirnar í rundskrivinum.

Stakroyndir

Úr útgjaldskoyringini fyri mai 2006 valdu vit nakrar stakroyndir út til neyvari eftirlit.

Vit kannaðu, um útfylt umsóknarblað og neyðug skjalprógv vóru í málunum, og vit samanbóru útgjaldsupphæddirnar við ásetingarnar í kunngerðum og í vegleiðingarskrivum fyri skúlaárið 2005/06. Einki var at finnast at.

Út frá saldulistanum yvir lán ultimo mai 2006, sendu vit út saldufrásagnir fyri 36 lán/-eftirstøður. Vit hava fingið 24 aftur við váttan frá lántakarunum um, at skrásetta skuldin var røtt.

Av teimum 12, sum ikki hava svarað, eru 6, sum hava rindað regluliga hvønn mánað í 2005, 1 lántakari er undir útbúgving og skal ikki rinda lánið aftur enn, og 1 lántakari rindar onkuntíð. Toll og Skattstova Føroya hevur í 2005 heinta inn nakað av skuldini hjá einum lántakara. Eftir standa 3 lántakarar, teir búgva uttanlands og hava ongantíð goldið nakað inn. Lánini eru frá ávikavist 1990, 1995 og 1997.

Innheintan av eftirstøðum

Ultimo 2005 var lánsskuldin slakar 61 mió.kr. Sambært § 8 í lógini um útbúgvingarstuðul er síðani 1999 heimilað Toll- og Skattstovu Føroya at heinta inn skuld, ið stavar frá Stuðulsstovninum. Í august 2003 varð avtala undirskrivað ímillum Stuðulsstovnin og Toll- og Skattstovu Føroya um at heinta inn eftirstøður.

Í desember 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at øll lán í eftirstøðu hjá teimum, sum búgva í Føroyum, vóru send til innheintingar. Á fundinum í juni 2006 kunnaði leiðarin um, at 9,1 mió.kr. eru fluttar Toll- og Skattstovuni til innheintingar. Av teimum eru 5,7 mió kr. goldnar. Leiðslan á Stuðulsstovninum helt innheintingina virka væl.

Mentamálaráðið og Stuðulsstovnurin høvdu í 2004 fund og annað samskifti við Toll- og Skattstovuna um at heinta inn lestrarskuld hjá teimum, sum búgva uttanlands. Eingin loysn varð funnin tá. Talan er um skuld hjá 238 persónum, tilsamans 4,8 mió.kr.

Í 2006 er málið aftur tikið upp við Toll- og Skattstovuna. Á fundi millum landsstýrismenninar í mentamálum og fíggjarmálum er avtalað, at Stuðulsstovnurin einsamallur fær uppgávuna at krevja hesa skuld inn. Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 er játtanin til Stuðulsstovnin hækkað *"til at gjalda fyri innkrevjing av útistandandi skuld uttanlands"*.

8.10 Stuðul til mentan og ítrótt (GL 2000/2 11 9-1)

Í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 vístu vit á, at umsitingin av studningi til mentanarendamál sum heild tyktist at vera fløkt og óskipað. Í ávísan mun er talan um fleirfaldað málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Eftir okkara tykki er tørvur á einari sanering/upprudding viðvíkjandi studningsgrundarlagi/-lóggávu og studningsumsiting, so endamál, treytir o.a. verða greiðari, og tað slepst undan dupultarbeiði o.s.fr.

Í frágreiðingini í februar 2003 umrøddu vit umsitingina av fleiri studningsjáttanum, sum Mentamálaráðið fyrisitur, og har studningur serliga verður latin feløgum at umsita. Vit vístu á, at Mentamálaráðið hevur ikki ásett leiðreglur ella treytir fyri, hvussu hesi feløg skulu umsita studningin, t.d. reglur um fíggjarætlan, eftirlit, roknskaparhald og grannskoðan.

Í mai 2005 kom í gildi Ll. nr. 60/2005 "um stuðul til mentan og list v.m."

Í § 2, stk. 3, í lógini stendur, at *"Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð neyvari treytir og reglur fyri, nær og hvussu stuðul verður játtaður, herundir krav um fíggjarætlan, eftirlit,*

upplýsingarskyldu, roknskap og grannskoðan hjá stuðulsmóttakara og um møguliga afturrindan av stuðli."

Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett neyvari treytir og reglur í kunngerð. Í februar 2006 boðaði Mentamálaráðið frá, at uppskot til kunngerð er gjørt, og kunngerðin verður væntandi lýst heilt skjótt.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at kunngerðin var liðug at fara til umrøðu á landsstýrisfundi, og síðani til løgfrøðiliga eftirkanning.

Kunngerðin er ikki lýst.

8.11 Listasavn Føroya (GL 2002/2 11 2-8)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2004 umrøddu vit játtanar-, roknskapar- og ognarviðurskiftini hjá Listasavni Føroya.

Í januar 2005 greiddi landsstýrismaðurin frá, at viðurskiftini millum sjálvsognarstovnin og stovnsraksturin enn ikki vóru greidd, og arbeitt varð við at endurskoða viðtøkurnar hjá Listasavninum. Tá ið tað arbeiðið verður liðugt, verður eisini greitt, hvussu roknskapurin skal verða fórdur í framtíðini, ásannandi at verandi framferðarháttur, har eitt møguligt rakstraravlop tilvildarliga verður býtt millum eginrakstur og stovnsrakstur, ikki kann halda fram. Mentamálaráðið væntaði, at arbeiðið fór at verða liðugt á vári 2005.

Í november 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at viðurskiftini millum sjálvsognarstovnin og stovnsraksturin enn ikki vóru greidd. Landsstýrismaðurin ætlaði at raðfesta hesa uppgávu soleiðis, at hon varð liðug veturin 2005/06.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004, (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann hevur sett ein arbeiðsbólk at loysa málið. Landsstýrismaðurin ger vart við, at málið er sera umfatandi, og nógv fyrilit eru at taka, bæði løgfrøðiliga og fyrisitingarliga. Landsstýrismaðurin heldur, at arbeiðsbólkurin kann koma við einum tilmæli síðst í februar 2007.

8.12 Kirkjugrunnurin (GL 2000/2 11 6-3)

Lógargrundarlag

Kirkjugrunnurin verður fyrisitin sambært:

- "Anordning nr. 887 af 8. december 1999 om ikrafttræden for Færøerne af lov om folkekirkens økonomi, som ændret ved anordning nr. 1602 af 20. december 2006".
- K. nr. 12 frá 11. februar 2000 "um Kirkjugrunnin".

Í § 24, stk. 1, í "lov om folkekirkens økonomi" er ásett, at *"Til dækning af de i § 23 nævnte udgifter ydes af landskassen et årligt tilskud."*

Í § 25, stk. 2, í lógini er ásett, at *"Stiftsøvrigheden over Færøernes Stift aflægger regnskab for Færøernes Kirkefond til Landsstyret efter bestemmelser fastsat af Landsstyremanden for Kirkelige Anliggender."*

Landsstýrismaðurin hevur í § 1, stk. 2, í K. nr. 12/2000 "um Kirkjugrunnin" ásett, at bókhaldið hjá grunninum verður skipað eftir somu ásetingum, sum galda fyri roknskaparhaldið hjá Stiftsstjórnini.

Endamálið við studningi úr Kirkjugrunninum

Í § 23 í "lov om folkekirkens økonomi" er ásett, at:

Færøernes Kirkefond afholder halvdelen af udgifterne vedrørende befordringsgodtgørelse til præsterne på Færøerne.

Af Færøernes Kirkefond kan der efter bestemmelser fastsat af Landsstyremanden for Kirkelige Anliggender ydes tilskud til hel eller delvis dækning af udgifter, som nævnt i § 2, stk. 1, nr. 1.

Landsstyremanden for Kirkelige Anliggender kan fastsætte regler om henlæggelse af en del af Færøernes Kirkefonds indtægter til en reservefond og om denne fonds anvendelse.

Tær útreiðslur, sum víst verður til í § 2, stk. 1, nr. 1, eru m.a. viðlíkahald og rakstur av kirkjum, sum kirkjukassarnir eisini skulu fíggja. Meginparturin av inntøkunum hjá kirkjukassunum stava frá kirkjuskattinum, og verður studningurin úr Kirkjugrunninum sostatt nýttur til sama endamál sum kirkjuskatturin.

Meginparturin av útreiðslunum hjá grunninum er studningur til viðlíkahald og umbygging av kirkjunum. Játtanin á fíggjarlógini til grunnin hevur seinnu árini ligið um 3 mió.kr.

Fleiri kirkjur, ið fáa studning úr Kirkjugrunninum afturat kirkjuskattinum, hava avlop ella seta pening av til ávís endamál og økja um samlaðu peningaognina.

Tað tykist tilvildarligt, um útreiðslur til viðlíkahald av kirkjum verða fíggjaðar við kirkjuskatti ella við studningi úr Kirkjugrunninum. Eitt serligt dømi er studningurin, ið varð latin ávísum kirkjukassum sum "endurgjald" fyri, at kirkjuskatturin í 2003 varð lægri, enn mett var frammanundan.

Sum víst á framman fyri kemst tað av, at kirkjuskatturin og studningurin úr Kirkjugrunninum at kalla fer til sama endamál, og at roknað verður við árligu játtanini á løgtingsfíggjarlógini til Kirkjugrunnin, tá ið fíggjarætlanirnar hjá kirkjukassunum verða viðgjørdar av próstadømisráðnum.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann er samdur í, at tað kann tykjast tilvildarligt, um kirkjugrunnurin ella kirkjuskatturin fíggjar útreiðslurnar til viðlíkahald og umbygging av kirkjum. Henda tilvild er beinleiðis ásett í lógini, tí talan er um eina dupultheimild.

Sum lógin er orðað, eiga útreiðslur til at halda kirkjur annaðhvørt at kunna verða fíggjaðar við kirkjuskatti ella við studningi úr Kirkjugrunninum. Einasti munur er, at fíggingin úr kirkjugrunninum skal vera eftir umsókn frá avvarðandi kirkjuráði í ítøkiliga førinum. Mentamálaráðið heldur ikki, at til ber at broyta hesa mannagongd uttan at broyta lógina.

<u>Vantandi reglur um umsiting av studningi úr Kirkjugrunninum</u>

Sambært § 22 og § 23, stk. 2, í "lov om folkekirkens økonomi", er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur um, hvussu Stiftsstjórnin skal stjórna grunninum og um studningsveitingar úr grunninum. Tað hevur landsstýrismaðurin gjørt soleiðis í K. nr. 12/2000 "um Kirkjugrunnin":

§ 1, stk. 1: Stiftsstjórnin stjórnar grunninum og hevur bókhaldið hjá grunninum um hendi.

§ 4, stk. 2: Stuðul verður veittur eftir umsókn frá avvarðandi kirkjuráði.

§ 4, stk. 3: Stiftsstjórnin ásetir sjálv, hvørjar mannagongdir eiga at verða fylgdar, tá søkt verður um studning.

Landsstýrismaðurin hevur ikki sjálvur ásett nakrar reglur, men latið tað upp til Stiftsstjórnina at áseta, hvussu mannagongdirnar skulu vera. Av tí at Stiftsstjórnin onga heimild

hevur at gera slíkar reglur, hevur hon ikki gjørt tær. Vit hava áður vístá, at landsstýrismaðurin kann ikki "delegera" hesa uppgávu til Stiftsstjórnina í einari kunngerð.

Í november 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at taka málið upp til nýggja meting, so neyvar reglur kunnu verða gjørdar.

Vantandi ásetan av reglum um fíggjarviðurskifti

Sambært § 6, stk. 3, § 10, stk. 2, og § 12, stk. 1, í "lov om folkekirkens økonomi", er álagt landsstýrismanninum at áseta neyvari reglur um:

- udarbejdelse af budgetter for kirkekasserne,
- stiftsøvrighedens (Stiftsstjórnin) godkendelse af kirkekassernes budget,
- regnskabernes aflæggelse,
- benyttelse af regnskabskyndig bistand i forbindelse med regnskabernes tilrettelæggelse og aflæggelse og ved kasseeftersyn,
- revision,
- provstiudvalgets (próstadømisráðið) godkendelse af regnskaberne.

Tað hevur landsstýrismaðurin gjørt soleiðis í K. nr. 14/2000 "um kirkjukassar":

§ 2, stk. 2: Stiftsstjórnin kann áseta reglur fyri, hvussu fíggjarætlanin skal setast upp og skipast.

§ 5, stk. 2: Stiftsstjórnin kann áseta reglur fyri, hvussu roknskapurin skal setast upp.

Landsstýrismaðurin hevur sostatt ikki ásett reglur í kunngerðini, men einans skrivað, at Stiftsstjórnin kann áseta neyvari reglur. Vit hava aftur vístá, at landsstýrismaðurin kann ikki í einari kunngerð "delegera" hesa uppgávu út til Stiftsstjórnina.

Í november 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at taka hesi viðurskifti upp til nýggja viðgerð.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann heldur tað vera mest skynsamligt at raðfesta uppgávuna at gera nýggja lóggávu og nýggja fíggjarskipan, framum at gera ábøtur á eina skipan, ið kortini bert skal virka til á ólavsøku í 2007.

Við hesi raðfesting verður millum annað uppskot til føroyska lóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar lagt fyri Tingið í februar 2007. Eftir ætlan loysir nýggja lógin allar trupulleikarnar, ið Landsgrannskoðanin vísir á.

9 Innlendismál

9.1 Ítróttavedding (GL 2001/2 02 1-3)

Sambært § 11 í Ll. nr. 34/1999 "um ítróttavedding v.m." skal Landsstýrið flyta peningin, *"sum tilkemur heimastýrinum at býta til almannagagnlig endamál"* til Sp/f Ítróttavedding. Tá ið sett er av til fyrisiting, skal felagið sambært § 9, stk. 1, býta peningin soleiðis:

- 60% til ítróttaendamál (ÍSF),
- 20% til barna- og ungdómsendamál (FUR),
- 20% til landsstýrismannin í mentamálum at stuðla ymiskum barna- og ungdómsarbeiði.

Í frágreiðingini í februar 2003 vísti Landsgrannskoðanin á, at í nógvum førum verður hesin studningur ikki samskipaður við aðrar samlíkar studningsjáttanir, ið Mentamálaráðið í flestu førum varðar av. Á s. 75-79 í frágreiðingini í februar 2003 vórðu nakrar av hesum játtanum umrøddar.

Samanumtikið var niðurstøða okkara, at á hesum málsøki, eins og á øðrum, kunnu fleiri stovnar/feløg fáa studning til somu endamál frá fleiri studningsjáttanum. Í ávísan mun er talan um fleirfaldaða málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Umsitingin av studningi er fløkt, óskipað og merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð og útgjalding. Eftir okkara tykki er tørvur á at bøta um studningsgrundarlagið/-lóggávuna og studningsumsitingina, so at endamál og treytir o.a. verða greiðari, og fyri at sleppa undan dupultarbeiði.

Gjøllari reglur um roknskap og grannskoðan ikki ásettar

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at í § 7B í donsku veddingalógini er ásett, at *"Det enkelte ressortministerium og hjemmestyrene fastsætter nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision med hensyn til midler, som efter §§ 6B-6I fordeles til private organisationer."*

Í Danmark hevur "Undervisningsministeriet" í Bek. nr. 15/1999 *"om regnskabsaflæggelse for og revision af tilskud til støtte af ungdomsformål"* sett krøv um m.a. fyrisitingargrannskoðan, sum er "fíggjarligi kritiski" parturin av grannskoðanini, og sum fevnir um metingar av, um stovnur/felag hevur loyst sínar uppgávur á ein sparnan og virknan hátt, og um úrslitini svara til endamál og fyritreytir fyri játtanunum.

Í Grønlandi hevur heimastýrið í "Landstingslov om fordeling af tips- og lottomidler" ásett, at studningurin skal verða rindaður aftur, hevur umsøkjarin givið skeivar upplýsingar. Fólkatingslógin heimilar landsstýrunum at áseta reglur um viðgerð og góðkenning av umsóknum, um treytir fyri studningi, um at útvega upplýsingar og at áseta reglur um roknskap og grannskoðan.

Í Føroyum hevur Løgtingið ongar tílíkar reglur sett í Ll. nr. 34/1999 "um ítróttavedding v.m.", og heldur ikki er heimilað/álagt landsstýrismanninum at áseta tílíkar reglur. Vanliga áliggur tað landsstýrismanninum í rímiligan mun at føra eftirlit og seta reglur. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at mótvegis Løgtinginum hevur landsstýrismaðurin ábyrgdina av, at játtanir á fíggjarlógini, eisini tær sum meginfeløg o.o. umsita, verða umsitnar rætt, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt.

Innlendismálaráðið helt í oktober 2004, at slíkar reglur áttu at verið gjørdar fyri Føroyar, men vísti á, at orkan í føroysku fyrisitingini er avmarkað. Innlendismálaráðið kunnaði samstundis um, at vegna stóra skerjing í Innlendismálaráðnum vóru veddingamál ikki raðfest í 2005, og tí verður í fyrsta lagi vent aftur til hetta mál í 2006.

Lóg um ítróttavedding kom í gildi í apríl 1999 og hevur sostatt virkað í sløk 8 ár. Eftir okkara tykki er tað ikki nøktandi, at føroyska heimastýrið ikki enn hevur ásett *"nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision"*, og ongar ætlanir hevur havt um at taka málið uppaftur fyrr enn í 2006.

Í februar 2006 boðaði Innlendismálaráðið frá, at ráðið var ikki ósamt við Landsgrannskoðanina í, at slíkar reglur eiga at verið gjørdar í Føroyum. Hinvegin er arbeiðsorkan í føroysku fyrisitingini sera avmarkað í mun til t.d. donsku fyrisitingina, og má tað tí ásannast, at tað ikki ber til at gera eins nógvar reglur í Føroyum, sum í t.d. Danmark, í øllum førum ikki líka skjótt. Landsstýrismaðurin hevur ongar ítøkiligar ætlanir um at gera slíkar reglur. Hildið verður framvegis, tá hugsað verður um samlaðu arbeiðsorkuna, at skulu slíkar reglur verða gjørdar í Føroyum, eiga tær at verða gjørdar antin av einum ávísum aðalráði/myndugleika, ella í felag av teimum aðalráðum, sum hava tørv á slíkum reglum.

Í september 2006 boðaði Innlendismálaráðið frá, at einki nýtt var hent í málinum.

Í skrivi 13. oktober 2006 til Rættarnevndina hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *"Landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur ongar leiðreglur gjørt og hevur, sum er, ikki tikið avgerð um, í hvønn mun Innlendismálaráðið eigur at raðfesta hesa uppgávu."*

Í ummælisskrivi sínum 18. oktober 2006 til Fíggjarnevndina er Rættarnevndin av teirri fatan, at eingin peningur eigur at verða goldin út, fyrr enn leiðreglurnar eru gjørdar.

9.2 Hin føroyski Happadrátturin (GL 2001/2 02 1-3)

Í februar 2002 vísti Landsgrannskoðanin á, at seinastu 10 árini hevði nettovinningurin av Happadráttinum í miðal verið um 1,4 mió.kr. og fyrisitingarútreiðslurnar 0,9 mió.kr. Sostatt lá árliga yvirskotið í miðal um 0,5 mió.kr. Yvirskotið árini 2000 - 2005 hevur ligið frá 21 t.kr. til 344 t.kr.

Í februar 2006 tók landsstýrismaðurin málið upp á landsstýrisfundi, har hann bað um undirtøku fyri at taka Happadráttin av 30. juni 2006. Undirtøka var ikki í Landsstýrinum. Happadrátturin verður tí fyribils rikin víðari, til onnur politisk avgerð verður tikin.

Sambært álitinum til fíggjarlóg 2007 heldur Fíggjarnevndin, at Happadrátturin eigur at verða endurskoðaður og nútímansgjørdur.

9.3 Roknskaparviðurskifti hjá kommununum (GL 2002/2 02 3-1)

Sambært § 47 í Ll. nr. 87/2000 "um kommunustýri" kann landsstýrismaðurin *"áseta nærri reglur um kontuskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tílíkt."*

Í november 2002 spurdi Landsgrannskoðanin løgmann, hvørjar reglur vóru ásettar, og um løgmaður helt tær vera nøktandi.

Í desember 2002 boðaði Løgmansskrivstovan frá, at Løgmálaráðið sat fyri hesum málsøki, og tí varð skrivið sent teimum at svara.

Í februar 2003 greiddi Løgmálaráðið/Innanríkisdeildin frá, at ein leiðbeining frá 1992, um at seta upp kommunalar fíggjarætlanir og roknskapir, enn var galdandi. Innanríkisdeildin helt ikki viðurskiftini vera nøktandi. Nakrar kommunur høvdu lagað skipanirnar eftir egnum tørvi, og til bar ikki at samanbera roknskapir ímillum kommunur ella ímillum land og kommunur. Ætlanin var at endurskoða roknskaparverkið hjá kommununum, og við heimild í § 47 í kommunustýrislógini at áseta neyvari og nøktandi reglur á økinum.

Í mars 2004 boðaði Innlendismálaráðið frá, at arbeiðið var ikki byrjað, tí val varð skrivað út. Ætlanin var at taka arbeiðið upp aftur, tá støða var tikin til arbeiðssetningin.

Í september 2004 vísti Gjaldstovan á, í ummæli sínum til uppskotið til løgtingslóg um barnavernd (Lm. nr. 10/2004):

"Tað er ein trupulleiki at flyta fíggjarligar uppgávur út til kommunurnar, sum ikki hava nakrar ásettar treytir um roknskaparverkið, t.d. eina felags kontuskipan ella eina roknskaparkunngerð, sum landið hevur. Tað er torført hjá Tinginum at taka avgerð um at flyta umsitingina av einari uppgávu, sum er so regulerað, til eitt annað almannaverk – í hesum føri kommunur, har tað ikki verða sett krøv – tí alt verður fíggjað við skattaborgarans peningi.

Nú kenni eg einki til, hvørjar skrásetingarskipanir eru neyðugar útyvir eina roknskaparskipan, men tað kundi hugsast, at neyðugt er við øðrum fyrisitingarligum KT-loysnum, har krav er um at uppfylla sokallaðu trygdarkunngerðina, sum fór at virka 1. september 2004.

Gjaldstovan hevur fleiri ferðir peikað á, at um ikki tað verður stovnsett eitt vælvirkandi KT-undirstøðukervi fyri tað kommunala økið, so verður hetta ein forðing fyri at flyta uppgávur frá landi til kommunur."

Í 2004 vóru fleiri fundir millum Innlendismálaráðið, Fíggjarmálaráðið og kommunufeløgini um eina felags roknskaparskipan, har Fíggjarmálaráðið m.a. greiddi frá Búskaparskipan Landsins, Kontuskipan Landsins og konteringarleiðbeiningini, uttan at komið varð til nakra semju um at nýta hesar skipanir.

Eftir at kommunufeløgini høvdu skipað seg av nýggjum eftir kommunuvalið, varð fundur aftur hildin í mars 2005 millum formenninar í kommunufeløgunum og landsstýrismenninar í innlendismálum og fíggjarmálum um eina arbeiðsætlan.

Í mai 2005 varð upprit um "strategi 2015" á kommunala økinum lagt fyri Landsstýrið. Partur av ætlanini var, at ein fíggjarstýringarskipan skuldi verða gjørd, sum skuldi standa kommununum í boði at nýta ella regluliga fráboða til. Skipanin skuldi tryggja gjøgnumskygni í kommunala geiranum og samstundis tryggja samanberingargrundarlag millum kommunurnar. Sambært landsstýrismanninum varð málið viðgjørt, og onkrar smærri fyrireikingar gjørdar, *"men síðst í november varð staðfest, at ongin avgerð var tikin um strategi á kommunala økinum. 2. november 2005 tekur nýggjur landsstýrismaður við í Innlendismálum."*

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann ætlar at leggja stóran dent á, at arbeiðið við kunngerð, kontuskipan og vegleiðing verður framt og liðugt komandi vár (2007).

Samskifti við landsstýrismannin

Løgtingsgrannskoðararnir hava fleiri ferðir heitt á landsstýrismannin um at tryggja, at reglurnar um roknskaparviðurskifti o.a. hjá kommununum verða endurskoðaðar og dagførdar, og at roknskaparviðurskiftini verða samskipað. Løgtingsgrannskoðararnir hava eisini vístá, at nú fleiri uppgávur verða fluttar kommununum, er tað umráðandi at tryggja, at roknskapar- og KT-viðurskiftini koma í eina tryggari legu. Løgtingsgrannskoðararnir hava átalað, at ikki nóg mikið er gjørt fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum umsitur kommunumál og hevur ábyrgdina av lóggávuni um kommunal mál, herímillum hoyra stjórnan av kommununum og eftirlit við teimum. Ein landsstýrismaður hevur rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum eru løgd til hansara, og tað áliggur honum, í rímiligan mun, at føra eftirlit við og áseta reglur á sínum málsøki.

Í september 2006 boðaðu vit landsstýrismanninum frá, at Landsgrannskoðanin ikki kundi góðtaka ferð eftir ferð at fáa ógreið og óformlig svar frá øðrum í Innlendismálaráðnum, tá ið vit settu fram spurningar til landsstýrismannin í einum so týðandi máli.

Í svarskrivi sínum í oktober 2006 ásannar landsstýrismaðurin, at tað hevur gingið striltið við at fáa skipað roknskaparviðurskiftini hjá kommununum á nøktandi hátt, og at arbeiðið hevur gingið illa og alt ov seint.

Landsgrannskoðanin heldur, at ábyrgdin av at áseta nærri reglur um kontuskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap o.t., umframt ábyrgdin at hava eftirlit við hesum pørtunum av virkseminum hjá kommununum, eigur at vera flutt til Fíggjarmálaráðið. Innlendismálaráðið hevur ikki førleikan á hesum øki.

10 Almanna- og Heilsumál

10.1 KT-viðurskifti á Almannastovuni (GL 2004/2 07 1-5)

Niðanfyri hava vit kunnað um støðuna viðvíkjandi KT-viðurskiftunum á Almannastovuni í mun til tilmæli okkara í frágreiðingini frá juli 2000.

I. VFS-SKIPANIN

1. januar 2000 varð VFS-skipanin á Almannastovuni tikin í nýtslu. Skipanin er ein journal-, málsviðgerðar-, útrokningar- og útgjaldsskipan, ið verður nýtt til at gjalda út fólkapensjón, fyritíðarpensjón, forsorgarveitingar, barnaforsorgarveitingar o.a., tilsamans umleið 800 mió.kr. um árið.

Í juli 2000 gjøgnumgingu vit skipanina við støði í FSR-grannskoðanarvegleiðing nr. 14, "Vejledning om revision i virksomheder, som anvender edb". Vit sendu landsstýrismanninum eina frágreiðing, ið vísti, at KT-viðurskiftini á Almannastovuni vóru ikki nóg trygg, og vit mæltu til fleiri ábøtur.

Vit hava síðani havt samskifti við Almannastovuna og landsstýrismannin um, hvussu gongst við arbeiðinum, og hvørji tiltøk eru sett í verk.

Síðani 2000 eru ásettar reglur og krøv um KT-trygd í landsumsitingini, t.d. í:

- roknskaparrundskrivinum, serliga í pkt. 8 og 10,
- Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum" v.s.b., serliga í § 31, stk. 3,
- K. nr. 28 frá 27. februar 2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum", ið neyvari greinar ítøkilig krøv til trygdartiltøk eftir § 31, stk. 3, í persónsupplýsingarlógini,
- KT-trygdarpolitikki Føroya Gjaldstovu, ið ásetir krøv til stovnar, ið samskifta við Búskaparskipan Landsins,
- rundskrivi Vinnumálaráðsins 22. desember 2004 um KT-trygd, ið ásetir, at leiðslurnar fyri 1. februar 2006 skulu lúka krøvini í trygdarstandardunum ISO 17799 og BS 7799-2.

II. AÐRAR SKIPANIR

Almannastovan nýtir eina journalskipan (ScanJour) og eina HP3000 teldu til forskotsrindan av barnapeningi, til dagpeningaskipanina og til lønir.

III. VÁÐAMETING AV KT-KERVINUM

Í september 2005 fekk Almannastovan handaða eina váðameting, sum eitt grannskoðarafelag hevði gjørt av KT-kervinum. Í váðametingini er vístá fleiri viðurskifti, sum ikki eru nóg trygg. Váðametingin fevnir um VFS-skipanina, ScanJour og Oracle Dátugrunnin. Aðrar skipanir eru eisini í váðametingini (dagpeningaskipanin, aðrar skipanir, sum hoyra til virksemið hjá Hjálpartólamiðstøðini o.a.).

Sambært almannastjóranum í juni 2006 hevði Almannastovan stórt sæð ongan pening til at bøta um teir veikleikar í KT-trygdini, sum váðametingin vísir á, og at eingin broyting er gjørd í VFS-skipanini, síðani váðametingin varð gjørd.

Í desember 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannastovan hevur vístá fleiri økir í KT-trygdini, ið bøtt kann verða um primo 2007.

IV. ARBEIÐIÐ VIÐ NÝGGJARI KT-SKIPAN

VFS-skipanin varð ment í 1997-1999 og tikin í nýtslu 1. januar 2000, uttan at Almanna- og Heilsumálaráðið og Almannastovan fyrst søktu Fíggjarmálaráðið um loyvi sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini.

Í februar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ein forkanning, í sambandi við menning av nýggjari avgreiðslu- og kunningarskipan á Almannastovuni, var um at verða liðug. Eitt aðalmál við hesari forkanning er, at nýggja KT-skipanin, sum skal fevna um alt kjarnuvirksemið á Almannastovuni, skal lúka allar ásetingar í roknskaparkunngerðini og í lóg/kunngerð um persónsupplýsingar. Føroya Gjaldstova er við í forkanningunum og verður somuleiðis við í menningini av nýggju skipanini fyri at tryggja, at øll krøv, ásett í roknskaparkunngerðini, verða fylgd.

Í november 2006 kunnaði Almannastovan landsstýrismannin um kravfestingina av nýggju KT-heildarskipanini, sum í minsta lagi kostar 18 mió.kr., men sum fult útbygt fer at kosta umleið 36 mió.kr. Væntandi verður talan um eina verklagslóg, sum fevnir um eitt 3 ára prosjekt, og ætlanin er at bjóða uppgávuna út alment.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 er eingin játtan til KT-trygdararbeiðið ella til at nútímansgera KT-skipanirnar á Almannastovuni.

Í desember 2006 helt landsstýrismaðurin, at verklagslógin væntandi verður løgd fyri Løgtingið fyrst í 2007. Støða er ikki enn tikin til samlaða kostnaðin, og enn er ikki endaliga gjørt av, hvørjir partar av skipanini eru neyðugir her og nú, og hvørjir kunnu bíða.

V. TRUPULLEIKAR, TENGDIR AT VERANDI KT-SKIPANUM

Herd krøv til KT-trygd

Í februar 2005 sendi Vinnumálaráðið út rundskriv um KT-trygd. Treytirnar í rundskrivinum skuldu vera loknar fyri 1. februar 2006.

Almannastovan er eisini fevnd av krøvunum í § 31, stk. 3, í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum og kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

Í frágreiðingini í mars 2005 til løgtingsgrannskoðararnar vístu vit á, at Almannastovan ikki lýkur øll krøvini, og at tað tí var neyðugt, at Almannastovan straks fór undir eina skipaða tilgongd.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at KT-trygdararbeiðið verður skipað við støði í váðametingini frá september 2005.

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2006 varð skotið upp at hækka játtanina til Almannastovuna 1,5 mió.kr. til KT-trygdina. Meirilutin í Fíggjarnevndini mælti til at hækka játtanina 750 t.kr. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Umsókn um undantaksloyvi frá Dátaeftirlitinum

Í juni 2006 boðaði almannastjórin frá, at Almannastovan hevði orðað ein KT-trygdarpolitikk fyri stovnin, sum tó ikki var settur í verk, tí tað var ov kostnaðarmikið. (Í november 2006 fekk Landsgrannskoðanin útflýggjað ásetingar um KT-stevnumið/KT-politikk, og KT-trygdarpolitikk, sum Almannastovan hevði orðað liðugt í oktober 2006).

Almannastovan søkti í mars 2006 Dátueftirlitið um loyvi at "útseta" nøkur av teimum "tungu økjunum".

Sambært skrivinum søkti Almannastovan Dátueftirlitið um:

1. at leingja tillagingartíðina til 31. august 2006 fyri tey tiltøk, sum hildið verður kunnu gerast beinanvegin, og

2. at onnur tiltøk, sum krevja stórar skipanarligar umleggingar og eru kostnaðarmiklar, verða tikin við í menningina av nýggju KT-skipanini.

Í november 2006 hevði Dátueftirlitið ikki svarað skrivinum, helst tí einki starvsfólk er at taka sær av tílíkum samskifti.

Um at skjalfesta skipan og mannagongdir

Í juli 2000 mæltu vit til sum skjótast at greina krøvini til at skjalfesta skipanina og mannagongdirnar á Almannastovuni, at savna og skipa skjalfestingina, og at gera reglur fyri at varðveita og dagføra hana. Sum nevnt, eru í dag alsamt fleiri krøv til KT-trygd, eisini til skipaðar skjalfestingar.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki nakra skipanarskjalfesting, sum lýsir, hvussu skipanirnar virka, hvussu dátastreymar eru o.s.v.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tær flestu KT-skipanirnar á Almannastovuni eru skjalfestar, men skjalfestan av øllum virksemi í skipanunum finst ikki savnað. At gera hetta arbeiði er kostnaðarmikið (um 300 t.kr.) .

Í november 2006 hevur Almannastovan greitt frá, at einki er hent viðvíkjandi skipanardokumentatión.

Førleiki á KT-deildini

Í juli 2000 mæltu vit til, at hóskandi útbúgving varð bjóðað starvsfólkunum á KT-deildini, serliga til at umsita brúkarar og at logga. Einki er ásett um, hvønn førleika KT-starvsfólk á Almannastovuni skulu hava.

Í desember 2004 svaraði landsstýrismaðurin, at starvsfólk á Almannastovuni tóku skeið í KT-trygd og persónsupplýsingarlógini, umframt at arbeitt varð við serligari útbúgvingarætlan fyri KT-økið.

Í februar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at starvsfólk á KT-deildini høvdu í 2005 fingið neyðuga útbúgving í at umsita brúkarar og at "logga" nýtsluna av kervinum.

Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at formlig lýsing av teimum førleikakrøvum, sum ein deild eigur at hava, varð gjørd fyri 2006-2007. Í tí sambandi var gjørt eitt yvirlit yvir ta eftirútbúgving, sum starvsfólkini á deildini skuldu hava. Talan er m.a. um skeið og eftirútbúgving í KT-trygd og persónsupplýsingarlógini, og í umsiting av fakskipanum, dátugrunnum, heimasíðu/intraneti o.a.

Landsgrannskoðanin skal í hesum sambandi viðmerkja, at Almannastovan er sera nógv merkt av stórari starvsfólkaútskifting á KT-deildini, og nógvir leiðarar hava verið á deildini. Almannastovan hevur roynt at leggja KT- og fíggjardeildina saman, men tað hevur víst seg at vera ov tungt, og deildirnar eru síðani skildar sundur aftur í sjálvstøðugar eindir. Sambært Almannastovuni verður ein leiðari settur frá 1. februar 2007, og verður deildin tá mannað við tveimum starvsfólkum og einum leiðara.

Broytingarmannagongd

Í juli 2000 mæltu vit til at gera reglur fyri, hvussu farast skuldi fram, vórðu broytingar gjørdar í skipanini. Reglurnar skuldu tryggja, at broytingar fóru fram undir skipaðum viðurskiftum, at skjalfesting varð útvegað, og at krøv vórðu sett til skjalfestingina.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki formligar mannagongdir fyri at stýra broytingum.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at farast skuldi sum skjótast undir at gera reglur um mannagongdir, í sambandi við at broytingar verða gjørdar í skipanum og skráum.

Í november 2006 boðaði Almannastovan frá, at arbeiðið er í gongd, og verður væntandi liðugt í 2007.

Uttanhýsis samskiftislinjur

Eingin skrivlig lýsing er av uttanhýsis samskiftislinjunum. Í 2000 mæltu vit til at gjøgnumganga tær, fyri at tryggja Almannastovuna ímóti óynsktari atgongd.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ongar serstakar eftirlitsskipanir á hesum øki.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tráðleysa sambandið millum Almannastovuna og P/f Elektron var tikið niður, og at ein ljóskaðal var tikin í nýtslu í staðin fyri. Annars samskiftir Almannastovan við veitarar og umheimin gjøgnum DNL og SamNet.

Í november 2006 hevur Almannastovan boðað frá, at samskiftið er óbroytt. Eisini verður kunnað um, at "brandmúrurin" verður umsitin av KT-fyrisitingini í Vinnumálaráðnum.

Fysisk trygd/neyðætlan

Í juli 2000 mæltu vit til fyribyrgjandi tiltøk í maskinrúminum og til eina neyðætlan.

Í mars 2005 svaraði Almannastovan, at ein rakstrarsáttmáli var gjørdur við P/f Elektron um at hýsa servarunum hjá Almannastovuni og um rakstraruppgávur í hesum sambandi.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki tryggjað, at skipanir kunnu verða endurskapaðar frá trygdaravritum.

Í februar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at sambært rakstrarsáttmálanum við P/f Elektron skulu avtalur verða gjørdar um hesi viðurskifti. Almannastovan hevur og fer at hava regluligar fundir við P/f Elektron m.a. um at fáa skipað eina neyðtænastu. Í hesum sambandi skal setast upp eitt "testumhvørvi", har royndir kunnu verða gjørdar at endurskapa dátur út frá trygdaravritum.

Í november 2006 boðaði Almannastovan frá, at teimum kunnugt hevði P/f Elektron ikki roynt at endurskapa dátur út frá trygdaravritum.

Um eftirlit og reglur um at logga

Í juli 2000 mæltu vit til at bøta um eftirlitið við feilum og misnýtslu, herímillum at lýsa møguleikar at logga og áseta reglur fyri at logga.

Sambært § 14, stk. 2, í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum" skal verða skrásett, um onkur óheimilað roynir at nýta upplýsingakervið.

Í juli 2006 fingu vit eftir áheitan dømi um, hvat varð loggað tveir ávísar dagar. Á logglistanum eru upplýsingar um id-nummar og klokkutíð fyri avgreiðslu. Sambært Almannastovuni eru tað bert starvsfólk á Vitanardeildini, sum hava atgongd til loggin.

Harafturat fingu vit dømi um ein "benyttelseslog" frá einari viku í 2006, sum vísir, hvat eitt starvsfólk hevur gjørt í VFS-skipanini ein ávísan dag.

Almannastovan brúkar ikki logglistarnar í dagliga arbeiðinum, men við støði í loggaðum upplýsingum verður hvønn dag ein dagslisti skrivaður út fyri hvørt økið hjá Almannastovuni.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki nakran politikk fyri, hvat skal verða loggað, nær kann verða skrivað yvir, og hvussu loggar skulu

varðveitast. Tað eru loggar í Windows, VFS-skipanini, ScanJour, HP3000 umframt loggar í brandmúrum og routarum. Trygdarkunngerðin ásetir, at loggast skal góðkend og ikki góðkend nýtsla av skipanum, og at loggar skulu varðveitast í 1 ár.

Brúkararættindi

Í juli 2000 mæltu vit til at gera greiðar reglur fyri, hvussu brúkararættindi skulu verða umsitin.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki skrivligar mannagongdir fyri umsiting av brúkarum, sum áseta, at rættindi skulu dagførast ella strikast, tá starvsfólk skifta virkisøki ella fara úr starvi.

Í desember 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at farast skuldi sum skjótast undir at gera reglur um mannagongdir fyri at áseta brúkararættindi.

Í juni 2006 boðaði Almannastovan frá, at skrivligar reglur ikki enn eru gjørdar, um og hvussu brúkararættindi skulu verða umsitin. Avvarðandi deildarleiðari boðar Vitanar-deildini frá skrivliga, hvørji rættindi nýggj starvsfólk skulu hava, tá tey verða sett í starv.

Tá ið fólk fara úr starvi, er eingin formlig mannagongd sett í verk, sum tryggjar at brúkararættindi verða strikað. Av og á verður ruddað upp í skipanunum, og tá verða brúkararættindi strikað hjá starvsfólki, sum eru farin úr starvi. Almannastovan brúkar ikki og hevur ongan kekklista, tá starvsfólk fara úr starvi. Vit hava víst á eitt dømi um ein tílíkan kekklista, sum er á heimasíðuni hjá Føroya Gjaldstovu.

Funktiónsskilnaður

Framvegis er tað so, at skilnaður er ikki í VFS-skipanini millum tey, sum skráseta, og tey sum vátta, og skilnaður er framvegis ikki millum deildir í VFS-skipanini.

Í juli 2006 boðaði Almannastovan frá, at møguleiki er í VFS-skipanini at gera skilnað millum skráseting og váttan, men tað krevur broytingar í skipanini, og er ikki sett í verk, tí tað er ov kostnaðarmikið.

Í desember 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannastovan hevur ikki hildið tað vera neyðugt at hava funktiónsskilnað millum deildir, tí tað ger Almannastovuna meira fleksibla og betur føra fyri at røkja sína skyldur. Almannastovan fer at áseta greiðar reglur á hesum øki og taka støðu til, um funktiónsskilnaður skal verða gjørdur.

VI. EFTIRLITSVIRKSEMI VIÐ ÚTGJALDINGUM

Roknskaparreglugerð fyri almannapensjónir, forsorgarveitingar o.a.

Í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum 1. februar 2001 um roknskaparreglugerðir er ásett, at innaneftirlitið á roknskaparøkinum á einum stovni skal vera skjalfest í einari roknskapar-reglugerð.

Vit hava fingið avrit av roknskaparreglugerðini fyri almannapensjónir, forsorgar-veitingar o.a. Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd og ikki dagfest.

Í november 2006 boðaði Almannastovan frá, at hon arbeiðir framvegis við at gera roknskaparreglugerðina lidna, og verður hon síðani send Almanna- og Heilsumálaráðnum at góðkenna.

Dagslistar

Dagslistar eru listar yvir hendingar í VFS-skipanini. Sambært dagførdu innanhýsis leiðbeining nr. 001/2004 “um eftirlit í sambandi við skráseting og útgjøld gjøgnum VFS”

verða dagslistar skrivaðir út hvønn morgun, og beint áðrenn vikuligu/mánaðarligu útgjaldingarnar fara fram.

Á dagslistunum eru allar veitingar, sum tann dagin eru tøppaðar í VFS-skipanini á Veitingardeildini, økisdeildunum í Suðuroy, Norðoyggjum og Eysturoy, í Brektoyminum, Arbeiðsmarknaðardeildini og á stjóraskrivstovuni.

Fulltrúarnir á Veitingardeildini skulu sambært leiðbeiningini gjøgnumganga dagslistarnar og skulu ansa eftir:

at allar veitingar eru skrásettar av persóni við heimild,

at eingir sjónligir feilir eru,

at møguligar óvanligar skrásetingar verða kannaðar.

Sambært Almannastovuni verða dagslistarnir váttaðir av deildarleiðaranum í viðkomandi øki/deild at vera í lagi, og verða síðani goymdir í ringbindum á økinum/deildunum.

Aðrir listar

Feilalistar, bókingarlistar og frádráttarlistar verða skrivaðir út fyri hvørja útgjaldskoyring. Listarnir verða váttaðir av deildarleiðaranum at vera í lagi. Er ein listi tómur, verður hann kortini skrivaður út, váttaður og goymdur saman við listunum í ringbindum. Vit hava sæð, at henda mannagongd verður fylgd.

Broyting av stamdáta, t.d. kontunummar til útgjald

Høvuðsreglan er, at viðskiftafólk skrivliga skulu biðja Almannastovuna um at broyta kontunummar. Undantikið hesa reglu eru broytingar av kontunummari hjá búfólki á ellis- og røktarheimum. Allar broytingar av kontunummari hjá móttakarum síggjast nú á dagslista.

Umsjón við innaneftirliti

Deildarleiðarin hevur ábyrgdina av, at innanhýsis mannagongdirnar eru í lagi. Tað verður gjørt við, at allir listar frá útgjaldingum verða kannaðir og kvittaðir at vera í lagi. Leiðslan fær onga frágreiðing um úrslitið av eftirlitsvirkseminum.

VII. NIÐURSTØÐA

Í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar hava vit í mong ár skrivað um KT-viðurskiftini á Almannastovuni og um VFS-skipanina. Samanumtikið halda vit, at bøtt er um viðurskiftini á summum økjum, men á týðandi økjum eru framvegis ikki framdar nøktandi ábøtur samsvarandi tilmælum okkara og ikki minst samsvarandi teimum herdu krøvunum á økinum.

Týðandi partar av KT-kervinum á Almannastovuni lúka ikki allar ásetingar í:

- roknskaparrundskrivinum, serliga í pkt. 8 og 10,
- § 31, stk. 3, í Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 “um viðgerð av persónsupplýsingum”,
- § 16 í K. nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum”,
- rundskrivinum um KT-trygd frá Vinnumálaráðnum 22. desember 2004, ið ásetir, at krøvini í trygdarstandardunum ISO 17799 og BS 7799-2 skulu verða lokin í seinasta lagi 1. februar 2006.

Sum víst á, hevur Landsgrannskoðanin á hvørjum ári, síðani VFS-skipanin varð tikin í nýtslu í 2000, gjørt vart við fleiri av umrøddu trupulleikunum, og bøtt er heldur ikki um

teir veikleikar í KT-trygdini, sum víst varð á í váðameting, sum eitt grannskoðarafelag gjørdi í september 2005 av KT-kervinum.

Tá havt verður í huga støddina á KT-kervinum á Almannastovuni, hvussu nógvur peningur fer um KT-skipanirnar, hvussu nógvar persónsupplýsingar KT-kervið rúmar, og hvussu heftur stovnurin er at kunningartøkni, er KT-trygdin ikki nøktandi, og langt er eftir á mál.

10.2 KT-trygd innan Heimarøkt og Serforsorg (GL 2004/2 07 4-16)

Í juni 2006 fekk Landsgrannskoðanin avrit av einari váðameting frá januar 2005, sum eitt grannskoðaravirkið hevði gjørt fyri Heimarøktina og Serforsorgina. Váðametingin varð gjørd við atliti at ásetingunum í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum". Endamálið var at eyðmerkja, hvørji sløg av persónsupplýsingum Heimarøktin og Serforsorgin viðger, og hvussu trygdin er skipað.

Sambært váðametingini í januar 2005 vóru staðfestir nakrir veikleikar í KT-trygdini, sum hava við sær ein øktan váða fyri persónsupplýsingum:

1. Fysiskar skjalagoymslur eru ikki læstar á øllum stovnum.
2. Upplýsingar, ið eru lagdar á ambætara, liggja óneyðugt á lokalum teldum.
3. Starvsfólk nýta í stóran mun felags loyniorð ella siga sítt loyniorð til onnur.
4. Summir stovnar lata búfólk nýta teldu. Ongar reglur eru fyri slíkari nýtslu.
5. Summir stovnar senda viðkvæmar persónsupplýsingar við telduposti. Ongar reglur eru fyri slíkum.
6. KT-trygdin eigur at verða samskipað (nógvir tænastuveitarar).
7. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru ikki nøktandi tryggjaðar í sambandi við visitatiónsskipan í gerð.
8. Lønarupplýsingar verða sendar við telduposti uttan bronglan.
9. Hóskandi skilnaður er ikki ímillum eindir á netinum hjá Heimarøktini/Serforsorgini og aðrar "kundar" hjá Landsapotekaranum.
10. Antivirusverjan á lokalum teldum er ikki nøktandi.
11. Trygdaravrit verða ikki testað, einki er avtalað hesum viðvíkjandi.
12. Ein veitari hevur ikki hert trygdina í Windows sambært viðurkendum kekklistum.
13. Einki eftirlit er við, hvørt ein veitari hevur eitt nøktandi støði í logisku trygdini.
14. Stýrisskipanir á lokalum teldum eiga at verða uppstigaðar, so allar kunnu innlimast í domenið.
15. Umsitingin av lyklum, til at brongla tráðleysu netsambondini, er ikki løgd í fasta legu.
16. Trygdin í tráðleysu netsambondunum verður ikki testað, og eingin mannagongd er fyri hesum.
17. Raksturin av tráðleysu netsambondunum er í stóran mun knýttur at einum ávísum persóni.
18. Útgerðin hjá Heimarøktini/Serforsorgini og hjá Landsapotekaranum er ikki liðugt uppsett. Skápið kann ikki latast aftur.
19. Internettrygdin er ikki testað av uttanveltaðum, og ongar ásetingar eru um at fremja slíkar testir.

20. Tað er ikki gjørd skrivlig avtala um samstarvið millum Heimarøktina/Serforsorgina og Landsapotekaran.
21. Einki eftirlit er við, hvørt Landsapotekarin hevur eitt nøktandi trygdarstøði.

Í februar 2005 kunnaði leiðslan á Heimarøktini og Serforsorgini um, at váðametingin *"fór at verða viðgjørd í vár við atliti at teimum viðurskiftum, sum eru nevnd í metingini, og fyri at skipa arbeiðið viðvíkjandi trygdarkrøvunum eftir einum miðvísum leisti."*

Í juni 2006 og aftur í november 2006 boðaði leiðslan frá, at váðametingin enn ikki er viðgjørd.

10.3 KT-trygd innan almanna- og heilsuøkið

Frammanfyri hava vit greitt frá, at Almannastovan og Heimarøktin/Serforsorgin ikki lúka ásetingarnar um KT-trygd.

Vit vilja í hesum sambandi gera vart við, at flestu stovnar innan almanna- og heilsuøkið heldur ikki lúka ásetingarnar um KT-trygd, og sama er galdandi á øðrum málsøkjum.

Sum gjøllari umrøtt undir "Kunningartrygd, støðan í dag" í kapittul 7 "Vinnumál" bað Landsgrannskoðanin í september 2006 hvønn landsstýrismann sær um at greiða frá/skjalprógva, hvørjir stovnar, sum hann varðaði av:

- 1. februar 2006 luku ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd,
- ikki luku ásetingarnar 1. februar 2006, og hvussu støðan er í dag,

og hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit/umsjón við, at stovnarnir lúka ásetingarnar í rundskrivinum.

Landsgrannskoðanin vísti í skrivinum á, at ein landsstýrismaður hevur rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teimum málsøkjum, sum løgd eru til hansara, og at tað áliggur honum, í rímiligan mun, at føra eftirlit við og áseta reglur á sínum málsøki.

Sambært løgmanni skulu stovnar og landsstýrismenn taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri krøvini, sum Vinnumálaráðið hevur sett.

Í svarskrivi sínum í oktober 2006 boðaði landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum frá, at bert tveir stovnar siga seg lúka ásetingarnar fult út, ella møguliga lúka ásetingarnar. Talan er um ávikavist Landsapotekaran, saman við Apoteksverkinum, og Hvíldarheimið Naina.

Stovnar, sum hava svarað, at teir ikki lúka ásetingarnar, eru sambært landsstýrismanninum:

- Landssjúkrahúsið
- Klaksvíkar Sjúkrahús
- Suðuroyar Sjúkrahús
- Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
- Sjúklingaheimið Tórshavn

Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur enn ikki sett nakrar fyriskipanir í verk fyri at kanna, hvørt stovnarnir, sum landsstýrismaðurin varðar av, lúka ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd.

Landsstýrismaðurin heldur ikki, at tað er uppgávan hjá landsstýrismanninum/aðalráðnum at skipa fyri beinleiðis eftirliti/grannskoðan av KT-trygdini á stovnunum. Tað skal leiðslan á stovnunum sambært ISO 17799 standardinum sjálv skipa fyri. Landsstýrismaðurin ætlar bert at spyrja stovnarnar, um teir hava framt eina árliga KT-skoðan, hetta í

sambandi við at hann ætlar at skipa fyri einum árliga afturvendandi evnisdegi fyri allar stovnarnar, sum hann varðar av. Á henda hátt kann landsstýrismaðurin hava eftirlit við, hvussu KT-trygdarstøðan á stovnunum er. Landsstýrismaðurin ætlar annars at eggja teimum stovnum, har eingin árlig KT-skoðan er gjørd, til at fáa tað í lag.

Spurningurin um leiklutin hjá landsstýrismonnum at hava eftirlit/umsjón við stovnunum á hansara málsøki er eisini umrøddur í frágreiðingini undir "Kunningartrygd, hví stovnar ikki lúka krøvini" í kapittul 7 "Vinnumál".

10.4 Almannastovan (GL 2004/2 07 1-5)

Í 2004 kannaðu vit, um roknskaparviðurskiftini á Almannastovuni vóru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Samanumtikið hildu vit roknskaparhaldið vera væl skipað, men vit vístu á, at:

1. nøkur ferðaforskot vóru ikki goldin aftur rættstundis,
2. skuldarar, vegna ov nógv goldið út ella goldið út av órøttum – um 2,6 mió.kr. - vóru ikki minkaðir (Almannastovan heitir á skuldarar um at gera eina afturgjaldsskipan, og sendir rykkjarar umleið triðja hvønn mánað),
3. ognaryvirlitið var ikki dagført.

Í august 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at:

ad 10) bert ein gomul eftirstøða er eftir,

ad 11) støðan er óbroytt (skuldin er tó vaksin um 0,2 mió.kr. í mun til 2004),

ad 12) ognaryvirlit er gjørt fyri deildirnar í Klaksvík, Runavík og á Tvøroyri. Ognaryvirlit fyri Tórshavn verður gjørt í september/oktober 2006.

Roknskapardeildin á Almannastovuni umsitur lønarútgjaldingarnar til starvsfólkini á Almannastovuni og á Hjálpartólamiðstøðini, um 100 fólk. Harafturat umsitur roknskapardeildin eisini lønarútgjaldingarnar til einar 130 stuðlar, ið brektoymið og barnaforsorgartoymið hava játtað. Vit mæltu í 2004 til at lýsa í roknskaparreglugerðini, hvør kann:

- seta fólk í starv/loysa fólk úr starvi, áseta lønarflokk, flyta í hægri lønarflokk, geva lønarískoyti o.t.,
- áleggja yvirtíðararbeiði/meirarbeiði og tænastuferðir,
- góðkenna lønarútgjaldingarnar, arbeiðstíð, frítíð, sjúku, avspáking og møguligar lønarfrádráttir.

Í juli 2004 boðaði Almannastovan frá, at tey ætlaðu at fremja tær ábøtur, vit høvdu mælt til.

Í november 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almannastovan hevði ikki havt orku til at broyta roknskaparreglugerðina.

Í august 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almannastovan í 2006 ætlaði at gera neyðugu tillagingarnar í roknskaparreglugerðini.

10.5 Almannapensjónir (GL 2004/2 07 2-8)

Landsgrannskoðanin hevur í 2006 grannskoðað umsitingina av almannapensjónum, og niðanfyri verður greitt frá úrslitinum av grannskoðanini.

Roknskapartøl/tal av skrásetingum

Umleið 800 mió.kr. verða tilsamans goldnar út um árið í fólkapensjón, fyritíðarpensjón, forsorgarveitingum, barnaforsorgarveitingum o.a.

Fólkapensjónin er samansett av grundupphædd og viðbót. Øll yvir 67 ár hava rætt til fulla grundupphædd. Viðbótin verður inntøkujavnað. Viðbótin hækkar 4% frá 1. januar á hvørjum ári, sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Fyritíðarpensjónin kann tillutast persónum millum 18 og 67 ár, grundað á skert arbeiðsføri vegna avlamni, einkjustøðu og uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár, og serligar sosialar umstøður. Upphæddirnar eru seinast ásettar í K. nr. 115/2006.

Ógreitt lógargrundarlag

Longu í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í juli 2000 gjørdu vit vart við, at í fleiri førum er ógreitt, hvussu ásetingarnar í §§ 21-23 í almannapensjónslógini (Ll. nr. 48/1999) skulu verða tulkaðar, og er tað serliga § 21, ið hevur sera stóran umsitingarligan og fíggjarligan týdning fyri pensjónistin. Mong ivamál eru viðvíkjandi umrokning, eftirrokning og uppgerðum av krøvum um ov nógv útgoldna pensjón.

Landsgrannskoðanin hevur síðani á hvørjum ári heitt á landsstýrismannin um at boða frá, hvørji stig hann fór at taka fyri at fáa viðurskiftini í rættlag. Kærustovnurin og Almannastovan hava heitt á Almanna- og Heilsumálaráðið um at broyta almannapensjónslógina, soleiðis at reglurnar fyri um- og eftirrokning verða eintýddar.

Í desember 2005 vísti landsstýrismaðurin á, at broytingarnar í almannapensjónslógini – Lm. nr. 43/2005 – sum vórðu samtyktar 19. desember 2005, fara at avmarka ella "minka um" mongu ivamálini, sum hava verið viðvíkjandi pensjónsáseting og um– og eftirrokning, og at umsitingin væntandi verður greiðari og meira gjøgnumskygd.

Í juni 2006 kunnaði Almannastovan um, at tey eru í ferð við at fyrireika um- og eftirrokningina eftir nýggju reglunum, sum skal fara fram fyrstu ferð í januar 2007.

Í § 21a, stk. 4, í almannapensjónslógini er ásett, at landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur í kunngerð um um- og eftirrokning av pensjónum. Almannastovan heldur, at lógin nú er so mikið greið, at neyðugt er ikki við einari kunngerð. Í juni 2006 fekk Landsgrannskoðanin avrit av innanhýsis vegleiðing til almannapensjónslógina.

Í november 2006 hevur almannastjórin boðað frá, at Almannastovan hevur gjørt av at gera eitt nágreiniligt kunningarskriv um tær broytingar, ið hava verið í pensjónslógini. Tað verður gjørt í januar/februar 2007.

Grannskoðan av einstøkum veitingum

Fólkapensjón

Landsgrannskoðanin valdi við stakroyndum út og kannaði 27 nýggj fólkapensjónsmál við støði í útgjaldingum tíðarskeiðið januar – mai 2006. Av teimum vóru 9 nýstovnað mál umframt 18 fyritíðarpensjónsmál, sum sjálvvirkandi vóru broytt til fólkapensjónsmál. Pensjónin hjá fyritíðarpensjónistum verður sjálvvirkandi broytt til fólkapensjón, tá pensjónistarnir fylla 67 ár.

Nýstovnað mál

Vit kannaðu, um:

- eitt fullfíggjað journaluppritablað fanst, har greitt varð frá gongdini í málinum o.a.,
- rætt útfylt umsóknarblað fanst,

- viðbótin var inntøkujavnað.

Einki var at finnast at.

Mál, broytt frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón

Sum áður nevnt, vóru 18 av fyritíðarpensjónsmálunum sjálvvirkandi broytt til fólkapensjónsmál. Einki var at finnast at.

Fyritíðarpensjón

Landsgrannskoðanin valdi við stakroyndum út og kannaði 40 nýggj fyritíðarpensjónsmál við støði í útgjaldingum tíðarskeiðið januar – mai 2006. Vit kannaðu um:

- fullfíggjað journaluppritablað fanst, har greitt varð frá gongdini í málinum o.a.,
- rætt útfylt umsóknarblað fanst,
- viðbót og grundupphædd var inntøkujavnað.

Einki var at finnast at.

Satsir

Við stakroyndum hava vit samanborið goldnar veitingar í 2006 við satsirnar, sum eru ásettir í K. nr. 138 frá 13. desember 2005 "um áseting og javning av almannaveitingum". Einki var at finnast at.

Aðrar viðmerkingar

Landsgrannskoðanin hevur í 2006 havt samskifti við leiðsluna á Almannastovuni um vandan fyri sviki ella mistøkum. Samanumtikið hevur Almannastovan ikki varhugan av, at svik er komið fyri. Almannastovan heldur eisini, at innaneftirlitið, serliga skipanin við dagslistum, byrgir upp fyri mistøkum og sviki.

10.6 Persónlig viðbót til pensjónistar (GL 2004/2 07 2-8)

Sambært § 12 í almannapensjónslógini kann persónlig viðbót verða veitt pensjónistum, ið hava serliga trupul kor.

Í K. nr. 19 frá 14. mai 2004 "um persónliga viðbót sambært almannapensjónslógini" ásetti landsstýrismaðurin neyvari reglur.

Sambært § 4, stk. 2, í K. nr. 19/2004 *"verður sum nøktandi upphædd til útreiðslur til mat, klæði og tílíkt nýtt ein grundupphædd, ið svarar til grundupphæddina til fólkapensjón."*

Grundupphæddin til fólkapensjón verður ikki javnað, sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum" við seinni broytingum. Upphæddin til uppihaldsútreiðslur er sostatt ikki hækkað síðani 1. februar 1999, og hevur tí ikki fylgt við prísvøkstrinum.

Í februar 2005 spurdu vit landsstýrismannin, um henda avleiðing er tilætlað.

Í mars 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at javning av grundupphæddini kundi verið ein partur av einari samlaðari endurskoðan av almannapensjónslógini, men at sjøtul ikki enn er settur á fyrireikingararbeiðið at endurskoða almannapensjónslógina.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevur ongar ætlanir um at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um at javna grundupphæddina til fólkapensjónistar, fyrr enn arbeiðið hjá Fíggjarmálaráðnum og Almanna- og Heilsumálaráðnum við eftirlønarreforminum er liðugt viðgjørt.

10.7 Ansingarsamsýning (GL 2002/2 07 3-7)

Í viðmerkingunum til Ll. nr. 52/2000 "um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima", sum varð løgd fyri Løgtingið 4. mars 2000, varð Løgtingið kunnað um, at "*landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ætlar at endurskoða lógina í síni heild seinni í ár, so møguligar lógarbroytingar fáa gildi frá ár 2001.*"

Í september 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevði verið noyddur at raðfesta nøkur lógarøki fram um onnur, og at lógin um ansingarsamsýning hevði ikki fremstu raðfesting.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at endurskoðanin av lógini um ansingarsamsýning liggur ikki fremst í raðfestingini av uppgávum í Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Í áliti sínum til uppskoti til løgtingsfíggjarlógina 2007 heldur Fíggjarnevndin, "*at landsstýrismaðurin átti at arbeitt við at styrkt hesa skipan.*"

10.8 Barnapeningur veittur í forskoti (GL 2000/2 07 2-5)

Vit hava síðani februar 2002 í frágreiðingum greitt frá, at á fleiri økjum er tørvur á at bøta um viðurskiftini. M.a. hava vit vístá:

Barnapeningur verður ikki heintaður inn uttan fyri Norðurlond

Barnapeningur verður ikki heintaður inn uttan fyri Norðurlond, hóast tað sambært konventiónum kann lata seg gera.

Í november 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstova Føroya ikki longur heintar pening inn uttan fyri Norðurlond, av tí at upplýsingarnar um persónarnar eru ikki nøktandi. Í nógvum førum finst bert navnið á persóninum, landinum ella býnum. Toll- og Skattstovan heldur tað ikki vera gjørligt, og hartil at vera ov kostnaðarmikið at heinta henda pening inn.

Í august 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært §§ 9 – 10 í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." v.s.b. hevur Toll- og Skattstova Føroya skyldu til at krevja inn alla skuld, ið er fallin gjaldingar. Almannastovan hevur tí sent øll afturborin krøv aftur til Toll- og Skattstovu Føroya.

Barnapeningur er ongantíð eftirgivin

Barnapeningur er ongantíð eftirgivin, og fylgt verður ikki við, um krøv fyrnast. Í november 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað tá vóru umleið 400 krøv, sum Almannastovan skuldi taka støðu til, um skuldin skuldi verða eftirgivin. Í flestu førum vóru krøvini fyrnað, gjaldskyldugi var deyður ella komin til pensjónsaldur, og Almannastovan hevði ikki havt orku til at avgreiða tey. Ætlanin var at fáa málini avgreidd fyrst í 2006.

Í august 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at leisturin er gjørdur, men Almannastovan hevur ikki havt orku til at taka støðu til hesi mál.

10.9 Forsorgarútreiðslur (GL 2006/2 07 3-11)

Veitingarstøðið sambært §§ 9 og 13

Sambært § 9 í forsorgarlógini kann fyribilshjálp vanliga í mesta lagi svara til grundupphæddina í fólkapensjónini.

Sambært § 13 verður varandi hjálp veitt við einari upphædd, ið svarar til fólkapensjónina (grundupphædd og viðbót) hjá pensjónisti uttan aðrar inntøkur.

Í báðum førum verður ískoyti veitt fyri hvørt barn svarandi til barnaviðbótina eftir løgtingslóg um almannapensjónir.

Grundupphæddin til fólkapensjón verður ikki javnað, sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum" við seinni broytingum. Grundupphæddin í uppihaldshjálpini sambært § 9 og varandi veitingin sambært § 13 eru sostatt ikki hækkaðar síðani 1. februar 1999, og hava tí ikki fylgt við prísvøkstrinum.

Í februar 2005 spurdu vit landsstýrismannin, um henda avleiðing var tilætlað. Vit vístu eisini á, at í svari sínum 26. januar 2005 til fyrispurning "viðvíkjandi skiftisupphædd hjá fyritíðarpensjónistum, javning og øðrum" - Lm. 100-17/2004 - segði landsstýrismaðurin m.a.:

> *"At uppihaldshjálpin ikki verður javnað, og ikki hevur verið tað seinastu árini, er sera óheppið, og rættast hevði verið at javnað upphæddirnar sambært einum javningarsatsi. Hetta kundi verið gjørt, uttan at bíðast skal eftir eini endurskoðan av allari pensjónslóggávuni. Arbeiðið at gera eina nýggja forsorgarlóg er farið í gongd. Í tí sambandi er ætlanin at broyta § 9 í forsorgarlóginií komandi árið."*

Í desember 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at av tí at grundupphæddin til fólkapensjón ikki verður javnað longur, er tað neyvan rætt framhaldandi at nýta hana til at áseta eina upphædd, ið skal nøkta grundleggjandi tørvin til uppihald sambært forsorgarlógini – livikostnaðurin stendur ikki í stað. Landsstýrismaðurin umhugsaði tí at broyta lógina.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tað framvegis er ætlanin at fremja lógarbroytingina í § 9, men sambært landsstýrismanninum er tað ógreitt, nær arbeiðsorka verður tøk, og tí er tað óvist, nær eitt lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið.

Endurgjald fyri inntøkumiss/vantandi kunngerð sambært § 17

Ásetingarnar í § 17 komu upprunaliga inn í forsorgarlógina sum § 14 A við "Lov nr. 224 af 17. maj 1970":

> *"Personer, der i hjemmet forsørger et barn med en fysisk eller psykisk lidelse, som medfører særlige udgifter ved forsørgelsen, har ret til at få dækket sådanne nødvendige merudgifter, såfremt de ikke kan dækkes gennem særforsorgens hjælpeforanstaltninger. Hjælpen er betinget af, at lægelige anvisninger med hensyn til barnets pasning m.v. følges."*

Við "Lov nr. 246 af 8. juni 1983" varð § 14 A flutt til § 17.

Longu í 1993 gjørdu vit vart við ivasomu heimildina í § 17 at veita endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til persónar, sum heima passa barn við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku.

Ikki fyrr enn við Ll. nr. 82 frá 8. mai 2003 "um broyting í lóg um almenna forsorg" verður heimildin lógarfest:

> *"Stk. 3. Stuðul kann verða veittur sum endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til persónar, sum heima uppihalda barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku. Stuðulin er treytaður av, at tað er ein avleiðing av sjúkuni ella brekinum, at tað er neyðugt at ansa barninum heima."*

Samstundis verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur um útreiðslur til ávísar viðgerðir og um endurgjald fyri inntøkumiss. Landsstýrismaðurin hevur ongar reglur ásett enn.

Í november 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann "*í næstum*" fór at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta veitingina sambært § 17 frá einari nettoveiting til eina bruttoveiting. Sambært landsstýrismanninum hevði ein tílík broyting við sær, at trupul-

leikarnir við at rokna út nettoendurgjaldið fyri mista arbeiðsinntøku fóru at verða loystir. Eitt slíkt lógaruppskot er ikki lagt fyri Løgtingið, og lógin er ikki broytt.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 2002 (Lm. nr. 56-6/2003), sum varð samtykt 18. mai 2004, heitti Løgtingið á landsstýrismannin um at áseta neyvari reglur sum skjótast.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 og aftur í mars 2005 umrøddi Landsgrannskoðanin, at útrokningin av mistari arbeiðsinntøku tyktist tilvildarlig, og vit vístu á dømi um hetta.

Vit vístu eisini á, at hóast Kærunevndin í fleiri førum hevði tikið avgerðir, sum greitt settu til viks siðvenju hjá Almannastovuni í málum viðvíkjandi endurgjaldi fyri inntøkumiss, hevði Almannastovan ikki broytt siðvenju í líknandi málum. At kunngerðin ikki er gjørd, er helst ein orsøk til trupulleikarnar.

Í juni 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at við verandi arbeiðsorku er tað óvist, nær kunngerðin verður gjørd, og at aðrar uppgávur verða raðfestar hægri.

Kirkjuskattur

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 umrøddu vit, at kirkjuskattur verður ikki tikin við í útrokningina, tá ið netto dagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið sambært § 9 verður roknað út. Í frágreiðing í februar 2002 umrøddu vit, at kirkjuskattur verður heldur ikki tikin við í útrokningina av nettoendurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 17.

Í oktober 2002 svaraði landsstýrismaðurin, at hann fór at taka stig til at broyta vegleiðingina, ið ásetir útrokningarháttin, soleiðis at kirkjuskattur fór at verða tikin við í útrokningina frá 1. januar 2003.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki var hent í málinum.

Í november 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevði ætlanir um at endurskoða alla forsorgarlógina, og fór hetta arbeiði at verða gjørt í stigum. Ætlanin var at broyta allar forsorgarveitingar til bruttoveitingar. Harvið fór trupulleikin við, at kirkjuskatturin ikki er við í útrokningini, at verða loystur. Landsstýrismaðurin hevði tí ongar ætlanir um at gera nakra broyting í útrokningini av hámørkunum.

Í februar 2006 og aftur í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum. Ætlanin at broyta forsorgarlógina er ikki slept, men tað er ikki greitt, nær arbeiðsorka verður tøk.

Endurbúgving o.a. sambært § 18 í forsorgarlógini

Meir enn 15 ár eru liðin, síðani vit fyrstu ferð heittu á Landsstýrið um sambært § 18, stk. 6, at áseta gjøllari reglur um stuðul til endurbúgving o.a.

Niðanfyri hava vit endurgivið § 18 í forsorgarlógini:

> *§ 18. Når det anses for påkrævet af hensyn til en persons mulighed for fremtidig at klare sig selv og sørge for sin familie, kan der ydes pågældende hjælp til uddannelse og erhvervsmæssig optræning eller omskoling.*
>
> *Stk. 2. Hvis det skønnes rimeligt ud fra den pågældendes økonomiske forhold, kan der ydes hjælp til anskaffelse af værktøj og arbejdsmaskiner, når det er af afgørende betydning for en person med nedsat erhvervsevne.*
>
> *Stk. 3. Der kan endvidere ydes hjælp til iværksættelse af selvstændig virksomhed. Hjælpen kan ydes som lån, når det findes rimeligt under hensyn til pågældendes fremtidige erhvervsmuligheder.*

Stk. 4. Til invalidepensionister, der har en uudnyttet delvis erhvervsevne i behold, kan der ydes et rentefrit lån svarende til højst 2 års pension, når der herved kan opnås en varig forbedring af pågældendes erhvervsevne.

Stk. 5. Til personer med invaliditet eller varig sygdoms- eller aldersbetinget svagelighed kan der ydes støtte til heilivág, hjælpemidler, herunder merudgifter til særlige beklædningsgenstande, som

1. *er nødvendige for, at pågældende kan udøve et erhverv, eller*
2. *væsentlig grad kan afhjælpe pågældendes lidelse, eller*
3. *i væsentlig grad kan lette den daglige tilværelse i hjemmet.*

Stk. 6. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om ydelse af hjælp efter stk. 1-5, íroknað reglur um egingjald og nær stuðul til hjálpartól kann veitast sum lán.

Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir síðani fleiri ferðir átalað, at landsstýrismaðurin ikki hevur ásett neyvari reglur.

Í november 2004 svaraði landsstýrismaðurin, at Almanna- og Heilsumálaráðið var í ferð við at endurskoða alla forsorgarlógina, og fór arbeiðið at verða gjørt í stigum. Væntandi fóru reglurnar fyri endurbúgving at verða endurskoðaðar um eitt ár.

Í februar 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki var hent í málinum. Tað var ikki greitt, nær arbeiðsorka fór at verða tøk.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir enn eina ferð, at neyvari reglur ikki vóru ásettar á hesum týðandi øki, har nógvur peningur verður brúktur.

Í september 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at hann framvegis ikki hevur starvsfólkaorku til at fara undir at gera nýggja forsorgarlóg.

Eftir hesum at døma hevur landsstýrismaðurin ongar ætlanir um í kunngerð at áseta nærri reglur um endurbúgving.

Hjálparamboð v.m. § 18, stk. 5, í forsorgarlógini

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina september 2003 varð Løgtingið kunnað um, at:

"landsstýrismaðurin ætlar sær at gera broytingar í praksis, reglugerðum, kunngerðum v.m. fyri at tálma vøkstrinum. Almannastovan og Almannamálaráðið arbeiða í løtuni við at seta í verk broytingar."

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina desember 2003 varð Løgtingið kunnað um, at:

"tað eru serliga útreiðslur til heilivág og hoyritól, sum vaksa nógv, men eisini útreiðslur til avlamisakfør, koyristólar og onnur hjálpartól vaksa. Almannamálaráðið arbeiðir í løtuni við at gera kunngerðir á økinum, men roknað verður ikki við, at kunngerðirnar náa at fáa ávirkan á útreiðslurnar í ár."

Í september 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar kunngerðir talan er um.

Í november 2004 svaraði landsstýrismaðurin, at talan var um kunngerðir um stuðul til:

- heilivág,
- avlamisbilar, og
- hoyri- og sjóntól.

Landsstýrismaðurin væntaði tá, at kunngerðirnar fóru at verða lidnar í 2005.

22. juni 2005 varð kunngerð nr. 91 "um stuðul til keyp av avlamisbili sambært forsorgarlógini" lýst. Eingin kunngerð um hoyri- og sjóntól er lýst, og kunngerðin um heilivág er ikki broytt.

Í juni 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at tað, at minka um útreiðslurnar til hjálpartól, er ikki nakað, ið kann verða gjørt frá degi til dags, tí spariltøk hava sjálvsagt stórar avleiðingar við sær fyri borgaran. Sambært landsstýrismanninum er, við verandi rakstrarjáttan til Almanna- og Heilsumálaráðið, sera ivasamt, um neyðugar kunngerðir verða gjørdar komandi árini.

Eftir øllum at døma hevur ikki verið arbeitt við kunngerðunum í tann mun, landsstýrismaðurin í 2003 og 2004 kunnaði um.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 verður Løgtingið aftur kunnað um, at:

"Landsstýrismaðurin arbeiðir við at áseta nærri reglur í nýggjari kunngerð um hoyritól við heimild í § 18, stk. 6 í forsorgarlógini. Við kunngerðini verður talan um neyvari reglur fyri hoyritólavirksemið."

Kontering av forsorgarveitingum

Vit hava til fánýtis síðani 1993 vístá, at konteringarnar eru alt ov tilvildarligar, helst tí at eingin konteringarleiðbeining finst. Hóast fleiri ætlanir, er einki hent.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann tíverri mátti staðfesta, at eingin konteringarleiðbeining var gjørd á forsorgarøkinum; men arbeiðið fór at verða raðfest høgt, so vegleiðingin væntandi fór at verða liðug innan fyri eitt hálvt ár.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003), ið varð samtykt 18. mai 2004, heittu løgtingsgrannskoðararnir á landsstýrismannin um at tryggja, at viðurskiftini koma í rættlag sum skjótast.

Í november 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almannastovan var farin undir at gera eina konteringarleiðbeining fyri almenna forsorg, men óvist var, nær hon fór at verða liðug.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at konteringarleiðbeiningin væntandi fór at verða liðug fyrst í 2006.

Sambært landsstýrismanninum í september 2006 verður konteringarleiðbeiningin væntandi liðug fyrst í 2007.

10.10 Stuðul til heilivág (GL 2003/2 07 3-11)

Í frágreiðing okkara í februar 2006 umrøddu vit, at viðskiftafólk rinda eitt ávíst egingjald um ársfjórðingin fyri stuðulsheimilaðan heilivág. Í apoteksskipanini verður skrásett, nær viðskiftafólkið hevur rindað egingjaldið í einum ársfjórðingi.

Sera nógv viðskiftafólk koma síðst í einum ársfjórðingi fyri at "keypa inn undir seg", so teimum ikki nýtist at heinta heilivág komandi ársfjórðing, og harvið sleppa tey undan egingjaldinum í einum ársfjórðingi. Sambært Tjaldurs Apoteki er neyðugt at hava eyka starvsfólk til arbeiðis, t.d. millum jól og nýggjár, tí so nógv viðskiftafólk koma eftir heilivági.

Til samanberingar er egingjaldið í Danmark ásett fyri eitt "stuðulsár", sum byrjar, tá viðkomandi fyrstu ferð fær útflýggjað stuðulsheimilaðan heilivág.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiddi við at broyta stuðulsskipanina, svarandi til donsku og svensku skipanina. Har letur sjúkrakassin eisini stuðul til heilivág, íroknað sertilskot, fyri tær fyrstu umleið 500 kr. um árið (tó 50% fyri fólk undir 18 ár). Stuðulin økist, so hvørt tørvurin á heilivági økist. Endamálið við einari tílíkari skipan er at lata tey, sum nýta lítið av stuðulsheimilaðum heilivági, gjalda meira sjálvi, og heldur nýta ein størri part av samlaða stuðlinum til teirra, sum hava størri tørv.

Henda skipan verður akkumulerað yvir eitt ár. Hvørt viðskiftafólk hevur sítt egna "stuðulsár", sum byrjar frá tí degi, viðkomandi fyrstu ferð keypir stuðulsheimilaðan heilivág, og endar 12 mánaðir seinni. Eitt nýtt "stuðulsár" byrjar so aftur, fyrstu ferð viðskiftafólkið keypir stuðulsheimilaðan heilivág, eftir at gamla "stuðulsárið" er endað. Landsstýrismaðurin helt, at soleiðis slapst undan trupulleikanum, at fólk keyptu inn undir seg.

Í desember 2005 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið við at umleggja alla stuðulsskipanina var eitt størri arbeiði, sum enn var í gongd. Ætlanin var, at nýggja skipanin skuldi virka einaferð í 2006.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein broyting í K. nr. 100/1999 skuldi koma í gildi 1. oktober 2005, soleiðis at stuðul bert varð veittur til heilivág, ið fekk stuðul frá sjúkrakassunum. Tað vísti seg tó, at ávísir sjúklingar fingu stuðul eftir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini til lívsneyðugan dýran heilivág, ið ikki fekk stuðul frá sjúkrakassa. Varð broytingin framd, hevði tað fingið sera óhepnar fylgjur fyri hesar sjúklingar. Hesin trupulleiki hevði gjørt arbeiðið at broyta kunngerðina torførari, men tað bleiv í løtuni kannað, hvussu tað kundi verða gjørt.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at *"málið er tíverri enn ikki búgvið til at fremja ætlaðu broytingina í kunngerðini."*

10.11 Gjald fyri heimahjálp í sambandi við umlætting (GL 2004/2 07 4-14)

Í frágreiðing okkara í februar 2006 vístu vit á, at ymiskt er, hvussu nógv pensjónistar skulu rinda fyri heimahjálp í sambandi við umlætting.

Pensjónistur, sum hevur aðra inntøku enn fólkapensjónina, skal rinda fyri heimahjálp alt eftir, hvussu stór inntøkan er. Sambært K. nr. 139 frá 13. desember 2005 "um broyting í kunngerð um heimahjálp" er frá 1. januar 2006 hægsta gjaldið, sum pensjónisturin kann koma at rinda, kr. 140,50 um tíman, tó verður í mesta lagi rindað fyri 30 tímar um mánaðin.

Fer sami pensjónistur til umlættingar á eldrasambýli hjá landinum ella kommununi, skal hann rinda fult tímatal fyri heimahjálp, meðan hann er á sambýlinum, uttan mun til, hvussu nógvar tímar hann frammanundan rindaði fyri. Tó er hægsta gjaldið fyri heimahjálp í 6 vikur (42 dagar) ásett til kr. 6.322,50 (kr. 140,5x45).

Fer pensjónisturin til umlættingar á ellisheimi ella á røktarheimi í 6 vikur, rindar hann harafturímóti einki fyri heimahjálp.

Pensjónistur, ið frammanundan rindar fyri heimahjálp, hevur sostatt stóran fyrimun av at fara til umlættingar á ellis-/røktarheimi, heldur enn á eldrasambýli. Landsgrannskoðanin ivast í, um hesin munur kann vera tilætlaður, serliga tá hugsað verður um, at tað í nógvum førum er sama tænasta, ið verður veitt á einum ellisheimi, sum í einum eldrasambýli.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hesin munur ikki hevur verið tilætlaður. Almanna- og Heilsumálaráðið er farið í holt við at kanna málið, so trupulleikin verður loystur.

10.12 Almannapensjón á stovnum (GL 2004/2 07 4-14)

Í § 4, stk. 1-2, í Ll. nr. 108/1999 "um uppihald á stovni. o.l" v.s.b. er ásett:

> *"Hjá pensjónistum, sum fáa varandi uppihald á góðkendum røktar- ella ellisheimum ella øðrum varandi staði, sum kann sammetast við eitt røktar- ella ellisheim, lækkar pensjónin við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin, pensjónisturin fær uppihald á viðkomandi heimi.*

Stk. 2. Ein upphædd verður varðveitt til rindan av útreiðslum til persónliga tørv pensjónistsins."

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið "um uppihald á stovni o.l." (Lm. nr. 25/1999) stendur m.a.:

"Almanna- og Heilsumálastýrið arbeiðir víðari við ætlanini um, at øll fólk skulu varðveita pensjónina. Ætlanin er at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið til støðutakan, so skipanin kann koma at virka frá ár 2001."

Í oktober 2004 spurdu vit landsstýrismannin, nær eitt tílíkt lógaruppskot væntandi verður lagt fyri Løgtingið.

Í mars 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at *"spurningurin um at varðveita pensjónina, tá ein fær varandi uppihald (meira enn 6 mánaðir) á stovni hevur fyrr verið umrøddur, og er landsstýrismaðurin til reiðar at taka málið uppaftur til politiska støðutakan í samgonguni. Tað er óvist, nær eitt uppskot kann leggjast fyri Løgtingið."*

Í februar 2006 og aftur í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki ítøkiligt er hent í málinum.

10.13 Heimarøktin (GL 2004/2 07 4-15)

Í frágreiðing okkara í februar 2006 umrøddu vit grannskoðanina av roknskapar- og lønarviðurskiftunum innan Heimarøktina, umsitingina av gjaldi fyri heimahjálp og nýggju visitatiónsskipanina. Í juni 2006 vitjaðu vit Suðurstreymoyar øki og kunnaðu okkum gjøllari um, hvørjar ábøtur eru framdar, og hvussu støðan er í dag.

Roknskaparreglugerð

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Heimarøktin í november 2004 hevði sett eitt starvsfólk at endurskoða roknskaparreglugerðirnar.

Í juni 2006 kunnaði Meginskrivstovan um, at nýggjar roknskaparreglugerðir fyri stovnarnar undir Heimarøktini í mars 2006 vórðu sendar Almanna- og Heilsumálaráðnum at góðkenna.

Í desember 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at roknskaparreglugerðirnar væntandi eru góðkendar 1. februar 2007.

Kunngerð um heimahjálp

Í K. nr. 101/2000 "um heimahjálp" var ikki ásett, hvussu gjøldini skulu verða eftirroknað, hvussu gjøldini skulu verða javnað, og hvørjar inntøkur inntøkugrundarlagið skuldi fevna um. Í mars 2004 mæltu vit landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða kunngerðina.

Við K. nr. 139 frá 13. desember 2005 varð kunngerðin broytt. Í § 8a er nú ásett: *"Landsstýrismaðurin ásetir javnaðu gjøldini í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum í seinasta lagi 1. januar á hvørjum ári, fyrstu ferð 1. januar 2007."*

Um inntøkugrundarlagið er í § 8, stk. 2, nú ásett: *"Inntøkugrundarlagið verður roknað sambært ásetingunum um hetta í løgtingslóg um almannapensjónir."*

Landsgrannskoðanin ivast í, um henda orðing er nóg neyv, m.a vísandi til ásetingina í § 20, stk. 5, í almannapensjónslógini: *"Ein frádráttur verður gjørdur í inntøkugrundarlagnum sambært stk. 1-4."*

Í mai 2006 vísti stjórin á Heimarøktini spurningin til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Visitatiónsskipanin

Sum umrøtt í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 hevur Heimarøktin gjørt eina KT-skipan, "Føroysk visitatiónsskipan" (FVS), til at umsita gjaldið fyri heimahjálp, og FVS-skipanin varð tikin í nýtslu umleið 1. februar 2005. Eitt av endamálunum við skipanini er at javna heimarøktartænastuna í øllum økjunum í landinum.

Í mai 2006 boðaði leiðslan frá, at skipanin lýkur øll krøvini um trygd í sambandi við nýtslu av KT og persónsupplýsingum.

Í FVS-skipanini eru skrásetingar um, hvussu nógvar tímar hvørt viðskiftafólk skal hava um dagin.

Bert tímarnir, ið ein heimahjálp arbeiðir hjá gjaldandi brúkarum, verða skrásettir í FVS-skipanini. Í hesum sambandi spurdu vit Meginskrivstovuna í desember 2005, um tørvur ikki er á at skráseta allar tímar, so til ber at fáa hagtøl úr FVS-skipanini, hvussu nógvir tímar verða veittir øllum brúkarum, t.d. í mun til visiteraðar tímar, brúkaratyngd, í hvørjum bólki og øki flestu tímar verða veittir o.s.fr. Harumframt kundu hesar skrásetingar eisini verið nýttar til at rokna út ávirkanina av møguligum lógarbroytingum o.ø.

Í mai 2006 greiddi stjórin á Heimarøktini frá, at starvsfólk og orka ikki var at skráseta allar tímar hjá øllum brúkarum.

Í november 2006 kunnaði økisleiðarin í Suðurstreymoyar øki um, at starvsfólkini eru sera nøgd við bert at skráseta gjaldandi brúkarar, tí tað er lættari at umsita, og eisini er lættari at svara brúkarunum, um teir ivast í, um tímatalið er rætt.

Lønarumsiting

Vísandi til frágreiðing okkara í februar 2005 mæltu vit til fleiri ábøtur, m.a. at:

1. tryggja, at øll økini hava dagførdar vegleiðingar,
2. gera skrivligar reglur um eftirlit og góðkenning av tímaskrásetingum/lønarút-gjøldum,
3. samskipa og lýsa mannagongdirnar skrivliga, so øll økini umsita eins og á skilabesta hátt,
4. taka støðu til, um sami persónur bæði kann skráseta og kanna skrásetingarnar,
5. gera skrivligar reglur um, hvørjar upplýsingar lønmóttakararnir skulu hava hvønn mánað.

Ad 1, 2 og 3: Sambært Meginskrivstovuni fingu øll økini á vári 2006 eitt ringbind við nýggju roknskaparreglugerðini umframt aðrar skrivligar reglur og mannagongdir, herímillum reglur um "eftirlit og góðkenning av lønarútgjøldum".

Ad 4: Ásett er nú, at sami persónur ikki bæði kann skráseta og kanna skrásetingarnar.

Ad 5: Ásett er nú, at hvønn mánað skal hvørt starvsfólk, umframt lønarseðil, fáa útskriftina "bilag til lønseddel", har skrásetingar um sjúku, frítíð, avspákan o.t. er dagført.

10.14 Serforsorgin (GL 2004/2 07 4-16)

Í frágreiðing okkara í februar 2006 umrøddu vit grannskoðan av Serforsorgini. Tørvur var á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

Roknskaparviðurskifti og onnur viðurskifti

Roknskaparreglugerð

Í februar 2005 vístu vit á, at eftir okkara tykki eru roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar ikki væl greinaðar og lýstar í roknskaparreglugerðini. Í fleiri førum er ikki greitt, hvørji starvsfólk hava ábyrgdina av arbeiðsuppgávunum, og í roknskaparreglugerðini er ikki í nóg stóran mun tikið fyrilit fyri, at roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar hjá stovnunum eru ymiskar.

Vit mæltu til:

at gera eina roknskaparreglugerð fyri hvønn bústovn/sambýli/verkstað sær,

at lýsa roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar betur,

at lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi inntøkum betur,

at greiða frá um journalskipanarreglur, trygdaravrit o.t., og

at lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi vørugoymslum hjá verkstøðum.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Serforsorgin í november 2004 hevði sett eitt starvsfólk at endurskoða roknskaparreglugerðirnar.

Í juni 2006 kunnaði Meginskrivstovan um, at nýggjar roknskaparreglugerðir fyri stovnarnar undir Serforsorgini í mars 2006 vórðu sendar Almanna- og Heilsumálaráðnum at góðkenna.

Í desember 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at roknskaparreglugerðirnar væntandi verða góðkendar ársskiftið um 2006/2007.

Onnur viðurskifti

Í februar 2005 mæltu vit m.a. til, at:

1. dagføra og menna ognaryvirlitini. Í juni 2006 boðaði Meginskrivstovan frá, at stovnarnir á oyðublað føra yvirlit yvir ognirnar, men eru ikki farnir undir at skráseta størri edv-útbúnað, innbúgv og aðrar størri ognir í skipanini hjá Gjaldstovuni,
2. gjøgnumganga tryggingarviðurskiftini. Í juni 2006 boðaði Meginskrivstovan frá, at rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum verður fylgt.

Peningastovnskontur/kassar

Vit hava fleiri ferðir í frágreiðingum vístá, at á summum stovnum innan Serforsorgina verða ikki allar peningastovnskontur skrásettar í bókhaldinum. Á summum verkstøðum verða kassapeningur og peningastovnskontur blandað saman, og tí vísa fleiri stovnsroknskapir ikki eina fullfíggjaða mynd av virkseminum.

Í 2004 varð enn eina ferð staðfest, at ikki allar peningastovnskontur/kassar vóru skrásettar í bókhaldinum:

1. Á einum verkstaði varð kassin ikki stemmaður av mótvegis skrásettu fíggjarstøðuni í bókhaldinum, sum ikki stemmaði við kassauppgerðina. Kontan hevur ikki verið røtt í áravís.
2. Á einum verkstaði var ein peningastovnskonta ikki skrásett í bókhaldinum.
3. Á tveimum verkstøðum var sølukassin ikki skrásettur í bókhaldinum. Einki mark var sett fyri, hvussu nógvur peningur kundi vera í sølukassanum, áðrenn avroknað varð til Gjaldstovuna, og uppgerðarskjal fyri stovnskassa varð ikki nýtt.

4. Á einum verkstaði var gávukontan ikki skrásett í bókhaldinum. Á tveimum verkstøðum var eingin reglugerð fyri gávukontuna.

Í februar 2005 mæltu vit enn eina ferð til at fáa hesi viðurskifti í rættlag, og at stovnarnir fylgja teimum treytum og mannagongdum, sum Føroya Gjaldstova hevur ásett.

Í juni 2006 boðaði Meginskrivstovan frá, at:

ad 1) Torført er at stemma av, tí talan er um gamlar saldur frá 1999/2000.

ad 2) Kontan er nú skrásett í bókhaldinum.

ad 3) Verkstøðini hava fingið boð um at fylgja teimum treytum og mannagongdum, sum Gjaldstovan hevur ásett.

ad 4) Verkstaðið hevur fingið boð um at skráseta gávukontuna. Viðvíkjandi vantandi reglugerð fyri gávukontur hevur Meginskrivstovan sent málið til Almanna- og Heilsumálaráðið.

10.15 Føroyingar á stovni í Danmark o.a. (GL 2004/2 07 4-16)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2004 umrøddu vit grannskoðanina av útreiðslum viðvíkjandi føroyingum á stovni í Danmark o.a. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

Endurgjald fyri pensjón til føroyingar á stovnum í Danmark

Árligu endurgjaldsútreiðslurnar liggja um 1 mió.kr. Landið hevur endurrindað hesar útreiðslur síðani 1995. Sambært viðmerkingunum til "Lov nr. 315 af 17. maj 1995 om sociale ydelser på Færøerne" endurrindar landskassin donskum kommunum pensjónsútreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark. Talan er um 10 fólk, hóast eini 30 fólk eru á stovni í Danmark.

Í januar 2003 svaraði landsstýrismaðurin, at hann helt ikki, at viðmerkingar til eitt danskt lógaruppskot var nóg haldgott grundarlag at játta pening á løgtingsfíggjarlógini. Hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Sambært § 54 í "Lov nr. 217 af 16. maj 1984 om social pension" við seinni broytingum:

> *"Fastsætter Socialministeren efter aftale med Færøernes landsstyre regler om afholdelse af udgifter til pension efter denne lov til personer, der på foranledning af færøske sociale myndigheder får ophold i Danmark, og om afholdelse af udgifter til pension til personer, der fra Danmark får ophold på Færøerne formidlet af danske sociale myndigheder."*

Reglurnar eru ikki ásettar.

Í januar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at samráðingar vóru farnar í gongd millum "Socialministeriet" og Almanna- og Heilsumálaráðið um at áseta reglurnar.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann við verandi starvsfólkaorku hevði valt at raðfesta aðrar átrokandi uppgávur framum.

Í februar 2006 og aftur í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum.

Ferðaútreiðslur til viðskiftafólk og avvarðandi

Sambært skjali A í "Lov nr. 717 af 18. november 1987 om tilskud til Færøernes hjemmestyre på det sociale område" skal landskassin, frá 1. januar 1988, rinda ferðaútreiðslur til føroyingar á stovni í Danmark og avvarðandi teirra.

Útreiðslurnar árini 2001 - 2005 hava ligið úr 44 t.kr. í 79 t.kr.

Ongar reglur eru fyri, hvussu játtanin skal verða umsitin, t.d. um skjalprógv, ella hvussu ofta um árið viðskiftafólk kunnu ferðast.

Í mai 2002 mæltu vit Serforsorgini til at áseta neyvari reglur.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fer at heita á Serforsorgina um at áseta neyvari reglur.

Í februar 2006 og aftur í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum.

Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk

Sambært skjali A í "Lov nr. 717 af 18. november 1987 om tilskud til Færøernes hjemmestyre på det sociale område" skal landskassin frá 1. januar 1988 rinda útreiðslur viðvíkjandi "klienter under ekstern forsorg".

Talan er um viðbót til foreldur, ið heima forsyrgja barni/børnum við víðfevndum likamligum ella sálarligum breki. Viðbótin verður veitt fyri eykaútreiðslur og stríð, ið stendst av brekinum. Almannastovan ger av, hvør skal hava viðbót, og gevur Serforsorgini boð um at rinda upphæddina.

Í 2001 var viðbótin kr. 2.000 um mánaðin fyri hvørt barnið, og rindað varð fyri 11 børn. Útreiðslurnar árini 2001-2005 hava ligið úr 102 t.kr. í 264 t.kr.

Sambært § 17 í forsorgarlógini kann hjálp til meirútreiðslur verða veitt foreldrum við brekaðum børnum. Vit duga ikki at síggja, hví viðbótin skal verða rindað júst hesum foreldrum, ella um veitingin sampakkar við § 17.

Í fylgiskjølum til løgtingsfíggjarlógaruppskotið fyri 1992 vísti Almannastovan m.a. á, *"at henda játtan er ein leivd frá tíðini í donsku umsitingini, og finst hon ikki aðrastaðni."* Landsgrannskoðanin hevur víst á, at eingin heimild er í almannalóggávuni at rinda hesar útreiðslur.

Í januar 2003 segði landsstýrismaðurin seg vera samdan við Landsgrannskoðanini, og hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at síðani 1990 hevði eingin tilgongd av persónum verið á hesari kontu, og í 2008 fellur útreiðslan burtur. Sambært landsstýrismanninum verður heimildarspurningurin tikin upp í sambandi við, at forsorgarlógin verður dagførd.

Í februar 2006 og aftur í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum.

10.16 Hjálpartólamiðstøðin (GL 2004/2 07 4-17)

Roknskaparviðurskifti

Í frágreiðing frá mars 2004 kunnaðu vit um grannskoðan okkara av roknskaparviðurskiftunum á Hjálpartólamiðstøðini, har vit mæltu til fleiri ábøtur, m.a.:

at greiða gjøllari frá í roknskaparreglugerðini um KT-skipanir og um KT-trygd,

at samstarva við Heimarøktina fyri at fáa skrásett hjálpartól, ið eru lænt út.

Í desember 2005 svaraði landsstýrismaðurin:

at vegna vantandi starvsfólkaorku er enn ikki greitt gjøllari frá í roknskaparreglugerðini um KT-skipanir og um KT-trygd,

at vegna vantandi starvsfólkaorku er einki gjørt fyri at skráseta gomul hjálpartól, ið eru lænt út.

Í juni 2006 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin:

- *um* stovnurin lýkur treytirnar í rundskrivi frá Vinnumálaráðnum 22. desember 2004 "um KT-trygd",
- *hvørjar* ætlanir eru um at skráseta hjálpartólini.

Vit fingu einki svar.

10.17 Stuðul til hjálpartól (GL 2004/2 07 4-17)

Stuðul til vektgjald á avlamisbili

Umsiting

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini veitir Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin studning til vektgjald til størri avlamisbilar (kassabilar), fær rokningarnar og verður á Akstovuni skrásett sum gjaldari av vektgjaldinum.

Heimildarspurningar

14. mars 2002 samtykti Løgtingið at strika § 12 í Ll. nr. 38/1982, soleiðis at avlamisbilar skulu gjalda vektgjald. Sambært viðmerkingunum til lógarbroytingina var talan um 21 bilar, men broytingin fór ikki at hava við sær øktar útreiðslur fyri brúkaran, tí Hjálpartólamiðstøðin skal rinda vektgjaldið sum stuðul, vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini.

Í skrivi 29. november 2002 boðaði Almannamálaráðið Almannastovuni frá, at *"full heimild er at játta vektgjald í sambandi við játtanina av avlamisbili eftir § 18 í forsorgarlógini."* Landsgrannskoðanin helt ikki, at ein slík heimild var í § 18 í forsorgarlógini.

Í februar 2004 bóðu vit landsstýrismannin um grundgevingar fyri sjónarmiðinum hjá Almannamálaráðnum um hesa heimild.

Í februar 2005 ásannaði landsstýrismaðurin, at eingin heimild er í forsorgarlógini, men at heimildin verður ásett í kunngerð. Kunngerð nr. 91 "um stuðul til keyp av avlamisbili sambært forsorgarlógini" varð lýst 22. juni 2005.

Í § 8 í kunngerðini er ásett, at *"Almannastovan kann veita umsøkjara stuðul til meirútreiðslur til vektgjald í mun til bil við eginvekt omanfyri 1300 kg, um hann lýkur krøvini til stuðul til bilkeyp sambært hesi kunngerð."*

Í kærunevndaravgerð 31. mai 2006 ger Kærunevndin m.a. vart við, at umrødda *"kunngerð skal hava heimild í lóg, og tá Almanna- og Heilsumálaráðið metir, at heimild er ikki í forsorgarlógini til at veita stuðul til vektgjald, ber neyvan til at skapa slíka heimild við at áseta hetta í kunngerð."*

Í juni 2006 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin, hvørji stig hann ætlar at taka fyri at greiða heimildarspurningin í K. nr. 91/2005.

Í desember 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at hann 30. november 2006 legði fram uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg, har m.a. verður skotið upp, at stuðul kann veitast til vektgjald, tá talan er um bil við eginvekt omanfyri 1300 kg.

Stuðul til bústaðarbroytingar o. a. (§ 18, stk. 5)

Í februar 2001 sendu vit landsstýrismanninum frágreiðing um grannskoðan av Hjálpartólamiðstøðini, herímillum um stuðul til hjálpartól. Saman við frágreiðingini sendu vit eitt upprit, har vit neyvari greinaðu út ymiskar heimildarspurningar. Vit vístu m.a. á, at tað var ivasamt, um bústaðarbroytingar kundu koma undir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini. Vit hava síðani til fánýtis í áravís mælt landsstýrismanninum til at greiða ivamálini.

Í einari kærunevndaravgerð í mars 2006 vísir Kærunevndin eisini á, at serstakliga við atliti at rættartrygdini hjá umsøkjarunum, er tíðin komin til, at ein greið heimild eigur at

verða fingin til vega at játta stuðul til bústaðarútreiðslur. Eisini tí at væntandi fara fleiri mál av hesum slagi at koma í framtíðini.

30. november 2006 legði landsstýrismaðurin fram uppskot til løgtingslóg um broyting í lógini um almenna forsorg. Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:

> *"Almannastovan hevur síðani 1988 veitt stuðul til bústaðarbroytingar eftir § 18, stk. 5, og Kærunevndin hevur higartil ikki avvíst møguleikan. Men Kærunevndin heldur ikki, at ráðiligt er at halda fram við hesum, og at neyðugt er við greiðari heimild at játta stuðul til íbúðarbroytingar eftir.*
>
> *Stuðul til avlamisbilar er eins og stuðul til bústaðarbroytingar ikki nevndur í § 18, stk. 5. Hjálpartólamiðstøðin/Almannastovan játtar stuðul til avlamisbilar eftir ásetingunum í kunngerð nr. 91 frá 22. juni 2005 um stuðul til keyp av avlamisbili sambært forsorgarlógini. Fyri at ivamál ikki skal vera um lógarheimildina at játta stuðul til avlamisbilar, verða eisini ásetingar um stuðul til avlamisbil tiknar við í hesum lógaruppskoti.*
>
> *Endamálið við lógarbroytingini er sostatt at fáa greiða lógarheimild fyri verandi siðvenju hjá Almannastovuni at játta stuðul til bústaðarbroytingar og avlamisbilar."*

Í desember 2006 greiddi landsstýrismaðurin frá, at heimildarspurningarnar verða loystir, um Løgtingið samtykkir framman fyri nevndu lógarbroyting.

Afturgjald av stuðli við afturgjaldskyldu til avlamisbilar og bústaðarbroytingar

Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir vístá, at vit halda tað vera sera ivasamt, um Hjálpartólamiðstøðin hevur heimild at veita stuðul við afturgjaldskyldu til avlamisbilar og bústaðarbroytingar. Tí er eisini ivasamt, um heimild er at krevja pening aftur.

Í desember 2006 heldur landsstýrismaðurin ikki, at nakað ivamál er um henda spurning. Hann vísir m.a. á eina kærunevndaravgerð, harført verður fram, at kærarin var kunnaður um treytirnar fyri játtanini og láninum. Kærarin hevði undirskrivað lánsskjøl og kendi afturgjaldstreytirnar, og hevði tí ikki rætt til at fáa goldið aftur lánið, sum hann longu hevði goldið.

Lán til bústaðarbroytingar hjá foreldrum at brekaðum børnum

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini hevur Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin síðani 1988 veitt rentufrí lán til bústaðarbroytingar hjá foreldrum at brekaðum børnum. Ein treyt hevur verið, at lánið verður tinglýst í ognini hjá foreldrunum. Lánið er avdráttarfrítt, til barnið er 15 ár, og tá verður støða tikin til afturgjaldsskipan, um barnið fær pensjón ella aðra inntøku.

Tá ið barnið hevur fylt 15 ár og hevur fingið avlamispensjón, hevur Almannastovan í fleiri førum hvønn mánað hildið aftur 20% av pensjónini til at rinda aftur lánið til bústaðarbroytingina hjá foreldrunum. Í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í februar 2001 hildu vit tað vera ivasamt, um henda mannagongd var lóglig.

Í september 2002 svaraði landsstýrismaðurin, at hann eisini ivaðist í, um mannagongdin var lóglig, og hann fór tí at taka spurningin upp við Almannastovuna.

Í februar 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann í januar 2005 hevði biðið Almannastovuna steðga við at afturhalda lán í pensjónini, til annað varð gjørt av.

10.18 Studningur til ALV (GL 1998/2 07 5-1)

Yvirskotsgjaldføri

Í november 2005 kannaði Landsgrannskoðanin roknskapirnar hjá ALV árini 2003 og 2004. Sambært roknskapunum hevði stovnurin í 2004 og 2003 avlop, ávikavist 680 t.kr. og 398

t.kr., tilsamans 1,1 mió.kr. fyri tann partin av virkseminum (Smiðjugerði), sum landið letur studning til.

Í roknskapinum er ein samlað fíggjarstøða. Í tíðarskeiðinum 2003 - 2004 er "eginognin" fyri samlaða ALV-virksemið vaksin við 1,3 mió.kr., til 2,2 mió.kr., og sæst tað aftur í øktum innistandandi í peningastovnum. Avlopið av studningsjáttanini tykist sostatt verða nýtt til at samla upp pening.

Í januar 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at hann hevði ongar ætlanir um, at ALV skuldi savna saman almennan pening í tann mun, sum gjørt var, og hann fór at taka málið upp við stýrið fyri ALV.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at hava fund við stýrið og leiðsluna fyri ALV, og fór at umrøða málið viðvíkjandi uppsavnan av almennum peningi.

Játtanarslag

Á fíggjarlógini 2002 varð játtanin til ALV hækkað úr 350 t.kr., í 4,8 mió.kr. Landsgrannskoðanin helt í juli 2002, at út frá einum eftirlitssjónarmiði var sera óheppið, at landið veitir ein so stóran árligan studning sum "onnur játtan" uttan aðra lógarheimild enn fíggjarlógina. Landið fíggjar so at siga allan raksturin av hesum virksemi, og um játtanin verður tikin við á fíggjarlógina sum ein "rakstrarjáttan", kemur ALV undir at kalla somu játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglur, sum galda fyri landsstovnar.

Á løgtingsfíggjarlógini 2006 er játtanin 4,8 mió.kr. til ALV framvegis ein studningsjáttan (onnur játtan), eitt játtanarslag sum er óvanligt fyri tílíkar stórar játtanir.

Í januar 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at hann er samdur við Landsgrannskoðanini, og at játtanin vónandi verður broytt til rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini 2007.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið "*í løtuni*" arbeiðir við einari arbeiðsætlan fyri møguliga at broyta játtanina til rakstrarjáttan.

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2007 er játtanarslagið framvegis ein studningsjáttan (onnur játtan). Sum víst á frammanfyri, er tað eitt játtanarslag, sum er óvanligt fyri tílíkar stórar játtanir.

Í áliti sínum til løgtingsfíggjarlógina 2007 heldur Fíggjarnevndin, at ALV nú fær so stóran stuðul, at landsstýrismaðurin eigur at umskipa játtanina til eina rakstrarjáttan.

10.19 Sjúkrakassar (GL 2001/2 08 3-1)

Vantandi ásetan av reglum

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 22, stk. 2 - 4, í sjúkratryggingarlógini kann Landsstýrið áseta neyvari reglur um ávís viðurskifti, og sambært § 25 er álagt Landsstýrinum at seta neyvari reglur fyri eftirliti við rindan av limagjaldi.

Á hvørjum ári síðani hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at arbeitt verður við nýggjari lóggávu, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið.

Í juli 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið "*í hesum døgum*" er í ferð við at gera uppskot til nýggja sjúkratryggingarlóg, sum eftir ætlan verður løgd fyri Løgtingið í komandi tingsetu (2006/07).

Eftirlit, grannskoðan o.a.

Sambært § 32 í sjúkratryggingarlógini hevur Almannastovan eftirlit við sjúkrakassunum, og sambært § 35, stk. 7, "*skal der med passende mellemrum ved Almannastovans foranstaltning foretages en indgående lokalrevision i enhver sygekasse, herunder undersøgelse af kassens regn-*

skabsvæsen og øvrige virksomhed. Ved samme lejlighed skal der ydes kasserne regnskabsmæssig og anden vejledning. Den nærmere ordning af denne revision fastsættes af Almannastovan."

Vit hava vískt á, at Almannastovan regluliga grannskoðar sjúkrakassarnar, men at arbeiðið verður ikki skjalprógvað, og eingin grannskoðanarfrágreiðing verður gjørd. Almannastovan hevur ikki ásett neyvari reglur fyri grannskoðanini sambært § 35, stk. 7.

Tá ið sjúkratryggingarlógin áleggur Almannastovuni at útinna grannskoðan og seta neyvar reglur, er støðan eftir okkara tykki ikki nøktandi.

Í juli 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at sambært uppskotinum til nýggja sjúkratryggingarlóg verður eftirlitsuppgávan flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið.

10.20 Ymiskar heilsuskipanir (GL 2005/2 08 3-3)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 umrøddu vit útreiðslurnar til:

- koppsetingar
- kunning um gitnaðarfyribyrging
- heilsukanningar av barnakonum
- læknakanningar av børnum

Samsýning til kommunulæknar

Sambært lógunum eru samsýningarnar tær somu, sum galda í Danmark. Samsýningarnar eru sambært sáttmála millum "Sygesikringen og Praktiserende Lægers Organisation".

Eftir avtalu í november 1998 millum Almanna- og Heilsumálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya verða samsýningarnar javnaðar við føroyska prístalinum sambært § 80 í sáttmálanum millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelagið, og ikki sambært donsku reglunum.

Vit vístu á, at smærri munir eru millum tær føroysku og donsku samsýningarnar. Talan er ikki um stórar upphæddir, men rindað verður ikki sambært lógini.

Í september 2006 ásannaði landsstýrismaðurin, at tað ikki verður rindað sambært lógini, men tá talan er um smáar upphæddir, verður ikki hildið, at grundarlag er fyri at broyta hesa mannagongd.

Útreiðslur landskassans

Sambært § 3 stk. 3, í Bek. nr. 576/1981 "om lægeundersøgelser af børn på Færøerne" *"afholdes udgifter til honorarer forskudsvis af landskassen for kommunerne. Staten refunderer kommunerne halvdelen af disse udgifter."*

Skipanin við heildarveiting varð sett í gildi 1. januar 1988, soleiðis at landskassin síðani 1. januar 1988 hevur borið útreiðslurnar á ymiskum økjum, ið ríkið rindaði frammanundan.

Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja, at ásetingarnar í B. nr. 576/1981 vórðu broyttar, so landskassin skuldi rinda part ríkisins. Helst er talan um vantandi konsekvensrætting av B. nr. 576/1981. Formliga hevur landskassin eftir øllum at døma síðani 1988 onga materiella heimild havt at rinda helvtina av útreiðslunum til læknakanningar av børnum.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at við Ll. nr. 63 frá 17. mai 2005 "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung" eru hesi viðurskifti komin í rættlag frá 1. januar 2006.

Nýtt lógargrundarlag

Lógargrundarlagið fyri koppsetingar, upplýsing um gitnaðarfyribyrging og heilsukanningar av barnakonum eru danskar lógir frá fyrst í áttatiárunum.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1994 varð avtalað, at Landsstýrið í seinastu lagi ultimo 1995 skuldi leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslógir á øllum almanna- og heilsuøkinum.

17. mai 1995 kom í gildi "Lov om sociale ydelser på Færøerne" og "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne". Talan er um rammulógir, sum áleggja/heimila heimastýrinum at lóggeva á almanna- og heilsuøkinum. Sambært rammulógunum verða gomlu donsku almanna- og heilsulógirnar í gildi, til nýggjar løgtingslógir loysa tær av.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1995 varð m.a. avtalað, at: *"Landsstyret bekræfter, at der vil blive fremsat forslag um udfyldende lovgivning vedrørende social- og sundhedsområdet i henhold til vedlagte tidsplan. Det er landsstyrets ansvar at sikre gennemførelsen af denne lovgivning i Lagtinget til ikrafttrædelse senest ved udgangen af lagtingssamlingen 1996/97."* Í avtaluni við donsku stjórnina í juni 1998 vórðu tíðarfreistirnar aftur broyttar.

Í desember 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at í samráði við kommunulæknafelagið verður arbeitt við málinum.

10.21 Fyribyrgingarráðið (GL 2005/2 08 3-3)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 umrøddu vit roknskapar- og lønarviðurskiftini í Fyribyrgingarráðnum. Í frágreiðingini mæltu vit til:

1. at gera eina roknskaparreglugerð samsvarandi rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum,
2. at fáa húsaleigusáttmálan góðkendan av Fíggjarmálaráðnum,
3. at dagføra ognaryvirlitið,
4. at fylgja mannagongdunum um mánaðarligu góðkenningina av roknskapinum.

ad 1) Almanna- og Heilsumálaráðið fekk uppskotið til reglugerð í oktober 2006, og farið verður at viðgera tað skjótast tilber.

ad 2) Landsstýrismaðurin harmast um, at leigusáttmálin framvegis ikki er góðkendur, men ætlar at taka málið upp við Landsverk skjótast til ber.

ad 3) Sambært Fyribyrgingarráðnum í juni 2006 er ognaryvirlitið í gerð.

ad 4) Almanna- og Heilsumálaráðið fekk í oktober 2006 góðkenningarskjal fyri 2005, umframt góðkenningarskjøl fram til august mánað 2006.

10.22 Vantandi dagføring av lóggávu og kunngerðum (GL 2003/2 07 1-4)

Síðani miðskeiðis í nítiárunum hava skiftandi landsstýrismenn í almanna- og heilsumálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at øll almanna- og heilsulóggáva fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti innan fyri stutta tíð.

17. mai 1995 kom í gildi "Lov om sociale ydelser på Færøerne" og "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne". Talan er um rammulógir, sum áleggja/heimila heimastýrinum at lóggeva á almanna- og heilsuøkinum. Sambært rammulógunum verða gomlu donsku almanna- og heilsulógirnar í gildi, til nýggjar løgtingslógir loysa tær av.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1995 varð m.a. avtalað, at: *"Landsstyret bekræfter, at der vil blive fremsat forslag um udfyldende lovgivning vedrørende social- og sundhedsområdet i henhold til vedlagte tidsplan. Det er landsstyrets ansvar at sikre*

gennemførelsen af denne lovgivning i Lagtinget til ikrafttrædelse senest ved udgangen af lagtingssamlingen 1996/97." Í avtaluni við donsku stjórnina í juni 1998 vórðu tíðarfreistirnar aftur broyttar.

Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin legði fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis í apríl 1999, varð kunnað um, at *"arbeiðið við at gera føroyskar løgtingslógir sambært rammulógini er í gongd, og miðað verður ímóti, at allar almannalógirnar verða lidnar í ár (1999)."*

Á fleiri økjum er lóggávan broytt og dagførd, t.d. almannapensjón, dagpeningur, barnaforsorg og fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung, men tað tók nógv fleiri ár, enn ætlað.

Niðanfyri hava vit víst á dømi um ætlaðar/fráboðaðar lógarbroytingar, har ikki er komið á mál.

Vantandi dagføring av lóggávu

Forsorgarlógin

Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin legði fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis 16. apríl 1999, varð kunnað um, at: *"Landsstýrið hevur sett sær fyri at gera nýggja lóggávu, sum skal loysa galdandi donsku forsorgarlógina og donsku barnaforsorgarlógina av, eins og kunngerðir til lóggávu og fyrisiting. Fyrireikingarnar til lóggávuna á almannaøkinum, sum Landsstýrið skjýtur upp fær felags heitið trivnaðarlóggávan, eru farnar í gongd, og verður forsorgarlógin og barnaforsorgarlógin eftir ætlan løgd fyri Tingið í heyst."*

Eisini varð kunnað um, at *"Landsstýrið heldur, at tann rætti vegurin er at gera lóggávuna einfaldari at umsita. Tað krevur, at vit mugu ganga burtur frá "metingarprinsippinum", ið altíð krevur størri umsitingarorku, yvir til fastar lógarbundnar veitingar, bygdar á nøkur fá objektiv, umsitingarlig atkomulig tørvskriteriir. Hetta er tað, sum verður nevnt "bruttoveitingar". "*

Í desember 1999 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at seta alt árið 2000 av til at gera nýggja forsorgar- og barnaforsorgarlóg. Í hesum sambandi vóru eisini ætlanir um at gera greiðar reglur og neyðugar kunngerðir, sum vantaðu á næstan øllum forsorgarøkinum, eisini viðvíkjandi endurbúgving.

Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, *"at ætlanin er at gera nakrar justeringar, tí orka er ikki í løtuni til at fara í gongd við at gera nýggja forsorgarlóg."*

Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2003 var ætlanin at nýta 500 t.kr. til nýggja forsorgarlóg.

Í november 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann í næstum fór at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta veitingina sambært § 17, frá einari nettoveiting til eina bruttoveiting, og ætlanin var at broyta allar forsorgarveitingar til bruttoveitingar.

Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2004 og 2005 var fyrireikingararbeiðið til eina nýggja forsorgarlóg byrjað; arbeiðið fór at verða skipað í stigum, og fyrsta økið, ið skuldi verða útgreinað, var fíggjarligur stuðul til familjur við børnum við skerdum førleika.

Í svari sínum 26. januar 2005 til fyrispurning "viðvíkjandi skiftisupphædd hjá fyritíðarpensjónistum, javning og øðrum" - Lm. nr. 100-17/2004 - segði landsstýrismaðurin m.a.: *"Arbeiðið at gera eina nýggja forsorgarlóg er farið í gongd. Í tí sambandi er ætlanin at broyta § 9 í forsorgarlógini komandi ár."*

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2006 stendur m.a.: *"Landsstýrismaðurin fer at gera nýggja forsorgarlóg. Hetta er ein verkætlan, sum mett verður at taka 3 ár. Neyðugt verður at seta tveir fulltrúar at arbeiða burturav við hesum."*

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2007 boðar landsstýrismaðurin aftur frá, at: *"Landsstýrismaðurin fer at gera nýggja forsorgarlóg. Hetta er ein verkætlan, sum mett verður at*

taka 3 ár. Neyðugt verður at seta ein fulltrúa at arbeiða burturav við hesum, umframt ta orku, ið Ráðið frammanundan leggur í forsorgarlógina."

Hvørki:

- nýggj forsorgarlóg,
- uppskot um at broyta § 9 í forsorgarlógini,
- uppskot um at broyta § 17 í forsorgarlógini, ella
- uppskot um broyta allar forsorgarveitingar til bruttoveitingar,

eru enn løgd fyri Løgtingið.

Lóg um varðveita pensjónina við uppihaldi á stovni

Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin legði fyri Løgtingið til aðalorða-skiftis 16. apríl 1999, varð kunnað um, at: *"Millum annað ætlar Landsstýrið at leggja lógaruppskot fyri Tingið, sum tryggjar, at allir pensjónistar, bæði fyritíðar- og fólkapensjónistar, fáa pensjón, sama um teir búgva heima, á stovni, røktarheimi ella í sambýli."*

Í desember 1999 boðaði landsstýrismaðurin frá, í almennu viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg "um uppihald á stovni o.l.", at: *"Landsstýrismaðurin ætlar at kanna, um ein heilt nýggj skipan í staðin skuldi setast í verk viðvíkjandi gjaldi á stovni, har pensjónistarnir skuldu varðveita pensjónina, og ístaðin rinda fyri uppihaldið. Ætlanin er at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið til støðutakan, so skipanin kann koma at virka frá ár 2001."*

Sum víst á í frágreiðingini undir "Almannapensjón á stovnum", er einki ítøkiligt síðani hent í málinum.

Lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima

Í mars 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, í almennu viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg "um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima", at: *"Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ætlar at endurskoða lógina í síni heild seinni í ár, so møguligar lógarbroytingar fáa gildi frá ár 2001."*

Einki uppskot um at broyta lógina er lagt fyri Løgtingið. Sum víst á í frágreiðingini undir "Ansingarsamsýning", hevur landsstýrismaðurin í september 2003 og aftur í september 2006 boðað frá, at endurskoðanin av lógini hevur ikki fremstu raðfesting.

Sjúkratryggingarlóg

Á vári í 1999 segði landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, í sambandi við arbeiðið við "Hvítubók", *"at føroysk løgtingslóg á sjúkrakassaøkinum verður løgd fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000."*

Einki lógaruppskot er enn lagt fyri Løgtingið. Sum víst á í frágreiðingini undir "Sjúkra-kassar", hevur landsstýrismaðurin á hvørjum ári síðani 1999 boðað frá, at arbeitt verður við nýggjari lóggávu, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið.

Vantandi kunngerðir

Vantandi reglur sambært § 17 í forsorgarlógini

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003), sum varð samtykt 18. mai 2004, heitti Løgtingið á landsstýrismannin um sum skjótast at áseta neyvari reglur sambært § 17 í forsorgarlógini (útreiðslur til ávísar viðgerðir og um endurgjald fyri inntøkumiss).

Sum víst á í frágreiðingini undir "Forsorgarútreiðslur", hevur landsstýrismaðurin ikki ásett hesar reglur.

Vantandi reglur um endurbúgving sambært § 18 í forsorgarlógini

Meira enn 15 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð heitti á Landsstýrið um at áseta gjøllari reglur um endurbúgving, sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini. Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir síðani fleiri ferðir átalað, at neyvari reglur ikki eru ásettar á hesum týðandi øki, har nógvur peningur verður brúktur.

Sum víst á í frágreiðingini undir "Forsorgarútreiðslur", hevur landsstýrismaðurin ikki ásett hesar reglur.

Vantandi reglur um stuðul til hoyri- og sjóntól sambært § 18 í forsorgarlógini

Í november 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at kunngerðin um stuðul til hoyri- og sjóntól fór at verða liðug í 2005.

Sum víst á í frágreiðingini undir "Forsorgarútreiðslur", er eingin kunngerð lýst enn.

Vantandi broyting av kunngerð um stuðul til heilivág

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiðir við at broyta kunngerðini um stuðul til heilivág.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið við at umleggja alla stuðulsskipanina enn var í gongd. Ætlanin var, at nýggja skipanin skuldi virka einaferð í 2006.

Sum víst á í frágreiðingini undir "Stuðul til heilivág", er kunngerðin ikki broytt.

Vantandi reglur sambært almannapensjónslógini

Landsstýrismaðurin skal sambært § 34, stk. 3, í almannapensjónslógini, aftaná samráðingar við donsku stjórnina, áseta gjøllari reglur fyri, hvussu verður við pensjónini, tá persónur, sum fær pensjón eftir donskum reglum, flytur til Føroya. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett hesar reglur.

Vantandi reglur sambært barnaverndarlógini

Landsstýrismaðurin skal sambært §§ 70-71 í barnaverndarlógini áseta neyvari reglur um uppalingarískoyti. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett hesar reglur.

Vantandi reglur sambært sjúkratryggingarlógini

Landsstýrismaðurin skal sambært § 25 í sjúkratryggingarlógini áseta neyvari reglur um eftirlit við rindan av limagjaldi. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett hesar reglur.

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Landsgrannskoðanin heldur ein stóran vanda liggja í, at skiftandi landsstýrismenn í almanna- og heilsumálum ikki gera kunngerðir ella loysa trupulleikarnar í verandi lóggávu. Ár um ár vísa teir á, at arbeitt verður við heilt nýggjari lóggávu á økinum, og at arbeiðsorka er ikki tøk til at gera neyðugar lógarbroytingar og lógarásettar kunngerðir.

Tað hevur stóran týdning at gera góðar og greiðar lógir frá fyrstan tíð. Við at gera nýggjar lógir, uttan at loysa grundleggjandi trupulleikarnar í verandi lóggávu, verða bert nakrir trupulleikar loystir, meðan aðrir verða skaptir. Almannapensjónslógin og dagpeningalógin, sum komu í gildi ávikavist í 2000 og 2001, eru ræðandi dømi. Ásannast má, at ov nógv orka í fleiri ár hevur verið "spilt burtur" til kæruviðgerðir í Kærunevndini og á

Almannastovuni í sambandi við t.d. tulkingar/umsiting av § 21-23 í almannapensjónslógini.

Tað tykist burtur við ár um ár at biðja Løgtingið um játtan at seta ein fulltrúa at gera nýggja forsorgarlóg. Landsgrannskoðanin heldur, at eitt so víðfevnt lógararbeiði krevur annað arbeiðslag enn at bíða eftir einum fulltrúa. Vit kunnu vísa á:

at tað tók fleiri ár at leggja uppskot fram at broyta 18, stk. 5, í forsorgarlógini (bústaðarbroytingar o.a),

at einki uppskot um at broyta § 9 og § 13 í forsorgarlógini er lagt fyri Løgtingið,

at einki uppskot um at broyta allar forsorgarveitingar til bruttoveitingar er lagt fyri Løgtingið,

at eingin kunngerð um útreiðslur til ávísar viðgerðir og um endurgjald fyri inntøkumiss sambært § 17 í forsorgarlógini er lýst,

at eingin kunngerð um endurbúgving sambært § 18 í forsorgarlógini er lýst,

at eingin kunngerð um stuðul til hoyri- og sjóntól sambært § 18 í forsorgarlógini er lýst,

at kunngerðin um stuðul til heilivág er ikki broytt.

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingunum í februar 2003 og mars 2004 gjørt vart við, at eftir okkara tykki er lógargrundarlagið sum heild eitt tað størsta vandamálið í umsitingini. Á fleiri málsøkjum er lógargrundarlagið ófullfíggjað.

Gongdin seinastu nógvu árini hevur vístur, at á týðandi økjum megnar landsumsitingin ikki at smíða góðar lógir og kunngerðir. Tað tykist at vera ein afturvendandi trupulleiki at manna størv við løgfrøðingum, sum hava førleika og royndir at smíða lógir. Tá ið eindirnar eru so smáar, er ofta eingin upplæring og siðvenja. Tað er kanska aftur ein atvold til starvsfólkaútskifting, og so heldur ónda ringrásin fram.

11 Fylgiskjøl til frágreiðing um fulltíðarstørv 1997–2004

Fylgiskjal 1: Um útrokning av fulltíðarstørvum hjá landinum

Í játtanarskipanini er ásett, *"at um ein játtan verður nýtt til at rinda starvsfólki hjá landinum løn, skal vera eitt starvsfólkayvirlit.*

Í starvsfólkayvirlitinum er víst lønarupphædd og tal á fulltíðarstørvum, býtt sundur millum tey, sum ávikavist eru sett eftir lønarkarmi 36 ella hægri og onnur. Eitt fulltíðarstarv svarar til vanliga árliga arbeiðstíð. Yvirtíð og størv, ið ikki eru fulltíðarstørv, verða umroknað til vanliga árliga arbeiðstíð."

Í sambandi við gjøgnumgongd av játtanunum 1997-2004 hevur Landsgrannskoðanin staðfest, at í fleiri førum er einki starvsfólkayvirlit. Seinnu árini eru viðurskiftini tó nógv batnað.

Sum dømi um vantandi starvsfólkayvirlit í viðmerkingunum til fíggjarlóg 2006 kunnu verða nevnd:

- Ymiskar felagsútreiðslur (útbúgving og gransking)
- Próvtøkur (útbúgving og gransking)
- Frítíðarundirvísing
- Almanna- og Heilsuskúli Føroya
- Biofar
- Granskingarráð Føroya
- Tjóðpallur Føroya
- Kommunulæknaskipanin
- Sjúklingahotellið Tórshavn

Í øðrum førum eru eingi samanberingartøl. Sum dømi kunnu verða nevnd:

- Føroya Brandskúli
- Heilbrigdi
- Blákrossheimið
- ALV-skúlin
- Føroya Barnaheim
- Rókin, Bústovnur fyri ung
- Heilsufrøðiskipanin
- Stuðulsskipanin fyri vaksin
- Føroya Blindastovnur
- Innlendismálaráðið

Gjøgnumgongdin vísir eisini, at fleiri starvsfólkayvirlit eru eyðsæð skeiv. Tí hevur Landsgrannskoðanin, við serligum útrokningum, mett um starvsfólkatalið, við grundarlagi í útgoldnum lønum og starvsfólkayvirlitum hjá teimum stovnum, sum vit halda geva rættastu samanhangandi upplýsingar árini 1997-2004.

Útrokningin byggir á tvey grundstøði, sum eru:

- Lønarbroytingarnar í prosentum eru tær somu fyri allar lønir hvørt árið sær.
- Í endaligu útrokningunum umboðar tann metta miðallønin fyri eitt málsøki allar stovnar á sama málsøki.

Árliga starvsfólkatalið er mett soleiðis: samlaðu lønargjaldingarnar fyri hvørt málsøki eru býttar við mettu miðalløninni fyri hvørt málsøki.

Lønarútreiðslurnar eru roknskapartøl, men aftanfyri útrokningarnar av miðalløninni fyri hvørt málsøki eru nógv stig, tey eru:

- Miðalløn fyri hvønn av teimum stovnum, sum hava givið upp starvsfólkatal á fíggjarlógini, er roknað út fyri hvørt ár, t.e. lønarútreiðslur býttar við starvsfólkatalinum.
- Fyri hvønn stovnin er lutfalsliga broytingin í miðalløninni fyri hvørt árið 1997-2004 roknað.
- Lutfalsliga árliga lønarbroytingin undir einum fyri alt "landskassaøki" er eitt vigað miðal av lønarbroytingini fyri hvønn stovnin. Hesar útrokningar eru gjørdar við regressjónsrokning (tí sonevnda LOESS-háttinum).
- Harafturat er vigaða miðalløn fyri hvørt málsøki roknað fyri øll árini undir einum.
- Árliga miðalløn fyri hvørt málsøki er mett soleiðis: miðalløn undir einum fyri hvørt málsøki er faldað við lutfalsligu árligu lønarbroytingini.
- Starvsfólkatalið fyri hvørt málsøki er: lønarútreiðslurnar fyri hvørt málsøki fyri hvørt árið, býttar við miðalløninа fyri hvørt málsøki fyri hvørt árið.
- Allar útrokningar eru vigaðar, soleiðis at skilja, at stovnsnummur við stórum lønarútgjaldingum telja meira enn tey við smáum lønarútgjaldingum.

Fylgiskjal 2: Um býti í málsøkir

Málsøki er eitt hugtak, sum verður brúkt í játtanarskipanini.

T.d. á bls. 403 í dagførdu løgtingsfíggjarlógini fyri 2004 verður hugtakið málsøki lýst soleiðis: "Málsøki er tað, sum ein grein verður býtt sundur í. Býtið hevur sum endamál at savna játtanir til somu endamál innan fyri landsstýrismannaøkini og at vísa týdningarmikil endamál og útreiðsluskipanir."

Dømi: 2.13.1.01. Sendistovur (rakstrarjáttan) á bls. 35, fyrsti siffurbólkur, her 2, vísir til grein 2 Løgmansfyrisitingin, annar siffurbólkur, her 13, vísir til málsøkið Uttanríkismál.

Í hesi kanning hevur Landsgrannskoðanin í flest øllum førum lagt málsøkir saman, tó eru beinleiðis útreiðslur til løgtingsmenn tiknar úr málsøkinum "10 Løgtingið" og lagt í eitt nýtt málsøki "19 Tingmenn". Eftir í málsøki "10 Løgtingið" er "Fyrisiting Løgtingsins" og stovnar undir Løgtinginum.

Málsøkir sum eru við í kanningini:

Málsnummar	Málsnavn
10	Løgtingsstovnar
11	Miðfyrisiting
15	Fíggjarmál o.a.
20	Heilsumál
21	Almannamál
23	Útbúgving og gransking
24	Mentan
37	Vinnumál
38	Samferðsla og samskifti

Samanleggingin sæst í talvuni niðanfyri. Teir báðir fyrru teigarnir vísa til býtið á fíggjarlógini, og teir báðir seinnu teigarnir vísa býtið, ið Landsgrannskoðanin hevur gjørt.

Samanlegging av málsøkjum:

Málsnummar smb. fíggjarlóg	Málsnavn	Málsnummar smb. uppgerð Landsgrannskoðaninar	Málsnavn
10	Løgtingið	10	Løgtingsstovnar
11	Felagsútreiðslur	11	Miðfyrisiting
12	Landsstýrið	12	Landsstýris- og løgtingsmenn
13	Uttanríkismál	11	Miðfyrisiting
14	Lógarmál	11	Miðfyrisiting
15	Fíggjarmál o.a.	15	Fíggjarmál o.a.
17	Sjálvstýrismál	11	Miðfyrisiting
18	Almenn starvsfólk v.m.	18	Almenn starvsfólk v.m.
19	Tingmenn	12	Landsstýris- og løgtingsmenn
20	Heilsumál	20	Heilsumál
21	Almannamál	21	Almannamál

Málsnummar smb. fíggjarlóg	Málsnavn	Málsnummar smb. uppgerð Landsgrannskoðaninar	Málsnavn
22	Íbúðarmál	21	Almannamál
23	Útbúgving og gransking	23	Útbúgving og gransking
24	Mentan	24	Mentan
25	Útgjaldsskipanir	15	Fíggjarmál o.a.
30	Umhvørvi	11	Miðfyrisiting
32	Ráevnisvinna	37	Vinnumál
33	Landbúnaður	37	Vinnumál
34	Fiskivinna	37	Vinnumál
35	Sjóvinna	37	Vinnumál
36	Aling	37	Vinnumál
37	Handil og vinna annars	37	Vinnumál
38	Samferðsla og samskifti	38	Samferðsla og samskifti
39	Arbeiðsmarknaður	37	Vinnumál
52	Skattir og avgjøld	15	Fíggjarmál o.a.

Talvan skal skiljast soleiðis: 11. Felagsútreiðslur, 13. Uttanríkismál, 14. Lógarmál, 17. Sjálvstýrismál og 30. Umhvørvi eru løgd saman til eitt mál: 11. Miðfyrisiting og so framvegis.

Málsøki 12: Landsstýris- og løgtingsmenn er ikki tikið við og heldur ikki málsøki 18: Almenn starvsfólk v.m., tí har eru hvørki lønir ella starvsfólk í vanligum týdningi.

Fylgiskjal 3: Broytingar í fulltíðarstørvum, greinað á málsøkir

Myndirnar niðanfyri vísa lutfalsbroytingina í starvsfólkatalinum greinað á málsøki, soleiðis sum Landsgrannskoðanin hevur valt at greina málsøkini.

Myndir: Tal av fulltíðarstørvum 1997-2004, 1997 = 1



Á myndunum sæst, hvussu lutfalsbroytingin í starvsfólkatalinum hevur verið árini 1997-2004. Tey málsøki, ið vaksa mest, eru løgtingsstovnar og miðfyrisiting. Síðani koma málsøkini almannamál, mentan, útbúgving og gransking, vinnumál og síðani heilsumál. Innan fyri fíggjarmál hevur eingin vøkstur verið hetta tíðarskeiðið, og innan samferðslu og samskifti er starvsfólkatalið minka.

Myndir: Spjaðing av miðalløninni millum stovnar hjá landinum 1997-2004



Á myndunum sæst, at spjaðingin í miðalløninni millum stovnar økist tíðarskeiðið 1997-2004 sambært starvsfólkayvirlitum í viðmerkingunum til fíggjarlógina.

Fylgiskjal 4: Hagstovan: lønarútgjaldingar 1997-2004

mió.kr.	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	Í tali	Í %
Landsfyritøkur	401	427	434	496	532	585	563	553	152	38%
Kommunufyritøkur	47	49	51	55	60	66	65	70	23	48%
Almennir peningastovnar	119	115	120	124	126	131	134	140	20	17%
Aðrir almennir fíggjarstovnar	6	6	7	9	12	11	11	12	6	94%
Almenn tryggingarfeløg og pensjónsgrunnar	44	49	52	55	59	64	66	67	23	54%
Heimastýrisfyrisitingin	897	940	1.003	1.065	1.153	1.251	1.318	1.413	516	57%
Ríkisfyrisitingin	77	78	79	83	87	89	91	94	17	23%
Kommunurnar	225	244	271	297	337	379	414	476	251	111%
Sosialir grunnar	13	12	11	12	11	12	12	13	0	2%
Umheimurin	29	32	31	31	31	31	30	29	0	-1%
Tilsamans	**1.858**	**1.952**	**2.058**	**2.227**	**2.407**	**2.617**	**2.703**	**2.866**	**1.007**	**54%**

Frágreiðing frá Hagstovu Føroya um greinabýtið

Í frágreiðing frá Hagstovuni um uppgerðargrundarlagið stendur m.a., *„at tað almenna er avmarkað til almenna fyrisiting og tænastu. Stovnsligar eindir, har høvuðsvirksemið er marknaðarlig framleiðsla, verða hildnar uttan fyri uppgerðina av tí almenna, hóast tær eru við í almennu roknskapunum. Tær verða skildar úr almennu roknskapunum og fluttar yvir í geiran vinnufyritøkur.*

Tað almenna fevnir sostatt bara um myndugleikar og stovnar, sum eru uttanmarknaðarligir framleiðarar, hvørs høvuðsuppgáva er at framleiða og veita tænastur til einstaklings- og felagsnýtslu, og harumframt at umbýta inntøku og ogn. Fíggjarkravið hjá tí almenna eftir útskiljing av marknaðarligum framleiðslueindum er tað sama sum upprunaliga. Tað er, at viðurskifti millum fyritøkulíku eindirnar og tað almenna eftir útskiljing bara snúgva seg um, at tað almenna yvirtekur undirskotið/yvirskotið hjá fyritøkulíku eindunum.

Landsfyrisitingin "landskassin" fevnir um landskassan, landsbankan og nakrar landsgrunnar, sum ikki eru við í landskassaroknskapinum. Fyritøkulíkir stovnar, sum eru í landskassaroknskapinum, eru fluttir úr heimastýrisfyrisitingini yvir í landsfyritøkur í geiranum vinnufyritøkur. T.d. Rúsdrekkasøla Landsins, Apoteksverkið, Postverk Føroya, Strandfaraskip Landsins, Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya og byggivirkið hjá Landsverki. Barsilsskipanin, sum liggur í landsroknskapinum, er flutt úr heimastýrisfyrisitingini yvir í sosialar grunnar."

Fylgiskjal 5: Hagstovan: løntakarateljingar 1997-2004

	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	Munur	Í %
Landbúnaður	30	38	45	39	42	42	43	50	20	67%
Fiskiskapur	2.559	2.506	2.374	2.357	2.611	2.645	2.750	2.525	-34	-1%
Ali- og kryvjivirki	483	540	695	658	762	669	454	337	-146	-30%
Ráevnisvinna	31	41	45	42	63	69	58	61	30	97%
Fiskavøruídnaður	1.936	2.229	2.134	2.271	2.294	2.441	2.394	2.154	218	11%
Skipasmiðjur, smiðjur	490	520	521	603	608	601	569	577	87	18%
Annar ídnaður	781	816	889	1.031	1.091	1.046	1.118	1.009	228	29%
Bygging	996	1.108	1.261	1.378	1.496	1.609	1.640	1.679	683	69%
Orku- og vatnveiting	168	159	147	157	156	155	150	153	-15	-9%
Handil og umvæling	2.368	2.460	2.599	2.679	2.810	2.893	2.981	3.010	642	27%
Gistihús og matstovuvirki	349	399	436	442	482	523	557	543	194	56%
Sjóflutningur	568	642	638	635	654	706	677	655	87	15%
Flutningur annars	337	391	405	431	522	531	513	544	207	61%
Postur og fjarskifti	592	598	605	605	639	663	642	615	23	4%
Fígging og trygging	827	820	808	840	834	842	827	826	-1	0%
Vinnuligar tænastur	415	423	458	502	556	593	620	655	240	58%
Húshaldstænastur	168	162	164	188	188	201	197	236	68	40%
Almenn fyrisiting og tænastur	**6.788**	**6.862**	**7.091**	**7.233**	**7.471**	**7.802**	**8.076**	**8.459**	**1.671**	**25%**
Felagsskapir, mentan o.a.	414	392	435	402	400	432	458	485	71	17%
Ótilskilað v.m.	62	79	114	106	108	111	108	110	48	77%
Tilsamans	**20.362**	**21.185**	**21.864**	**22.599**	**23.787**	**24.574**	**24.832**	**24.683**	**4.321**	**21%**

Frágreiðing frá Hagstovu Føroya um løntakarateljingarnar

Í frágreiðing frá Hagstovuni um uppgerðargrundarlagið viðvíkjandi løntakarum stendur m.a., "*at løntakarateljingin er grundað á skráirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya um samtíðarskatt, føroysk virki og á skráirnar hjá Landsfólkayvirlitinum. Uppgerðin fevnir um borgarar í landinum millum 16 og 74 ár, sum fáa lønargjaldingar um samtíðarskattaskipanina. Bert tey verða tald uppí, sum hava eina lønarinntøku, sum svarar til minst eina dagløn um mánaðin hjá ófaklærdum arbeiðara. Somuleiðis verða tey tald uppí, sum fara úr arbeiði vegna barsilsfarloyvi ella sjúku.*

Av tí at útgjaldingar hjá serliga sjófólki kunnu vera óregluligar, telja vit fólk sum løntakarar, hóast tey onga løn fáa í ein ella tveir mánaðar, um tey so aftur fáa løn mánaðin eftir. Hvønn mánaða eru fleiri, sum fáa lønarinntøku frá ymsum arbeiðsgevarum, men fyri at hvør løntakari bert skal telja við eina ferð hvønn mánaða, verða løntakarar flokkaðir í vinnugrein alt eftir, hvaðani størsti parturin av inntøkuni kom í galdandi mánaða. Hesar reglur, sum vit hava hildið okkum til í uppgerðini, eru lagdar soleiðis, at uppgerðin í frægasta mun fylgir reglum frá ILO, og tí verður sambærlig við líknandi uppgerðir í øðrum londum. Ársuppgerðin er grundað á mánaðaruppgerðina í november."